# Nýggj kommunuskipan

*Niðurstøður og tilmæli*

Táttur II

Kommununevndin september 1998

Kolofon:

Kommununevndin: **Nýggj kommunuskipan**

**Niðurstøður og tilmæli**

Álit frá Kommununevndini september 1998

Útgevari: Føroya landsstýri

Uppseting: Hestprent

# Innihaldsyvirlit


Innihaldsyvirlit .......... 3
1. Samanseting, kommissorium og verkætlan .......... 7
1.1 Samanseting .......... 7
1.1.1 Virksemið hjá Kommununevndini .......... 7
1.2 Kommissorium .......... 8
1.2.1 Hvussu Kommununevndin tulkar kommissorium .......... 9
1.3 Álitið í mun til verkætlanina .......... 10
2. Samandráttur .......... 12
2.1 Tulkingar av kommissorium .......... 12
2.2 Kommunubýtið .......... 12
2.3 Uppgávubýtið .......... 13
2.3.1 Kommunusamstarv .......... 15
2.3.2 Samskifti millum land og kommunur .......... 15
2.3.3 Eftirlit við kommununum .......... 15
2.4 Ábyrgdarbýtið .......... 16
2.4.1 Javning .......... 16
2.5 Reglur .......... 17
2.6 Serskipanir fyri útoyggjarnar og tey smærru bygdasamfeløgini .......... 17
2.7 Verksetanarætlan .......... 18
3. Fyrimunir og vansar við verandi kommunuskipan .......... 19
3.1 Fyrimunir .......... 19
3.2 Vansar .......... 19
3.2.1 Bílig og liðilig umsiting .......... 19
3.2.2 Staðbundið fólkastýri .......... 20
3.3 Niðurstøða .......... 21
4. Kommunubýtið .......... 22
4.1 Krøv til kommunueindina .......... 22
4.1.1 Landafrøðilig viðurskifti .......... 22
4.1.2 Samferðsluskipanin .......... 22
4.1.3 Fólkagrundarlag .......... 23
4.1.4 Samstarv .......... 23
4.2 Bestu hóskandi kommunueindir .......... 24
4.2.1 Norðoyggjar .......... 24
4.2.2 Eysturoy .......... 25
4.2.3 Sundalagið .......... 27
4.2.4 Streymoy .......... 28
4.2.5 Vágar .......... 30
4.2.6 Sandoy .......... 31
4.2.7 Suðuroy .......... 32
4.3 Møguligar kommunueindir, sum lúka treytirnar .......... 34
4.3.1 Eystureysturoy .......... 34
4.3.2 Vestureysturoy .......... 35
4.3.3 Norðsuðuroy .......... 36

4.3.4 Suðursuðuroy ... 38
5. Uppgávubýtið ... 39
5.1 Kommunala sjálvstýrið ... 39
5.2 Kommunuuppgáva mótvegis landsuppgávu ... 40
5.3 Uppgávubýtið í verandi lóggávu ... 41
5.3.1 Løgtingslóg um føroysku kommunurnar (kommunulógin) ... 41
5.3.2 Løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur (kommunuvallógin) ... 41
5.3.3 Stýriskipanarviðurskifti ... 43
5.3.4 Fólkayvirlit ... 43
5.3.5 Mentan ... 43
5.3.6 Sløkkilið, ravmagn ... 43
5.3.7 Leiguíbúðir, byggi- og býarskipanir ... 44
5.3.8 Dýr, matvørur ... 44
5.3.9 Ognartøka, matrikulering o.a. ... 44
5.3.10 Undirvísingarmál ... 45
5.3.11 Umhvørvi, vatn v.m. ... 45
5.3.12 Almannaviðurskifti ... 46
5.3.13 Verja borgaravernd ... 47
5.3.14 Ferðsla, vegir ... 47
5.3.15 Kirkja ... 47
5.3.16 Løgreglan ... 47
5.3.17 Skattamál ... 47
5.3.18 Heilsumál ... 48
5.3.19 Havnir ... 49
5.3.20 Skráir ... 50
5.4 Kommunusamstarv ... 50
5.4.1 Felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði ... 50
5.4.2 Felagskommunalt samstarv uttan fyriskipanarligan bygnað ... 51
5.4.3 Niðurstøða og tilmæli ... 51
5.5 Samskifti millum land og kommunur ... 51
5.6 Eftirlit við kommunum ... 52
6. Broytingar í lóggávuni ... 53
6.1 Løgtingslóg um føroysku kommunurnar (kommunulógin) ... 53
6.2 Løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur ... 53
6.3 Stýriskipanarviðurskifti ... 54
6.4 Fólkayvirlit ... 54
6.5 Mentan ... 54
6.6 Sløkkilið, ravmagn ... 54
6.7 Leiguíbúðir, byggi- og býarskipanir ... 54
6.8 Dýr, matvørur ... 54
6.9 Ognartøka, matrikulering o.a. ... 55
6.10 Undirvísingarmál ... 55
6.11 Umhvørvi, vatn v.m. ... 56
6.12 Almannaviðurskifti ... 56
6.13 Verja borgaravernd ... 56
6.14 Ferðsla, vegir ... 57
6.15 Kirkja ... 57
6.16 Løgreglan ... 57

6.17 Skattamál ..... 57
6.18 Heilsumál ..... 57
6.19 Havnir ..... 58
6.20 Alment ..... 58
7. Ábyrgdarbýtið ..... 59
7.1 Verandi endurgjaldsskipan ..... 60
7.2 Heildarveitingarskipan ..... 62
7.3 Javning ..... 63
7.3.1 Javning eftir inntøkugrundarlagnum ..... 64
7.3.2 Javning eftir útreiðslutørvi ..... 66
7.4 Ráðlegging um eina javningarskipan ..... 68
7.5 Viðmerkingar til javningina ..... 68
8. Reglur ..... 70
8.1 Fíggjarstýringin ..... 70
8.2 Lántøka ..... 71
8.2.1 Verandi kommunuskuld ..... 72
8.3 Vinnulívið (og veðhaldsbindingar) ..... 74
9. Serskipanir ..... 76
9.1 Møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum ..... 76
9.2 Møguligar serskipanir fyri tey smærru bygdasamfeløgini ..... 77
10. Fyrimunir og vansar við nýggju skipanini ..... 79
10.1 Fyrimunir ..... 79
10.1.1 Meir orka ..... 79
10.1.2 Kommunurnar verða sterkari ..... 79
10.1.3 Ábyrgdarbýtið ..... 80
10.1.4 Borgarin ..... 80
10.1.5 Samfelagsligir fyrimunir ..... 80
10.1.6 Staðbundið fólkastýri ..... 80
10.2 Vansar ..... 81
10.3 Annað ..... 81
11. Verksetanarætlan ..... 83
12. Uppskot um nýggja kommunustýrislóg ..... 85
12.1 Uppskot um nýggja kommunustýrislóg ..... 85
Kapittul 1 ..... 85
Kapittul 2 ..... 85
Kapittul 3 ..... 87
Kapittul 4 ..... 89
Kapittul 5 ..... 90
Kapittul 6 ..... 91
Kapittul 7 ..... 92
Kapittul 8 ..... 94
12.2 Viðmerkingar til uppskot um nýggja kommunustýrislóg ..... 95
Almennar viðmerkingar ..... 95
1. Inngangur. ..... 95
2. Høvuðstættir. ..... 96
3. Endurskoðan. ..... 96
4. Fíggjarligar avleiðingar ..... 96
Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinirnar ..... 97

Til kapittul 1 .... 97
Til kapittul 2 .... 99
Til kapittul 3 .... 104
Til kapittul 4 .... 112
Til kapittul 5 .... 114
Til kapittul 6 .... 118
Til kapittul 7 .... 120
Til kapittul 8 .... 126
12.3 Uppskot um lóg um samanlegging og sundurbýti í kommunur .... 131
12.4 Viðmerkingar til uppskot um lóg um samanlegging og sundurbýti í kommunur .... 132
Almennar viðmerkingar .... 133
Viðmerkingar til tær einkultu lógargreinirnar .... 133
Keldulisti .... 136
Keldur serliga til kapitul 12 .... 137
FYLGISKJØL .... 139
Fylgiskjal A: Nettoskuld pr. álíkning í 1996 um skattaprosentið var 23% .... 139
Fylgiskjal B .... 141
Galdandi kommunulóg í mun til uppskotið um nággja kommunustárislóg .... 141
Fylgiskjal C .... 164
Uppskotið um nýggja kommunustýrislóg í mun til galdandi kommunulog .... 164

# 1. Samanseting, kommissorium og verkætlan

## 1.1 Samanseting

Landsstýrið samtykti á fundi 23. apríl 1996 at seta nevnd at gera uppskot um eina nýggja, kommunala skipan í Føroyum. Í Kommununevndini eru tilsamans 6 limir, sum øll eru embætisfólk:

3 limir úr landsfyrisitingini. Teir eru:

- Hilmar Høgenni, formaður, umsitingarleiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni
- Sørin Pram Sørensen, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni
- John Rajani, fulltrúi í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og

3 limir frá kommununum. Teir eru:

- Jens Marius Poulsen, næstformaður, býráðsskrivari í Tórshavnar kommunu
- Dinna Jensen, býráðsskrivari í Runavíkar kommunu og
- Sveiney Sverrisdóttir, skrivari í Føroya Kommunufelag

Tá ið Kommununevndin varð sett, tilnevndi landsstýrið Reidar Nónfjall, fulltrúa í fíggjarmálastýrinum, at verða formaður. Reidar Nónfjall segði seg tó úr nevndini í januar 1997, av tí at hann fór í annað starv. Ístaðin fyri Reidar Nónfjall varð John Rajani, fulltrúi í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, valdur í nevndina, og Hilmar Høgenni, fyrisitingarleiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni varð so tilnevndur sum formaður.
Umframt nevndarlimirnar hevur Jógvan K. Mørkøre, formaður fyri Føroya Kommunufelag, verið eygleiðari í nevndini, og eisini hevur Atli Leo, fulltrúi í fíggjarmálastýrinum, verið eygleiðari í nevndini ta síðstu tíðina, Kommununevndin hevur arbeitt.
Harafturat skal viðmerkjast, at Kommununevndin eisini hevur keypt sær sakkøna hjálp. Jens Marius Dalsgaard og Jóannes Hansen hava rættlisið álitið fakliga, og Petur Jacob Sigvardsen hevur rættlisið tað málsliga. Harumframt hevur Anni á Hædd, løgfrøðingur, veitt nevndini løgfrøðiliga hjálp til uppskotið um nýggja kommunustýrislóg við viðmerkingum og uppskotið um samanleggingarlóg við viðmerkingum, umframt at Karsten Loiborg, løgfrøðingur, hevur havt lógaruppskotini til stuttar viðmerkingar.

### 1.1.1 Virksemið hjá Kommununevndini

Nevndin setti Maluna Johansen, cand. merc., sum skrivara hjá Kommununevndini fulla tíð. Kommununevndin hevur havt 55 fundir tilsamans. Harumframt hevur nevndin havt fleiri kunnandi fundir við landsstýrisdeildir, almennar stovnar, fólk sum dagliga arbeiða við/í kommunum v.m. Eisini hava formaðurin og skrivarin havt fundir við allar kommunurnar og við allar stovnar, ið umsita kommunumál. Í teimum førum, tá ið umráðandi hevur verið at fáa neyvari upplýsingar, hava fundir eisini verið við einstakar persónar, ið hava verið førir fyri at geva nevndini tílíkar upplýsingar.
Kommununevndin hevur eisini verið kunningarferð, har vitjað var í Íslandi, Grønlandi og í Danmørk. Vit fingu nakað at vita um, hvussu kommunuskipanirnar riggaðu í hesum londum, og sumt av tí sæst eisini aftur í uppskotinum um nýggja kommunuskipan í hesum áliti.

# 1.2 Kommissorium

Landsstýrið samtykti á fundi 12. september 1995 at seta nevnd at gera uppskot um nýggja kommunala skipan. Landsstýrið samtykti á sama fundi arbeiðssetningin hjá nevndini og gjørdi somuleiðis av at leggja málið fyri løgtingið til støðutakan sum uppskot til samtyktar, løgtingsmál nr. 7/1995. Løgtingið samtykti 18. desember 1995 við ávísum broytingum, uppskotið hjá landsstýrinum.
Kommununevndin skal gera uppskot um nýggja kommunuskipan við støði í hesum arbeiðssetningi:

**A. Við atliti at verandi kommunuskipan verður álagt nevndini:**

1. At lýsa búskaparliga grundarlagið hjá kommununum.
2. At lýsa demografisku og geografisku viðurskiftini.
3. At greina formligu- og óformligu viðurskiftini millum land og kommunu, t.e. m.a. uppgávu- og ábyrgdarbýtið og fíggjarlig viðurs0kifti.
4. At greina umsitingarlig viðurskifti, herundir kommunalt samstarv.
5. At greina hvørjar uppgávur kunnu leggjast út til kommunurnar í mun til nøkur nærri tilskilað alternativ íbúgvatøl í teimum einstøku kommunalu eindunum.
6. At greina um heildarveitingar-/útjavningarskipan ella aðrar skipanir kunnu nýtast í fíggjarliga samskiftinum millum land og kommunur.

**B. Nevndin skal koma við tilmæli um:**

1. Hvørjar uppgávur hóskandi kunnu umsitast av kommunalu eindunum við støði í einum greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.
2. Hóskandi tal og stødd á kommunum við støði í B 1.
3. Møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum verða at grunda á serstøku viðurskiftini, sum har eru galdandi.
4. Møguligar serskipanir fyri tey smáu bygdasamfeløgini verða gjørdar soleiðis, at tey í mest møguligan mun varðveita síni eyðkenni.

**C. Harafturat skal nevndin koma við tilmæli um neyðugar broytingar í ávísum formligum viðurskiftum:**

1. Øll kommunulógin skal verða eftirkannað, tvs. dagførd og gjørd greiðari.
2. Reglur um fíggjarstýring, t.e. fíggjarætlan, bókhald, roknskaparviðurskifti, reglur um lántøku og veðhaldsbindingar.
3. Avmarkingar mótvegis privata vinnulívinum.
4. Ásetingar um kommunalt samstarv.
5. Vísa á neyðugar broytingar í serlóggávuni.

**D. Høvuðssjónarmiðini og meginreglurnar í nevndararbeiðinum skulu vera:**

1. Broytingarnar í kommunuskipanini skulu byggja á sjálvbodna samanlegging.
2. Fíggjarlig ábyrgd fylgir avgerðarrættinum.

3. Uppgávurnar verða loystar, so tær eru fullgóðar samfelagsbúskaparliga, men so nær borgarunum, sum til ber.
4. Borgararnir fáa gjølla at vita um kostnaðin av kommunuvirkseminum.

### 1.2.1 Hvussu Kommununevndin tulkar kommissorium

Kommununevndin hevur í síni verkætlan greitt frá, hvussu hon tulkar sín arbeiðssetning. Her skulu vit tó koma við nøkrum viðmerkingum afturat.
Sambært arbeiðssetningi nevndarinnar er ein av meginreglunum tann, at broytingar í kommunuskipanini skulu byggja á sjálvbodna samanlegging.
Ein fyritreyt fyri greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti er tann, at kommunueindirnar verða størri. Eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti við verandi kommunueindum hevði borið við sær, at flestu uppgávurnar høvdu verið landsuppgávur, og at kommunurnar bert høvdu fingið smáuppgávur at loysa í bygdini. Spurningurin hevði so verið, um tað so ikki mundi verið skilabetri at tikið kommunuskipanina av, og latið áhugafeløg tikið sær av teimum smáuppgávum, ið tá vóru eftir. Men hetta er ikki ætlanin. Ynskiligt er at styrkja tað kommunala sjálvstýrið við at fáa færri og størri kommunueindir, so at tær ikki bert megna at loysa tær uppgávur, tær nú hava, men at tær harumframt eisini verða førar fyri at átaka sær nýggjar uppgávur, sum tær ikki megna at átaka sær í verandi líki.
Við øðrum orðum, so eru kommunusamanleggingar fortreytin fyri einum greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti. Tí er ásetingin um eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti eisini í andsøgn við kommunusamanlegging, um so er, at kommunurnar ikki sjálvbodnar ynskja at leggja saman.
Niðurstøðan hjá Kommununevndini er tí tann, at meginreglan um sjálvbodna samanlegging má vera tíðaravmarkað, og at kommunurnar fáa eitt ávíst tíðarskeið til sjálvbodnar at leggja saman. Men um kommunurnar ikki hava lagt saman, tá ið tíðarskeiðið er farið, verður neyðugt at leggja tær saman við lóg.
Kommununevndin mælir til, at tíðaravmarkingin fyri sjálvbodna kommunusamanlegging í teimum eindum, sum Kommununevndin vísir á, verður sett til ár 2002.
Kommununevndin mælir staðiliga til, at kommunurnar nýta hetta avmarkaða tíðarbilið til sjálvbodna samanlegging. Tær kunnu í sjálvbodnari samanlegging sjálvar seta treytirnar, hvussu lagt verður saman, og kommunurnar í økinum eiga í felag at gera eina útbyggingarætlan fyri ta stóru, kommunalu eindina.
Um kommunurnar ikki sjálvbodnar leggja saman, verður tað landsstýrið, ið fer at áseta samanleggingartreytirnar.
Tað verður tí avgjørt ein fyrimunur fyri kommunurnar, um tær vilja nýta hetta høvið fram til valið í 2002, s. kapittul 11, til sjálvbodna samanlegging, so at tær sjálvar eru við at seta treytirnar fyri samanleggingini. Á henda hátt ber til hjá teimum at sýna ans og fyrilit fyri serligum viðurskiftum, sum júst eru galdandi í teirra øki, eins og til ber at leggja serligan dent á onnur viðurskifti.
Í arbeiðssetninginum verður álagt Kommununevndini at koma við tilmæli um møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum og møguligar serskipanir fyri tey smáu bygdasamfeløgini.
Nevndin skilur henda setning sín soleiðis, at í sjálvari tí nýggju kommunuskipanini skulu møguligar serskipanir vera og ikki, at útoyggjarnar t.d. skulu fáa eina serskipan, sum er óheft av einum nýggjum kommunubýti. Kommununevndin heldur tað ikki vera skilagott at arbeiða við tveimum javnsettum skipanum í einum nýggjum kommunubygnaði. Hetta ger umsitingina nógvar ferðir torførari og dýrari. Í einum so lítlum samfelagi er tað eisini burtur úr vón og viti at hava ymiskar skipanir.

Sambært arbeiðssetninginum skal nevndin koma við tilmæli um tær uppgávur, ið hóskandi kunnu umsitast av kommunalu eindunum við støði í einum greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.
Stavnhaldið sum Kommununevndin hevur sett at miða seg eftir er hetta, at kommunurnar eru javnsettar í mun til lóggávuna og stýring frá landinum. Avleiðingin av hesum er, at uppgávubýtið millum land og kommunur verður treytað av minsta felagsnevnaranum, so at eingin kommuna fær aðrar uppgávur enn tær, sum tann minsta eindin í skipanini er før fyri at fyrisita. Atvoldin til hetta er tann áður nevnda, at í einum so lítlum samfelagi verður tað hildið skilaleyst at hava fleiri javnsettar skipanir, so at hvør einstøk kommuna hevur ymiskar uppgávur at loysa.
Kommununevndin vil eisini gera vart við, at hon heldur tað ikki vera skynsamt at hava eina tríbýtta skipan, sum vit t.d. síggja í Danmørk og Noregi, har stýringin er lutað sundur á tann hátt, at staturin hevur landsupggávur um hendi, amt/fylki veita tænastur við størri veitingarøki enn ein kommuna, og eftir eru so kommunurnar. Føroyar eru, sum longu nevnt, alt ov lítlar at hava tílíka stýring og umsiting.

# 1.3 Álitið í mun til verkætlanina

Kommununevndin gav í september 1996 út eina verkætlan fyri arbeiðið hjá Kommununevndini. Í verkætlanini verður nomið við, at nevndararbeiðið er lutað sundur í tríggjar tættir.

Táttur I er ein útgreining av verandi kommunuskipan. Í verkætlanini er hesin táttur býttur sundur í trý, nevnliga:

- uppgávu- og ábyrgdarbýtið  lógargrundarlagið undir virkseminum hjá kommununum
- lýsing av kommununum  lýsingar av einstøku kommununum og
- áhugabólkar hjá kommununum  fatanin hjá landsfyrisitingini o.ø. av kommununum

Kommununevndin hevur mestsum rokkið sínum ætlanum um uppgávu- og ábyrgdarbýtið og um kommunufrágreiðingarnar. Ætlanin var tó at gera meira burtur úr áhugabólkunum hjá kommununum; men nevndin má tó ásanna, at stundir hava ikki verið at fara so nágreiniliga til verka á hesum øki. Ætlanin var eisini at seta ein hoyringsbólk, tá ið nevndin var liðug við fyrsta tátt. Nevndin gjørdi tó av á fundi 23. september 1997, at hetta ikki var neyðugt, tí tað snúði seg í grundini um sannroyndir (fakta).

Táttur II er kommunala nýskipanin. Í verkætlanini er hesin táttur býttur sundur í fýra, nevnliga:

- kommunuskipanir  ástøði um kommunuskipanir o.a.
- samanleggingar í øðrum londum  lýsingar av skipanunum, royndir o.a.
- uppgávu- og ábyrgdarbýti  uppskot um eitt nýtt uppgávu- og ábyrgdarbýti, onnur formlig viðurskifti o.a. og
- kommunubýti  uppskot um nýtt kommunubýti

Partarnir um kommunuskipanir og samanleggingar í øðrum londum eru ikki beinleiðis til skjals í sjálvum álitinum. Kommununevndin hevur nomið sær kunnleika um ástøðið á kommunuøkinum; men hon hevur tó bert tikið teir partar av hesum ástøði við í sjálvt álitið, sum hon helt vera neyðugar. Nevndin valdi hesa mannagongd, so álitið skuldi verða lættari at lesa. Harafturímóti hevur Kommununevndin ikki í sjálvum álitinum greitt frá samanleggingunum í øðrum londum v.m., og er orsøkin í høvuðsheitum tann, at stundir hava ikki verið til tess. Men Kommununevndin hevur

tó bæði við lesnaði og gjøgnum kunningarferðina í grannalondum okkara nomið sær nógva vitan og virðismiklan kunnleika, sum uppskotið eisini óbeinleiðis ber brá av.
Harafturímóti eru ætlanirnar um partarnar um uppgávu- og ábyrgdarbýtið og kommunubýtið í Tátti II náddar í álitinum.

Táttur III snýr seg um verksetanina. Í verkætlanini er hesin táttur býttur sundur í tvey, nevnliga:

- verksetan
- lógarfyrireikandi arbeiði

Hesin tátturin liggur uttanfyri sjálvt arbeiði hjá Kommununevndini. Men harafturímóti hevur Kommununevndin í Tátti II í álitinum gjørt uppskot um eina verksetanarætlan, sum lýsir, hvussu tann nýggja skipanin kann verða sett í verk.
Ætlanin var í sjálvari verksetanarætlanini at nema við tær fyrisitingarligu og búskaparligu avleiðingarnar, ið stóðust av hesum tilmæli. Hetta er ikki gjørt; men ístaðin ber allur Táttur II brá av hesum avleiðingum, tó at tær eru ikki so ítøkiligar. Orsøkin til tess er tann, at tað er trupult at meta um tær ítøkuligu fyrisitingarligu og búskaparligu avleiðingarnar, tí tær eru treytaðar av samráðingarúrslitinum millum land og kommunur um tað endaliga uppgávubtið. Tí hevur Kommununevndin ikki lagt so stóran dent á hetta. Tó skal verða viðmerkt, at umsitingarliga verður avleiðingin av álitinum tann, at ein partur av landsumsitingini verður fluttur til kommunuumsitingina. Tessvegna verður landsumsitingin bíligari og kommunuumsitingin dýrari. Tó heldur nevndin ikki, at landsumsitingin fer at minka líka nógv, sum kommunuumsitingin fer at vaksa.

# 2. Samandráttur

## 2.1 Tulkingar av kommissorium

Kommununevndin skal koma við einum ítøkiligum uppskoti um nýtt kommunubýti, har ásett eru bæði tal og stødd á teimum kommunalu eindunum. Stavnhaldið er, at kommunurnar bert fáa tær uppgávur um hendi, sum tær sjálvar eru førar fyri at røkja. Hetta merkir, at nýggja kommunuskipanin skal ikki verða grundað á kommunusamstarv, og eigur tað tí bert at verða eitt ískoyti til nýggjan, kommunalan bygnað.
Kommununevndin tulkar sín arbeiðssetning soleiðis, at ætlanin er at menna tað kommunala sjálvstýri, og at kommunurnar tískil skulu fáa fleiri uppgávur at røkja, enn tær nú hava. Somuleiðis verður miðað eftir at fáa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti. Fyritreytin fyri hesum er, at kommunalu eindirnar verða størri, og at kommunurnar tí mega verða lagdar saman. Við hesum í huga tulkar nevndin kommissorium soleiðis, at kommunurnar mega fáa eitt avmarkað tíðarskeið til sjálvbodna samanlegging. Nevndin heldur, at tær eiga at fáa 4 ár  til ár 2002  til hetta arbeiðið. Tá ið so hetta tíðarskeiðið er farið, eiga kommunurnar at verða lagdar saman við lóg.
Við atliti at serskipanum fyri útoyggjarnar og tey smáu bygdasamfeløgini tulkar Kommununevndin kommissorium soleiðis, at møguligar serskipanir eiga at verða gjørdar innan fyri eina nýggja kommunuskipan. Nevndin heldur, at í so lítlum landi sum okkara er ikki skilagott at hava fleiri javnsettar kommunuskipanir. Tí eiga allar kommunur at verða javnsettar mótvegis bæði lóggávu og stýring frá landinum, og tí eigur uppgávubýtið millum land og kommunur eisini at verða gjørt við støði í minsta felagsnevnara.

## 2.2 Kommunubýtið

Í sambandi við nýtt kommunubýti eru tað 4 eyðkenni, Kommununevndin hevur havt at miða seg eftir. Eyðkennini eru: tey landafrøðiligu viðurskifitini, samferðsluskipanin, fólkagrundarlagið og samstarvið.
Ein kommunueind eigur at vera ein natúrlig, landafrøðilig eind, so at bæði kommunuráðleggingin og tænastuveitingin til borgaran loða eintýddar saman. Somuleiðis eigur víddin á kommunueindini ikki at verða størri enn so, at íbúgvarnir í kommununi hava hóskandi atgongd til kommunudepilin og tær almennu tænasturnar.
Kommunueindirnar skulu eisini vera ein samanhangandi samferðslueind.
Tað er skilabest at fólkagrundarlagið í kommunueindini ikki verður minni enn 2.000 íbúgvar. Best hevði verið, um tað var størri. Tó heldur nevndin tað vera veruleikafjart at seta markið hægri enn 2.000, av tí at tær landafrøðiligu umstøðurnar í Føroyum eru so háttaðar, sum tær eru. Hildið verður, at 2.000 íbúgvar mega vera til tess at veita trygd fyri, at kommunueindin fær eina sømiliga kommunuumsiting, umframt at hon kann verða før fyri at veita borgarunum tær tænastur, sum borgaranum í einum nútímans samfelagi hevur/fær tørv á.
Kommununevndin heldur, at havt eigur at vera í huga tað nógva og fjølbroytta samstarvið, sum er kommuna millum nú á døgum.
Við hesum áskoðanum í huga mælir Kommununevndin til hetta kommunubýtið:

1. **Norðoyggjar**: t.e. Fugloyar, Svínoyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar, Mikladals og Húsa kommunur
2. **Eysturoy**: t.e. Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Nes, Runavíkar, Skála, Sjóvar og Oyndarfjarðar kommunur (og møguliga eisini Elduvíkar og Funnings kommunur)
3. **Sundalagið**: t.e. Eiðis, Sunda, Gjáar, Haldórsvíkar, Saksunar, Hvalvíkar, Hósvíkar kommunur (og møguliga Funnings og Elduvíkar kommunur)
4. **Streymoy**: t.e. Vestmanna, Kvívíkar, Kollafjarðar, Tórshavnar, Kirkjubøar, Nólsoyar og Hests kommunur
5. **Vágar**: t.e. Sandavágs, Miðvágs, Sørvágs, Bíggjar og Mykines kommunur
6. **Sandoy**: t.e. Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur
7. **Suðuroy**: t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur.

Besta loysnin er tí 7 kommunur, og Kommununevndin mælir til, at hetta verður grundarlagið undir kommunusamanleggingunum.
Tó er tað soleiðis, at tað eisini eru aðrar kommunueindir, ið lúka tey eyðkenni, Kommununevndin hevur miðað seg eftir. Eysturoyggin eins og Suðuroyggin kunnu verða tvær kommunueindir hvør. Við tí sundurbýti í huga kunnu kommunueindirnar verða hesar:

1. **Norðoyggjar**
2. **Eystureysturoy**: t.e. Fuglafjarðar, Leirvíkar og Gøtu kommunur
3. **Vestureysturoy**: t.e. Nes, Runavíkar, Skála, Sjóvar og Oyndarfjarðar kommunur (og møguliga eisini Elduvíkar og Funnings kommunur)
4. **Sundalagið**
5. **Streymoy**
6. **Vágar**
7. **Sandoy**
8. **Norðursuðuroy**: t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar og Fámjins kommunur
9. **Suðursuðuroy**: t.e. Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur.

Nevndin mælir tí til, at ikki verður gjørligt at leggja saman í smærri kommunueindir, sum til ber at skipa við sjálvbodnari samanlegging.

## 2.3 Uppgávubýtið

Kjarnin í tí kommunala sjálvstýrinum er, at kommunurnar sjálvar kunnu raðfesta sínar uppgávur, og at tær sjálvar kunnu gera av, hvørjar uppgávur, tær ætla at loysa - umframt tær lógarásettu. Við hesum fæst ein miðfirringarvinningur (desentraliseringsvinningur, tí kommunan er betur før fyri enn landið at nøkta ynski/tørv borgarans á staðnum, t.v.s. tað fæst eitt rættari vav og ein betri samanseting av teimum almennu tænastunum. Ein treyt fyri miðfirringarvinningi er tó tann, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið fylgjast, so at borgarin betur kann duga á at skyna, hvat tað kommunala virksemið í roynd og veru kostar. Við hesum kann borgarin seta harðari krøv um nýtsluna av skattakrónum sínum. Onnur treytin fyri miðfirringarvinningi er, at kommunan hevur búskaparligan og umsitingarligan førleika at stýra, so at tilfeingið verður gagnnýtt sum best.
Viðvíkjandi uppgávubýtinum millum land og kommunr eru tað serliga tvær meginreglur, ið verdar eru at hava í huga, og eru tær: nærleiki og burðardygd. Meginreglan um nærleika er tann, at skalt tú fáa miðfirringarvinningin, so mega uppgávurnar verða røktar so nær borgaranum, sum til ber. Og

meginreglan um burðardygd er tann, at skalt tú fáa eina virkisføra (effektiva) uppgávurøkt, so er umráðandi, at økið, sum uppgávan skal fevna um, hevur eina burðardygga støðd.
Við støði í verandi lóggávu verða her nevndar tær uppgávur, sum Kommununevndin heldur eiga at verða kommunalar og hvørjar, ið eiga at verða landsuppgávur. Dentur verður lagdur á, at sjónskur skilnaður eigur at vera ímillum lands- og kommunuuppgávur, og at eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti fæst, so at fíggjarliga ábyrgdin fylgir uppgávuni.

- Fólkayvirlitið eigur at vera savnað á felags kerv.
- Fólkabókasavnstænastan eigur at vera ein kommunal uppgáva og samskipað við skúlabókasavnstænastuna
- Sløkkiliðsarbeiðið eigur at vera staðbundið í kommununi
- El-veitingartænastan eigur at vera ein landsuppgáva, av tí at veitingarøkið er landið alt
- Leiguviðurskifti borgaranna eiga at vera ein kommunal uppgáva
- Sum ein eyðsýndur partur av kommununnar ráðlegging eiga allar kommunur at hava býarskipan og byggisamtykt
- Eftirlitið við matvørulógini eigur at vera ein kommunal uppgáva
- Uppgávurnar hjá hegnsýnisnevndini eiga at verða latnar tí kommunalu umsitingini at røkja
- Fólkaskúlin eigur at verða kommunalur; men tó eigur undirvísing vegna serligan tørv at vera miðsavnað, av tí at umráðandi eru bæði stór servitan og skilagóð samskipan.
- Skúlagongd eftir fólkaskúlan eigur at vera landsuppgáva
- Frítíarundirvísing, serstøk frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi eiga at vera kommunalar uppgávur
- Greiða eigur at fáast á, hvør ætlanin er við Musikkskúlanum. Støða eigur síðan at verða tikin til, um hann skal vera ein kommunu- ella landsuppgáva
- Eftilitið við umhvørvislógini eigur í høvuðsheitum at vera kommunalt
- Innsavnan av burturkasti eigur at vera ein kommunal uppgáva; men sjálv brenningin ella burturbeiningin kundi verið landsuppgáva
- Vatnveitingaruppgávan eigur at verða ein lógarásett, kommunal uppgáva
- Almannaøkið eigur at verða latið kommununum. Tað snýr seg bæði um forsorgina og barnaforsorgina. Samdøgursstovnar til børn eiga tó at verða miðsavnaðir, og harumframt eiga landið og kommunurnar í felag at fáa greiðu á, um eftirlønarøkið skal verða miðsavnað, ella tað skal verða latið kommununum at umsita
- Vegakervið eigur at verða býtt sundur í lands- og kommunuvegir; hesir vegir eiga so eftirsíðan at verða ávikavist ein lands- og kommunuuppgáva
- At taka sær av kirkjugørðunum er ein kommunal uppgáva
- Líkningarmyndugleikin eigur at verða latin kommununum. Harafturímóti er landsins býti av skattum, inntøkuflytingum o.ø. borgaranna millum ein av høvuðsuppgávum landsins (býtisuppgávan), og eigur henda uppgáva tískil at verða miðsavnað
- Umráðandi er hjá landi og kommunum at fáa greiðu á, hvørt tað skal verða land ella kommuna, ið skal hava um hendi at heinta inn kommunuskatt, sum fallin er til gjaldingar
- Kommunulæknaskipanin, heimarøktin, skúlalæknaskipanin og tannrøktarskipanin, t.e. heilsutænastan uttan fyri sjúkrahúsini, eigur at verða latin kommununum at røkja
- Ellisheim eiga at vera kommunal burturav

- Havnalóggávan eigur at verða dagførd. Landsstýrið og kommunurnar eiga við samráðingum at koma ásamt um tað endaliga býtið

### 2.3.1 Kommunusamstarv

Ein viðkomandi spurningur er, um felagskommunalt samstarv kann koma ístaðin fyri kommunusamanleggingar. Kommunusamstarv kann verða býtt sundur í helvt, nevnliga: felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði, og felagskommunalt samstarv uttan fyriskipanarligum bygnaði.
Viðvíkjandi felagskommunalum samstarvi við fyriskipanarligum bygnaði verður sjálvstøðug fyriskipan sett á stovn, ið so tær samstarvandi kommunur geva sín myndugleika. Á tann hátt er hetta samstarvsslagið í andsøgn við tað staðbundna sjálvstýrið, við tað at møguleikin kommunanna at raðfesta uppgávurnar minkar munandi, av tí at bæði tilfeingi og myndugleiki verða latin hesi sjálvstøðugu fyriskipan at røkja. Tílíkt samstarv er heldur ikki í samljóð við fólkastýrið, við tað at leiðslan í felagskommunala samstarvinum verður vald óbeinleiðis av kommunustýrunum. Tessvegna fær borgarin bert óbeinleiðis ávirkan á tær avgerðir, ið tiknar verða, og samstarvsleiðslan stendur bert óbeinleiðis til svars mótvegis borgarunum. Meginreglan um, at uppgávu- og ábyrgdarbyrðan skulu fylgjast, verður eisini brotin. Uppgávan verður latin samstarvinum; men kommunurnar hava ta endaligu fíggjarligu ábyrgdina.
Av hesum ávum eigur felagskommunalt samstarv bert at verða eitt ískoyti til nýggjan, kommunalan bygnað. Harafturímóti er einki til hindurs fyri felagskommunalum samstarvi uttan fyriskipanarligan bygnað. Kommunusamstarv av hesum slagi kann snúgva seg um: keyp og sølu av tænastum, samskipan, upplýsingar- og hugskotsskifti, har veruligar avtalureglur eru galdandi.

### 2.3.2 Samskifti millum land og kommunur

Felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði eigur bert at vera eitt ískoyti til nýggjan, kommunalan bygnað. Tó heldur Kommununevndin, at tað eigur at vera eitt kommunufelag, har allar kommunur eru limur.
Eitt tílíkt felag fer at hava ein týdningamiklan lut í sambandi við skiftið frá verandi kommunubygnaði og til tann nýggja. Harumframt verður ein uppgáva hjá kommunufelagnum, sum frá líður, at samráðast við landsstýrið um tann rikna fíggjarpolitikkin og um neyðugar javningar í kommunuskipanini. Eisini verður tað uppgáva felagsins at umboða kommunurnar á fjølbroyttum grundarlagi mótvegis øðrum myndugleikum og stovnum. Men mótvegis kommununum verður uppgávan hjá kommunufelagnum ráðgevandi.

### 2.3.3 Eftirlit við kommununum

Í eini nýggjari, kommunalari skipan er sera umráðani, at tørvandi orka verður tøk til tað kommunala eftirlitið. Í samanburði við verandi skipan verður uppgáva eftirlitsins í nýggju skipanini stórt sæð eitt rættargildiseftirlit, ið skal ansa eftir, at kommunurnar halda lógirnar. Tað er tí sera umráðandi, at hetta eftirlitið verður eitt veruligt eftirlit, so at kommunurnar fáa ta neyðugu virðingina fyri tí og sostatt eisini fyri lóggávuni.

## 2.4 Ábyrgdarbýtið

Tann endurgjaldsskipan, sum er galdandi, hevur fleiri vansar við sær. Hon hevur eina neyva stýring frá landinum við sær, av tí at landið má fylgja við sínum egnu útreiðslum. Hetta er ikki í samsvari við hugtakið um staðbundið sjálvstýri. Endurgjaldsskipanin veldur harumframt, at trupult er at staðfesta ábyrgdina av teimum avgerðum, ið tiknar eru. Hetta kann volda, at skeivar avgerðir fáa ongar avleiðingar. Endurgjaldsskipanin kann eisini volda, at kommunurnar kunnu ikki so væl raðfesta sínar uppgávur, av tí at stuðulin (endurgjaldingin) er markað. Hetta er heldur ikki í samljóð við tað kommunala sjálvstýrið. Við slíkari endurgjaldsskipan fáa borgararnir heldur ikki greitt at fata, hvat tað kommunala virksemið í roynd og veru kostar.
Kommununevndin mælir tí til, at galdandi endurgjaldsskipan verður avtikin. Ístaðin skal fíggjarliga ábyrgdin fylgja avgerðarrættinum, t.e.: at snýr tað seg um eina kommunala uppgávu, so er tað eisini kommunan, ið sjálv eigur at fíggja hana.
Ímillum Danmørk og Føroyar, og eisini millum donsku stjórnina og danskar kommunur, er ein blokkskipan komin ístaðin. Men Kommununevndin mælir frá, at ein tílík blokkskipan verður framd ímillum landsstýrið og føroyskar kommunur, tí ein tílík skipan er í andsøgn við megingregluna um, at borgararnir eiga at fáa greitt at vita, hvat tað kommunala virksemið í roynd og veru kostar.
Nevndin mælir heldur til, at landsstýrið velur ta skipanina, sum er átøk teirri íslendsku, so at javnað verður ávikavist í lands- og kommunuskattinum. Hetta merkir, at um so er, at ein uppgáva verður flutt frá landi til kommunurnar, so eigur kommunuskatturin at vaksa og landsskatturin at minka samsvarandi uppgávukostnaðinum. Við øðrum orðum sagt, eiga kommunurnar sjálvar at heinta skattin inn heldur enn landið, ið eftirsíðan býtir og sendir hann út aftur til kommunurnar gjøgnum eina blokkskipan.
Kommununevndin mælir til harumframt, at skattaskipanin verður broytt á tann hátt, at allur "progressivitetur" verður í landsskattinum. Ein av høvuðsuppgávum landsins er býtisuppgávan, t.e.: at býta inntøkur landsins soleiðis, at trygd verður veitt øllum borgarum at fáa ein minsta part av samfelagskøkuni. Hetta er ein landsuppgáva, og av tí at uppgávu- og ábyrgdarbýtið skulu fylgjast, so er tað eisini landið sjálvt, ið eigur at fíggja hesa uppgávu.
Nevndin mælir eisini til, at loyvt skal verða kommunum at áseta gjøld fyri tænastur. Snýr tað seg um lógarásettar tænastur, skal lógarheimild eisini verða ásett hesum viðvíkjandi.

### 2.4.1 Javning

Umstøðurnar hjá kommununum eru, sum vera man, ikki tær somu. Tí er neyðugt at ansa eftir, at allar kommunur eru fíggjarliga førar fyri at røkja tær lógarásettu uppgávurnar. Tí ræður eisini um, at lagt verður upp fyri ójavna í fíggingarskipanini. Hesi viðurskifti benda á eina javningarskipan, so at allar kommunur kunnu verða førar fyri at veita eitt ávíst tænastustøði, nú tær skulu røkja sínar lógarásettu uppgávur.
Javningarskipanin er í tveimum pørtum, nevnliga: inntøkugrundarlag kommununnar og útreiðslutørvur hennara. Javningarskipanin hevur tí til endamáls at javna bæði munin í inntøkugrundarlagnum og í útreiðslutørvinum pr. íbúgva í kommununum.
Inntøkujavningin verður roknað á tann hátt, at miðalinntøkugrundarlag landsins pr. íbúgva verður drigið frá inntøkugrundarlagnum hjá kommunueindini pr. íbúgva, faldað við javningarprosentinum og við einum felags roknaðum skattaprosenti og við íbúgvatalinum.
Tað er javningarprosentið, ið treytar, hvussu stórur tann parturin er, sum verður javnaður, og tað er tað felags roknaða skattaprosentið, ið skal veita trygd fyri, at kommunueindin ikki kann ávirka javningina við at broyta sítt skattaprosent.

Útreiðslujavningin verður roknað sum útreiðslutørvur kommununnar pr. íbúgva, minus miðal-útreiðslutørvin alra kommuna pr. íbúgva, faldað við javningarprosentinum, faldað við íbúgvatalinum.
Tað er ikki so einfalt at javna eftir útreiðslutørvi, tí ringt kann vera at finna eitt mát fyri útreiðslutørvinum hjá kommunueindini. Sjálvt um so er, so eigur hetta at verða funnið á sakligum metingarstøði, so at kommunueindin ikki kann ávirka javningina, samstundis sum tað sakliga metingarstøðið eigur at mynda tann veruliga eftirspurningartørvin á tænastum, sum javnað verður fyri.
Kommununevndin ásannar, at tílík javning er neyðug, nú nýggjar uppgávur skulu verða latnar kommununum. Tað ræður um, at henda nýggja skipanin verður væl og virðiliga fyrireikað. Kommununevndin mælir tí til, at nevnd verður sett at kanna hesi viðurskifti gjøllari, og at hon ger uppskot um eina javningarskipan í Føroyum. Henda skipanin eigur at verða gjørd á sakligum metingarstøði (við objektivum kriterium), og eigur hon sum minst at ávirka eggjanina hjá kommununum at skapa búskaparligan framburð, eins og henda skipan sum minst eigur at órógva meginregluna um, at borgarin greitt skal vita, hvat tað kommunala virksemið kostar.

## 2.5 Reglur

Í sambandi við fíggjarstýringina verður mælt til, at kommunurnar fáa eina javngjørda (standardiseraða) kontoskipan, og at tær nýta somu bókhaldsmeginreglur. Kommunusamanleggingarnar eru eitt sera gott høvi at fáa tað gjørt. Hetta er til fyrimunar bæði fyri land og kommunur. Kommununevndin mælir til, at arbeiðsbólkur verður settur at fyrireika fíggjarstýringarskipanina hjá kommununum.
Viðvíkjandi lántøku er aðalreglan tann, at kommunurnar sjálvar skulu fíggja, so at samband er millum skattin og tænastustøðið. Tó eiga kommunurnar at fáa loyvi at fíggja íløgurnar við lántøku, tí útreiðslurnar av eini íløgu eru til gagns í mong ár. Vit vita tó av royndum, at neyðugt er at avmarka lántøkuna hjá kommununum, eins og vanligt er at gera í grannalondum okkara. Nevndin mælir tí til, at nettoskuldin hjá kommununum ikki kann verða størri enn eina álíkning netto við miðalskattaprosentinum í skattabandinum. Um lántøkan fer um hetta lániloftið, skal landsstýrið góðkenna tað. Kommununevndin mælir tí eisini til, at omanfyri nevndi arbeiðsbólkur fær til arbeiðis at lýsa hugtakið lántøku" gjøllari.
Í sambandi við vinnulívið mælir Kommununevndin til, at kommunurnar hvørki kunnu vera beinleiðis ella óbeinleiðis partur av vinnulívinum. Orsøkin til tess er, at tað almenna eigur ikki at blanda seg upp í marknaðarkreftirnar, tí so verður javnvágin órógvað, við tað at kommunurnar - við skattapeningi borgaranna - lættliga kunnu vinna kappingina við tað privata. Kommunan eigur heldur at gera karmarnar um vinnulívið.
Kommunan eigur heldur ikki at stuðla einstøkum fyritøkum, av tí at slíkur stuðul avlagar kappingina. Harafturímóti kann kommunan veita almennan stuðul sum t.d. ráðgeving, sum øll virki í kommununi hava javnbjóðis møguleika at gagnnýta.

## 2.6 Serskipanir fyri útoyggjarnar og tey smærru bygdasamfeløgini

Álagt er Kommununevndini í arbeiðssetningi sínum at koma við tilmæli um møguligar serskipanir fyri útoyggjarnar og tey smærru bygdasamfeløgini.

Kommununevndin er av teirri áskoðan, at støðan er so hættislig í útoyggjunum, at trupulleikar teirra kunnu ikki verða loystir við einum nýggjum kommunubygnaði. Um ætlanin er at varðveita búsetingarmynstrið í útoyggjunum, so eru áneyðir at fremja landspolitisk tiltøk, kanska skattasundurgreining, broytingar í jarðarlóggávuni og tílíkt. Hetta eru tiltøk, sum landsstýrið má seta í verk og fremja.
Í eini nýggjari kommunuskipan er umráðandi at veita trygd fyri, at tey staðbundnu sjónarmiðini í teimum smærru bygdasamfeløgunum verða hoyrd. Hetta kann t.d. verða gjørt á tann hátt, at settar verða ráðgevandi staðbundnar nevndir við hoyringarætti; men tað eiga tó at vera kommunurnar sjálvar, ið skulu taka støðu til, um tær eru sinnaðar at hava tílíkar nevndir. Um gjørt verður av at seta staðbundna nevnd, eigur hon at verða vald, samstundis sum kommunuval er. Nevndin eigur at verða mannað við 3 staðbundnum umboðum og 2 frá kommunustýrinum, har borgarstjórin er annað umboðið.

## 2.7 Verksetanarætlan

Hetta er verksetanarætlanin fyri nýggju kommunuskipanina

| Ár | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003-> |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | --- | --- | --- | --- | --- | |
| Sjálvbodnar kommunusamanleggingar | --- | | | | | |
| Nýggj kommunustýrislóg verður sett í gildi | --- | | | | | |
| Samanleggingarlóg verður sett í gildi | --- | ---- | --- | --- | --- | |
| Fíggjarskipanin verður lagað eftir nýggju skipanini | --- | | | | | |
| Arbeiðsbólkur settur at gera neyvari reglar fyri kontoskipan, bókhald og lántøku | --- | | | | | |
| Broytingar í kommunuvallógini verða settar í gildi | --- | | | | | |
| Nevnd verður sett at gera uppskot um nýggja vallóg til kommunu- og løgtingsval | --- | | | | | |
| Løgtingslóg um val til kommunur og løgting verður sett í gildi | | | | | --- | |
| Møgulig kommunusamanlegging við lóg | | | | | --- | |
| Barnaøkið verður latið kommunum | | | | | --- | --- |
| Javningar í fíggjarskipanini sb. Broytingunum í uppgávubýtinum | | | | | --- | --- |
| Uppgávubýtið verður lagað eftir nýggju kommunuskipanini | | | | | | --- |
| Tillagingar í serlóggávuni | --- | --- | --- | --- | --- | --- |

# 3. Fyrimunir og vansar við verandi kommunuskipan

Táttur I í álitinum frá Kommununevndini lýsir verandi kommunuskipan, hvussu uppgávu- og ábyrgdarbýtið er millum land og kommunu og hvørja einstaka kommunu. Harafturat eru gjørdar nakrar eftirmetingar um, hvussu kommunurnar loysa verandi uppgávubýti.

## 3.1 Fyrimunir

Ein fyrimunur við verandi kommunuskipan er, at kommunala umsitingin er lutfalsliga bílig og sera liðilig. Í fleiri førum er tað so, at borgararnir kunnu venda sær til bygda(r)ráðið, nær tað skal vera, og fáa hjálp í einum og hvørjum føri.
Ein annar fyrimunir er fólkastýrið, sum er í nánd borgaranna  staðbundið fólkastýri (nærdemokratiið). Tær nógvu kommunur eru so mikið smáar, at hvør einstakur borgari kann hava stóra ávirkan á avgerðirnar í kommununi. Samstundis er tað so nógv lættari at koma hvørjum øðrum við og at nema ta felags kenslu, sum er at finna í teimum smáu kommununum.
Við verandi skipan hevur tað eisini í nógvum førum verið ein fyrimunir at vera lítil kommuna, tí orkan hevur verið so lítil, og tí hevur heldur ikki borið til at gera tær stóru íløgurnar og við tí skuldarbinda kommununa. Í nógvum førum eru tað tí tær smáu kommunurnar, sum eru skuldarfríar.

## 3.2 Vansar

Men teir fyrimunir, her eru nevndir, kámast eitt sindur, við tað at tær flestu kommunueindir eru so smáar, og tískil er bæði tann umsitingarliga og búskaparliga orkan so lítil. Til dømis hava 14 kommunur ongan skrivara, og í fleiri kommunum er skrivarin bert settur nakrar fáar tímar um vikuna. Og tað eru bara 13 kommunur, sum hava onnur starvsfólk enn skrivara í umsitingini.

### 3.2.1 Bílig og liðilig umsiting

Tað er ein fyrimunur, at tann kommunala umsitingin er bílig og liðilig; men bágin er so tann, at hesar kommunur megna t.d. ikki at veita borgarum sínum tær tænastur, sum borgarar í einum nútímans samfelagi tørva. Hetta kemur m.a. til sjóndar í umsitingini av fleiri uppgávum, sum formliga eru kommunalar, men sum kortini eru fluttar aftur til landið. Tvs. at fyrireikingin av málum til kommunupolitikararnar at taka støðu til, ikki er til staðar ella ikki er nóg góð. Í staðin fyri at málini verða fyrireikað út frá lokalu fyritreytunum verða nógv mál fyrireikað hjá landsmyndugleikunum (landsverkfrøðingi, almannastovuni v.m.) ella bý-/bygda(r)ráðsformanninum sjálvum. Av hesum gerst landsumsitingin eisini lutfalsliga dýrari, og samfelagsliga er tí einki spart, sjálvt um kommunuumsitingin er bílig.
Hetta kemur eisini til sjóndar í málsviðgerðini á bý-/bygda(r)ráðsfundum, har mestsum bert teknisk mál og fíggjarmál eru á skránni.

At kommunala umsitingin er bílig og liðilig kemst eisini av, at tær smáu kommunurnar eru ikki førar fyri at veita borgarunum tær tænastur, teimum er tørvur á í einum nútíðar samfelagi. Tí brúka íbúgvarnir í teimum smáu kommununum hentleikarnar í teimum stóru kommununum, uttan at teir tó rinda tann veruliga kostnaðin fyri hesar tænastur. Tískil eru tað bert íbúgvarnir í teimum stóru kommununum, ið rinda fyri tær íløgur, sum gjørdar vera, sjálvt um hesar íløgur tó eisini verða brúktar av íbúgvunum í øðrum kommunum.[1] Av hesum sama hava nógvar av teimum smáu kommununum heldur onga skuld.
Í hesum sama viðfangi er eisini vert at nevna, at kommunuarbeiðið hjá bý-/bygda(r)ráðslimunum, og kanska serliga hjá bý-/bygda(r)ráðsformonnunum, verður avrikað mestsum av handahógvi. Tær hava ikki fíggjarliga orku at lata bý-/bygda(r)ráðsformannin arbeiða fulla tíð fyri kommununa, og ofta fáa bý-/bygda(r)ráðsformenninir og bý-/bygda(r)ráðslimirnir lítla og onga samsýning fyri sítt arbeiði.[2] Arbeiðsdygdin valdast tí ofta, hvør formaðurin er, og tað er sjálvandi ikki so heppið. Avleiðingin kann verða, at málsviðgerðin verður tilvildarlig, og tá so er, er vandi fyri, at rættartrygdin hjá borgarunum verður skerd.

### 3.2.2 Staðbundið fólkastýri

Fyrimunurin við staðbundna fólkastýrinum kann eisini lættliga kámast, tí mark er fyri, hvussu smáar kommunurnar kunnu verða, áðrenn demokratiið verður syndrað. Eitt virkið staðbundið fólkastýri merkir í roynd og veru, at kommunurnar veruliga hava uppgávur, sum tær kunnu raðfesta, og tað kunnu vit ikki siga, at tær hava við verandi kommunuskipan. Av teimum 49 kommununum eru tað 19, ið hava færri enn 200 íbúgvar, og 28, ið hava færri enn 500 íbúgvar. Av hesum lága íbúgvatali kann tað eisini lættliga vera so, at bæði bý-/bygda(r)ráðslimir og nevndarlimir skjótt kunnu verða ógegnigir. Umframt hetta eru eisini aðrir vansar við verandi kommunuskipan.
Smáar kommunur hava nógv torførari at menna seg, tí bæði tann fíggjarliga íløguorkanin og førleikin eru ov lítil. Og skulu fólk støðast í kommununi, so er ein fortreytin júst tann, at kommunan mennist, so tað verður stimbrandi fyri tað unga ættarliðið at búseta seg har. Umráðandi er eisini, at kommunan hevur fólk við førleika, ið er ført fyri at skipa og geva íblástur til at kommunan mennir seg. Menningargrundarlagið er at skapa so góðar umstøður í kommununi, at fólk verða altrá eftir at stovnseta síni virki har. Og við teimum koma so nýggj arbeiðispláss. Týdningarmikið er eisini, at kommunan kann veita borgarunum neyðugar tænastur so sum ansingarpláss, góðan skúla o.s.fr., so fólk kunnu trívast í kommununi. Tað eru bert stórar kommunur við nógvari fíggjarligari orku, ið eru førar fyri at mennast á henda hátt.
Við nógvum kommunalum eindum er somuleiðis truplari at samskipa samfelagsligu útbyggingina, so at hon verður skilagóð. Vandin fyri at fáa eitt flakavirki á hvørjum tanga" er nógv størri við nógvum kommunalum eindum.
Skipanin við nógvum kommunum ger eisini eftirlitsuppgávuna hjá landinum nógv størri, truplari og dýrari. Tað kann vera ógvuliga tíðarkrevjandi bara at fáa neyðugu upplýsingarnar frá kommununum. Aftur at hesum kemur so kostnaðurin av, at stórur partur av kommunuumsitingini er í landsumsitingini, av tí at kommunurnar megna ikki uppgávuna sjálvar.
Tær smærru kommunurnar, ið eru lítið mentar, muna so lít ið ímóti landsumsitingini, og tí verður arbeiðsgongdin eisini so stirvin í hesum kommunum.

---

[1] Her skal viðmerkjast, at summar íløgur eru gjørdar við útgangasstøði í, at eisini íbúgvar í grannakommununum nýta tænastuna.
[2] Fyri bygdaráðsformenn í kommunum við minni enn 1.500 íbúgvum er samsýningin 50 kr. pr. íbúgva um árið, tó ikki minni enn 5.000 kr. Fyri kommunur við fleiri enn 1.500 íbúgvum er samsýningin um árið: 1501-2000 íbúgvar 90.000 kr., 2001-2500 íbúgvar 120.000 kr. og 2501-300 íbúgvar 150.000 kr.

Av tí at endurgjaldsskipanin, sum er galdandi í sambandi við fígging av uppgávunum í verandi kommunuskipan - saman við umsitingini av nógvum lógarfestum uppgávum hjá kommununum - er flutt aftur til landið, er tað sera trupult at staðfesta ábyrgd. Hetta er sjálvandi óheppið, tí henda óvirkna skipanin ber við sær, at skeivar avgerðir fáa ongar avleiðingar.

## 3.3 Niðurstøða

Niðurstøðan er, at verandi kommunuskipan gevur ikki kommununum nakað veruligt sjálvræði/sjálvstýri. Tær flestu kommunurnar hava nú ikki møguleika at raðfesta sínar uppgávur, av tí at tann búskaparliga og umsitingarliga orkan er so lítil. Er ynskiligt, at kommunurnar skulu fáa meira sjálvræði/sjálvstýri, og at tær sostatt veruliga kunna stýra sínum egnu viðurskiftum, so er treytin, at tær verða samskipaðar í størri búskaparligar eindir, t.e. kommunusamanleggingar. Verður hetta ikki veruleiki, gerst neyðugt at flyta meginpartin av uppgávunum til landið at umsita, so at uppgávu- og ábyrgdarbýtið verður greiðari.

# 4. Kommunubýtið

Kommununevndin hevur í arbeiðssetningi sínum fingið álagt at mæla til hóskandi tal og stødd á kommunum við støði í einum greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Nevndin hevur í tátti I lýst verandi kommunalu skipanina. Ein av eftirmetingunum er, at nógvar kommunur eru so smáar, at tær hvørki hava fíggjarliga ella umsitingarliga orku at umsita tær uppgávur, tær nú hava sambært lógini. Eitt dømi í so máta er almannaøkið, sum upprunaliga var ein kommunal uppgáva. Men av tí at kommunurnar eru so smáar, er umsitingin av hesi uppgávuni flutt aftur til landið.
Eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti krevur í sjálvum sær ikki broytingar í kommunubýtinum. Men verður hildið fast um verandi kommunubýti, verður úrslitið, at neyðugt verður at flyta meginpartin av uppgávunum til landið. Skulu kommunurnar hava nakrar veruligar uppgávur at umsita einsamallar, so mega vit fáa størri kommunalar eindir.

## 4.1 Krøv til kommunueindina

Spurningurin er so, hvørji eyðkenni eru, ið hava týdning, tá hugsað verður um møguligar størri kommunueindir. Kommununevndin hevur lagt dent á hesi eyðkenni:

A. Landafrøðilig viðurskifti
B. Samferðsluskipan
C. Fólkagrundarlag
D. Samstarv

### 4.1.1 Landafrøðilig viðurskifti

Kommunueindin skal vera ein natúrlig landafrøðilig eind, so at kommunuráðleggingin og tænastuveitanin til borgaran loða væl saman. Tað er til dømis óhugsandi, at Sandoyggin og Norðoyggjar verða lagdar saman í eina kommunu, tí henda eindin loðar ikki saman landafrøðiliga. Víddin á kommunueindini eigur heldur ikki at verða størri enn, at íbúgvarnir í kommununi hava rímiliga atgongd til kommunumiðdepilin og tær almennu tænasturnar. At kommunueindin er ein natúrlig landafrøðilig eind átti eisini at borið við sær, at íbúgvarnir lættari kunnu venja seg við ta nýggju eindina, sum teir nú eru vorðnir partur av.
Eitt oyggjasamfelag sum Føroyar er frá náttúrunnar hond býtt sundur í landafrøðiligar eindir. Dømi um eintýddar, landafrøðiligar eindir eru: Vágar, Norðoyggjar, Suðuroy og Sandoy.
Til tess at fáa tær nýggju eindirnar at loða saman, verður helst í einstøkum førum neyðugt at býta onkrar av verandi kommunum sundur.

### 4.1.2 Samferðsluskipanin

Alment kann verða sagt, at samferðslunetið/-skipanin í Føroyum er væl útbygd. Eitt sjálvsagt krav til nýggju kommunueindirnar er, at tær skulu vera ein samanhangandi samferðslueind, so at ikki skal verða neyðugt at fara ígjøgnum eina aðra kommunu fyri at koma til hinar kommunupartarnar.

Í hesum viðfangi eigur eisini at verða havt í huga, at eindirnar mega verða skipaðar á tann hátt, at tær hava fyrilit fyri ferðamynstrinum hjá íbúgvunum við atliti at bústaði og arbeiði, og hvat miðstaðarøki lættast er at koma til hjá borgarunum, tað veri seg í almennum og privatum ørindum teirra. Um eindirnar hava hetta í huga, so stimbrar tað hitt kommunala fyritakssemið, tí tænastuframleiðslan kann verða lagað til búsetingarmynstrið, lendisskipanin kann verða samskipað betur, og eitt betri samsvar fæst millum teirra, sum nýta tænasturnar, og teirra, sum fíggja tær.

### 4.1.3 Fólkagrundarlag

Landsstýrið setti á vári í 1969 5-mannanevnd at kanna kommunalu lóggávuna í Føroyum. Sambært hesi nevnd hevur kommunusundurbýtingin í so nógvar og smáar kommunur fram til 1972 havt við sær veikar kommunur, sum í roynd og veru lítið og einki vald hava. 5-mannanevndin helt, at størri kommunalar eindir høvdu borið við sær, at borgarin fataði greidligari, at tað var kommunustýrið, ið hevði ábyrgdina av teimum kommunalu uppgávunum, og at borgarin tí fekk eina størri ávirkan. Hvussu stór kommunueindin eigur at verða, er eisini treytað av, hvørjar uppgávur kommunurnar skulu loysa. 5-mannanevndin metti tó, at einir 1.500 íbúgvar áttu í øllum føri at veitt kommunueindini eina sømiliga fyrisiting. 5-mannanevndin helt tó, at hesin málsetningurin var ov lítil. Umframt eina sømiliga kommunufyrisiting skal kommunan eisini kunna bjóða sínum borgarum tær tænastur, sum ein borgari í einum nútíðar samfelagi krevur, og krøvini verða størri og størri. Um so er, at kommunan ikki megnar hetta, ja, so leitar borgarin sær aðrar leiðir eftir hesum tænastum. Kommunan eigur m.a. at bjóða sínum íbúgvum: skúlagongd, eina sosiala skipan, ellis- og røktarheim, ítróttar- og samkomuhús o.s.fr. Til tess at náa hesum málum muna 1.500 íbúgvar ov lítið.
Kommune- og fylkesinndelingsudvalget", sum var sett í Noregi í 1989, hevði ta áskoðan, at íbúgvatalið í eini kommunu átti í minsta lagi at vera 5.000. Hetta helt nevndin vera neyðugt, um m.a. kostnaðarvirkni skuldi vera í umsitingini og tí kommunalu tænastuframleiðsluni og til tess at fáa tørvandi førleika at røkja fjølbroyttar, kommunalar uppgávur.
Í sambandi við kommunubroytingina í Danmørk var miðað eftir, at kommunurnar skuldu ikki hava eitt fólkatal, sum var minni enn 3.000  4.000; men hildið varð, at fyrimunirnir vóru fleiri, um fólkatalið var uppaftur størri, t.e. einar 5-6.000 íbúgvar.
Við støði í hesum áskoðanum heldur Kommununevndin sum skilabest, at fólkatalið í kommunueindini ikki verður minni enn 2.000, og at best hevði verið, um tað var enn størri. Nevndin heldur tað tó vera óveruligt at seta markið hægri enn 2.000, av tí at tær landafrøðiligu umstøðurnar í Føroyum eru so háttaðar, sum tær eru. Markið við 2.000 íbúgvar er eisini grundað á, at tað er tað, ið krevst, fyri at kommunan kann átaka sær fólkaskúlan sum eina kommunala uppgávu burturav. Við einum fólkagrundarlagi, sum er á leið 2000 íbúgvar, hevur ein kommuna næmingagrundarlag fyri einum 2-sporaðum fólkaskúla. Hetta ber við sær ein virknari rakstur bæði hølisliga og undirvísingarliga, eins og at tey fakligu tilboðini til næmingarnar verða størri.

### 4.1.4 Samstarv

Kommununevndin heldur eisini, at fyrilit eigur at verða fyri kommunusamstarvi av ymiskum slagi, av tí at samstørv hava skapt eina meira ella minni samanhangandi eind og eina felags kenslu. Sí eisini kommunulýsingarnar í Tátti I, parti II.

# 4.2 Bestu hóskandi kommunueindir

Við støði í áður nevndu áskoðanum mælir Kommununevndin til hetta kommunubýtið:

- Norðoyggjar
- Eysturoy
- Sundalagið
- Streymoy
- Vágar
- Sandoy
- Suðuroy

Eindirnar: Norðoyggjar, Vágar, Sandoy og Suðuroy eru serliga grundaðar á eyðkenni sum natúrligar, landafrøðiligar eindir.
Kommununevndin mælir til, at Suðuroyggin verður ein kommunueind, sjálvt um oyggin við 2 kommunueindum lýkur áður nevndu krøv. Men av tí at øll oyggin er ein natúrlig, landafrøðilig eind, verður hon nógv sterkari, um hon er ein, tí serstakliga tann fíggjarliga orkan verður størri. Eisini kunnu vit ímynda okkum eina óhepna innanhýsis kapping, um tað verða 2 kommunur í Suðuroynni heldur enn ein felags oyggjarmenning.
Av tí at samstarvið í Sundalagnum er so týdningarmikið, verður Sundalagið ein kommunueind. Har er longu eitt slag av felagskenslu, og síðan brúgvin var bygd um Streymin, hevur hetta økið verið ein samanhangandi samferðslueind. Eisini verður hildið, at økið hevur góðar vakstrarmøguleikar.
Av hesum ávum verða Streymoyggin og Eysturoyggin býttar eitt sindur sundur.
Tann besta loysnin er tí 7 kommunur, og lagt skal verða afturat, at hetta er grundarlagið undir kommunusamanleggingunum, uttan so verður, at kommunurnar ikki sjálvbodnar leggja saman. Her verður so hvør einstøk kommunueind viðgjørd fyri seg.

## 4.2.1 Norðoyggjar

Kommunan fevnir um: Fugloyar, Svínoyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar, Mikladals og Húsa kommunur.



Norðoyggjarnar eru ein natúrlig, landafrøðilig eind. Miðstaðarøkið í hesum føri er Klaksvík. Ferðasambandið úr oyggjum og bygdum er til Klaksvíkar bæði viðvíkjandi arbeiði, almennum tænastum og viðvíkjandi samskiftinum haðan og úr Norðoyggjunum. Tó hava fólk í Fugloy og Svínoy ikki so lætta atgongd til kommunalu tænasturnar. Sí eisini kapitul 9. Við árslok 1997 var fólkatalið í Norðoyggjunum 5.625.
Umframt hesi viðurskifti hava Norðoyggjar ymisk samstørv. Tær eru eitt læknadømi, allar kommunurnar í Norðoyggjum eru í Norðoya sýsla, og til løgtingsval eru Norðoyggjar eisini eitt valdømi. Av søguligum samstørvum er greitt, at Norðoyggjar vóru ein kommuna, tá ið kommunala

skipanin var sett í verk í 1872. Harumframt samstarva Norðoyggjar eisini um ellisheim og um ferðavinnuna.
Allar kommunur í Norðoyggjum uttan Svínoyar kommuna, keypa sær framhaldsskúlapláss í Klaksvík. Somuleiðis hava allar kommunur í Norðoyggjum gjørt avtalu við tannlækna í Klaksvík um barnatannrøktina. Eisini keypa kommunurnar, ið eiga teir smáu skúlarnar í Norðoyggjum (t.e. Húsa, Mikladals og Kunoyar kommunur), sær skúlabarnasvimjing eina ferð um vikuna úr Klaksvíkar kommunu.
Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Norðoyggjar (1000 kr.)**

| | **1996** | **1997** | **1998** |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 412.003 | 445.728 | 495.602 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 81.489 | 86.496 | 85.220 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 38.972 | 40.505 | 41.943 |
| Nettorentur | 16.199 | 14.286 | 14.328 |
| Íløgur | 10.917 | 15.318 | 16.787 |
| Íløgustuðul | 938 | 143 | 1.675 |
| Úrslit | 16.339 | 16.530 | 13.837 |
| | | | |
| Avdráttir | 11.148 | 9.857 | 14.450 |
| Miðalskattaprosent | 19,8 | 19,4 | 17,2 |
| Nettoskuld | 173.287 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 5.609 | 5.625 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl. Fyri Hvannasund bert fíggjarætlanartøl.
Annars verður víst á kommunulýsingarnar í tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

## 4.2.2 Eysturoy

Kommunan fevnir um: Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Nes, Runavíkar, Skála, Sjóvar og Oyndarfjarðar kommunur og møguliga eisini Elduvíkar og Funnings kommunur.




Hetta er ein natúrlig, landafrøðilig eind og samanhangandi samferðslueind.
Elduvíkar og Funnings kommunur kunnu verða ein partur av Eysturoyar kommunu. Tað veldst um, hvat íbúgvarnir í hesum báðum kommununum ynskja. Tó skal kravið verða lokið um, at kommunueindin skal vera ein samanhangandi samferðslueind, so at annaðhvørt verða báðar kommunurnar partur av Eysturoyar kommunu ella Sundalags kommunu, ella verður Elduvíkar kommuna partur av Eysturoyar kommunu, og Funnings kommuna verður partur av Sundalags kommunu. Av tí at Elduvíkar og Funnings kommunur eru hvør sínumegin Funningsfjørð og vanliga hava verið mettar til hvønn sín part av Eysturoynni, so ber ikki til at siga burturav, hvar hesar kommunur eiga at verða partur av. Men við útbyggingini av samferðslunetinum er Funningur komin nærri Skálafjørðinum og Elduvík nærri Sundalagnum.
Við árslok 1997 var fólkatalið 8.375. Um Elduvíkar kommuna er við, var tað 8.470, og 8.568 um bæði Elduvíkar og Funnings kommunur eru við.
Viðvíkjandi samstørvum er at nevna, at øll Eysturoyggin er ein sýsla, eitt valdømi til løgtingsval, eitt skattaøki, og at Eysturoyggin var ein av teimum upprunaligu kommununum.
Um samstørvini í hesi kommunueindini er annars at siga, at samstarvað hevur verið ymsar vegir, og bendir tað ikki á eina so eintýdda samanlegging. Í Eysturoynni eru 3 læknadømi: Nes sóknar læknadømi, sum er Nes og Runavíkar kommunur, Skála læknadømi, sum er Elduvíkar, Skála og Sjóvar kommunur, og Fulgafjarðar læknadømi, sum er Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu og Oyndarfjarðar kommunur. Funnings kommuna er so í Eiðis læknadømi.
Kommunurnar kring Skálafjørðin (t.e. eisini Gøtu kommuna) samstarva um Kongshavnar havn og um brunamál (tó ikki Gøtu kommuna). Sjóvar, Skála og Elduvíkar kommunur samstarva um barnatannlækna, meðan Skála, Oyndarfjarðar, Hellurnar (í Fuglafjarðar kommunu) kommunur keypa sær framhaldsskúlapláss á Strondum. Funnings- og Elduvíkar kommunur keypa sær framhaldsskúlapláss í Felagsskúlanum á Oyrabakka, og tær samstarva eisini um havnina. Nes og Runavíkar kommunur samstarva um musikkskúla og serstaka frítíðarundirvísing. Fuglafjarðar, Leirvíkar og Gøtu kommunur samstarva um brunamál og ítróttahøllina á Kambsdali.
Harumframt keypa Leirvíkar og Gøtu kommunur sær framhaldsskúlapláss í Fuglafirði.
Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Eysturoy (1000 kr.)**

| | 1996 | 1997 | 1998 |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 622.806 | 660.440 | 733.549 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 120.726 | 120.797 | 124.631 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 55.467 | 61.923 | 65.478 |
| Nettorentur | 24.198 | 23.227 | 21.822 |
| Íløgur | 22.004 | 16.396 | 22.661 |
| Íløgustuðul | 1.884 | 150 | 3.430 |
| Úrslit | 20.941 | 19.401 | 18.100 |
| | | | |
| Avdráttir | 10.199 | 15.343 | 21.224 |
| Miðalskattaprosent | 19,4 | 18,3 | 17 |
| Nettoskuld | 268.053 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 8.345 | 8.470 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl. Íroknað Elduvíkar kommunu.

Annars verður víst á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

### 4.2.3 Sundalagið

Sundalags kommuna fevnir um: Eiðis, Sunda, Gjáar, Haldórsvíkar, Saksunar, Hvalvíkar og Hósvíkar kommunur og møguliga eisini Funnings og Elduvíkar kommunur.




Hetta er ikki beinleiðis ein natúrlig, landafrøðilig eind; men brúgin um Streymin ger hesa eindina til eina samanhangandi samferðslueind.

Elduvíkar og Funnings kommunur kunnu verða ein partur av Sundalagnum, og tað veldst so aftur um, hvat íbúgvarnir í hesum báðum kommununum ynskja. Tó skal kravið verða lokið um, at kommunueindin skal vera ein samanhangandi samferðslueind, so at annaðhvørt verða báðar kommunurnar partur av Eysturoynni ella Sundalagnum, ella verður Elduvíkar kommuna partur av Eysturoynni, og Funnings kommuna verður partur av Sundalagnum. Við árslok 1997 var fólkatalið

2.045. Um Funnings kommuna er við, var tað 2.143, og 2.238 um bæði Funnings og Elduvíkar kommunur eru við. Hetta fólkatalið er á markinum fyri eina kommunueind. Kommununevndin heldur tó, at hetta økið hevur lutfalsliga góðar menningarmøguleikar.
Av samstørvum skal fyrst verða nevnt tað felags kommunala samstarvið í Sundalagnum. Hetta samstarvið er millum: Sunda, Gjáar, Hvalvíkar, Haldórsvíkar og Hósvíkar kommunur. Hesar kommunur samstarva um: brunamál, umhvørvismál, tekniska umsiting og barnatannrøktina. Harumframt hava hesar kommunur - saman við Kollafjarðar, Eiðis og Saksunar kommunum - eisini samstarv um Felagsskúlan á Oyrabakka. Funnings og Elduvíkar kommunur keypa sær framhaldsskúlapláss í Felagsskúlanum á Oyrabakka. Saksunar kommuna hevur ongan skúla og keypir sær tí skúlapláss frá 1. til 7. flokk í grannakommununum.
Umframt felags kommunala samstarvið í Sundalagnum eru allar kommunurnar uttan Elduvík í Eiðis læknadømi.
Hinvegin verður eisini samstarv aðrar vegir. Kommunurnar í Eysturoynni eru í Eysturoyar sýslu, Eysturoyar valdømi til løgtingsval, í Eysturoyar skattaøki og vóru tær partur av tí upprunaligu Eysturoyar kommunu. Eisini samstarva allar kommunurnar í Eysturoynni um ellisheim.
Kommunurnar í Streymoynni eru harafturímóti partur av Streymoyar sýslu, í Norðstreymoyar valdømi til løgtingsval, í Streymoyar skattaøki I og vóru tær partur av tí upprunaligu Norðstreymoyar kommunu.
Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Sundalagið (1000 kr.)**

| | 1996 | 1997 | 1998 |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 146.002 | 162.583 | 190.111 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 26.790 | 27.311 | 29.546 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 15.845 | 16.534 | 17.620 |
| Nettorentur | 3.932 | 3.323 | 2.671 |
| Íløgur | 4.235 | 4.381 | 5.378 |
| Íløgustuðul | 239 | | |
| Úrslit | 3.017 | 3.073 | 3.877 |
| | | | |
| Avdráttir | 3.951 | 3.388 | 4.993 |
| Miðalskattaprosent | 18,3 | 16,8 | 15,5 |
| Nettoskuld | 32.704 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 2.082 | 2.143 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanar. Fyri Gjógv bert fíggjarætlanartøl. Tøl fyri Saksun vanta fyri 1996. Íroknað Funnings kommunu.

Annars verður víst á kommunulýsingar í tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

## 4.2.4 Streymoy

Útsynningsstreymoyar kommuna fevnir um: Vestmanna, Kvívíkar, Kollafjarðar, Tórshavnar, Kirkjubøar, Nólsoyar og Hests kommunur




Kirkjubøar, Tórshavnar, Kollafjarðar, Kvívíkar og Vestmanna kommunur eru ein sjálvstøðug, landafrøðilig eind. Harafturat koma so Nólsoyar og Hests kommunur. Hetta er náttúrligt, tí vanliga samskiftið er við miðstaðarøkið. Í hesum viðfangi er at nevna, at Kollafjarðar og Tórshavnar kommunur hava gjørt avtalu, sum landsstýrið hevur góðkent, um at kommunurnar verða formliga lagdar saman frá 1. januar 2001 at rokna. Kvívíkar og Vestmanna kommunur lúka ikki tey eyðkenni, ið áður eru nevnd, at verða sjálvstøðug kommuna, og tær verða tí natúrligur partur av økinum. Mesta samskiftið hjá hesum kommunum er við Tórshavn. Við árslok 1997 var fólkatalið í kommunueindini 18.947 íbúgvar.
Sameindu sóknirnar í Suðurstreymoyar prestagjaldi, t.e. Kirkjubøar, Kaldbaks, Nólsoyar og Tórshavnar uttanbíggja kommunur vóru í síni tíð ein kommuna. Tórshavnar, Kirkjubøar, Nólsoyar og Hests kommunur eru eitt læknadømi. Harumframt hava hesar kommunur samstarv um ellisheim, og tær smáu kommunurnar keypa sær nógvar tænastur úr Tórshavnar kommunu sum t.d.: skúlapláss, barnatannrøkt og ruskburturbeining.
Harafturímóti eru Vestmanna, Kvívíkar og Kollafjarðar kommunur eitt læknadømi. Vestmanna og Kvívíkar kommunur eru felags um skúlabarnatannlæknan, og Kvívík keypir sær framhaldsskúlapláss í Vestmanna. Avtala er eisini millum Vestmanna og Kvívíkar kommunur um at hjálpa hvørjum øðrum í sambandi við brunamál. Saman eru hesar kommunur eisini partur av skattaøkinum: Streymoyarøki I, í Streymoyar sýslu, og vóru tær partur av tí upprunaligu Norðstreymoyar kommunu.
Talvan niðanfyri sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Streymoy (1000 kr.)**

| | **1996** | **1997** | **1998** |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 2.012.881 | 1.840.216 | 1.901.205 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 303.295 | 305.873 | 333.241 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 171.700 | 185.698 | 208.828 |
| Nettorentur | 46.467 | 48.209 | 41.405 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Íløgur | 24.194 | 18.426 | 25.760 |
| Íløgustuðul | 179 | | 800 |
| Úrslit | 61.113 | 53.540 | 58.048 |
| | | | |
| Avdráttir | 21.165 | 38.621 | 62.825 |
| Miðskattaprosent | 15,1 | 16,6 | 17,9 |
| Nettoskuld | 634.942 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 18.639 | 18.947 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl.

Annars verður víst á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

## 4.2.5 Vágar

Vága kommuna fevnir um: Sandavágs, Miðvágs, Sørvágs, Bíggjar og Mykines kommunur.




Vágar er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Umframt Vágar er Mykines eisini partur av hesi kommunueind, tí alt samskifti við Mykines fer um Vágarnar.
Samferðslan í oynni er góð. Tí er góður møguleiki hjá íbúgvunum í oynni at ferðast til arbeiðis og at fáa atgongd til privatar og almennar tænastur. Tað er bert Gásadalur, sum er einasta bygd í landinum, ið ikki hevur vegasamband.
Mykinesfólk hava harafturímóti ikki so lætta atgongd til kommunalu tænasturnar, og tað sama kann sigast um íbúgvarnar í Gásadali. Sí eisini kapittul 9.
Við árslok 1997 var fólkatalið í hesi kommunueind 2.617 íbúgvar.
Tað eru ymisk samstørv millum kommunurnar í økinum. Fyrst er at nevna Felagskommununa í Vágum. Vágar eru eisini: eitt læknadømi, ein sýsla, eitt valdømi til løgtingsval, eitt skattaøki, og upprunaliga vóru tær eisini ein kommuna. Harumframt samstarva kommunurnar um ellisheimið í Vágunum og eisini um musikkskúlan (tó ikki Mykines, sum ikki hevur børn). Allar kommunurnar uttan Sandavágs kommuna hava eisini sama tannlækna at taka sær av barnatannrøktini. Umframt hetta samstarva Sandavága og Miðvágs kommunur eisini um skúla, havn, brunamál og bókasavn.
Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Vágar (1000 kr.)**

| | 1996 | 1997 | 1998 |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 212.065 | 227.255 | 221.733 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 40.352 | 41.541 | 40.984 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettorakstrarútreiðslur | 21.237 | 22.678 | 22.600 |
| Nettorentur | 6.259 | 5.975 | 5.435 |
| Íløgur | 1.999 | 3.335 | 4.195 |
| Íløgustuðul | | | 36 |
| Úrslit | 10.857 | 9.553 | 8.790 |
| | | | |
| Avdráttir | 2.771 | 4.721 | 7.319 |
| Miðalskattaprosent | 19 | 18,3 | 18,5 |
| Nettoskuld | 80.266 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 2.595 | 2.617 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl.

Víst verður annars á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

### 4.2.6 Sandoy

Sandoyar kommuna fevnir um: Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur.




Sandoyggin er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Umframt Sandoynna er Skúvoy eisini partur av hesi kommunueind, tí tað mesta av samskiftinum úr Skúvoynni er um Sandoynna, og tí at Skúvoy landafrøðiliga og natúrliga hoyrir til Sandoynna.
Við árslok 1997 var fólkatalið í kommunueindini 1.439 íbúgvar. Hetta er minni enn skilabesta markið, sí 4.1.3. Kommununevndin heldur tó, at tað er best at liva við einum undantaki í hesum føri, tí tað mundi verið ónatúrligt og óhóskandi at lagt hesa eindina saman við t.d. Suðuroynni, Vágum ella Streymoy. Hetta átti ikki at havt tær stóru avleiðingarnar við sær. Kommunueindin verður lutvíst tyngri at reka. Hugsast kann tó, at hendan kommunueindin, í størri mun enn hinar stóru keypir sær tænastu frá øðrum, heldur enn sjálv at uppbyggja allan neyðugan serkunnleika. Kommunueindin skuldi tí ikki verið nøkur forðing fyri at lagt uppgávur út til kommunurnar. Hædd eigur tó at verða tikið fyri hesari kommunueindini í kommunuskipanini.
Samferðsluskipanin í Sandoynni er góð, og tí er lætt hjá íbúgvunum at ferðast í oynni bæði í sambandi við arbeiði, og tá ið tørvur er á privatum og almennum tænastum.

Skúvoyingar hava harafturímóti ikki so lætta atgongd til kommunalu tænasturnar. Sí eisini kapittul 9.
Sandoyggin saman við Skúvoy eru ein sýsla, eitt valdømi til løgtingsval, eitt skattaøki, eitt læknadømi, og henda sýslan var ein av teimum upprunaligu kommununum. Harumframt samstarva kommunurnar í Sandoynni (tó ikki Skúvoy) um: skúlan, barnatannlækna, frítíðarundirvísing, musikkskúla og ellisheim. Tað er vanligt, at Skúvoyar kommuna keypir sær neyðugar tænastur ymsastaðni.
Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Sandoy (1000 kr.)**

| | **1996** | **1997** | **1998** |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 90.741 | 95.745 | 105.272 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 18.596 | 17.439 | 20.570 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 12.231 | 12.707 | 12.451 |
| Nettorentur | 6.501 | 6.261 | 6.554 |
| Íløgur | 68 | 792 | 1.325 |
| Íløgustuðul | | | |
| Úrslit | -204 | -2.321 | 240 |
| | | | |
| Avdráttir | 1.448 | 2.229 | 2.423 |
| Miðalskattaprosent | 20,5 | 18,2 | 19,5 |
| Nettoskuld | 80.259 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 1.473 | 1.439 | |
| | | | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl.

Víst verður annars á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

## 4.2.7 Suðuroy

Suðuroyar kommuna fevnir um: Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur.




Øll Suðuroyggin er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Við árslok 1997 var fólkatalið í Suðuroy 5.049 íbúgvar.
Suðuroyggin hevur ymisk samstørv: hon er ein sýsla (hevur fyrr verið tvær), eitt valdømi til løgtingsval, eitt skattaøki, og hon var ein av teimum upprunaligu kommununum. Harumframt verður samstarvað um: ellisheim, musikkskúla og ferðavinnu.
Tað eru tó eisini samstørv, ið ikki fevna um alla oynna. Suðuroyar norðara helvt er eitt læknadømi. Harafturat samstarva hesar kommunur um barnatannlæknan, og Hvalbiar og Tvøroyrar kommunur samstarva um brunamál. Hvalbiar og Fámjins kommunur keypa sær eisini framhaldsskúlapláss á Tvøroyri.
Suðuroyar sunnara helvt er eitt læknadømi. Harafturat samstarva hesar kommunur um barnatannlæknan, og Sumbiar, Vágs og Porkeris kommunur samstarva um brunamál. Hovs, Porkeris og Sumbiar kommunur keypa sær framhaldsskúlapláss í Vági.
Talvan niðanfyri sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Suðuroy (1000 kr.)**

| | **1996** | **1997** | **1998** |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 343.541 | 370.859 | 389.775 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 72.124 | 72.833 | 74.727 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 43.666 | 41.307 | 42.453 |
| Nettorentur | 21.908 | 20.391 | 16.958 |
| Íløgur | 1.958 | 2.356 | 3.282 |
| Íløgustuðul | 555 | 91 | 100 |
| Úrslit | 5.147 | 8.870 | 12.134 |
| | | | |
| Avdráttir | 10.793 | 10.236 | 13.951 |
| Miðalskattaprosent | 21 | 19,6 | 19,2 |
| Nettoskuld | 275.737 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 5.044 | 5.049 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl.

Annars verður víst á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

# 4.3 Møguligar kommunueindir, sum lúka treytirnar

Frammanfyri í 4.2 hevur Kommununevndin víst á tær kommunueindir, hon heldur vera best hóskandi. Her skal tó verða víst á, hvørjar kommunueindir eru møguligar við støði í teimum eyðkennum, sum nevnd eru í 4.1.

Hesar kommunueindir eru møguligar:

- Norðoyggjar
- Eystureysturoy
- Vestureysturoy
- Sundalagið
- Streymoy
- Vágar
- Sandoy
- Norðsuðuroy
- Suðursuðuroy

Kommununevndin mælir tí til, at hetta verða tær minstu kommunueindirnar, sum til ber at skipa við sjálvbodnari samanlegging.
Her verða so Eystureysturoyar, Vestureysturoyar, Norðsuðuroyar og Suðursuðuroyar kommunur lýstar; men hinar kommunueindirnar vera tær somu (smb. kapittul 4.2).

## 4.3.1 Eystureysturoy

Eystureysturoyar kommuna fevnir um: Fuglafjarðar, Leirvíkar og Gøtu kommunur.




Henda kommunueindin er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Til tess at fáa eina samanhangandi samferðslueind er tó neyðugt at skilja Hellurnar frá Fuglafjarðar kommunu og tann partin av Gøtu kommunu, sum er við Skálafjørðin, frá Gøtu kommunu. Hellurnar og tann parturin av Gøtu kommunu, sum er við Skálafjørðin, eru natúrligir partar av Vestureysturoyar kommunu. Við árslok 1997 var fólkatalið 3.177 íbúgvar.

Av samstarvi millum hesar kommunur eru: brunamál og ítróttarhøllin á Kambsdali. Harumframt keypa Leirvíkar og Gøtu kommunur sær framhaldsskúlapláss í Fuglafirði. Fuglafjarðar læknadømi fevnir eisini um hesar kommunur, tó at Oyndarfjarðar kommuna eisini er við.
Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Eystureysturoy (1000 kr.)**

| | **1996** | **1997** | **1998** |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 254.467 | 262.786 | 287.215 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 47.344 | 49.035 | 49.502 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 21.651 | 24.322 | 25.957 |
| Nettorentur | 9.520 | 9.066 | 8.673 |
| Íløgur | 11.513 | 7.174 | 12.158 |
| Íløgustuðul | 1.884 | 150 | 3.430 |
| Úrslit | 6.544 | 8.623 | 6.144 |
| | | | |
| Avdráttir | 2.639 | 6.613 | 8.080 |
| Miðalskattaprosent | 18,6 | 18,7 | 17,2 |
| Nettoskuld | 118.354 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 3.095 | 3.177 | 902 |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl. Íroknað Elduvíkar kommunu.
Víst verður annars á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

## 4.3.2 Vestureysturoy

Vestureysturoyar kommuna fevnir um: Nes, Runavíkar, Skála, Sjóvar og Oyndarfjarðar kommunur og møguliga eisini Elduvíkar og Funnings kommunur.




Henda kommunueindin er eisini ein natúrlig, landafrøðilig eind. Men í hesum føri er eisini neyðugt at broyta kommunumarkið, so kommunan verður ein samanhangandi samferðslueind. Tann parturin

av Gøtu kommunu, sum er við Skálafjørðin, og Hellurnar mugu eisini verða partar av kommunueindini.
Umframt: Nes, Runavíkar, Skála, Sjóvar og Oyndarfjarðar kommunur, kunnu Elduvíkar og Funnings kommunur eisini verða ein partur av Vestureysturoy. Tað veldst um, hvat íbúgvarnir í hesum báðum kommununum ynskja. Sí. 4.2.2
Við árslok 1997 var fólkatalið 5.198. Um Elduvíkar kommuna var við, er tað 5.293, og 5.391 um bæði Elduvíkar og Funnings kommunur eru við.
Um samstørvini í hesi kommunueindini er annars at siga, at samstarvað hevur verið ymsar vegir, og bendir tað ikki á eina so eintýdda samanlegging. Her eru 2 læknadømi: Nes sóknar læknadømi, sum er Nes og Runavíkar kommunur, og Skála læknadømi, sum er Elduvíkar, Skála og Sjóvar kommunur. Funnings kommuna er í Eiðis læknadømi, og Oyndarfjarðar kommuna er í Fuglafjarðar læknadømi.
Kommunurnar kring Skálafjørðin (t.e. eisini Gøtu kommuna) samstarva um Kongshavnar havn og um brunamál (tó ikki Gøtu kommuna). Sjóvar, Skála og Elduvíkar kommunur hava samstarv um barnatannlækna, og Skála, Oyndarfjarðar kommunur og Hellurnar keypa sær framhaldsskúlapláss á Strondum. Funnings- og Elduvíkar kommunur keypa sær framhaldsskúlapláss í Felagsskúlanum á Oyrabakka, og tær samstarva eisini um havnina. Nes og Runavíkar kommunur samstarva um musikkskúla og serstaka frítíðarundirvísing.
Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Vestureysturoy (1000 kr.)**

| | 1996 | 1997 | 1998 |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 368.339 | 397.654 | 446.334 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 73.382 | 71.762 | 75.129 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 33.816 | 37.601 | 39.521 |
| Nettorentur | 14.678 | 14.161 | 13.149 |
| Íløgur | 10.491 | 9.222 | 10.503 |
| Íløgustuðul | | | |
| Úrslit | 14.397 | 10.778 | 11.956 |
| | | | |
| Avdráttir | 7.560 | 8.730 | 13.144 |
| Miðalskattaprosent | 19,9 | 18 | 16,8 |
| Nettoskuld | 149.699 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 5.250 | 5.293 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl. Íroknað Elduvíkar kommuna.
Annars verður víst á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

## 4.3.3 Norðsuðuroy

Norðsuðuroyar kommuna fevnir um: Hvalbiar, Tvøroyrar og Fámjins kommunur.




Øll Suðuroyggin er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Men Norðsuðuroy er eisini ein natúrlig, landafrøðilig eind, sum eisini í aðramáta lýkur tey eyðkenni, ið sett eru. Tó er neyðugt at flyta kommunumarkið millum kommunueindirnar soleiðis, at Hovsegg verður markið. Hetta er natúrligari landafrøðiliga, um oyggin skal verða 2 kommunur. Við árslok 1997 var fólkatalið í Suðuroyar norðara helvt 2.709 íbúgvar.
Suðuroyar norðara helvt er eitt læknadømi. Harafturat samstarva hesar kommunur um barnatannlæknan, og Hvalbiar og Tvøroyrar kommunur samstarva um brunamál. Hvalbiar og Fámjins kommunur keypa sær eisini framhaldsskúlapláss á Tvøroyri.
Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Norðsuðuroy (1000 kr.)**

| | **1996** | **1997** | **1998** |
|---|---:|---:|---:|
| Inntøkugrundarlag | 200.273 | 211.215 | 217.363 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 39.681 | 38.881 | 40.988 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 25.217 | 23.329 | 23.756 |
| Nettorentur | 14.215 | 12.932 | 10.770 |
| Íløgur | 843 | 1.013 | 1.152 |
| Íløgustuðul | 150 | 91 | |
| | -444 | 1.698 | 5.310 |
| | | | |
| Avdráttir | 5.946 | 5.057 | 7.744 |
| Miðalskattaprosent | 19,8 | 18,4 | 18,9 |
| Nettoskuld | 167.454 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 2.714 | 2.709 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl.

Annars verður víst á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

### 4.3.4 Suðursuðuroy

Suðursuðuroyar kommuna fevnir um: Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur.




Øll Suðuroyggin er ein natúrlig, landafrøðilig eind. Men eins og Norðsuðuroy er Suðursuðuroy eisini ein natúrlig, landafrøðilig eind, sum eisini í aðramáta lýkur tey eyðkenni, ið sett eru. Men neyðugt verður, sum áður nevnt, at flyta kommunumarkið millum kommunueindirnar soleiðis, at Hovsegg verður markið. Hetta er natúrligari landafrøðiliga. Við árslok 1997 var fólkatalið í Suðuroyar sunnaru helvt 2.340 íbúgvar.

Suðuroyar sunnara helvt er eitt læknadømi. Harafturat samstarva hesar kommunur um barnatannlæknan, og Sumbiar, Vágs og Porkeris kommunur samstarva um brunamál. Hovs, Porkeris og Sumbiar kommunur keypa sær eisini framhaldsskúlapláss í Vági.

Henda talvan sýnir búskapargrundarlagið undir nýggju kommunueindini.

**Búskapartalva fyri Suðursuðuroy (1000 kr.)**

| | 1996 | 1997 | 1998 |
|---|---|---|---|
| Inntøkugrundarlag | 143.268 | 159.644 | 172.412 |
| | | | |
| Skattainntøkur | 32.443 | 33.952 | 33.739 |
| Nettorakstrarútreiðslur | 18.449 | 17.978 | 18.697 |
| Nettorentur | 7.693 | 7.459 | 6.188 |
| Íløgur | 1.115 | 1.343 | 2.130 |
| Íløgustuðul | 405 | | 100 |
| Úrslit | 5.591 | 7.172 | 6.824 |
| | | | |
| Avdráttir | 4.847 | 5.179 | 6.207 |
| Miðalskattaprosent | | | |
| Nettoskuld | 108.283 | | |
| Fólkatal ultimo árið | 2.330 | 2.340 | |

Viðm.: 1996 roknskapartøl, 1997 og 1998 fíggjarætlanartøl.

Víst verður annars á kommunulýsingar í Tátti I viðvíkjandi fjølbroyttari kunning um tær einstøku kommunurnar í kommunueindini.

# 5. Uppgávubýtið

## 5.1 Kommunala sjálvstýrið

§ 82 í grundlógini er soljóðandi: Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov". Sama fyriskipan er komin við í nýggju stýrisskipanarlógina, har § 56 hevur hetta orðaljóðið: Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldarbindast við láni, borgan o.ø.m.". Tað er við øðrum orðum løgtingið, sum ger av, hvørjar uppgávur kommunurnar skulu hava, og hvussu umfatandi kommunala sjálvstýrið skal vera.
Kjarnin í tí kommunala sjálvstýrinum er, at kommunurnar sjálvar kunnu raðfesta tær kommunalu uppgávurnar og skipa fyri, hvussu tær skulu verða loystar[3], umframt at tær sjálvar gera av, hvørjar uppgávur, umframt tær lógarbundnu, tær ynskja at røkja.
Á henda hátt fæst ein miðfirringarligur fyrimunur (desentraliseringsvinningur). Kommunan er betur før fyri enn landið at nøkta ynski/tørv borgarans á staðnum. Við hesum fæst eitt rættari vav og ein betri samanseting av teimum kommunalu tænastunum. Treytin fyri at fáa miðfirringarfyrimunin er tó tann, at kommunurnar fíggja seg sjálvar. Hetta er soleiðis at skilja, at tey, ið hava gagn av eini tænastu, skulu eisini fíggja hana, ella at uppgávu- og fíggjarliga ábyrgdarbýtið skulu fylgjast. Við hesum framferðarhátti dugir borgarin betur at fata kostnaðin av tí kommunala virkseminum, og hann vil tí eisini seta harðari treytir um, hvussu skattakrónurnar skulu verða nýttar. Tískil má kommunan eisini meta bæði um kostnað og tænastugagn og útvega tær tænastur, sum gagna borgarunum best. Ein onnur treyt fyri at fáa miðfirringarfyrimunin er tann, at kommunan hevur búskaparligan og umsitingarligan førleika at stýra, so at sum mest fæst burtur úr tilfeinginum. Miðfirringarfyrimunurin ber við øðrum orðum við sær
meira virkisføri (effektivitet), serstakliga tí at vavið og samansetingin av teimum kommunalu tænastunum verður skilabetri. Tað er hetta, ið rópt verður tillutanarvirkni (allokeringseffektivitetur). Virkisføri fevnir eisini um kostnaðarvirkni, t.v.s. at arbeiðið verður gjørt so bíliga, sum til ber. Í hesum føri er tað tó trupult at siga, hvørt ein uppgáva verður loyst kostnaðarvirknari í kommununum ella hjá landinum. Hetta er tó treytað av, hvat uppgávuslag talan er um.
Og kommunala sjálvstýrið er eisini í samljóði við demokratiið ella fólkastýrið. Í fólkastýrinum verður miðað eftir, at eindin í tí politisku viðgerðini skal vera so lítil, sum til ber. Við hesum verður fjarstøðan millum veljaran og tey fólkavaldu lítil, og borgarin fær á henda hátt mestu ávirkanina. Við fleiri smáum eindum eru eisini fleiri luttakarar í tí politiska virkseminum. Fjøltáttað luttøka í tí staðbundna politiska virkseminum ber við sær, at íbúgvarnir fáa eitt staðbundið tilknýti og eina felags kenslu. Hesin parturin eigur tó at verða lisin í mun til tað, ið frammanfyri er sagt og tá serstakliga, at umráðandi er, at kommunurnar hava ta tørvandi orkuna at stýra sínum kommunalu viðurskiftum, og at tað í roynd og veru eru uppgávur at raðfesta.

---

[3] Tað skal viðmerkjast, at kommunan kann eisini sjálv gera av, um hon sjálv ynskir at loysa eina uppgávu, ella hon velur at keypa sær tænastuna aðrastaðni.

## 5.2 Kommunuuppgáva mótvegis landsuppgávu

Sum skrivað er í fylgiskjali B í Verkætlanini, so loysir tað almenna tríggjar høvuðsuppgávur:

- Býtingaruppgávuna, t.e.: tað almenna býtir um við skattum, inntøkuflytingum o.ø. nýtslumøguleikarnar hjá borgarunum.
- Støðufestisuppgávuna (stabiliseringsuppgávan), t.e.: tað almenna roynir við sínum politikki at ávirka m.a. arbeiðsloysið og úrslitið á fíggjarlógini og gjaldsjavnanum.
- Tillutingaruppgávuna, t.e.: at tilfeingið verður flutt, har framleiðslan av almennu tænastunum er virknast.

Tað er serstakliga tillutingaruppgávan, ið er hóskilig at miðfirra.
Tað eru einamest tvær meginreglur, ið gera vart við seg galdandi í kjakinum um uppgávubýtið millum land og kommunur, og tær eru: nærleiki og burðardygd.
Meginreglan um nærleika sigur, at uppgávurnar eiga at vera loystar so nær borgaranum, sum til ber, fyri at fáa ein miðfirringarfyrimun. Orðingin sum til ber"er liðilig, tí hetta hugtakið verður ikki eyðlýst. Men tað, sum ber til, er treytað av teimum krøvum, ið skulu verða lokin, so at uppgávan kann verða loyst. Lúka kommunurnar krøvini um uppgávuloysnina, ja, so eigur uppgávan at verða loyst hjá kommununi, men annars hjá landinum.
Til tess at tryggja virknar uppgávuloysnir, bæði viðvíkjandi kostnaði og dygd, so eiga tær at vera á tí støði, sum hevur eina burðadygga støðd í mun til uppgávuna. Sambært formanninum í kommunulæknafelagnum eigur t.d. fólkatalið til ein kommunulækna at vera umleið 1.000[4], Avgerðin um uppgávubýtið millum land og kommunu kann annaðhvørt valdast, hvørt kommunurnar kunnu lúka krøvini at røkja viðkomandi uppgávu, ella tað valdast sjálva kommununa, har uppgávukrøvini verða lagað soleiðis, at kommunan verður ein burðardygg eind. Og tað kann ikki verða sagt eintýtt, hvat ið er tað rætta. Í tí kjakinum kunnu hesi fyrilit vera til hjálpar:

- **Nærleiki.** Skilt eigur at verða ímillum lendisskipaðan (fysiskan) og politiskan nærleika. Við lendisskipaðum nærleika verður dentur lagdur á, at tær almennu tænasturnar vera veittar so nær borgarunum, sum til ber. Við politiskum nærleika verður dentur harafturímóti lagdur á, at teir politikarar, ið hava ábyrgd av uppgávuni, eru nær hjá borgarunum. Politiski nærleikin gevur politikaranum betri kunnleika um teir trupulleikar, sum avgerðir skulu verða tiknar um. Somuleiðis verður vegurin eisini styttri millum politikara og borgara, og tað gevur borgarum betri møguleika at hava eina virkna luttøku í fólkastýrinum.
- **Fjarleiki.** Skilt eigur eisini her at verða ímillum lendisskipaðan (fysiskan) og politiskan fjarleika. Í summum føri er tað ein fyrimunur, at politikarin ikki er so nær, tí har í fjarstøðu síni hevur hann betri yvirlit yvir trupulleikan, og samstundis verður hann ikki so heftur av honum.
- **Einvorðni.** Umráðandi er, at sama tænastustøðið verður veitt allastaðni. Sum dømi í so máta kann verða nevnt, at líka nógv heimahjálp verður veitt fólki, ið hava sama tørv fyri neyðini. Hetta kundi bent á, at miðsavningin var loysnin; men tað er tó ivasamt, um tænastan hevði verið einvorðnari, sjálvt um hon verður miðsavnað.
- **Ólík.** Hetta er mótsetningurin til einvorðni. Tað verður lagdur dentur á, at økini eru ólík, og tí er tað positivt, at politiskar og umsitingarligar avgerðir vera tiknar, so sum umstøðurnar eru í tí einstaka førinum.
- **Rættartrygd.** Eitt sum er týdningarmikið fyri rættartrygdina er framskygni, t.e. at hvør einstakur borgari hevur møguleika at síggja frammanundan, hvørjar tær rætttarligu

[4] Læknar í starvi til hvønn 1.000 íbúgvar í Føroyum er 0,58 í mun til 0,71 í Danmark (1993).

avleiðingarnar verða í ávísum støðum og av ávísum avgerðum. Dømi í so máta kann vera: hvussu stóra peningaupphædd tú hevur rætt at fáa, tá ið tú verður eftirløningur (pensjónistur). Spurningurin er so, á hvørjum støði rættartrygdin verður best ansað, ella um tað yvirhøvur hevur nakran týdning á hvørjum støði, uppgávunar verða loystar.

- **Virkisføri.** Virkisføri merkir, at uppgávuloysnin skal verða mett eftir dygdini í mun til bæði tíð og kostnað. Dygdin eigur at verða mett í mun til tey mál, sett eru; men neyðugt er at gera av, hvør tann kostnaður er, ið skal verða íroknaður. Tað kann t.d. vera lætt at minka um kostnaðin á einum einstøkum arbeiðsplássi. Men um útreiðslurnar bert vera fluttar aðrastaðni (um t.d. læknar leggja sjúklingar inn, áður enn tað er neyðugt, ella at sjúkrahúsið útskrivar sjúklingar, áðrenn teir eru frískir), so er spurningurin, um nakað er vunnið. Tí er týdningarmikið at gera av, hvønn leiklut fyrilitið fyri virkisførið (burðardygdina) skal hava fyri uppgávubýtið.
- **Ábyrgd.** At ábyrgdin fylgir við uppgávuni, ella at uppgávu- og fíggjarliga ábyrgdarbýtið eigur at fylgjast.
- **Heild.** At tað á hvørjum politiskum stigi hjá okkum landi og kommunum - er møguligt at raðfesta uppgávurnar. Hetta er partur av fólkastýrinum.

Niðanfyri verður verandi uppgávubýtið millum land og kommunur viðgjørt, og Kommununevndin kemur við sínum tilmælum um, hvørt uppgávan eigur at vera ein landsuppgáva ella ein kommununal uppgáva. Og Kommununevndin mælir til, at greiður skilnaður verður millum lands- og kommunuuppgávur, so at málið um eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur verður rokkið. Við hesum er eisini sagt, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið skulu fylgjast, og snýr tað seg tí um eina kommunala uppgávu, so skal fíggingin eisini vera kommunal.

# 5.3 Uppgávubýtið í verandi lóggávu

Parturin er skipaður á sama hátt sum Táttur I, Partur I Uppgávu- og ábyrgdarbýtið.

## 5.3.1 Løgtingslóg um føroysku kommunurnar (kommunulógin)

Sí kapitul 12

## 5.3.2 Løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur (kommunuvallógin)

Kommununevndin mælir til at kommunuvallógin og løgtingslógin um val til Føroya løgting verða samanskrivaðar í eina lóg um val til løgting og kommunur. Hetta skal tryggja at ongin óneyðugur munur verður á hvussu hesi val verða fyriskipað. Orsakað av hesum hevur Kommununevndin valt ikki at gera eitt uppskot um eina nýggja kommunuvallóg, men heldur vísa á neyðugar broytingar í verandi kommunuvallóg.
Kommununevndin mælir til at valdagurin til kommunustýrið verður ásettur til ein fastan dag - annan týsdag í november. Við hesum verður tað óneyðugt at áseta dagin fyri valið hvørja ferð kommunustýrisval er og við at seta valdagin til annan týsdag í november er skotbráðið at viðgerða og avgreiða møguligar kærur rímiligt til at hesar kunnu avgreiðast í góðari tíð, áðrenn nývalda kommunustýrið skal taka við.
Kommununevndin mælir eisini til at tað verður álagt landsstýrinum at lýsa valdagin og hvar og nær vallistarnir skulu latast inn. Í verandi lóg er hetta álagt valnevndini. Kommununevndin metir at

henda álegging eigur at liggja hjá landsstýrinum, soleiðis at treytirnar verða tær somu í øllum kommununum. Eisini kann hugsast at landsstýrið við hesum fær møguleika at staðbinda, hvar vallistarnir skulu latast inn, samanber við § 6 2. petti, soleiðis at lýsast kann at valevnislistarnir skulu verða valnevndarformanninum, ella einum av honum tilnevndum persóni í hendi á kommunuskrivstovuni í seinasta lagið.
Tá tað er ein borgaraskilda at lata seg velja til kommunustýrið, mælir kommununevndin til, at, umframt løgmaður, limir av landsstýrinum og ríkisumboðsmaðurin, eisin fólk í leiðandi kommunustarvi eiga at kunnu bera seg undan at taka við vali. T.d. verður starvið sum kommunuskrivari nærum ógjørligt at røkja samstundis sum starvið sum kommunustýrislimur. Ásetingarnar í uppskotinum til nýggja kommunustýrislóg gera at fólk í leiðandi kommunustarvi kenna seg noyddan at fara í farloyvi tað valskeiðið tey skulu sita í kommunustýrinum, hóast at tað bert er borgarstjórastarvið, ið kann roknast sum fulltíðar starv.
Og neyðugt verður eisini at broyta vallógina soleiðis at valskeiði sum byrjar 1. januar 2001 verður 2 ár og ikki 4. Henda tillagin er neyðug fyri at fáa vallógina at sampakka við tíðarætlanina í tilmælinum, soleiðis at komandi valskeið bert verður tvey ár
Harumframt við atliti til galdandi kommunuvallóg eigur at verða viðgjørt og tikið støðu til um:

- vælrætturin til kommunuval eigur at víðkast til at fevna um ríkisborgarar úr londum uttanfyri norðurlond, um hesir hava havt fastan búðstað í eitt ávíst áramál í Føroyum
- freistirnar fyri ger av vallista, og at áseta nærri hvussu fólk, ið ikki longur lúka treytirnar fyri valrætti í eini kommunu, verða tikin av aftur vallistanum
- valevnislistar skulu latast valnevndarformanninum á staðbundnum stað t.d. kommunuskrivstovuni
- tíðirnar valstaðið skal/kann hava opið
- álagt skal verða at brúka valkort til øll val
- tað er neyðugt at ein kommunustýrislimur skal verða limur í valstýrinum
- krøvini til atkvøðurúmini skulu verða so ítøkilig sum tey eru í lógini, t.d. ásetingin um at brúka svartan blýant
- atkvøðu kassarnir skulu verða læstir ella seglaðir
- hvussu valbók skal førast, tá fleiri valstøð eru og hvussu henda skal samskipast í eina valbók hjá valnevndini
- nærri ásetingar um óhjálpnar veljarar, eisini sjónveikar og blindar
- dagføring av uppteljing av atkvøðum, har fleiri enn eitt atkvøðuøki eru
- mannagongd fyri atkvøðu við brævi
- ásetingina um at bert landsstýrið kann útvega gildugar
- seðlar, fylgibrøv og brævbjálvar og hvat skal verða prentað á seðlar til brævatkvøður
- fólk sum greiða brævatkvøðu skulu hava møguleika at møta á valstaðnum og greiða atkvøðu av nýggjum og
- hvussu brævatkvøðurnar verða handfarnar/viðgjørdar valdagin og nær og hvussu tær verða blandaðar við hinar atkvøðuseðlanar og

Umframt broytingar í kommunuvallógini er eisini neyðugt at gera broytingar í mun til lógina um val til Føroya løgting. Tað er sera umráðandi at valdømini í sambandi við løgtingsval í minsta lagi verða tillagað teimum nýggju kommunueindinum. Tað tykist ólogisk at t.d. íbúgvarnir á Eiði og íbúgvarnir í Haldórsvík, eftir eina kommunusamanlegging í Sundalagnum, ikki skulu velja millum somu valevnir í sambandi við løgtingsval. Valdømini í sambandi við løgtingsval mugu tí í minsta lagi verða tey somu sum kommunueindirnar.

Við atlitið at hesum mælir kommununevndin til, at nevnd verður sett sum skjótast at gera uppskot til eina felags vallóg fyri løgting og kommunur. Hendan eigur at verða sett í gildið í seinasta lagið 1. januar 2003.

### 5.3.3 Stýriskipanarviðurskifti

Víst verður til 5.3.2

### 5.3.4 Fólkayvirlit

Kommununevndin mælir til, at løgtingslóg nr. 86 um fólkayvirlit frá 1982 verður dagførd. Hugsast kann, at fólkayvirlitið verður ein samanhangandi dátugrunnur, har kommunurnar hava fastalinjusamband við tann partin og tær upplýsingar, sum eru kommununi viðkomandi. Einstakar kommunur hava longu henda møguleikan. Hesar upplýsingar eiga kommunurnar eisini at kunna brúka til ymisk onnur endamál sum t.d. grindalista. Tær eiga eisini at hava møguleika at knýta sínar egnu skipanir í tann partin av skipanini, sum tær hava atgongd til. Tað skal viðmerkjast, at nú ger Landsfólkayvirlitið meginpartin av arbeiðinum viðvíkjandi fólkayvirlitinum.

### 5.3.5 Mentan

At veita borgarunum í kommununi bókasavnstænastu er ein kommunal uppgáva. Tað er lættari hjá kommunustýrinum enn hjá landsstýrinum at laga tænastuna til borgarans ynski.
Fíggingin er harafturímóti bæði kommunal og um landskassan. Hetta eigur at verða broytt, so at ábyrgdin fylgir uppgávuni, og fíggingin verður kommunal.
Kommununevndin heldur, at bókasavnslógin er í so framasøkin, og at hon eigur at verða lagað til tey veruligu viðurskiftuni. Møguliga átti ætlanin um meginbókasøvn at verið slept, og heldur skuldi hvør kommunueind havt eina fólkabókatænastu, sum eitt virkið kommunustýri skuldi lagt soleiðis til rættis, sum best hóskaði kommunueindini. Og Kommununevndin mælir til, at fólkabókasavnið og skúlabókasavnið/søvnini verða samskipað fyri at fáa ein skilagóðan rakstur. Kommununevndin mælir tí til, at fólkabókatænastan og skúlabókatænastan vera verandi kommunal. Tað er tó neyðugt at broyta verandi lóg.
Greiða eigur at fáast á, um bygdasøvn við mentanarsøguligum týdningi eru ein kommunal uppgáva, ella tey eru ein landsuppgáva. Lógin á hesum øki (løgtingslóg nr. 17 frá 1972) eigur at verða dagførd.

### 5.3.6 Sløkkilið, ravmagn

Alment eiga tilbúgving, bjarging og sløkkiliðsarbeiði at verða samskipað, og at ein tilbúgvingarætlan eigur at verða gjørd fyri alt landið. Í hesum sambandi skal støða verða tikin til, hvørjar uppgávur skulu verða staðbundnar hjá kommununum.
Sløkkiliðsarbeiðið eigur at vera staðbundið í kommunueindini. Við tað at kommunalu eindirnar verða størri, ber betur til hjá kommununum at fylgja ásetingunum í verandi løgtingslóg nr. 86 um eldsbruna o.a. frá 1986. Somuleiðis verður eisini tann tekniski førleikin tøkur í

kommunufyrisitingini, ið skal veita trygd fyri, at brunatrygdin í sambandi við byggimál altíð er í lagi.
SEV er eitt felagskommunalt samstarv. Sambært kapittul 5.4 eiga felagskommunal samstørv við fyriskipanarligum bygnaði bert at vera eitt ískoyti til ein nýggjan kommunalan bygnað. El-veitingarøkið er fyri alt landið. Tí er tað ein landsuppgáva (og ikki ein kommunu uppgáva) at veita hesa tænastuna.

### 5.3.7 Leiguíbúðir, byggi- og býarskipanir

Ein MB  midlertidig bestemmelse  um leiguviðurskifti er í gildi fyri Tórshavnar kommunu. Kommununevndin mælir til, at hetta økið verður dagført og sett í gildi fyri allar kommunur.
Í løtuni er bert lógarkravt, at Tórshavnar kommuna hevur eina byggi- og býarskipan, hóast flestu kommunur eisini hava byggi- og býarskipanir í dag. Kommununevndin mælir til, at allar kommunur skulu hava eina býarskipan og byggisamtykt, sum ein natúrligan part av kommunuráðleggingini. Býarskipanin eigur at hava eina heildarætlan fyri kommununa og eisini møguleikar fyri partsætlanum, sum fevna um eitt størri ella minni øki í kommununi. Hesar partsætlanir skulu sjálvandi vera í samljóði við býarskipanina. Tað skal viðmerkjast, at kommunuráðleggingarnar eiga sjálvandi eisini at vera í samljóði við landsráðleggingina.

### 5.3.8 Dýr, matvørur

Kommunan hevur eftirlitið við matvørulógini á staðnum. Flestu kommunur eru so smáar, at tær eru ikki mentar at loysa hesa uppgávu. Eisini kann sigast, at myndugleikin (kommunustýrið) í smáum eindum er í námindum av teimum, sum eru undir eftirliti, t.v.s. handlar, fjós o.t. Lógarheimild er til, at kommunurnar biðja Heilsufrøðiligu Starvsstovuna fremja eftirlitið fyri rokning; men í flestu førum er eingin tílík avtala gjørd. Landsstýrið hevur tó heimilað Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at røkja hesar uppgávur kommunanna vegna, um tær ikki gera tað sjálvar, og verður tað tá gjørt fyri kommunanna rokning.
Við størri kommunalum eindum verður orkan hjá kommunustýrinum størri, og eisini verður fjarleikin millum eftirlitsmyndugleikan (kommununa) og tann, ið er undir eftirliti, størri. Tískil verður kommunan eisini før fyri at fremja eftirlitið við matvørulógini á staðnum, so sum lógin hevur álagt teimum.

### 5.3.9 Ognartøka, matrikulering o.a.

Tað eru tvær høvuðslógir um ognartøku: lóg nr. 69 frá 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne" og lóg nr. 13 frá 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir. Mannagongdin í hesum báðum lógum eru ikki eins. Sambært lógini frá 1881 tilnevnir dómarin tveir mans; men sambært lógini frá 1954 er tað ein føst nevnd, sum metir.
Kommununevndin mælir til, at allar kommunur skulu hava eina býarskipan og byggisamtykt, og tí verður ikki neyðugt við lógini frá 1881. Tískil eigur Lov nr. 69 frá 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne" at verða sett úr gildi, og ístaðin eigur lóg um, hvussu farast skal fram í sambandi við ognartøku at verða sett í gildi.

Uppgávurnar hjá hegnsýnisnevndini sambært lóg nr. 171 frá 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred eiga at vera latnar kommunuumsitingini.

### 5.3.10 Undirvísingarmál

Undirvísingarmál eru ein kommunal uppgáva, og tí eigur fólkaskúlin at verða kommunalur burturav. Fólkaskúlin er nú í stóran mun kommunalur, so aðalmunurin verður, at kommunan eisini skal seta lærararnar í starv. Fyrimunurin verður, at hvør einstøk kommuna kann sjálv gera eina heildarætlan fyri sítt skúlaøki. Vansin verður tann, at kommunurnar kunnu raðfesta skúlar so ymiskt, og at tað tískil kann verða ov stórur dygdarmunur teirra millum. Tessvegna er umráðandi, at lóggávan veitur trygd fyri einum ávísum dygdarstøði, sum í minsta lagi skal vera í øllum skúlum, og at orka til neyðugt eftirlit hesum viðvíkjandi verður tøk.
At fólkaskúlin verður ein kommunal uppgáva, ber eisini við sær, at kommunan skal taka sær av at undirvísa sjúkum og avlamnum heima og børnum, sum liggja á sjúkrahúsi. Serundirvísingin verður eisini ein kommunal uppgáva. Kommununevndin heldur harafturímóti, at undirvísing vegna serligan tørv krevur so stóra servitan og samskipan, at tað er ein landsupggáva, hóast sjálv undirvísingin, í summum føri, kann vera í skúlunum í kommununum.
Í skúlalóggávuni er ásett, at í hvørjum skúla, sum í minsta lagi hevur 3 samanhangandi floksstig, skal vera skipað eitt skúlabókasavn. Kommununevndin mælir til, at skúlabókasavnið/-søvnini í kommununi verða samskipað við fólkabókasavnið í kommununi.
Veitingarøkið fyri skúlaútbúgving aftan á fólkaskúlan, t.d. studentaskúla, hægri handilsskúla, læraraskúla, lærlingaútbúgvingar, tekniska skúla o.s.fr., er størri enn kommunueindin. Veitingarøkið er alt landið, og tí eiga hesar uppgávur at vera landsuppgávur. Tað eru tær eisini í nógvum førum; men kommunurnar eru tó við til at fíggja lærlingalæruna. Hetta er ikki rætt, tá tað snýr seg um eina landsuppgávu. Landið eigur einsamalt at fíggja hesa uppgávu.
At skipa fyri frítíðarundirvísing, serstakari frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi er sjálvsagt ein kommunal uppgáva. Kommunustýrið hevur betri kunnleika um tørvin á hesum enn landið. Men við tað at hetta er ein kommunal uppgávu, so eigur kommunan eisini at hava fíggjarligu ábyrgdina.
Viðvíkjandi musikkskúlanum er neyðugt, at tað politiskt verður gjørt greitt, hvat endamálið er við einum tílíkum skúla. Skulu skúlabørnini sjálv sleppa at ynskja sær, hvat ljóðføri tey skulu spæla á, ella skal musikkskúlin veita trygd fyri, at tey skulu leika á tílíkum ljóðførum, at spælikunnleikin verður fjøltáttaður. Í fyrsta føri eigur uppgávan at vera kommunal, men í øðrum føri ein landsuppgáva.

### 5.3.11 Umhvørvi, vatn v.m.

Landsstýrið hevur yvirumsjónina við, at umhvørvisverndarlógin verður hildin; men tað hevur í stóran mun avhendað hesa eftirlits- og umsitingaruppgávu til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.
Alment er galdandi bæði fyri hetta lóggávuøkið eins og onnur, at landsstýrið (her Heilsufrøðiliga Starvsstovan) eigur ikki at hava heimild at gera hesa kommunalu uppgávu fyri kommununnar rokning, um so er, at kommunan røkir ikki uppgávuna. Um kommunan misrøkir sína uppgávu, eiga bøtur at verða latnar teimum kommunustýrislimum, ið hava ábyrgd av uppgávuni, so at kommunan sjálv verður noydd at røkja sínar kommunalu uppgávur.
Umhvørvisøkið er í stóran mun ein kommunal uppgáva, og ansað eigur at verða eftir á staðnum, at umhvørvið verður virt. Kunngerðin um umhvørvisreglur, sum hevur sína heimild í umhvørvisverndarlógini, áleggur eisini í stóran mun kommununi at hava eftirlit við umhvørvinum.

Men ofta eru kommunurnar so smáar, at tær megna ikki altíð hesa uppgávuna. At kommunueindirnar verða størri, skuldi givið teimum betri møguleika at røkt hesa uppgávu. Sambært umhvørvisreglunum er innsavnan av burturkasti eisini kommunal uppgáva. Spurningurin er tó, um sjálv brenningin av burturkasti ella burturbeiningin av burturkasti er ein kommunal uppgáva. Økið fevnir um alt landið, og hetta kundi tí verið ein landsuppgáva. Ein møguleiki er tí at leggja hetta øki til landið. Hetta kann verða gjørt á tann hátt, at kommunurnar selja IRF og KB til landið, ella at tær loysa brennistøðirnar frá kommununum. Søluinntøkan kundi so verið brúkt at rinda kommunuskuldina við.
Viðvíkjandi vatni er lóggávan ikki dagførd, og eigur hetta at verða gjørt. Satt at siga, so er vatnveitingin ein av teimum tænastum, sum borgarar í einum framkomnum samfelagi krevja. Hetta er ein víðtøkin uppgáva, og harumframt er hon eisini kravmikil við t.d. vatngóðskuni. Kommununevndin mælir tí til, at tað verður ein kommunal uppgáva at syrgja fyri vatnveiting. Men um so skuldi verið, at áneyðir vera at tálma vatnnýtsluni, so áttu kommunurnar í eini vatnlóggávu at kunna ásett vatngjald.

## 5.3.12 Almannaviðurskifti

Alment er forsorgin eitt øki, sum eigur at vera kommunalt. Kommunan kennir nógv betur sínar íbúgvar og tørv teirra enn ein miðsavnað umsiting. Tí er hetta økið eyðvitað ein kommunal uppgáva. Í kommunum við fleiri enn 2.000 íbúgvum er økið nú í høvuðsheitum kommunalt. Men í kommunum, ið hava færri enn 2.000 íbúgvar, - og tað eru tær flestu!, er tað Almannastovan, sum tekur avgerðir á forsorgarøkinum, av tí at kommunurnar sjálvar eru ov smáar, og tí megna tær ikki uppgávuna. Við størri kommunalum eindum skuldu bæði møguleikin og tann umsitingarliga kommunuorkan á hesum øki verið munandi størri.
Forsorgarøkið er eitt trupult øki, ið fevnir um kontanta hjálp, varandi hjálp, endurbúgving o.a. Tað er tó ikki neyðugt, at alt økið verður latið til kommunurnar í einum. Ein vandi at leggja hesa uppgávu til kommununa er, at lógin ikki verður umsitin eins í teimum ymsu kommununum. Tí er sera umráðandi at gera skipanina soleiðis, at hon veitur trygd fyri at allir borgarar fáa somu umsorgan og hjálp. At uppgávan verður miðsavnað, veitir í sjálvum sær onga trygd fyri, at allir borgarar verða viðgjørdir á sama hátt.
Nú hevur Almannastovan skrivstovur um alt landið, og førleikin at umsita lógina er tí eisini tøkur á staðnum. Verður henda uppgáva latin kommununi, eiga hesar skrivstovur at verða kommunalar, og neyðugar tillagingar eiga at verða gjørdar, so at tað umsitingarliga skrivstovuøkið verður tað sama sum kommunueindin.
Alment skal eisini verða nevnt, at við tað at almannaøkið verður kommunalt, og tann fíggjarliga ábyrgdin eisini verður latin kommununum, so ber betur til hjá kommununum at fylgja við viðurskiftunum hjá teimum borgarum, ið fáa forsorgarhjálp.
Eisini barnaforsorgin eigur at vera kommunal, tí eisini í hesum føri kennir kommunan betur borgarans viðurskifti enn landið. Kommununevndin mælir til, at barnaverndarnevndin, sum nú er ov nær borgaranum í flestu kommunum og tí ofta ikki virkar eftir ætlan, verður avtikin, og at hetta arbeiðið verður flutt til kommunuumsitingina. Umframt hesa broyting eigur lógin at verða dagførd.
Í sambandi við dagstovnar, dagrøkt og samdøgursstovnar, so er samdøgursstovnur ein landsuppgáva, tí veitingarøkið fevnir um alt landið. Fíggjarliga ábyrgdin av hesum stovnum eigur tí at verða miðsavnað. Harafturímóti eru dagrøktin og dagstovnar sjálvandi ein kommunal uppgáva, tí eisini í hesum føri er tað læ ttari hjá kommununi at raðfesta hesa uppgávu, tí kommunan kennir betur henda tænastutørvin hjá borgarunum í kommununi. Fíggjarliga ábyrgdin av hesum stovnum skal tí

eisini vera hjá kommununi. Tað er tó møguligt hjá kommununi at áseta partvíst nýtslugjald, so at foreldur rinda ein part av kostnaðinum.
Her er tó at viðmerkja, at í løtuni verður alt almannaøkið endurskoðað.
Kommununevndin heldur tað vera óneyðugt, at tey fólk, ið eiga at fáa eftirløn, verða noydd at søkja um hetta. Tað er týðiliga lýst í lógini, hvør hevur rætt at fáa eftirløn, og tí eigur útgjaldingin at fara fram av sær sjálvari. Viðvíkjandi øðrum eftirlønum fyritíðareftirlønum og -viðbótum kundu avgerðir hesum viðvíkjandi verið latnar kommununum. Kommunan hevur samanumtikið betri vitan um sínar egnu borgarar enn landsumsitingin. Um avgerðarrætturin er hjá kommununum, skulu tær eisini fíggja uppgávuna. Kommununevndin mælir tó til, at kommunurnar saman við landinum skulu taka støðu til, hvørt hetta økið ella partur av økinum skulu vera ein kommunuuppgáva ella ikki. Sambært Kongelig anordning nr. 389 af 15/11-1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" skal bý-/bygda(r)ráðið eina ferð um árið gera ein lista yvir tryggingarskyldugar sjómenn. Hetta er ikki ein kommunal uppgáva, og hon eigur tí ikki at vera hjá kommununum. Somuleiðis hevur Anordning nr. 245 af 1933 angående forsikring af fanger og forvarede mod følger af ulykkestilfælde ongan týdning fyri kommunurnar.

### 5.3.13 Verja borgaravernd

Anordning nr. 337 af 2/10-1952 hvorved lov om Civilforsvaret sættes i kraft på Færøerne" eigur at verða settur úr gildi. Ístaðin eigur ein tilbúgvingarætlan at veðra gjørd fyri alt landið. Sí eisini 5.3.6.

### 5.3.14 Ferðsla, vegir

Vegakervið í Føroyum er býtt sundur í lands- og kommunuvegir. Kommununevndin mælir til, at tað er ein landsuppgáva at syrgja fyri vegakervinum úr eini bygd í aðra - ella fyri høvuðsveganet landsins. Landsveganetið eigur so eisini at fata um tey atløguupláss, sum eru neyðug til tess at tryggja samferðsluna. Harafturímóti er tað ein kommunal uppgáva at syrgja fyri, at vegakervið innanhýsis í kommuni verður gjørt og hildið. Í hesum føri er neyðug at greina, hvat ið er landsvegur, og hvat ið so er kommunuvegur. Hetta er eisini gjørt við kunngerð um landsvegaskrá, sum regluliga verður dagførd. Ábyrgdarbýtið eigur at fylgja hesum sundurbýti.

### 5.3.15 Kirkja

Tað er gamalt, at kommunan tekur sær av kirkjugørðunum, og er hetta eisini varðveitt í uppskotinum um nýggja kirkjulóggávu.

### 5.3.16 Løgreglan

Løgreglan er eitt øki, ið ikki er yvirtikið; men Kommununevndin mælir til, at sýslurnar verða broyttar samsvarandi í nýggja kommunubýtinum, sí kapitul 4.

### 5.3.17 Skattamál

Kommunan eigur at hava líkningarmyndugleikan. Tað er kommunan, ið kennir best til viðurskiftini hjá sínum borgarum. Men av tí at nógvar kommunur eru so smáar, hava tær ikki megnað hesa uppgávu, men latið umsitingina til Toll- og Skattstovu Føroya. Tískil er líkningarmyndugleikin við løgtingslóg nr. 169 frá 1997 lagdur til landið. Við einum nýggjum kommunubygnaði við munandi størri kommunueindum verður umsitingarliga orkan eisini størri, og Kommununevndin mælir tí til, at líkningarmyndugleikin verður aftur kommunalur.
Toll- og Skattstova Føroya hevur nú skrivstovur kring landið og førleikin at umsita lógina er tí eisini tøkur á staðnum. Við at leggja líkningarmyndugleikan aftur til kommununa kundu hesar skrivstovur verið kommunalar, og neyðugar tillagingar eiga at verða gjørdar, so at umsitingarliga skrivstovuøkið verður tað sama sum kommunueindin. Tað skal viðmerkjast, at toll- og mvg- økið eisini eru úti á økisskrivstovunum[5].

Býtingaruppgávan er ein av høvuðsuppgávum landsins, t.v.s. at landið býtir um nýtslumøguleikarnar hjá borgarunum við skattum, inntøkuflytingum o.ø. Hetta er ein landsuppgáva, sum landið einsamalt tekur avgerð um, og fíggingin eigur tí at vera hjá landinum. Skattaskipanin eigur tí at verða broytt, so at allur progressivitetur" er hjá landinum, og at fíggjarliga ábyrgdin fylgir avgerðarrættinum. Hetta merkir, at kommunan eigur ein lutfalsligan part (t.e. kommunuskattin) av hvørji krónu, borgararnir í kommununi tjena. Sagt við øðrum orðum, so skal landið rinda botnfrádrátt, rentustuðul og tílíkt, sí eisini kapitul 7. Kommununevndin mælir til, at skattainntøkurnar hjá kommununum verða roknaðar av persónligum inntøkum.
Kommununevndin mælir til, at eitt skattaband verður ásett, t.v.s. at bæði eitt lág- og hámark verða sett fyri kommunuskattin. Hetta skal so sjálvandi verða javnað í sambandi við tað broytta uppgávubýtið o.a. millum land og kommunur. Atvoldin til kommunuskattabandið er at forða fyri skattaflýggjan, at landið hevur møguleika at stýra øllum skattatrýstinum, og at borgarin kann síggja, hvussu nógvan kommunuskatt viðkomandi kann koma at rinda.
Til at áseta gjøld fyri nýtslu av kommunalum tænastum mælir Kommununevndin til, at kommunurnar fáa heimild í kommunustýrislógini at áseta gjald fyri tær tænastur, ið ikki eru lógarkravdar, so at tær kunnu stýra nýtsluni, um tær halda tað vera neyðugt. Harafturímóti mælir nevndin til, at kommunur, um tær ynskja at áseta gjald fyri lógarkravdar uppgávur, skulu hava heimild til tess í viðkomandi lóg.
Nú krevur Føroya Gjaldstova inn allan skatt, herímillum eisini eftirstøður. Í sambandi við størri kommunalar eindir stingur so tann spurningur seg upp, um landið tá enn skal røkja hesa arbeiðsuppgáva. Kommunurnar mugu í øllum førum sigast at hava størri áeggjan at krevja inn kommunuskattainntøkurnar, enn landið hevur. Harafturímóti hevur landið eina innkrevjingarskipan, har eftirstøður verða mótroknaðar inntøkum, og kann hetta lætta um innkrevjingina. Men tað er helst einki, ið forðar fyri, at kommunurnar eisini kunnu brúka hesa skipan, samstundis sum tær hava sín egna pantifúta. Spurningur er tó eisini, um kommunurnar sjálvt um tær hava eitt nýtt kommunubýti, enn verða ov smáar, og at pantifútin sostatt verður staddur ov nær borgarunum í kommununi.

## 5.3.18 Heilsumál

[5] Hildið verður ikki ráðiligt at skilja hetta burturúr sambært fíggjarmálastýrið. Spurningurin er tí um skrivstovan so eisini kann vera partvíst kommunal og partvíst landsskrivstova.

Heilsutænastan uttan fyri sjúkrahúsini, t.e. kommunulæknaskipanin, heimarøktin, skúlalæknaskipanin og tannrøktarskipanin, eigur øll at vera ein kommunal uppgáva, tí veitingarøkið er ikki størri enn ein kommuna, og tað er kommunan, ið best kennir tørvin hjá sínum íbúgvum, og sum tí kann raðfesta uppgávurnar betur.
Hesar uppgávur eru nú í høvuðsheitum kommunalar. Tað er bert heimarøktin, sum er hjá landinum. Lóggávan eigur tí at verða broytt soleiðis, at heimarøktin verður latin kommununum. Heimarøktin er í løtuni lutað sundur í 6 øki. Hesi øki kundu hóskandi verið kommunal og lagað á tann hátt, at hvørt øki var í samsvari við kommunueindina.
Somuleiðis skal lóggávan verða broytt soleiðis, at fíggjarliga ábyrgdin á øllum hesum økjum fylgir við uppgávuni. Tað vil m.a. siga, at kommunan skal rinda grundlønina hjá kommunulæknanum, at tær skulu rinda útreiðslurnar av skúlalæknaskipanini og fyribyrgjandi læknakanningum av børnum undir skúlaaldri, og at tær skulu somuleiðis fíggja heimarøktina.
Tað skal viðmerkjast, at við hesum verða kommunulæknarnir kommunalt settir. Av hesi orsøk er eisini neyðugt at dagføra kommunulæknaskipanina m.a. soleiðis, at umstøðurnar í læknadøminum verða javnari, og eiga læknadømini at verða lagað á tann hátt, at tey fylgja kommunueindini.
Skipanin við sjúkrakassum eigur eisini at verða dagførd í sambandi við dagføringina av heilsutænastuni uttan fyri sjúkrahúsini. Spurningurin er, um tað er neyðugt við sjúkrakassum, og um kommunurnar ikki heldur áttu at fíggja hvør sín part, og at hesar útreiðslur so fara um skattin.
Tað skal viðmerkjast, at fyri hesar tænastur eins og fyri tænastur á almannaøkinum er neyðugt at ráðleggja skipanina soleiðis, at hon ið hvussu so er tryggjar øllum borgarum eitt tænastulágmark.
Harumframt er neyðugt at ansa eftir, at heilsuskipanin á kommunala økinum ikki hellir kostnað til ta heilsuskipan, landið hevur, og øvugt. Tað skal v.ø.o. veitast trygd fyri, at kommunur og land ikki kunnu áleggja hvørjum øðrum óbeinleiðis útreiðslur. T.d. kann hugsast ein skipan, har landið skal endurrinda tær útreiðslur, ein kommuna fær álagt, um ein sjúklingur, ið krevur viðgerð á sjúkrahúsi, ikki kann verða viðgjørdur beinanvegin. Harafturímóti skal kommunan rinda, um t.d. ein røktarkrevjandi sjúklingur ikki kann verða útskrivaður straks eftir viðgerð, av tí at kommunan ikki kann veita røktartænastuna.
Ellisheim eiga at vera kommunal burturav. Veitingarøkið er ikki størri enn kommunan. Harafturímóti er hvíldarheimið Naina ein landsupggáva, tí sjúklingar frá landssjúkrahúsinum verða lagdir inn har, áðrenn teir verða sendir heim eftir viðgerð á sjúkrahúsinum.

## 5.3.19 Havnir

Kommununevndin mælir til, at nýggj lóggáva verður gjørd á hesum øki. Lógin skal m.a. áseta, hvør ið m.a. heldur anodurnar í havnunum, so at íløgurnar ikki farast. Havnirnar áttu eyðvitað at verið býttar sundur í góðs-, fiski- og ferjuleguhavnir, og lýst eigur at verða, hvat hvør havnin er. Í endurskoðanini av økinum eigur eisini tann nevndin, ið ásetur vøru- og bryggjugjøld, at verða íroknað. Eisini skal ásetast, hvønn status havnirnar skulu hava, t.e.: hvussu tær skulu føra roknskap, og um roknskapurin skal vera partur av kommunuroknskapinum ella ikki. Eisini er neyðugt, at tann nýggja havnalógin leggur upp fyri teimum eitt sindur víðari rásum, kommununar eiga at hava á hesum øki (jf. kapitul 8.3 um vinnulívið) enn á øðrum økjum. Landsstýrið eigur at hava eftirlit við, at t.d. leigan er til marknaðarprís heldur enn galdandi mannagongd, har Landsverkfrøðingurin vegna landsstýrið kann broyta eitt leigugjald, sum kommunan hevur ásett í sambandi við leigu av havnalagnum. Um greiðar ásetingar eru í lógini um, hvussu havnalagið kann gagnnýtast, og hvussu langt kann verða bygt frá bryggjukantinum, skuldi ikki verið neyðugt hjá Landsverkfrøðinginum, vegna landsstýrið, at góðkent byggiloyvi á havnalagnum.

### 5.3.20 Skráir

Alment eigur teldukervið hjá kommununum at verða skipað á tílíkan hátt, at samband er ímillum land og kommunu. Spurningurin um, hvørt kommunurnar eiga at kunna nýta P-talið í viðurskiftunum við borgarar sínar, eigur at verða umhugsaður.

## 5.4 Kommunusamstarv

Fleiri kommunur í Føroyum eru nú so smáar, at tær megna ikki at røkja fleiri av teimum uppgávum, tær nú hava sambært lógini. Tað er tí ein viðkomandi spurningur, um vit heldur skuldu havt kommunalt samstarv enn kommunusamanleggingar í stórar eindir við nógvari orku.
Felagskommunalt samstarv kann verða lutað sundur í:

1) felagskommunalt samstarv við einum fyriskipanarligum bygnaði
2) felagskommunalt samstarv uttan fyriskipanarligan bygnað, t.e.
   a) keyp og søla av tænastum
   b) samskipan, upplýsing- og hugskotsskifti

### 5.4.1 Felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði

Við slíkum samstarvi verður ein sjálvstøðug fyriskipan sett á stovn, ið so fær myndugleikan frá teimum kommunum, ið samstarva. Fyriskipanini verður sostatt heimilað at taka avgerðir vegna hesar samstarvandi kommunur og at binda tær rættarliga.
Ein meginspurningur viðvíkjandi felagskommunalum samstarvi av hesum slagi er: atlitið at virkisførinum, tí fólkaræðisligu stýringini og eftirlitsmøguleiki kommunanna. Verður dentur lagdur á ta fólkaræðisligu stýringina, kann tað bera við sær, at samstarvið verður óvirkisført, og at bygnaðurin verður viðtøkutungur. Vandi er eisini fyri, at tær samstarvandi kommunurnar fara at raðfesta sínar egnu fyrimunir fram um teir fyrimunir, samstarvið annars kann bera við sær.
Verður dentur harafturímóti lagdur á eitt virkisført samstarv, ið hevur viðtøkulættan bygnað, er vandi fyri, at raðfestingin í samstarvinum verður ikki í samsvar við áhugamálini hjá kommununum, og møguleikin fyri eftirliti er avmarkaður. Kommunurnar kunnu tí lættliga fáa ta fatan, at tær hava onga ávirkan á samstarvið, men bert rinda rokningina. SEV-samstarvið kann sigast at vera eitt dømi í so máta.
Felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði skerjir virðini í tí staðbundna sjálvstýrinum, tí bæði tilfeingi og myndugleiki verða latin samstarvinum, og av teirri orsøk minka møguleikarnir hjá sjálvum kommununum at raðfesta sínar egnu uppgávur. Hetta minkar tí um tað kommunala sjálvstýrið og tessvegna eisini um møguleikan at veita trygd fyri tí munabesta tilfeingisbýtinum til tær uppgávur, ið eru lagaðar til ynskini á staðnum.
Felagskommunalt samstarv er eisini í andsøgn við sjálvt fólkastýrið. Tær miðfirraðu eindirnar hava til endamáls at geva borgaranum ávirkan á síni staðbundnu viðurskifti. Hetta kemur fyrst og fremst til sjóndar á tann hátt, at borgarin fer á val. Hann fer vanliga á val og velur tann politikara, hann heldur hava somu áskoðan, sum hann sjálvur hevur. Til næsta val stendur politikarin so til svars fyri sínar avgerðir. Leiðslan í tí kommunala samstarvinum verður vald óbeinleiðis av kommunustýrunum. Tískil verður tað truplari hjá tí einstaka borgaranum at gera sína ávirkan galdandi, tí hann hevur bert óbeinleiðis ávirkan, og at tey, sum taka avgerðirnar, standa bert lutvíst

til svars mótvegis borgaranum. Ábyrgdarviðurskiftini verða ógreið í huga borgaranna, og vegurin millum borgara og teirra, sum taka avgerðirnar, verður longri.
Og meginreglan um, at uppgávu- og ábyrgdarbyrðan fylgjast, verður eisini brotin. Uppgávubyrðuna fær tað felagskommunala samstarvið; men ta endaligu fíggjarligu ábyrgdina hevur tann einstaka kommunan.
Lagt kann verða afturat, at meginregluliga er heldur ikki rætt at miðfirra uppgávurnar til kommunurnar, og at tær eftirsíðan miðfirra uppgávurnar aftur til eitt kommunalt samstarv.

### 5.4.2 Felagskommunalt samstarv uttan fyriskipanarligan bygnað

Hetta samstarvið fatar um avtalur millum kommunurnar, og rættarliga gera avtalureglurnar seg galdandi. Tað er í sjálvum sær skilagott, at kommunur samskipa arbeiði sítt og veita hvørjum øðrum upplýsingar og hugskot. Á henda hátt kunnu tær læra av royndum hvør hjá øðrum.

### 5.4.3 Niðurstøða og tilmæli

Niðurstøðan hjá Kommununevndini er tí, at felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði kann bert vera eitt ískoyti til nýggjan kommunalan bygnað. Miðað eigur at verða eftir, at kommunurnar bert fáa tær uppgávur at røkja, sum tær sjálvar eru mentar at loysa.
Sambært kommunulýsingunum í Tátti I, Parti II er longu eitt fjøltáttað kommunalt samstarv við fyrisitingarligum bygnaði kommuna millum. Í flestu førum er hetta samstarvið millum tær kommunur, sum verða lagdar saman í eina nýggja kommunueind í tí nýggja kommunubygnaðinum Harumframt er skilagott, at kommunurnar eisini hava felagskommunalt samstarv, uttan at teimum tó nýtist at hava ein fyriskipanarligan bygnað.

## 5.5 Samskifti millum land og kommunur

Felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði eigur, sum longu nevnt, bert at verða eitt ískoyti til ein nýggjan, kommunalan bygnað. Kommununevndin heldur tó, at tað eigur at vera eitt kommunufelag, har allar kommunur eru limur.
Tílíkt kommunufelag hevur í flestu førum ein sera týdningarmiklar leiklut í sambandi við yvirgongdina frá verandi kommunubygnaði og til tann nýggja. Í hesum tíðarskeiði skulu kommunurnar samráðast dúgliga við landsstýrið um tað nýggja uppgávubýtið ja, sjálvt um smálutir, samstundis sum skil skal fáast á fíggingina. Í fyrstu atløgu verður hetta størsta uppgávan hjá kommunufelagnum, sjálvt um kommunufelagið eisini verður at taka sær av hesi uppgávu í framtíðini.
Umframt hesa uppgávu er eisini vert at nevna samráðingaruppgávuna, har land og kommunur á hvørjum ári skulu samráðast um fíggjarpolitikkin, t.e. um nýtslu- og íløgukarmarnar o.a. fyri land og kommunur komandi fíggjarárið. Ynski landsstýrisins verður at samráðast við ein mótpart og ikki við hvørja einstaka kommunu. Eyðvitað er tí eitt kommunufelag, sum tikið úr leikum, at røkja hesa uppgávuna.
Av øðrum uppgávum hjá kommunufelagnum er at nevna tillagingar í kommunuskipanini, t.e. at landið ikki uttan víðari broytir lógir, kunngerðir o.a., sum raka kommunurnar, uttan so er, at tær fáa tílík mál til ummælis.

Somuleiðis kann hugsast, at tað nú verður ein fjølbroyttari uppgáva hjá kommunufelagnum at umboða kommunurnar mótvegis øðrum myndugleikum og stovnum.
Í kommunanna høpi fer kommunufelagið í høvuðsheitum at hava eina ráðgevandi uppgávu. Harafturímóti kann eisini hugsast, at kommunufelagið fer at ansa eftir, at kommunurnar t.d. halda teir karmar, sum kommunufelagið og landsstýrið eru vorðin samd um í árligu samráðingunum, tí um kommunurnar ikki halda seg til gjørdar avtalur, kann vandi verða fyri, at landið við eini lógarheimild fer at stýra kommununum.
Eitt nýtt kommunufelag, ið hevur allar kommunur sum limir, verður nógv sterkari í ymiskum samráðingum, enn tann einstaka kommunan kann vera. Tað verður tí nógv lættari hjá kommununum at umboða síni áhugamál gjøgnum eitt máttmikið kommunufelag.
Í okkara grannalondum, sum vit vanliga sammeta okkum við, t.e. Danmørk, Ísland og Grønland, hava øll hesi lond eitt kommunufelag, har allar kommunur eru limir. Týdningarmesta endamálið hjá kommunufelagnum í Íslandi er t.d.: at røkja áhugamál kommunanna mótvegis ríkinum og øðrum pørtum, tað veri seg innan- og uttanlands. Harumframt er endamálið at styrkja samstarvið millum kommmunurnar og at stuðla samstarvið um teirra felags áhugamál. Tað skal viðmerkjast, at í Íslandi er óbeinleiðis kravdur limaskapur galdandi. Kommunurnar kunnu melda seg út; men tær skulu tó framvegis rinda limagjald. Í Danmørk eru allar kommunur -uttan Keypmannahavnar og Frederiksbergs kommunur  limir í kommunufelagnum.

## 5.6 Eftirlit við kommunum

Í eini nýggari, kommunalari skipan er sera umráðandi, at eftirlitið við kommununum fær ta orku, tí tørvar. Tað eigur at verða savnað á einum staði, og best hevði verið, um tað var ein sjálvstøðug deild í einum aðalstýri. Sum dømi kann nevnast, at í Danmørk er tað innanríkisráðið, ið hevur kommunueftirlitið; men í Íslandi er tað sosialmálaráðið, ið hevur hetta málsøkið.
Í mun til verandi skipan verður eftirlitið í nýggju skipanini stórt sæð eitt rættargildiseftirlit. Tað skal sjálvsagt ikki góðkenna alt møguligt, sum kommunurnar gera, tí tær skulu verða so nógv sjálvstøðugari, enn tær eru í løtuni, og tí skulu tær eisini standa til svars fyri sínar egnu avgerðir. Ístaðin skal eftirlitið nýta sína orku at ansa eftir, at kommunurnar halda tey lógarásettu krøvini, og at tær halda seg innan fyri teir lógarásettu karmarnar. Tað er tí umráðandi, at tað nýggja eftirlitið verður eitt veruligt eftirlit, so at tann kommuna, ið ikki heldur lógarásetingarnar, sum skjótast verður beind aftur á rætta leið, og at møguligar heimilaðar revsiatgerðir verða settar í verk. Hetta er neyðugt, um ein nýggj, kommunal skipan skal virka, og at kommunurnar fáa ta neyðugu virðingina bæði fyri eftirlitinum og lóggávuni.
Ein stór uppgáva hjá eftirlitinum verður eisini at tulka lóggávuna, tá ið ivamál stinga seg upp bæði hvat viðvíkur karmar fyri ta kommunalu fulltrúnna og eisini aðrar rættaraðalreglur, bæði skrivaðar og óskrivaðar, og á tann hátt uppbyggja eina mannagongd, ið samstundis kann gerast partur í menningini av tí kommunalu skipanini.

# 6. Broytingar í lóggávuni

Hetta kapitlið eigur at verða samlisið við kapittul 5, við tað at tær til mæltu broytingarnar í lóggávuni eru grundaðar á niðurstøðurnar í kapitli 5 um uppgávubýtið.

## 6.1 Løgtingslóg um føroysku kommunurnar (kommunulógin)

Sí kapittul 12.

## 6.2 Løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur

Løgtingslóg nr. 49 um val til Føroya løgting frá 20/7-1978 og løgtingslóg nr. 44 frá 19/6-1972 um val til allar føroyskar kommunur eiga at verða endurskoðaðar við tí í hyggju, at tær verða samanskrivaðar í eina lóg um val til løgting og kommunur, hetta fyri at tryggja at ongin óneyðugur munur verður á hvussu hesi val verða fyriskipað.
Við hesum í huga mælur kommununevndin til at bert smærri broytingar verða gjørdar í Løgtingslóg nr. 44 frá 19/6-1972 um val til allar føroyskar kommunur. Broytingarnar eru hesar:

- Alment eigur bygda(r)ráð" at verða broytt til kommunustýrið" og bygda(r)ráðlimur" verða broytt til kommunustýrislimur"
- § 2 3. petti verður broytt soleiðis: § 2 3. petti Regluligt val fer fram annan týsdag í november og valskeiðið gongur frá 1. januar árið eftir."
- § 3 2. petti verður broytt soleiðis:
- § 3 2. petti Landsstýrið lýsur í minsta lagi 6 vikur fyri valdagin:
  1) valdagin
  2) hvar valevnislistar skulu latast inn
  3) seinastu freist fyri at lata valevnislistar inn"
- § 10 og § 13 4. petti verður strikað. (Henda heimild er ótíðarhóskandi)
- § 17 2. petti skal tilvísingin vera § 8 3. petti
- Í § 17 3. petti verður brotið: ella har nøvnini á valevnunum eru ikki sett á atkvøðuseðilin, sbr. §10, 1. petti og § 13, 4. petti, innanfyri hvørs teigi veljarin hevur skrivað navnið á einum av valevnunum á listanum" strikað
- § 22 2. petti verður víðkað soleiðis: §22 2. petti. Um onkur hevur verið limur í kommunustýrinum í 8 ár ella meiri, hevur hann ikki skyldu at taka við endurvali, fyrr enn 2 fylgjandi valskeið eru liðin; somuleiðis kann persónur, íð fylt hevur 60 ár, bera seg undan at taka við vali. Endaliga kunnu løgmaður, limir av landstýrinum, ríkisumboðsmaður og fólk í leiðandi kommunustarvi bera seg undan at taka við vali."
- § 29 2. petti verður broytt soleiðis: §29 2. petti Val sambært hesi lóg fer fram annan týsdag í november ár 2000, og verður hetta valskeiðið bert 2 ár. Annan týsdag í november 2002 verður val sambært hesi lóg í øllum kommununum."

## 6.3 Stýriskipanarviðurskifti

Lov for Færøerne nr. 95 af 25/3-1933 om statistik" og Bekendtgørelse for Færøerne nr. 6 af 9/1-1936 om statistik, broytt við kunngerð nr. 160 frá 20/6-1936" eiga at verða settar út gildi. Lóg nr. 33 frá 7/5-1991 um Hagstovu Føroya er komin ístaðin.

## 6.4 Fólkayvirlit

Løgtingslóg nr. 86 um fólkayvirlit frá 1982 og kunngerð nr. 95 um fólkayvirlit frá 1982 eiga eisini at verða broytt, so at henda uppgávan verður savnað á felagskerv; men at kommunurnar framvegis skulu hava skrásetingina um hendi. Tó skulu kommunurnar bert hava atgongd til upplýsingar um edv-kervið viðvíkjandi sínum egnu viðurskiftum. Tað eigur eisini at verða ásett í lógina, at kommunurnar skulu hava skyldu at veita Landsfólkayvirlitinum tær neyðugu upplýsingarnar.

## 6.5 Mentan

Neyðugt er at broyta løgtingslóg nr. 56 um megin-/fólka- og skúlabókasøvn frá 1988 og møguliga eisini kunngerð nr. 125 um skúlabókasøvn frá 1990, so lógin ikki verður so framasøkin, men meira í samsvar við veruleikan. Av tí at talan er um eina kommunala uppgávu, so skal kommunan eisini sjálv fíggja hesa tænastu. Lógin eigur tí at verða broytt samsvarandi hesum.
Løgtingslóg nr. 17 frá 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi eigur at verða dagførd.

## 6.6 Sløkkilið, ravmagn

Ein tilbúgvingarætlan eigur at verða gjørd fyri alt landið.

## 6.7 Leiguíbúðir, byggi- og býarskipanir

MB for Færøerne fra 1940 om lejeforhold" eigur at verða sett úr gildi, og ístaðin eiga reglur at verða gjørdar um leiguviðurskifi, sum skulu vera galdandi fyri allar kommunur. Kunngerð nr. 17 frá 1973 (Tórshavnar uttanbíggja kommuna) eigur at vera sett úr gildi.
Sum skilst, skal nevnd setast at gera nýtt lógaruppskot um býarskipanir og byggisamtyktir. Hetta lógaruppskot skal so koma ístaðin løgtingslóg nr. 13 frá 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir. Kommununevndin mælir til, at tað verður eitt lógarkrav, at kommunurnar hava eina býarskipan og byggisamtykt, og annars minnir Kommununevndin á meginregluna um eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, og at landið ikki eigur at hava heimild gera eitt arbeiði fyri kommunanna rokning.

## 6.8 Dýr, matvørur

Kunngerð nr. 28 frá 1991 um skyldu at hava hund í bandi í Tórshavnar og Argja kommunu eigur at verða dagførd, nú Argir eru vorðnar partur av Tórshavnar kommunu.
Løgtigslóg nr. 46 frá 1985 um matvørur v.m. eigur at verða broytt soleiðis, at yvireftirlitsmyndugleikin, t.e. Heilsufrøðiliga Starvsstovan, ikki kann røkja hesa kommunuuppgávu fyri kommunanna rokning. Ístaðin eiga bøtur/dagbøtur at verða álagd kommunustýrislimunum, um so er, at eftirlitsuppgávan verður misrøkt.
Kunngerð nr. 25 frá 1996 um at merkja liðugt pakkaðar matvørur eigur at verða broytt soleiðis, at eftirlitsmyndugleikin er hjá kommununi. Um kommunan ikki røkir hesa uppgávuna, eiga bøtur/dagbøtur at verða álagdar.

# 6.9 Ognartøka, matrikulering o.a.

Lov nr. 69 frá 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne" eigur at verða sett úr gildi. Ístaðin eigur ein lóg um, hvussu farið eigur at verða fram viðvíkjandi ognartøku, ein atburðarlóg, at verða sett í gildi. Lóg nr. 170 frá 1937 for Færøerne om Grandestævne m.m." eigur at verða dagførd. Lov nr. 171 frá 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred" eigur somuleiðis at verða dagførd. Uppgávurnar hjá hegnsýnisnevndini eiga at vera hjá kommunuumsitingini. Kommununevndin minnir í hesum viðfangi aftur á meginregluna um, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið eiga at fylgjast.

# 6.10 Undirvísingarmál

Fólkaskúlin eigur at verða kommunalur burturav, og skúlalóggávan eigur at verða dagførd samsvarandi hesum, so at kommunurnar t.d. skulu rinda læraralønirnar, og lærararnir verða kommunalt settir. Tó heldur Kommununevndin, at undirvísing vegna serligan tørv skal framvegis vera ein landsuppgáva, og at skúlalóggávan skal veita trygd fyri, at so verður.
Alment eigur skúlalóggávan at verða smíðað soleiðis, at fíggjarliga ábyrgdin fylgir uppgávuni, so tað t.d. er kommunan, ið hevur fíggjarligu ábyrgdina av næmingaflutningsskipanini, undirvísingaramboðum o.s.fr. Landsstýrið skal so heldur kunna áleggja teirri kommunu, ið misrøkir sína uppgávu, bøtur, enn at tað skal seta tiltøk í verk fyri kommununnar rokning.
Løgtingslóg nr. 125 frá 1997 um fólkaskúlan eigur at verða broytt, so at ásetingarnar um skúlabókasavnið verða samskipaðar við fólkabókasavnið í kommununi. Lógin eigur somuleiðis at verða broytt soleiðis, at kommunan í sambandi við fólkaskúlan sjálv kann ráðleggja undirvísingina so skynsamt, sum til ber. Tað er § 29, stk. 5 í lógini, sum eigur at verða broytt soleiðis, at tað er kommunustýrið, sum ger av, hvørjir skúlar í kommununi skulu verða brúktir at undirvísa børnum.
Løgtingslóg nr. 55 frá 1965 um býtið av kommununnar útreiðsluparti til lærlingalæruna eigur at vera sett úr gildi. Talan er um eina landsuppgávu, sum landið tí eigur alla fíggjarligu ábyrgdina av.
Løgtingslóg nr. 70 frá 1983 um frítíðarundirvísing v.m. eigur somuleiðis at verða broytt. Frítíðarundirvísing, serstøk frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi er ein kommunal uppgáva, og kommunan eigur tí at hava fíggjarligu ábyrgdina á hesum øki.
Løgtingslóg nr. 69 frá 7/6-1984 um stuðul til musikkskúlar eigur at verða sett úr gildi, og ístaðin eigur ein løgtingslóg um musikkskúla at koma í hennara stað. Lógin eigur at avmynda, hvørji tey politisku ynskini at hava musikkskúla eru. Á tí grundarlagi eigur so støða at verða tikin til, um hetta er ein landsuppgávu ella ein kommunuuppgávu. Meginrelgarnar um eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýtið skulu verða fylgdar, tá ið lógin verður gjørd.

## 6.11 Umhvørvi, vatn v.m.

Løgtingslóg nr. 134 frá 1988 eigur at verða broytt soleiðis, at kommunustýrislimirnir fáa bøtur, um henda uppgáva verður misrøkt.
Lov nr. 48 frá 1988 om Tilvejebringelse af Vedtægt for Benyttelse af Vand fra Tórshavns Vandværk", og við heimild í Bekendtgørelse nr. 36 af 20/7-1906 om en af Justitsministeriet stadfæstet Vedtægt for Benyttelsen af Vand fra Tórshavns Vandværk, Lov nr. 63 af 1909 for Færøerne om Vandledninger og Lov nr. 169 af 1937 for Færøerne om Benyttelse af Indsøer og Vandløb" eiga øll at verða sett úr gildi, og dagførdar lógir mega koma ístaðinfyri.

## 6.12 Almannaviðurskifti

Lovbekendtgørelse nr. 100 af 1988 om offentlig forsorg" og kunngerðir við heimild í hesi lóg eiga at vera broytt, so at uppgávan verður kommunal. Harumframt er ikki neyðugt, at sýslumaðurin skal geva sítt ummæli í sambandi við umsókn um einkjupensjón.
§ 14 stk. 1, 3 í Lovbekendtgørelse nr. 104 af 2/3-1988 om børneforsorg" skal verða broytt soleiðis, at hon vísir til løgtingslóg nr. 71 frá 20/5-1995 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., og § 1, stk. 7 í løgtingslóg nr. 125 frá 21/5-1993 um býtið av almannaútreiðslum v.m. skal eisini verða broytt soleiðis, at hon vísir til løgtingslóg nr. 71 frá 1995 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.
Lovbekendtgørelse nr. 104 af 1988 om børneforsorg" skal verða dagførd, og uppgávurnar hjá barnaverndini eiga at verða fluttar til kommunuumsitingina. Tí verður eisini neyðugt at broyta kunngerð nr. 6 frá 1995 um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt. Kunngerð nr. 62 frá 1993 um dagstovnar, dagrøkt og døgnstovnar fyri børn og ung eigur at verða broytt soleiðis, at ein sjálvstøðug kunngerð verður fyri samdøgursstovnar, ið skal vera ein landsuppgáva, meðan dagrøktin og dagstovnar eru ein kommunal uppgáva. Lóggávan á hesum øki eigur at verða broytt soleiðis, at fíggjarliga ábyrgdin fylgir uppgávuni.
Uppskot um nýggja eftirlønarlóg er gjørd. Í uppskotinum vera lógirnar um pensjón samskipaðar í eina lóg. Lógaruppskotið eigur at laga seg eftir avgerðini millum kommunurnar og landið, um uppgávan skal vera ein lands- ella kommunuuppgáva. Sum er, verður uppgávan í lógaruppskotinum lýst sum ein landsuppgáva. Hvørt so verður, so eigur fíggjarliga ábyrgdin at fylgja við uppgávuni.
Løgtingslóg nr. 125 frá 1993 um býtið av almannaútreiðslum v.m. eigur at verða broytt soleiðis, at fíggjarliga ábyrgdin fylgir við uppgávuni. Henda løgtinglóg fatar eisini um einstøk heilsumál, og eigur at verða rættað, so at uppgávu- og ábyrgdarbýtið fylgja heilsuøkinum.
Kongelig anordning nr. 389 af 15/11-1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" eigur at verða broytt soleiðis, at fyriskipanin ikki dregur kommunurnar uppí. Somuleiðis hevur Anordning nr. 245 af 1933 angående forsikring af fanger og forvarede mod følger af ulykkestilfælde" ongan týdning fyri kommunurnar, og tí eigur eisini henda fyriskipanin at verða broytt. Báðar fyriskipanirnar eiga at verða dagførdar ella møguliga settar úr gildi.

## 6.13 Verja  borgaravernd

Anordning nr. 337 af 2/10-1952 hvorved lov om Civilforsvaret sættes i kraft på Færøerne" eigur at verða sett úr gildi.

## 6.14 Ferðsla, vegir

Løgtingslóg nr. 51 frá 25/7-1972 um landsvegir eigur at verða broytt, so at vegagrunninum verður avtikin. Somuleiðis eigur lógin at verða broytt soleiðis, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið fylgjast, tvs. at kommunurnar skulu hvørki rinda til landskassan ella til Landsverkfrøðingin fyri viðlíkahald av landsvegum. Hetta er ein landsuppgáva, ið skal verða fíggjað um landsins fíggjarlóg.

## 6.15 Kirkja

Ongar viðmerkingar.

## 6.16 Løgreglan

Hetta økið er ikki yvirtikið. Tí eigur fíggjarliga ábyrgdin at liggja hjá ríkinum/landinum. Lov nr. 55 af 1894 indeholdende bestemmelse om Politiet på Færøerne" skal tí verða broytt samsvarandi hesum. Lógin eigur, ið hvussu so er, at verða dagførd, og í tí høpi eiga sýslurnar at verða tær somu sum kommunueindirnar.

## 6.17 Skattamál

Øll skattalóggávan eigur at verða broytt. Lógirnar eru:

- løgtingslóg nr. 86 frá 1983 um landsskatt og kommunuskatt
- løgtingslóg nr. 87 frá 1983 um áseting av skatti til landskassan
- løgtingslóg nr. 51 frá 1971 um skatt av rentutrygging v.m.
- løgtingslóg nr. 148 frá 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum og
- løgtingslóg nr. 40 frá 1986 um skatt av vinningi í sambandi við sølu av virðisbrøvum, til tess at meginreglurnar í álitinum verða fylgdar.

Kunngerð nr. 22 frá 1984 um sjómansskatt eigur at verða sett úr gildi. Somuleiðis eigur Lov nr. 85 om inddrivelse af skatter og afgifter til det offentlige m.m." at verða sett úr gildi. Ístaðin skal støða verða tikin til, um pantingin skal vera ein lands ella kommuuppgáva, og eigur lóggávan so at byggja á hesa avgerðina.

## 6.18 Heilsumál

Lov nr. 279 af 1976 om ligsyn m.m." eigur at verða broytt. Nú á døgum er óneyðugt at áseta, at líksýnismenn skulu verða settir.

Lov nr. 239 af 1927 af lov nr. 88 af 1914 om kommuunal Lægehjælp" eigur at verða dagførd.
Løgtingslóg nr. 56 frá 1952 um býti av Føroya parti av løn kommunulækna eigur at verða broytt soleiðis, at fíggjarliga ábyrgdin fylgir uppgávuni.
Løgtingslóg nr. 87 frá 1997 um heilsusystratænastuna og løgtingslóg nr. 88 frá 1997 um heimasjúkrasystratænastuna eiga at verða broyttar, so at uppgávan verður kommunal og fíggjarliga ábyrgdin fylgir við uppgávuni.
Bekendtgørelse nr. 576 af 1981 om lægeundersøgelse af børn på Færøerne", sum byggir á Lov nr. 236 af 1946 om lægeundersøgelse af børn" og A. nr. 16 af 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning", eiga møguliga at verða dagførdar, umframt at fíggjarliga ábyrgdin skal vera hjá kommununum.
Neyðugt er at dagføra lógina um sjúkrakassar.
Løgtingslóg nr. 125 frá 1993 um býtið av almannaútreiðslum v.m. eigur at verða broytt soleiðis, at fíggjarliga ábyrgdin fylgir uppgávuni. Hetta merkir, at fíggjarliga ábyrgdin av ellisheimum og heimarøkt eigur at vera hjá kommununum.

## 6.19 Havnir

Økið eigur at verða dagført. Tað snýr seg um Lov nr. 7 af 1875 om udfærdigelse af regelmentariske Bestemmelser for Benyttelsen af Havne m.m", um kunngerð nr. 32 frá 1990 um skipa- og vørugjøld fyri havnir og bryggjur og um Lov nr. 127 af 1913 om Anlæg af Havne m.v. på Færøerne".

## 6.20 Alment

Í fleiri lógum, sum viðvíkja kommununum, er ásett, at landsstýrið kann fara inn og røkja uppgávuna fyri kommunanna rokning, um kommunan ikki sjálv loysir uppgávuna. Hetta eigur at verða broytt. Er uppgávan kommunal, skal kommunan, hvussu víkur og vendir, eisini loysa uppgávuna. Tí eiga allar heimildir, ið loyva øðrum at gera uppgávur fyri kommunanna rokning at strikast. Allar lógir, ið viðvíkja kommununum, eiga at verða kannaðar hesum viðvíkjandi.
Í nógvum lógum eru somuleiðis fleiri ásetingar um, at landsstýrið skal góðkenna mangt og hvat. Nú ið kommunurnar í høvuðsheitum skulu stýra sínum egnu viðurskiftum, umframt at endurgjaldsskipanirnar verða tiknar av, er ikki longur tørvar á hesum lógarásetingum, og eiga tær tí í mongum førum at verða strikaðar. Kommunala lóggávan eigur eisini í so máta at verða kannað. Sí ta kommunalu lóggávuna í fylgiskjali B og C í Tátti I, Parti I Uppgávu- og ábyrgdarbýtið.
At enda skal verða nevnt, at orðini bý-/bygda(r)ráðið" og bý-/bygda(r)ráðsformaður" eiga at verða broytt í lóggávuni til ávikavist kommunustýrið" og borgarstjóri".

# 7. Ábyrgdarbýtið

Til at fíggja sítt virksemi hava kommunurnar álíkningarrætt sambært skattalógini[6]. Umframt skattainntøkurnar hava kommunurnar inntøkur av ognum (rentur), av brúkaragjaldi og aðrar inntøkum í sambandi við raksturin. Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar hjá kommununum fyri 1996, eftir at tær eru lutaðar í nevndu inntøkusløg. Sum sæst, eru skattainntøkurnar nógv tann størsta inntøkukeldan hjá kommununum á fíggjarætlanunum, sløk 84 %, meðan aðrar inntøkur eru gott 16 %.

| 1996 (1000 kr.) | Skattur | Rentur v.m. | Brúkaragjald | Aðrar inntøkur | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| Fugloyar kommuna | 758 | 3 | 0 | 0 | 761 |
| Svínoyar kommuna | 675 | 16 | 0 | 193 | 884 |
| Viðareiðis kommuna | 3.924 | 0 | 25 | 0 | 3.949 |
| Hvannasunds kommuna | 4.800 | 0 | 50 | 0 | 4.850 |
| Klaksvíkar kommuna | 68.463 | 1188 | 0 | 15.893 | 85.544 |
| Kunoyar kommuna | 1.472 | 24 | 0 | 126 | 1.622 |
| Mikladals kommuna | 734 | 0 | 8 | 0 | 742 |
| Húsar kommuna | 663 | 1 | 0 | 9 | 673 |
| Oyndarfjarðar kommuna | 2.967 | 2 | 0 | 392 | 3.361 |
| Elduvíkar kommuna | 1.231 | 1 | 0 | 80 | 1.312 |
| Fuglafjarðar kommuna | 21.583 | 170 | 0 | 8.688 | 30.441 |
| Leirvíkar kommuna | 12.612 | 15 | 0 | 1.263 | 13.890 |
| Gøtu kommuna | 13.149 | 117 | 0 | 1.683 | 14.949 |
| Nes kommuna | 15.811 | 217 | 0 | 3.154 | 19.182 |
| Sjóar kommuna | 10.262 | 135 | 0 | 2.336 | 12.733 |
| Skála kommuna | 8.702 | 161 | 0 | 2.517 | 11.380 |
| Eiðis kommuna | 8.178 | 60 | 0 | 1.156 | 9.394 |
| Sunda kommuna | 6.458 | 38 | 0 | 1.682 | 8.178 |
| Funnings kommuna | 1.218 | 1 | 0 | 13 | 1.232 |
| Gjáar kommuna | 726 | 0 | 0 | 0 | 726 |
| Haldórsvíkar kommuna | 3.201 | 0 | 0 | 388 | 3.589 |
| Saksunar kommuna | | | | | |
| Hvalvíkar kommuna | 4.143 | 3 | 0 | 370 | 4.516 |
| Hósvíkar kommuna | 2.866 | 22 | 0 | 685 | 3.573 |
| Kollafjarðar kommuna | 13.790 | 71 | 0 | 2.637 | 16.498 |

[6] Sambært galdandi lóggávu er líkningarmyndugleikin hjá landinum, sum kommunanna vegna krevur skattin inn.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Kvívíkar kommuna | 7.183 | 12 | 0 | 1.053 | 8.248 |
| Vestmanna kommuna | 18.838 | 321 | 0 | 2.261 | 21.420 |
| Kirkjubøar kommuna | 2.357 | 30 | 0 | 1.080 | 3.467 |
| Hests kommuna | 520 | 30 | 0 | 38 | 588 |
| Nólsoyar kommuna | 2.645 | 0 | 25 | 0 | 2.670 |
| Sandavágs kommuna | 10.594 | 37 | 0 | 538 | 11.169 |
| Miðvágs kommuna | 14.017 | 47 | 0 | 1.977 | 16.041 |
| Sørvágs kommuna | 14.927 | 188 | 0 | 2.185 | 17.300 |
| Bíggjar kommuna | 642 | 0 | 20 | 0 | 662 |
| Mykines kommuna | 172 | 0 | 2 | 0 | 174 |
| Sands kommuna | 7.062 | 1 | 0 | 611 | 7.674 |
| Skopunar kommuna | 6.692 | 2 | 0 | 362 | 7.056 |
| Skálavíkar kommuna | 2.400 | 60 | 0 | 46 | 2.506 |
| Húsavíkar kommuna | 1.837 | 152 | 0 | 43 | 2.032 |
| Skúvoyar kommuna | 605 | 0 | 0 | 0 | 605 |
| Hvalbiar kommuna | 9.151 | 324 | 193 | 0 | 9.668 |
| Tvøroyrar kommuna | 29.238 | 115 | 0 | 0 | 29.353 |
| Fámjins kommuna | 1.292 | 34 | 0 | 23 | 1.349 |
| Hovs kommuna | 1.630 | 0 | 0 | 0 | 1.630 |
| Porkeris kommuna | 5.847 | 115 | 0 | 379 | 6.341 |
| Vágs kommuna | 20.946 | 18 | 0 | 4.186 | 25.150 |
| Sumbiar kommuna | 4.020 | 0 | 50 | 0 | 4.070 |
| Tórshavnar kommuna | 257.962 | 0 | 0 | 56.932 | 314.894 |
| Runavíkar kommuna | 34.409 | 517 | 0 | 8.720 | 43.646 |
| **Tilsamans** | **663.372** | **4.248** | **373** | **123.699** | **791.692** |

Viðm.: Fíggjarætlanartøl fyri Hvannasund og Gjógv. Tøl fyri Saksun vanta.

Men inntøkur og útreiðslur á fíggjarætlanunum hjá kommununum siga ikki alt. Kommunuskipanin í Føroyum er grundað á endurgjaldskipanir. Hetta merkir, at í nógvum førum eru landið og kommunurnar felags um at fíggja tær ymisku lógarásettu uppgávurnar. Hetta er galdandi fyri: skúlaøkið, almannaøkið, bókasavnsøkið, heilsuøkið o.a.[7] Av hesum ávum sæst heldur ikki allur kostnaðurin av hesum uppgávum í kommunuroknskapunum. Hetta er tó ikki altíð galdandi fyri íløgur. Í hesum føri stendur kommunan sum lántakari, og tí sæst øll lániupphæddin í fíggjarstøðuni hjá kommununi, sjálvt um landið sambært serlóggávuni skal rinda part av láninum. Tí er ein postur í roknskapinum, sum eitur íløgustuðul.

# 7.1 Verandi endurgjaldsskipan

Her verður so nomið við tær avleiðingar, ið kunnu standast av eini endurgjaldsskipan, og hesar avleiðingar eru ikki altíð so hepnar.

[7] Víst verður á fylgiskjal A í Tátti I, Parti I um Uppgávu- og ábyrgdarbýtið, ið vísir eitt heildaryvirlit yvir, hvussu lógarásettu uppgávurnar verða fíggjaðar.

Í fyrsta lagi ber ein tílík skipan við sær eina neyva stýring frá landinum, av tí at landið sjálvsagt má ansa eftir sínum egnu útreiðslum.[8] Tí skal landsstýrið eisini góðkenna næstan allar avgerðir og broytingar í kommununum. Hetta er ikki í samljóð við hugtakið: staðbundið sjálvstýri, har kommunurnar sjálvar stýra sínum viðurskiftum.
Í øðrum lagi gera endurgjaldsskipanirnar tað trupult at staðfesta, hvør ið hevur ábyrgdina av uppgávunum. Av tí at ábyrgdin er trupul at festa, ber tað ofta við sær, at skeivar avgerðir fáa ongar avleiðingar. Hetta kann vera vandamikið. Men skal verða lagt á annan bógv, so eigur ábyrgdin at fylgja avgerðarrættinum. Hetta merkir, at kommunan eigur at hava alla ábyrgdina av teimum kommunalu uppgávunum: bæði at fremja tær og at hava ta fíggjarligu ábyrgdina. Hetta er eisini í samsvar við eina av meginreglunum hjá Kommununevndini um, at fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum. Ein tílík skipan veitir trygd fyri, at skipanin verður virknari.
Í triðja lagi ber endurgjaldsskipanin við sær, at kommunurnar kunnu ikki raðfesta uppgávurnar, sjálvt um hetta er eitt av aðalmálunum við tí kommunala sjálvstýrinum. Skipanin hevur verið so háttað, at kommunurnar hava fingið stuðul til ymiskar verkætlanir sum t.d. til vega- og havnabyggingar. Verkætlanirnar vóru tó treytaðar av, at meginmyndugleikin, landsstýrið, góðkendi tær. Tað kann tí sigast at vera landsstýrið, ið hevur gjørt av hvørjar íløgur, ið skulu verða gjørdar. Stuðulin var markaður", t.e.: kommunurnar kundu ikki sjálvar gera av, hvat hann skuldi verða brúktur til, og tí hevur heldur ikki borið til hjá teimum at raðfesta íløgurnar. Ella við øðrum orðum sagt, so hevur talan verið um miðsavnaða, deildarstýrda (sektorstýrda) ráðlegging.
Hetta hevur so aftur ført við sær at økir, sum ikki hava verið stuðlað úr landskassanum, fingu lægri raðfesting hjá kommunupolitikarunum enn onnur øki. T.d. hevur eingin stuðul verið veittur til spillvatnsleiðingar, og tað vísur seg eisini, at hetta øki ikki er tað, sum hevur staðið ovast á raðfestingarlistanum hjá summum kommunupolitikarunum.
Her kann verða skoytt uppí, at til hevur borið hjá kommununum at fáa pening burtur úr hesi skipan (at spekulera í skipanini). Tað kann t.d. vera skynsamt hjá kommununi at byggja eina havn, sjálvt um tað ikki er nakar veruligur tørvur á henni. Um vit siga, at býtið er 15/85%, so skuldi kommunan bert rindað 15% av íløguni. Hesin kostnaðurin kundi saktans komið inn aftur í kommunukassan, tí arbeiðspláss vórðu skapt í kommununi. Hetta vaksandi virksemið hevði so samstundis eina ringvirkan, sum eisini kundi økja um inntøkurnar hjá kommununi[9], og kundi tað so fíggja tey 15%. Frá kommununnar sjónarhorni var tað tí skynsamt, men als ikki samfelagsliga. Kommunurnar høvdu tó tann trupulleika at stríðast við, at tær fingu ikki hendur á stuðlinum, fyrr enn t.d. havnarbeiðið bæði var liðugt og góðkent. Avleiðingin av hesum var, at kommunurnar høvdu byggilán í mong ár og tískil eisini stórar byggirentur, sum øktu um kommunuskuldina. Samstundis tóktist tað, sum vóru fleiri kommunur ov seint gjørdar varar við, at hesi prosentini, kommunan skuldi fíggja, vóru í veruleikanum stórar millióna upphæddir.
Í fjórða lagi fær kommunuborgarin ikki eina greiða fatan um, hvat kommununnar virksemi í roynd og veru kostar, tí við tað at landið rindar ein part, er ikki samsvar millum tað, borgarin rindar í kommunuskatti, og tann veruliga kostnaðin av kommunalu uppgávunum.
Av hesum orsøkum, ið nevndar eru, og tí, at ein av meginreglunum í nevndararbeiðinum sambært arbeiðssetninginum er, at fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum, so mælir Kommununevndin til at avtaka tær endurgjaldskipanir, sum nú eru í gildi, viðvíkjandi fígging av

---

[8] Her kann viðmerkjast, at landið ikki á sama hátt leggur upp fyri ávirkanini av sínum tiltøkum á kommunuútreiðslurnar. Til dømis kann nevnast, at bara í 1997 er útreiðslubýtið til dagstovnar broytt soleiðis, at kommunurnar skulu rinda 5% meira, og somuleiðis var givin ein skattalætti til sjómenn, sjálvt um tað lutvíst var mótsvarað, við tað at m.a. partafelagsskatturin var býttur soleiðis, at kommunurnar fingu ein part. Men í hvørgum føri vóru kommunurnar eftirspurdar.

[9] Tað skal tó verða tilskilað, at í 80-unum høvdu kommunurnar einki arbeiðsloysi.

almennum uppgávum. Er ein uppgáva kommunal, so skal kommunan fíggja hesa uppgávu, og er tað harafturímóti ein landsuppgávu, so skal landið eisini fíggja hesa uppgávu. Ella sagt við øðrum orðum, so skal tann, ið umsitur uppgávuna, eisini fíggja hana. Hetta ber við sær, at bert tey, ið taka avgerðir, kunnu áleggja sær sjálvum fíggjarligu ábyrgdina av avgerðunum.

# 7.2 Heildarveitingarskipan

Við atliti at verandi kommunuskipan og sambært kommissorium, er Kommununevndini álagt at greina, um m.a. ein heildarveitingarskipan kann verða nýtt í fíggjarliga samskiftinum millum land og kommunu, ella um ein tílík skipan kann verða brúkt heldur enn verandi endurgjaldsskipan.
Í t.d. Danmørk og millum Danmarkar og Føroya eru nógvar endurgjaldskipanir avtiknar, og ístaðin er gjørd ein heildarveitingarskipan. Blokkurin til kommunurnar í Danmørk er ein partur av kommunufíggingini, og við støði í teimum staðbundnu ynskjunum ger so kommunan sjálv av, hvussu peningurin verður brúktur. Kommunan kann økja útreiðslurnar á ávísum økjum ella seta skattaprosentið niður. Blokkstuðulin, ið er grundaður á skattagrundarlagið hjá kommununi, verður býttur til kommunurnar sum partur av øllum skattagrundarlagnum, og hann ber tí ongar javnandi avleiðingar við sær.
Ein meginregla í nevndararbeiðinum er at lata borgararnar fáa greitt at fata, hvat kommunuvirksemið í roynd og veru kostar. Ein heildarveitingarskipan er í andsøgn við hesa meginreglu (tí tá verður kommunala virksemið fíggjað við skattainntøkuni og blokkinum til kommununa). Nevndin vil tí mæla frá, at ein heildarveitingarskipan verður sett í gildi í Føroyum. Kommununevndin mælir heldur til at gera eina skipan, sum er lík teirri íslendsku, t.e. at javnað verður ávíkavist í lands- og kommuskatti. Hetta merkir, at ístaðin fyri at landið krevur skatt, ið síðan (við støði í nøkrum objektivum kriterium) verður býttur út aftur til kommunurnar sambært eini heildarveitingarskipan, eiga kommunurnar sjálvar at krevja skatt inn.
Fyri at lýsa hetta við einum dømi kunnu vit nevna fólkaskúlan. Fólkaskúlin er ein kommunal uppgáva, men verður fíggjað við eini endurgjaldsskipan, við tað at landið m.a. fíggjar læraralønirnar. Ætlanin er, sum áður nevnt, at taka endurgjaldsskipanirnar av, og at kommunurnar sjálvar skulu fíggja hesa uppgávu. Heldur enn at fáa ein blokk frá landinum fyri læraralønirnar eigur javningin at fara um skattin, so at landsskatturin minkar við tí skattaprosenti, sum læraralønirnar kosta, og kommunuskatturin veksur so samsvarandi við hesum sama skattaprosenti. Í sambandi við tílíka umlegging er neyðugt at rokna út, hvussu nógv læraralønirnar kosta í skattaprosentum. Tá ið skúlin í Íslandi var lagdur burturav til kommunurnar, minkaði landsskatturin 2,74% og kommunuskatturin vaks við 2,79%, t.v.s. at borgarin merkti at kalla einki til broytingina (0,05%). Um kommunan so kann røkja hesa uppgávu fyri minni enn 2,79%, er tað bert ein fyrimunur fyri hana, tí so kann hon brúka peningin til annað endamál.
Av hesum sæst, at kommunuskatturin verður lutvíst størri, og at landskatturin verður lutvíst minni. Men tað øvugta er galdandi, um ein uppgáva verður flutt frá kommununum til landið. Henda skipanin treytar, at tað javnan eru samráðingar millum land og kommunur um tílíkar javningar ávikavist í lands- og kommunuskattinum, bæði tá ið uppgávur verða fluttar millum land og kommunur, men eisini í sambandi við tær lógarbroytingar, sum ávirka kostnaðin hjá kommununum báðar vegir.
Umframt tær javningar í skattaskipanini, sum nevndar eru, eigur skattaskipanin at verða broytt soleiðis, at allur progressivitetur verður í landsskattinum. Hetta er neyðugt, um tann meginreglan skal verða fylgd, at við avgerðarrættinum fylgir eisini tann fíggjarliga ábyrgdin. Ein av høvuðsuppgávunum hjá landinum er býtingaruppgávan, t.v.s. at landið býtir um við skattum, inntøkuflytingum o.ø. nýtslumøguleikarnar hjá borgarunum fyri at veita trygd fyri, at teir allir fáa

ein minstapart av samfelagskøkuni. Hetta er ein landsuppgáva, sum landið einsamalt tekur avgerð um, og fíggingin eigur tí at vera hjá landinum. Tað ber m.a. við sær, at botnfrádrátturin í kommunuskattinum verður avtikin, og samtykkja landsins myndugleikar t.d., at inntøkur undir 20.000 kr. skulu ikki rinda skatt, so eigur kommunan ístaðin at álíkna kommunuskatt av teimum 20.000 kr., og landið skal so endurrinda borgaranum kommunuskattin av hesum 20.000 kr.
Kommununevndin mælir til, at skattaskipanin hjá kommununum fyri fysiskar persónar verður so einfald, sum til ber, m.a. at kommunuskattur verður álíknaður persónligu, skattskyldugu inntøkuni. Hetta merkir, at landið rindar allar frádráttir: FAS, barnafrádrátt, landsskattafrádrátt, rentufrádrátt, og at tað bert er landsskatturin, sum verður ávirkaður av skattaloftinum, ið ásett er o.s.fr.
Kommunurnar eiga eisini at hava møguleikan at áleggja gjøld, um tað kann verða brúkt at stýra nýtsluni við, ella um bert ávísir bólkar í kommununi brúka tænastuna. Dømi í so máta kann vera eitt gjald á vatnnýtsluni, ella eitt bátahyljagjald. Fyri lógarásettar uppgávur skal lógarheimild vera fyri at kunna áseta gjald.

# 7.3 Javning

Við atliti at verandi kommunuskipan og sambært arbeiðssetningi sínum er Kommununevndini eisini álagt at greina, um m.a. javningarskipan kann verða nýtt í fíggjarliga samskiftinum millum land og kommunu.
Ætlanin við einum nýggjum kommunubygnaði við færri og størri kommunueindum er m.a. at leggja uppgávur frá landinum til kommunurnar at umsita. Allar kommunur verða javnsettar mótvegis lóggávuni, t.e. at tær allar skulu loysa tær somu uppgávurnar. Í hesum føri eigur at verða miðað eftir, at allar kommunur eru fíggjarliga førar fyri at loysa tær kommunalu uppgávurnar, sjálvt um umstøðurnar hjá teimum ikki eru tær somu. Við støði í teirri meginreglu, at kommunurnar skulu vera javnsettar, tá ið um ræður at røkja *lógarásettar*[10] uppgávur, er neyðugt at leggja upp fyri ójavnanum í fíggingarskipanini.
Hesi viðurskifti benda á eina javningarskipan. Endamálið við eini tílíkari skipan er at tryggja øllum kommununum umstøður at veita eitt ávíst tænastustøði, tá ið tær skulu røkja tær lógarásettu uppgávurnar. Við hesum slepst undan, at stórur munur verður í kommunuskattaprosentinum, tá ið um ræður at røkja tær lógarásettu uppgávurnar. Ein ávísur munur í kommunuskattaprosentinum vil tó vera við atliti at tænastustøðinum, tí ætlanin við tí kommunalu skipanini er júst tann, at kommunurnar skulu hava møguleika at laga skattaprosentið og tænastuna eftir staðbundnu ynskjum borgaranna. Endamálið er tí ikki at tryggja, at kommunurnar eru eins, men at tær hava líknandi umstøður, tá ið um ræður at røkja tær lógarásettu uppgávurnar.

Munur í inntøkugrundarlagi og útreiðslutørvi eru umstøður, ið volda, at ymiskt er, sum kommunurnar eru fyri:

- Kommunurnar hava ikki sama **inntøkugrundarlag**. Í summum kommunum búgva nógv fólk við stórum inntøkum, og í øðrum kommunum er tað øvugta galdandi.
- Kommunurnar hava eisini ymiskan **útreiðslutørv**, tí bæði tann sosiali bygnaðurin og aldurssamansetingin í kommununum eru so ymisk kommunanna millum, so t.d. hevur ein kommuna við nógvum børnum stórar útreiðslur til dagansingarpláss og til skúla; men harafturímóti hevur ein kommuna við fáum børnum ikki so stórar útreiðslur á hesum øki.

[10] Ein minniluti í Kommununevndini mælir til, at tað skulu vera lógarásettar og náttúrurættarligar uppgávur.

Ein javnan fatar tí um:

- javnan av muni í inntøkugrundarlagnum pr. íbúgva hjá kommununum
- javnan av muni í útreiðslutørvinum pr. íbúgva hjá kommununum

## 7.3.1 Javning eftir inntøkugrundarlagnum

Toll- og Skattstova Føroya metir upp í november mánaði inntøkugrundarlagið fyri komandi ár. Fyri A-inntøkur verður inntøkugrundarlagið gjørt upp sum tann veruliga inntøkan frá 1.1. til 1.11 og roknað til eina ársinntøku. Ársinntøkan, sum er tann skattskylduga inntøkan ella inntøka minus inntøkufrádráttir, er so inntøkugrundarlagið hjá viðkomandi fyri komandi ár. Fyri kreppuna var vanligt at hækka inntøkugrundarlagið við einum lønarvøkstri, sum oftast var fingin til vega frá Hagstovuni. Men hetta verður ikki gjørt longur.
Fyri B-inntøkur verður inntøkugrundarlagið sett við støði í tí seinast kendu veruligu inntøkuni. Tó verða broytingar í fyribilsskattaskránni hjá persóninum tiknar við.

**Dømi um javning eftir inntøkutørvi:**

| | |
|---|---|
| Kommuna I | Kommuna II |
| 2 skattgjaldarar | 2 skattgjaldarar |
| Inntøkugrundarlag | Inntøkugrundarlag |
| 100.000 pr. skattgjaldara | 50.000 pr. skattgjaldara |
| 2 børn, sum hvørt kostar | 2 børn, sum hvørt kostar |
| 10.000 kr. í skúlaútreiðslum | 10.000 kr. í skúlaútreiðslum |
| | |
| Inntøkugrundarlagið hjá hesi | Inntøkugrundarlagið hjá hesi |
| kommunu er 200.000 kr. tilsamans, | kommunu er 100.000 kr. tilsamans, |
| og útreiðslurnar eru 20.000 kr. | og útreiðslurnar eru 20.000 kr. |
| tilsamans ella 10% | tilsamans ella 20% |

Hetta eru dømi um 2 kommunur, sum eru í somu støðu; men har inntøkugrundarlagið í kommunu I er dupult so stórt, sum tað er í kommunu II. Umstøðurnar at røkja ta lógarfestu uppgávuna, t.d. skúlagongd hjá børnunum, eru tí ikki tær somu.
Sum tað sæst av hesum dømi, skulu íbúgvarnir í kommunu I rinda 10% í skatt fyri at gjalda skúlagongdina hjá børnunum, og í kommuna II skulu teir gjalda 20% í skatt fyri somu tænastu. Um einki verður gjørt við hetta, er vandi fyri, at borgararnir í kommunu II flyta til kommunu I, av tí at tað er munandi bíligari at liva í hesi kommununi.
Til tess at forða hesi gongdini er umráðandi, at umstøðurnar í hesum báðum kommununum verða mestsum tær somu. Og tað kann (m.a.) verða gjørt við inntøkujavning, sum í hesum døminum merkir, at kommuna I, ið hevur tað hægra inntøkugrundarlagið, skal rinda pening til kommunu II, ið hevur tað lægra inntøkugrundarlagið.
Henda talvan sýnir inntøkugrundarlagið, fólkatalið og skattagrundarlagið pr. íbúgva í teimum nýggju" kommunueindunum. Talvan er grundarlagið undir myndini niðanfyri.

| 1996 | Norðoyggjar | Eysturoy | Sundalagið | Streymoy | Vágar | Sandoy | Suðuroy | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattagrundarlag í 1000 kr. | 412.003 | 622.806 | 146.002 | 2.012.881 | 212.065 | 90.741 | 343.541 | 3.840.039 |
| Fólkatal við | 5.609 | 8.345 | 2.082 | 18.639 | 2.595 | 1.473 | 5.044 | 43.797 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| árslok | | | | | | | | |
| Skattagrundarlag pr. íbúgva | 73.454 | 74.632 | 70.126 | 107.993 | 81.721 | 61.603 | 68.109 | 87.698 |
| Skattagrundarl. í % av miðalskattagr. | 84 | 85 | 80 | 123 | 93 | 70 | 78 | 100 |

Viðm.: Elduvíkar kommuna er í Eysturoy og Funnings kommuna er í Sundalagnum.

Myndin sýnir, at inntøkugrundarlagið pr. íbúgva í Streymoyarøkinum er tað einasta, sum er hægri enn inntøkugrundarlagið pr. íbúgva í øllum landinum (miðalinntøkugrundarlagið).




Harafturímóti er inntøkugrundarlagið í Sandoyarøkinum ikki meira enn 70% av miðalinntøkugrundarlagnum fyri landið. Sandoyarøkið er eisini eitt tað øki, sum hevur verið meinast rakt av kreppuni.
Fyri at gera umstøðurnar hjá kommununum at røkja tær lógarfestu uppgávur javnari er neyðugt við inntøkujavning. Javningin verður funnin soleiðis:

> inntøkugrundarlagið pr. íbúgva hjá kommunueindini verður drigin frá miðalinntøkugrundarlagnum pr. íbúgva í øllum landinum og so faldað við javningarprosentinum og einum felags roknaðum skattaprosenti og íbúgvatalinum.

Verður hetta talið positivt (t. e. at inntøkugrundarlagið í kommununi er minni enn miðalinntøkugrundarlagið), fær kommunan pening gjøgnum javningarskipanina. Kommunan skal harafturímóti rinda pening til skipanina, um hetta talið er negativt.
Felags roknaða skattaprosentið skal veita trygd fyri, at kommunueindin ikki kann ávirka javningina við at broyta sítt skattaprosent, so heldur enn at falda inntøkugrundarlagið eftir javningina við skattaprosentinum hjá kommununi verður roknað fram til eitt felags skattaprosent. Hetta verður gjørt á tann hátt, at allar útreiðslurnar hjá kommunueindunum verða settar í mun til alt inntøkugrundarlagið hjá kommunueindunum. Hetta tal var fyri 1996: 674.847/3.840.039=17,57%.

Dømi um inntøkujavning sæst í talvuni og á myndini niðanfyri. Her er roknað við 33 prosenta javning.

| 1996 | Norð-oyggjar | Eysturoy | Sunda-lagið | Streymoy | Vágar | Sandoy | Suðuroy | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattagrundarlag í | 412.003 | 622.806 | 146.002 | 2.012.881 | 212.065 | 90.741 | 343.541 | 3.840.039 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1000 kr. | | | | | | | | |
| Fólktal við árslok | 5.609 | 8.345 | 2.082 | 18.639 | 2.595 | 1.473 | 5.044 | 43.797 |
| Skattagrundarlag pr. íbúgva | 73.454 | 74.632 | 70.126 | 107.993 | 81.721 | 61.603 | 68.109 | 87.698 |
| Skattagr. í % av miðalskattagr. | 84 | 85 | 80 | 123 | 93 | 70 | 78 | 100 |
| Skattagrundarlag eftir 33% javning | 78.155 | 78.944 | 75.925 | 101.296 | 83.693 | 70.214 | 74.573 | |
| Gjalding til/frá øki í 1000 kr. | 4.632 | 6.322 | 2.121 | -21.933 | 899 | 2.229 | 5.729 | |

Viðm.: Elduvíkar kommuna er í Eysturoy og Funnings kommuna er í Sundalagnum.

Í sambandi við eina javning av inntøkugrundarlagnum er tað sostatt Streymoyarøkið, ið fer at rinda til hini økini. Í hesum dømi fáa hini økini eitt ískoyti, sum er 33% av muninum millum miðalinntøkugrundarlagið í landinum og inntøkugrundarlagið hjá kommununi.




## 7.3.2 Javning eftir útreiðslutørvi

Tað eru 3 viðurskifti, ið volda, at munur er á útreiðslustøði kommunanna:

1. virkisførismunur - summar kommunur eru virkisførari enn aðrar
2. munur á tænastuveiting - tænastustøði kommunanna er ymiskt eftir egnum ynski og
3. munur er á útreiðslutørvi

| |
|---|
| *Munur á virkisføri* |
| *Munur á valdum tænastustøði* |
| *Munur á útreiðslutørvi* |

Til ber hjá kommununi at ávirka rakstrarvirknið, og hon velur sjálv sítt tænastustøði. Tað er sostatt bert munurin á útreiðslutørvinum, sum kommunan ikki beinleiðis kann ávirka, og tí er tað bert hesin tørvur, sum eigur at verða javnaður.

**Dømi um javning eftir útreiðslutørvi:**

| | |
|---|---|
| Kommuna I | Kommuna II |
| 2 skattgjaldarar | 2 skattgjaldarar |
| Inntøkugrundarlag 100.000 | Inntøkugrundarlag 100.000 |
| pr. skattgjaldara | pr. skattgjaldara |
| 2 børn, sum hvørt kostar | 4 børn, sum hvørt kostar |
| 10.000 kr. í skúlaútreiðslum | 10.000 kr. í skúlaútreiðslum |
| Skúlaútreiðslurnar eru | Skúlaútreiðslurnar eru |
| tilsamans 20.000 kr. | tilsamans 40.000 kr. |

Av hesum sæst, at inntøkugrundarlagið hjá kommununum er tað sama, men at kommuna I hevur 2 børn, og kommuna II hevur 4 børn. Av tí vera útreiðslurnar hjá kommunu II 40.000 kr. tað er tvífalt so stórar, sum tær eru hjá kommunu I. Til tess at fíggja útreiðslurnar skulu borgararnir í kommunu I rinda 10% í skatti; men borgararnir í kommunu II skulu harafturímóti rinda 20%.
Verður einki gjørt við tílík viðurskifti, er vandi fyri, at borgararnir í kommunu II flyta til kommunu I, tí tað er munandi bíligari at liva í hesi kommunu. Í hesum føri er tí neyðugt at javna eftir útreiðslutørvinum hjá kommununum, so at kommuna I, ið hevur tann lítla útreiðslutørvin, rindar til kommunu II, ið hevur tann stóra útreiðslutørvin.
Tað er ikki so lætt at javna eftir útreiðslutørvi sum eftir inntøkugrundarlagnum. Neyðugt er at finna eitt mál fyri útreiðslutørvinum hjá hvørji einstakari kommunueind. Hetta eigur at verða gjørt við sakligum metingarstøði (objektivum kriterium), so at kommunan sjálv ikki kann ávirka javningina. Harafturímóti eigur tað sakliga metingarstøðið at lýsa tann veruliga eftirspurningartørvin fyri tær tænastur, javnað verður fyri.
Í Danmørk er útreiðslutørvurin hjá tí einstøku kommununi grundaður á hesi 3 viðurskifti:

- eitt grundískoyti
- tann aldurstreytaða útreiðslutørvin hjá kommununi, sum telur 80% og
- tann sosialt treytaða útreiðslutørvin hjá kommununi, sum telur 20%

Grundískoytið er við, av tí at ein og hvør kommuna, stór ella lítil, hevur fastar útreiðslur. Grundískoytið leggur serliga upp fyri tær meirútreiðslur, sum eru í teimum smæstu kommununum.
Tann aldurstreytaði útreiðslutørvurin hjá kommununi verður funnin á tann hátt, at íbúgvatalið í hvørjum aldursbólki verður faldað við einum miðalkostnaði fyri ein íbúgva í hvørjum aldursbólki. Tað eru serliga børn og tey eldru, ið her hava týdning fyri útreiðslutørvin hjá kommununi. Av børnum standast útreiðslur til dagstovnar, skúlar o.a., og av teimum eldru eru útreiðslur til heimahjálp, ellisheim, pensjón o.s.fr.
Tann sosialt treytaði útreiðslutørvurin hjá kommununi verður funnin við støði í sosialum kriterium. Í Danmørk eru hesi metingarstøði m.a., hvussu nógv børn eru í kommununi, sum bert hava ein forsyrgjara, hvussu nógv arbeiðsleys eru í aldrinum 20-59 ár, hvussu nógv fólk eru millum 25-49 ár, sum ikki hava nakra vinnuliga útbúgving o.s.fr. Hesi viðurskifti sýna ta sosialu tyngdina í kommununi.
Tá ið útreiðslutørvurin hjá kommununi er funnin, verður javningin funnin á tann hátt, at:

> miðalútreiðslutørvurin pr. íbúgva í øllum kommunum verður drigin frá útreiðslutørvinum pr. íbúgva í kommununi faldað við javningarprosentinum og við íbúgvatalinum.

Um talið er negativt, (t.e. at útreiðslutørvurin hjá kommununi er minni enn miðalútreiðslutørvurin fyri landið), skal kommunan rinda til javningarskipanina. Kommunan fær harafturímóti pengar frá

javningarskipanini, um talið er positivt. Við øðrum orðum sagt, koma kommunur við lítlum útreiðslutørvi at rinda til tær kommunur, ið hava nógvan útreiðslutørv fyri neyðini.
Hetta yvirlitið sýnir okkum eitt dømi um útreiðslujavningina á skúlaøkinum. Men av tí at skúlaøkið bert er ein partur av kommununnar útreiðslum, so eigur hetta dømið at verða tikið við fyrivarni, við tað at tað einki sigur um allan útreiðslutørvin hjá eini kommunu í so máta. Somuleiðis er støðið tikið í verandi kommunum, so at lagt er ikki uppfyri, at stórar kommunueindir fara møguliga at gagnnýta raksturin betur.

| Øki | Norð-oyggjar | Eysturoy | Sunda-lagið | Streymoy | Vágar | Sandoy | Suðuroy | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Næmingar | 877 | 1.405 | 401 | 2.945 | 418 | 222 | 750 | 7018 |
| Tímar | 1694 | 2.650 | 860 | 5.229 | 801 | 512 | 1.524 | 13.270 |
| Krónur | 15.415.400 | 24.115.000 | 7.826.000 | 47.583.900 | 7.289.100 | 4.659.200 | 13.868.400 | 120.757.000 |
| Miðal/næm. | 17.577 | 17.164 | 19.516 | 16.158 | 17.438 | 20.987 | 18.491 | 17.207 |
| Javning pr. næm. | 122 | -14 | 762 | -346 | 76 | 1.248 | 424 | |
| Tilsamans | 107.275 | -19.962 | 305.610 | -1.019.697 | 31.903 | 276.969 | 317.900 | |

Viðm.: Elduvíkar kommuna er í Eysturoy og Funnings kommuna er í Sundalagnum.

Í hesum dømi er eisini javnað við 33%. Sum vit síggja á talvuni, kostar ein næmingur í miðal kr. 17.207 árliga, um roknað verður við, at hvør undirvísingartími kostar 175 kr. Av talvuni sæst, at tað bert eru Streymoy og Eysturoy, ið hava minni útreiðslutørv, enn miðaltørvurin er pr. næming. Tað verða tí hesar kommunur, ið skulu rinda til hinar kommunurnar.

# 7.4 Ráðlegging um eina javningarskipan

Ein javningarskipan kann verða ráðløgd á ymiskan hátt. Til ber, at kommunurnar sjálvar rinda ein part av sínum skattainntøkum í ein javningargrunn. So verður tað uppgáva grunsins at býta peningin millum kommunurnar. Í hesum føri verður tað javnað millum kommunurnar.
Nú ein uppgáva skal verða flutt frá landi til kommunur, og skatturin so samstundis verður javnaður, sí kapitul 7.2, so hevði borið til í tí viðfangi at goldið javningargrunninum ein part av hesum skatti. Um t.d. tann uppgáva, ið flutt verður, kostar 10%, so lækkar landskatturin 10%, kommunuskatturin hækkar 8%, og javningargrunnurin fær 2%.
Til ber eisini at javna frá landi til kommunur, so at landið rindar ein part av sínum inntøkum í tann javningargrunn, sum frammanfyri er nevndur. Tað er hesin háttur, sum nýttur verður í Íslandi. Hvørt hesin ella hasin háttur verður nýttur, so er tað, ið hvussu so er, peningur hjá teimum somu borgarum, ið javnað verður við.

# 7.5 Viðmerkingar til javningina

Av tí at javningarskipanin er í tveimum, er tað møguligt, at sama kommuna skal rinda pening til javningina, tá ið tað verður inntøkujavnað, og at hon fær pening aftur frá javningarskipanini, tá ið javnað verður eftir útreiðslutørvinum.
Kommununevndin ásannar, at javning er neyðug, nú uppgávur skulu verða lagdar til kommunurnar. Kommununevndin mælir tí til, at nevnd verður sett at kanna hesi viðurskifti gjøllari, og eigur henda

nevndin at gera uppskot um eina javningarskipan her á landi. Tað er serliga javningin av útreiðslutørvinum, ið krevur nógva fyrireiking. Tað skal viðmerkjast, at javningarskipanin eigur at verða gjørd við sakligum metingarstøði (objektivum kriterium), so kommunurnar ikki kunnu ávirka javningina. Eisini skal viðmerkjast, at ein javningarskipan eigur sum minst at ávirka eggjanina hjá kommununum at skapa búskaparligan vøkstur, eins og hon sum minst eigur at órógva meginregluna um, at borgarin greitt skal kunna fata kostnaðin av tí kommunala virkseminum.

# 8. Reglur

Í arbeiðssetningi sínum er álagt Kommununevndini at gera reglur um fíggjarstýringina hjá kommununum, og snýr hetta seg um: fíggjarætlan, bókhald, roknskaparviðurskifti og reglur um lántøku og veðhaldsbindingar. Somuleiðis er álagt kommununevndini at koma við tilmæli um avmarkingar mótvegis tí privata vinnulívinum.

## 8.1 Fíggjarstýringin

Í løtuni brúka flestu kommunur kontoskipanina frá landsstýrinum, tó at líkt er til, at kommunurnar hava lagað hesa skipanina eftir teirra tørvi.
Nú kommunurnar skulu leggja saman í størri eindir, er gott høvi (og helst einasta høvið) at broyta fíggjarstýringina hjá kommununum, tí nýggja kommunueindin skal kortini laga sína fíggjarstýring til ta stóru eindina. Hetta merkir, at fíggjarstýringarskipanirnar í teimum gomlu kommununum skulu nú verða sameindar í eina og somu skipan.
Kommununevndin mælir staðiliga til, at allar tær nýggju kommunueindirnar fara at nýta eina javngjørda skipan, so at bæði kontoskipan og bókhaldsmeginreglur verða javngjørdar (standardiseraðar)[11]. Hetta merkir, at kommunurnar t.d. skulu bóka tíðaravmarkingar á sama hátt, at ognirnar verða virðismettar á sama hátt o.s.fr.
Fyrimunirnir við eini javngjørdari skipan á hesum øki eru nógvir. Hjá kommununum verður lagamanni at bera ársroknskapirnar saman hvør hjá aðrari og sostatt síggja, hvussu nógv tað kommunala virksemið kostar í teimum ymisku kommunueindunum í mun til sína egnu kommunu. Er munur á, ber til at læra hvør av øðrum og á henda hátt menna eina enn virknari kommunu. Hagtølini vera tí frálík stýringaramboð at hava hjá kommununi.
Eisini ber til at leggja tølini hjá kommununum saman, tá ið tey eru gjørd upp á sama hátt. Hesi tøl kunnu vera hent at hava t.d. til árligu samráðingarnar við landsstýrið. Avgerðar

grundarlagið verður munandi betri. Somuleiðis vera tølini sera hent at nýta í eini møguligari javningarskipan.
Harumframt er ein fyrisett (standard) fíggjarstýringarskipan góð at hava hjá teimum starvsfólkum, sum dagliga arbeiða við fíggjarstýringini í kommununum. Tey fáa nú fleiri starvsfelagar í hinum kommununum, sum arbeiða við teimum somu spurningunum. Við hesi mannagongd verða spurningarnir loystir á sama grundarlagi, eins og grundarlagið at menna fíggjarstýringina eisini verður tað sama, og skuldi hetta havt góða ávirkan á alt arbeiðslagið.
Ein fyrisett skipan á fíggjarstýringarøkinum verður eisini ein stórur fyrimunur hjá landinum. Hagtølini verða munandi betri, og nógv léttari verður at bera gongdina í kommununum saman, og er hetta tí eitt gott stýringaramboð at hava hjá landinum, við tað at avgerðargrundarlagið hjá landinum eisini verður munandi betri. Við eini fyrisettari skipan verður eisini munandi léttari at leggja hagtølini saman og at fáa tey inn í tjóðarroknskapin. Hetta er eitt sera týdningarmikið stýringaramboð at hava hjá einum og hvørjum landi.

---

[11] Tað hevði verið sera gott fyri landsumsitingina sum heild at fáa eina einsháttaða skráseting fyri allan tann almenna sektorin.

Niðurstøðan er tí tann, at kommunurnar skulu brúka eina fyrisetta (standard) kontoskipan og hava somu bókhaldsmeginreglur. Tað er so eyðvitað, at kontoskipanin hjá kommununum eigur at verða grundað á nýggju kontoskipanina hjá landinum. Somuleiðis kunnu Roknskaparverk landsins" og viðkomandi kunngerð um bókhald hóskandi verða lagað til tørv kommunanna. Í kommunustýrislógini eigur tí at verða heimilað landsstýrinum at seta kunngerðir um neyvari reglur um fíggjarstýringina hjá kommununum í gildi[12]. Mælt verður til at arbeiðsbólkur beinanvegin verður settur til at gera neyðugar tillagingar.
Umframt at brúka fyrisetta kontoætlan og bókhaldsmeginreglur eiga kommunurnar sjálvar at taka støðu til, hvussu tær ráðleggja sína fíggjarstýring, hvørja telduskipan tær brúka o.s.fr. Á henda hátt kunnu tær sjálvar laga skipanina, so at tær fáa tað at vita úr skipanini, tær ynskja. Treytin er, sum sagt, bara tann, at kontoskipanin og bókhaldsmeginreglurnar eru tær somu.
Ein møguleiki hjá kommununum er at festa seg upp í nýggju skipanina hjá Føroya Gjaldsstovu. Hetta ber væl til, og

fyrimunurin í so máta er, at kommunurnar kunnu spara nógvan pening, við tað at:

- landið longu hevur gjørt nógvar royndir við skipanini, m.a. eisini við viðgerðini av tí partinum, sum skal leggjast til kommunurnar
- land og kommunur kunnu nýta somu serkønu hjálp
- skifti við starvsfólkum millum land og kommunur verður løtt
- uppsetingar, útskriftir o.t. kunnu endurnýtast og
- samanstillingin av teimum kommunalu og landskassans skrásetingunum verður eintýðug og sostatt løtt og skjót at arbeiða við.

Viðvíkjandi grannskoðan mælir Kommununevndin til, at landsgrannskoðarin ger karmarnar um grannskoðanina; men at kommunurnar sjálvar velja sær ein grannskoðara (sum tó skal vera ríkisgóðkendur ella skrásettur) at grannskoða roknskapin, eins og tær higartil hava gjørt. Tað skal viðmerkjast, at bókhaldið og grannskoðanin skal vera skild sundur.

# 8.2 Lántøka

Aðalmeginreglan er tann, at kommunurnar skulu fíggja seg sjálvar, so at samband er millum skatt og tænastustøðið. Av hesum koma kommunuútreiðslurnar at dugna sama árið, sum skattafíggingin verður goldin.
Viðvíkjandi íløgunum er hetta tó ein trupulleiki, tí um so er, at kommunurnar skulu fíggja eina íløgu um skatt sama ár, íløgan verður gjørd, kann tað bera við sær, at skattaprosentini í kommununum verða ógvuliga skiftandi frá einum ári til annað.
Og meginreglan um, at kommunuútreiðslurnar skulu dugna sama árið, verður brotin, tí vanligt er, at íløgurnar verða til gagns fleiri ár. Hetta merkir, at regluligt samband verður ikki millum skattin og tænastustøðið. Tí eigur kommunum at verða loyvt at fíggja íløgur (ikki rakstur) við lántøku. Tað skal viðmerkjast, at bæði rakstur og íløgur eiga at standa á fíggjarætlanini. Munurin millum tær samlaðu útreiðslurnar og inntøkurnar sæst tá annaðhvørt sum gjaldførisøking ella sum

[12] Tað skal undirstrikast, at áðrenn landsstýrið kann miðfirra fíggjarligu ábyrdinga, má landsstýrið fastleggja, hvussu skrásetingarnar úti í kommununum skal fara fram.

gjaldførisminking vegna møguliga lántøku. Eru íløgurnar stórar, er ivaleyst neyðugt at taka lán, og øvugt, um íløgurnar eru smáar.
Vit vita av beiskum royndum, at tað tó er neyðugt bæði at avmarka kommunulántøkurnar og at stýra teimum. Hetta er eisini vanligt at gera í grannalondum okkara. Í Íslandi verður t.d. ikki góðtikið, um nettoskuldin er omanfyri umleið 50% av eini álíkning, og at neyðugt er at verða varin, um nettoskuldin verður umleið 80% av álíkningini. Noreg og Svøríki hava eisini avmarkingar, og í Danmørk eru sera strengar avmarkingar í gildi.
Fyri at gera skipanina so einfalda, sum til ber, verður ásett, at nettoskuldin hjá kommununum ikki kann verða størri enn eina álíkning við miðalskattaprosentinum í skattabandinum, sí 5.3.17, og verður lániloftið sostatt sett til eina álíkning[13]. Undir lániloftið kunnu kommunurnar sjálvar gera av til hvørjar íløgur, lænt verður. Tað er ikki neyðugt, at landsstýrið skal góðkenna hetta fyri hvørt lánið, um kommunan bert heldur seg undir lániloftið. Lántøkan verður tá einans kommunanna ábyrgd. Tað er tó umráðandi neyvt at lýsa hvat kemur undir hugtakið lántøka. Kommununevndin mælir tí til, at arbeiðsbólkurin, sum nevndur er í kapittul 8.1, eisini fær hesa uppgávu til viðgerðar.
Tað skal verða viðmerkt, at uppskotið um kommunustýrislógina heimilar landsstýrinum at áleggja kommununum at gera neyðugar broytingar í fíggjarætlanini ella eykajáttanum, um nettoskuldin hjá kommununi er meir enn ein álíkning við miðalskattaprosentinum í skattabandinum.
Umframt nevnda lániloftið er eisini umráðandi, at virksemið hjá kommununum - og tískil eisini lántøkan, samsvarar við fíggjarpolitikk landsins. Í teimum árligu samráðingunum skulu tí karmar verða avráddir hvørt ár millum land og kommunur, sí eisini kapitul 5.5.

### 8.2.1 Verandi kommunuskuld

Tað er ikki álagt Kommununevndini í arbeiðssetninginum at viðgera kommunuskuldina. Sum skrivað er í verkætlanini hjá Kommununevndini, so hevur skuldin ikki so nógv við sjálvan kommunubygnaðin at gera; men kommunuskuldin er ein trupulleiki, ið ikki kann verða skúgvaður til viks, um roynt verður í stuttum at líta frameftir.

Kommunuskuldin er eisini ein tann stórsta forðingin fyri kommunusamanlegging. Tær 49 kommunurnar eru sera ymiskar fyri, sí fylgiskjal B í Tátti I, Parti II. Summar hava onga skuld, og er tað aloftast tær smáu kommunurnar, og aðrar kommunur standa í botnleysari skuld. Við eini kommunusamanlegging verða skuldafríar kommunur lagdar saman við skuldabundnar kommunur, og veldur hetta sjávsagt mótstøðu í teimum kommunum, sum lítla og onga skuld hava.
Við árslok 1995 var ein avtala gjørd millum kommunurnar og lánveitararnar (kreditorarnar). Talan er um eina 5 ára avtalu, sum tí er í gildi til árslok ár 2000. Eftir hetta verður so vent aftur til tær gomlu avtalurnar, um ikki annað er/verður avtalað. Her er at viðmerkja, at tað snýr seg um 24 kommunur, sum við árslok 1996 høvdu størri nettoskuld enn eina skattaálíkning, við einum skattaprosenti á 23%. Við árslok 1996 høvdu 12 av hesum kommunum eina nettoskuld, ið var meir enn 3 skattaálíkningar, sí fylgiskjal A[14].

---

[13] At áseta lániloftið hjá kommununum til eina álíkning við miðalskattaprosentinum í skattabandinum ber við sær, at nógvar kommunur kunnu ikki taka lán komandi árini.

[14] Tað skal viðmerkjast, at í 1997 vóru skattainntøkurnar hjá kommununum næstan 100 mio. kr. størri enn ætlað (14,6%), og fyri teir fyrstu 5 mánaðirnar av eru tær kommunalu skattainntøkurnar, ið mettar eru eftir ársgrundarlagnum, 33 mió. kr. størri enn ætlað (4,5%). Hetta hevur sjálvandi bøtt um kommunubúskapin. Tað eru tó enn kommunur, sum standa í botnleysari skuld, og verður hetta ein trupulleiki.

Umframt, at sjálv skuldin er ein trupulleiki fyri kommunusamanleggingina, heldur Kommununevndin seg síggja tveir aðrar trupulleikar:

1) at nakrar kommunur standa í botnleysari skuld við teirri avleiðing, at bæði rentur og avdráttir taka ov nógv av fíggjarætlanini
2) at tað eru so nógvir lántakarar (49), sum hvør sær hava lutfalsliga lítla trygd og lítlan sakkunnleika til peningamarknaðin, og at kommunurnar fáa tí í síni heild ikki nóg lagaligar treytir á peningamarknaðinum.

Ymisk uppskot eru gjørd til tess at loysa hesar trupulleikar.
Í einum uppskoti verður mælt til, at skuldin hjá teimum kommunum, ið eru mest skuldabundnar, verður sanerað niður til 3 álíkningar við støði í einum skattaprosenti, sum verður 23. Saneringin er bundin saman við eini kommunusamanlegging, og mælt verður til at fíggja saneringina við at nýta tað, sum stendur í kommunala láni- og veðhaldsgrunninum. Hildið verður, at tílík sanering kostar umleið 115 mio. kr., ið svarar til tað, sum stendur í láni- og veðhaldsgrunninum. Fyrimun

urin við hesum uppskoti er, at tá hevur eingin kommuna størri skuld enn 3 álíkningar, og hildið verður, at tær tá kunnu hóra undan við tílíkari skuld. Vansin við hesum er í fyrstu syftu tó tann, at uppskotið treytar, at menningin í búskapinum verður tann sama, sum hon hevur verið tey bæði seinastu árini, og í øðrum lagi, at talan er um eina almenna umfígging (sanering), ið ikki leggur uppfyri, at umstøðurnar als ikki eru tær somu í kommununum. Triði vansin er, at peningurin í láni- og veðhaldsgrunninum so verður brúktur og tískil ikki endurrindaður kommununum, og eru kommunur ímóti hesum framferðarhátti. Henda loysnin roynir at loysa nevnda trupulleika 1 og lutvís eisini trupulleika 2, við tað at saneringin er tengd at eini kommunusamanlegging.
Tvey onnur uppskot, sum líkjast hvørjum øðrum, eru eisini gjørd. Hesi uppskot royna í báðum førum at loysa nevnda trupulleika 2. Høvuðssjónarmiðini í báðum myndlunum eru, at ein kommunalur lánigrunnur ella stovnur verður stovnaður. Grunnurin verður so lántakari mótvegis lánveitaranum og lánveitarin mótvegis teimum einstøku kommununum. Hetta merkir, at kommunali lánigrunnurin skal umfíggja verandi kommunulán. Í hesum viðfangi ræður um, at kommunali lánigrunnurin hevur eina samhaldsfasta trygd aftan fyri seg, og skotið verður upp at brúka kommunala láni- og veðhaldsgrunn til hetta endamál, og um so skuldi verið, at kommunurnar rinda meira inn í grunnin. Tær kunnu so fáa lán úr grunninum við rentu, ið samsvarar við kreditvirðið hjá tí einstøku kommununi.
Fyrimunurin við hesi skipan er tann, at tað er *ein* partur, sum fer stinnari út á peningamarknaðin og við størri førleika (grunnurin vil menna ein serkunnleika á økinum) enn tí, hvør einstøk kommuna hevur. Við hesum verða lánitreytirnar eisini lagaligari. Og lánitreytirnar til kommunurnar verða so eisini settar eftir, hvussu støðan er hjá hvørji einstakari kommunu. Vansin við hesum er, at eitt millumlið verður millum kommunurnar og endaliga lániveitaran, og økir tað um lánikostnaðin. Tó verður meira vunnið, enn mist verður. Uppskotini loysa heldur ikki nevnda trupulleika 1.
Best hevði tí verið at funnið eina loysn, sum loysti báðar hesar trupulleikar. Ein møguleiki hevði verið at brúka kommunala láni- og veðhaldsgrunnin sum ein kommunalan lánigrunn, so sum nevnt er frammanfyri. Hesin grunnur skuldi so eisini fingið heimild at veitt kommununum rentufrí lán og kanska eisini sanering, um einki annað var til ráða at taka. Á henda hátt bar til at loysa trupulleika 1 og 2. Í Íslandi er ein tílíkur lánigrunnur. Um so skuldi verið, at mótstøða er ímóti einum tílíkum grunni, so er óneyðugt, at hann skal verða varandi, men at hann bert skal vera eina skiftistíð, til allar kommunurnar eru komnar fyri seg aftur.

Ein heilt onnur loysn á trupulleikunum er at brúka loysnina við kommunala lánigrunninum, samstundis sum kommunurnar kundu roynt at minkað um skuldina við t.d. at selt burtur av ognum sínum. SEV er ein eyðsæddur møguleiki í so máta. Allar kommunur eru við í kommunala samstarvinum um SEV. Tær kundu selt stovnin fyri hægsta boð og brúkt peningin at endurrindað skuldina við. Við árslok 1997 javnvigaði fíggjarstøðan hjá SEV við 552 mio. kr., og øll eginognin var slakar 160 mio. IRF og KB eru eisini ognir, ið seldar kundu verið á sama hátt sum SEV. Men hetta er tó ikki so einfalt sum SEV-dømið, við tað at talan er um 2 virki, og at allar kommunur ikki eru limir í IRF.
Uppaftur ein annar møguleiki er, at landið kemur við saneringspeningi at loysa trupulleika 1. Fyrimunurin við hesum framferðarhátti er, at tað ikki verður sanerað ímillum kommunurnar sínámillum, men millum land og kommunur.
Til endans skal tó viðmerkjast, at sum búskaparmenningin hevur verið síðstu árini, hevur hon verið til fyrimunar fyri kommunurnar, og tí man vera best at vita, hvussu leikur fer í komandi døgum, áðrenn farið verður undir at sanera kommunuskuld. Tó eigur at verða miðað eftir, at kommunurnar fáa lagaligari treytir á peningamarknaðinum. Til tess ber til at brúka okkurt av teimum nevndu uppskotunum, ella kunnu kommunurnar eisini sjálvar royna at fáa lagaligari treytir við verandi lániveitarar.

# 8.3 Vinnulívið (og veðhaldsbindingar)

Við tí staðbundna sjálvstýrinum fæst, sum áður sagt, ein miðfirringarvinningur, sí kapitul 5.1. Tað er tó mark fyri, hvussu víðfevnandi tað kommunala sjálvstýrið skal verða. Í summum førum skal kommunan fylgja lógini bókstavliga sum t.d. viðvíkjandi ognartøku og skattaeftirgeving. Á øðrum økjum hevur kommunan størri rásarúm, har virksemið ikki beinleiðis er lógarásett. Tað má tó ikki vera ímóti lógunum.
Kommunurnar eiga at halda seg innan fyri fulltrú kommunanna. Her verður m.a. hugsað um óskrivaðar reglur um, hvat kommunur eiga og ikki eiga at gera. Treytin fyri hesar gerðir er at tær ikki eru ímóti lógunum og øðrum reglum. Fyrimunurin við hesum er, at fulltrúin kann laga seg eftir samfelagsliga tørvinum, so at kommunan kann verða virknari, tá ið illa stendur til við búskapinum, og øvugt. Vansin er tó, at markið er ógreitt.

Markið fyri kommunalum sjálvstýri er m.a.:

- at virða uppgávubýtið, so at kommunan loysir sínar kommunalu uppgávur, og at landið loysir landsuppgávurnar
- at virða kommunumarkið, so at tað, sum verður áverkað í kommununi, verður hesum kommunuíbúgvum at gagni
- at virða tað privata økið (sektorin). Kommunur mugu ikki vera við í vinnulívinum.

Ástøðiliga er henda seinasta ásetingin grundað á ta áskoðan, at tað almenna eigur ikki at blanda seg upp í marknaðarkreftirnar. Hesar kreftir syrgja sjálvar fyri, at javnvág" verður. Um tað almenna blandar seg upp í marknaðarkreftirnar, so verður henda javnvágin órógvað, tí við sínum skattapeningi kunnu kommunurnar lættliga vinna kappingina við tað privata. Trupulleikin er tó tann, at ilt verður eftirsíðan at skilja sundur tað almenna og privata økið.
Við hesum í huga mælir nevndin tí til, at kommunurnar hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis kunnu verða partur av vinnulívinum. Hetta merkir, at tær hvørki kunnu eiga ella reka vinnulig virki, og at tær heldur ikki kunnu seta partapening í, veita lán ella veðhald til vinnulig virki. Kommunur eiga tó at kunna reka tey virki, ið tær vanliga reka, sum t.d. busskoyringina.

Uppgáva kommununnar er at seta karmarnar, heldur enn at hon sjálv skal taka lut í vinnulívinum. Hon eigur t.d. at ávísa vinnuøkir, at gera og halda vegir o.a., so at hon á tann hátt kann draga vinnulívið at sær.
Vinnuligur stuðul kann verða lutaður sundur í almennan og ítøkiligan stuðul. Ein kommuna kann ikki veita ítøkiligan stuðul til einstakar fyritøkur, og heldur ikki er loyvt henni at krógva" stuðulin við t.d. at veita veðhald ella at selja virkjum bílig grundstykki o.a. Hetta avlagar kappingina. Harafturímóti hevur kommunan loyvi at veita almennan stuðul sum t.d. at ráðgeva virkjum í kommununi o.s.fr. Í hesum føri verður stuðul tøkur til øll virkini í kommununi, og tí avlagar hann ikki kappingina.
Tað eru tó 2 undantøk frá hesum meginreglum. Tað eina undantakið er: bygningar á havnaøkinum. Íløgur í havnaøkið eru sera kostnaðarmiklar, og Kommununevndin heldur tískil, at tað skuldi borið til hjá kommunu at átt bygningarnar[15] á havnaøkinum, og at hon so kundi leiga teir út. Við hesum verður forðað fyri, at bygningar á havnaøkinum verða at standa tómir við ongum virksemi, um t.d. eitt virki fer á húsagang. Men tað er sera umráðandi, at leigan fyri bygningarnar er til marknaðarprís. Tað skal ikki bera til hjá kommununi at veita ein fjaldan stuðul við at leiga hesar bygningarnar út bíliga.
Hitt undantakið er galdandi fyri útoyggjarnar. Her er umráðandi, at kommunan er lagaligari, so at íbúgvarnir t.d. kunnu brúka tey amboð, kommunan eigur í bygdini, og at hon t.d. keypir í stórum ávísar vørur, ið eru dýrar at fáa til útoyggjarnar so sum sand o.a., sum hon so selur aftur til íbúgvarnar til kostprís.

[15] Talan er bert um sjálvan bygningin, ikki um maskinur og aðra útgerð.

# 9. Serskipanir

Tað er í kommissorinum álagt Kommununevndini at koma við tilmæli um:

- møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum, og at hesar serskipanir skulu verða grundaðar á tey serstøku viðurskiftini, har eru galdandi og
- møguligar serskipanir fyri tey smærru bygdasamfeløgini, og at tær verða gjørdar soleiðis, at hesi bygdasamfeløg kunnu varðveita síni eyðkenni sum best

Kommununevndin tulkar hetta sum ásetingar, ið eru grundaðar á eitt (politiskt) ynski um at varðveita búsetingarmynstrið í landinum.

## 9.1 Møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum

Fyrsti spurningurin, sum neyðugur er at seta, er hesin: Hvussu eigur ein útoyggj at verða lýst (definerað). Kommununevndin beyð umboðum úr Mykinesi, Fugloynni, Svínoynni og Skúvoynni til fundar, og var tá ein útoyggj lýst sum tann landslutur:

- har ikki er komandi til og frá sama dag til arbeiðis og í skúla, og
- har ikki ber til at brúka teir fyrimunir, sum fylgja við tí samfelagsligu menningini.

Við hesi lýsingini eru: Mykines, Fugloy, Svínoy og Skúvoy útoyggjar. Harumframt kunnu verða nevndar: Dímun og Koltur. Tær eru tó ikki so fjølbygdar" sum hinar. Koltur er avtoftað sum bygd, men er endurreist við einum festarahúski.
Sambært arbeiðssetninginum er tað, sum longu nevnt, eitt ynski, at verandi búsetingarmynstur verður varðveitt. Hetta ynskið kemur aftur til sjóndar í samgonguskjalinum millum fólkaflokkin, tjóðveldisflokkin og sjálvstýrisflokkin frá 1998, har ásett verður, at:
Útjaðarin er í eini serligari støðu. Samgongan er samd um, at neyðugt er at fremja verulig tiltøk, um útoyggjum og smáplássum skal vera lív lagað".
Kommununevndin er tó av teirri áskoðan, at í útoyggjunum er støðan nú so hættislig, at tað ger tað sama, um hesar útoyggjar framhaldandi verða sjálvstøðugar, ella tær verða lagdar saman við størri eindir. Teirra trupulleikar kunnu ikki verða loystir í einum nýggjum kommunubygnaði. Um fólk støðast í útoyggjunum ella ikki, er uttan fyri kommunalu skipanina. Tað er tí ein landsuppgáva at varðveita búsetingarmynstrið í útoyggjunum, og tískil mega landpolitisk tiltøk verða sett í verk.
Við hesum í huga heldur Kommununevndin, at eingin serskipan fyri útoyggjarnar eigur at verða bygd upp í nýggja kommunubygnaðin. Men harafturímóti heldur nevndin ikki, at útoyggjakommunurnar eiga at verða uttan fyri eina nýggja kommunuskipan, tí hildið verður, at búsetingarmynstrið í útoyggjunum hvørki hórar undan ella doyr, um útoyggjakommunurnar eru sjálvstøðugar kommunur, ella tær eru partar av stórum kommunum. Og av tí at landið ikki er størri í vavi enn so, er tað, sum áður sagt, ikki skilagott at arbeiða við fleiri ymiskum kommunuskipanum. Útoyggjakommunurnar eiga tí at verða viðgjørdar eins og hinar kommunurnar í kommunubygnaðinum.
Men harafturímóti ber til at fremja landspolitisk tiltøk. Eitt hugskot, sum serliga hevur verið umrøtt á fundum í Kommununevndini, er skattasundurgreining, t.e. at útoyggjafólk ikki eiga at rinda so nógvan skatt sum fólk aðrastaðni, av tí at hesi fólk fáa lutfalsliga ikki altíð tað gagn av tænastunum,

sum íbúgvarnir í meginøkinum fáa[16]. Við hesum er tó vandi fyri skattaflýggjan. Broytingar í jarðarlóggávuni hava eisini verið havdar á munni. Men hetta er, sum sagt, landspolitisk tiltøk, og tí er tað landið, ið skal taka støðu til, hvat ið er til ráða at taka.

Her skal tó verða nomið við, hvørji tey ynski eru, sum útoyggjakommunurnar hava, og eru hesi:

- at vera sjálvstøðugar kommunur, so tær kunnu varðveita skattainntøkurnar og hava avgerðarmyndugleikan á staðnum[17]
- at fáa betri samferðslusamband við meginlandið
- at fólk á staðnum fáa framíhjárætt at gera tað arbeiði, sum skal verða í útoyggjunum
- at tey amboð, sum eru í oynni, verða brúkt
- at møguleikar eru at gista á meginlandinum, tá ið íbúgvarnir í útoyggjunum skulu til lækna, tannlækna o.s.fr. og
- at íbúgvarnir í útoyggjum fáa ellisheimspláss, har teir ynskja tað.

# 9.2 Møguligar serskipanir fyri tey smærru bygdasamfeløgini

Eisini í hesum føri kann verða ringt at áseta, hvat ið eitt lítið bygdasamfelag er; men Kommununevndin heldur, at tey bygdasamfeløg, ið hava lítlan møguleika at verða umboðað í kommunustýrinum í teirri nýggju kommunueindini, og tey bygdasamfeløg, sum eru avskorin frá miðstaðarøkinum í kommunueindini, kunnu verða lýst sum tey smáu bygdasamfeløgini. Við hesum eru útoyggjarnar eisini smá bygdasamfeløg.
Í eini nýggjari kommunuskipan er umráðandi at tryggja, at tey staðbundnu sjónarmiðini í teimum smærru bygdasamfeløgunum verða hoyrd. Hetta kann verða gjørt á ymiskan hátt. Sum dømi kann verða nevnt, at Kaldbak er ein partur av Tórshavnar kommunu. Til tess at veita trygd fyri, at tey staðbundnu sjónarmiðini í Kaldbak skulu verða hoyrd, er ein Kaldbaksnevnd sett, har býráðsformaðurin er formaður. At borgarstjórin eisini er nevndarformaður, kann vera við til at tryggja, at nevndarynskini kunnu verða framd í verki. Í hesum viðfangi kann verða nevnt, at Kaldbaksnevndin hevur m.a. hoyringarrætt viðvíkjandi byggimálum í teirra øki. Nevndin hevur fund í minsta lagi hvønn ársfjórðing. Harafturímóti eru

fleiri lítlar bygdir í Runavíkar kommuna, uttan at nøkur bygdanevnd tó er sett.
Kommununevndin mælir tí til, at heimild verður í kommunustýrislógini at seta ráðgevandi staðbundnar nevndir, og at ein tílík nevnd fær hesar høvuðsuppgávur at røkja:

- at verða hoyrd í staðbundnum málum, sum verða umrødd í sjálvari kommunueindini

[16] Hesir spurningar kunnu eisini verða snaraðir á, tí spurningurin er, um tað ikki kann verða ein avbjóðing hjá nýggju kommunueindunum, hvussu tær eisini skulu tryggja tænastustøðið í útoyggjunum. Tað er hóast alt kommunan, sum er til fyri borgaran, og ikki øvugt, og tí er ógvuliga viðkomandi at spyrja, um tað ikki er kommunan, ið skal koma út til borgaran. Eitt ítøkiligt dømi í so máta er kommunulæknaskipanin. Nú skulu útoyggjafólk í flestu førum inn á meginlandið til lækna; men hví ikki hava læknaviðtalu í útoyggjunum t.d. 14. hvønn dag ella ein dag um mánaðin! Tað skuldu ikki staðist tær nógvu útreiðslurnar av hesum.

[17] Útoyggjarnar bera ótta fyri, at tær verða gloymdar, og at kommunustýrið í nýggju kommunueindini vil ikki raðfesta teirra viðurskiftini serliga høgt. Men, sum áður sagt, heldur Kommununevndin tað ikki vera rætt at arbeiða við fleiri kommunuskipanum í Føroyum. Heldur eigur størri dentur at verða lagdur á rættargildiseftirlitið, so at trygd verður veitt fyri, at kommunan heldur sínar skyldur - eisini í útoyggjunum. Tað, ið so er eftir til tess at tryggja búsetingarmynstrið, verður hildið at vera ein landsuppgáva.

- at viðgera áleikandi, staðbundin mál og annars at geva kommunustýrinum upplýsingar um tey staðbundnu ynskini.

Staðbundna nevndin, skal verða vald samstundis sum kommunustýrið, so at valskeið hennara verður tað sama sum kommunustýrisins. Staðbundna nevndin skal hava 3 staðbundin umboð umframt 2 kommunustýrislimir, har borgarstjórin er annar teirra. Staðbundna nevndin skal bert vera ráðgevandi, til tess at fíggjarliga ábyrgdin í kommunueindini skal verða savnað á einum staði - hjá kommunustýrinum.
Kommununevndin mælir til, at kommunurnar sjálvar skulu gera av í samanleggingartíðarskeiðinum, hvussu tey staðbundnu sjónarmiðini í teimum smáu bygdasamfeløgunum skulu koma til ummælis í nýggju kommunueindini, um staðbundin nevnd skal verða sett ella ikki, ella okkurt heilt annað. Av hesum kemur týðiliga til sjóndar, hvussu umráðandi tað er, at kommunurnar sjálvbodnar leggja saman, so at tílík viðurskifti sum hesi verða avrádd av kommununum sjálvum og ikki av landsins myndugleika.

# 10. Fyrimunir og vansar við nýggju skipanini

Ein og hvør skipan hevur sínar fyrimunir og vansar. So er eisini vorðið við hesum uppskoti um eina nýggja, kommunala skipan.

## 10.1 Fyrimunir

Við uppskotinum um nýggja kommunu skipan hevur Kommununevndin roynt at bera tað so í bandi, at vansarnir fóru at verða so fáir, sum til ber.

### 10.1.1 Meir orka

Við 7-9 kommunum verða munandi størri kommunueindir enn við verandi kommunuskipan. Á henda hátt fáa kommunurnar bæði størri og fjølbroyttari inntøkugrundarlag og tískil eisini stóra, fíggjarliga orku.
Við stórum kommunueindum og betri fíggjarligari orku verða kommunueindirnar nógv betur førar fyri at lúka tey ásettu krøvini og at røkja sínar kommunalu uppgávur. Við tí nýggju skipanini fer tí at bera til at lata uppgávur, sum nú formliga eru kommunalar, men sum landið umsitur - sum t.d. almannaøkið - aftur til kommunurnar, umframt at aðrar uppgávur eisini kunnu verða latnar teimum at røkja.
Við hesum fæst ein miðfirringarvinningur. Kommunan verður betur før fyri enn landið at nøkta staðbundna tørv/ynski borgarans og við hesum skapa eitt betri, fjølbroyttari og sannari kommunalt tænastustøði. Við størri kommunalum eindum er lagamanni hjá kommununi at fáa sær tann neyðuga førleikan at stýra soleiðis, at tilfeingið verður gagnnýtt sum best. Miðfirringarvinningurin skuldi tí eisini borið við sær, at virkisførið mennist.

### 10.1.2 Kommunurnar verða sterkari

At kommunurnar verða størri, at tær fáa betri fíggjarliga orku og bæði stórar og fleiri uppgávur at røkja, skuldi eisini borið við sær, at tær helst eisini fara at økja um umsitingarligu orkuna. Og at kommunurnar nú veruliga fáa uppgávur at røkja, og at uppgávuraðfesting teirra er vorðin veruleiki, fer helst eisini at bera við sær, at skikkað fólk verða áhugað at søkja størv hjá kommununi. Við øðrum orðum sagt, so fara fólk, ið hava nomið sær hægri útbúgving, nú eisini at søkja størv í kommununum, av tí at kommunan nú kann bjóða hesum fólkum eitt bæði áhugavert og spennandi starv og umhvørvi. Við at savna tey nógvu, góðu og dugnaligu fólkini, sum nú eru í kommununum, og sum hava holla vitan um kommunuviðurskifti, kann kommunan harumframt skapa eina góða umsiting. Hetta skuldi so økt munandi um tann almenna, fakliga kommunuførleikan.
Vegna tess, at fakligi førleiki kommununnar økist í sterkum, fíggjarligum kommunueindum, so hevur tað í kjalarvørrinum eina gagnliga ávirkan við sær á so mongum øðrum økjum. Hetta økir um møguleikarnar at menna og útbyggja kommununa, og tað dregur so aftur fólk at sær, ið bæði hava hug at stovnseta virki og at búseta seg í kommununi. Av hesum mennist kommunan enn meira, og jú sterkari hon er, tess fleiri uppgávur verður hon før fyri at røkja.

Og tess sterkari kommunan er, tess stinnari er hon eisini mótvegis landsstýrinum.

### 10.1.3 Ábyrgdarbýtið

Uppskotið um nýggja kommunubygnaðin ber við sær, at endurgjaldsskipanirnar verða avtiknar. Ístaðin verður skipanin soleiðis, at fíggjarliga ábyrgdin fylgir uppgávuábyrgdini. Hetta ger tað lættari at áleggja ábyrgd. Tað skuldi so eisini borið við sær, at skeivar avgerðir fáa avleiðingar. At fíggjarliga ábyrgdin fylgir uppgávuábyrgdini er ein stórur fyrimunur, um borið verður saman við endurgjaldsskipanina.
Hetta er eisini grundarlagið undir miðfirringarvinninginum. Tí er umráðandi, at kommunurnar fíggja seg sjálvar, so at tey, ið hava gagn av eini tænastu, eisini skulu fíggja hana. Av hesum fær borgarin greitt at vita, hvat tað kommunala virksemið kostar, og hann verður tí at seta harðari treytir um, hvussu skattakrónur hansara skulu verða nýttar. Tessvegna verður kommunan noydd at meta um kostnað og gagnligar tænastur og at fremja tær tænastur í verki, ið mest gagna borgarunum.

### 10.1.4 Borgarin

Tað skuldi eisini verið ein fyrimunur hjá borgaranum, at kommunurnar verða størri, tí tann umsitingarliga orkan skuldi verið betri. Tað skuldi minkað munandi um tilvildarliga málsviðgerð og tískil økt um rættartrygdina hjá borgarunum.
Eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti ber eisini við sær, at borgarin dugir betur á at skyna, hvat alt kommunuvirksemið kostar, og hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av tí ávísu uppgávuni. Við øðrum orðum verður munandi lættari at síggja teir mongu staklutirnar í hesi nýggju kommunuskipanini. Harumframt er ikki óhugsandi, at borgarin fær tað lættari viðvíkjandi sínum viðurskiftum mótvegis kommununi. Kommunueindin skal sjálv ráðleggja umsitingina; men ikki er óhugsandi, at borgarin bert skal koma á sama plássið at greiða síni viðurskifti, sjálvt um tað skuldi verið almannamál ella skattamál, ið avgreidd skulu verða. Við hesum fæst ein umsitingarsamskipan, ið eisini verður smidligari mótvegis borgarunum.

### 10.1.5 Samfelagsligir fyrimunir

Við nógv færri kommunalum eindum verður tann kommunala ráðleggingin og grundarlagið undir útbyggingarætlanum munandi betri og skynsamari, tí samfelagsliga útbyggingin og kommunubúskapurin verða betri, og sostatt átti eisini landsbúskapurin at verið burðardyggari.
Tann størri, fíggjarliga orkan í kommunueindunum verður eisini ein fyrimunur, tá ið skuldartrupulleikin skal verða loystur, tí kreditvirðið hjá kommununum verður munandi betri.
Fáar kommunueindir og nógv greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti lætta eisini munandi um eftirlitsuppgávurnar hjá landinum. Við tí nýggju skipanini skulu kommunurnar ikki søkja landið um ymisk loyvi, og landið skal ikki góðkenna mangt og hvat, sum kommunurnar gera, tí í nýggju skipanini hava kommunurnar nógv størri sjálvstýri. Í samanburði við verandi viðurskifti skal landið stórt sæð verða eitt rættargildiseftirlit. Tað skuldi lætt munandi um umsitingina bæði hjá landi og kommunu.

### 10.1.6 Staðbundið fólkastýri

Sagt kann verða, at jú størri kommunurnar verða, tess minni verður tað staðbundna fólkastýrið. Hetta kann sigast at vera ein vansi - og tá serstakliga hjá útoyggjunum, har íbúgvarnir ikki hvønn dag kunnu fara til miðstaðarøkið í kommunueindini. Tað bøtir heldur ikki um støðuna, um so er, at útoyggjarnar kanska í fleiri førum ikki ynskja sær somu tænastur sum í meginøkinum, av tí at umstøðurnar als ikki eru tær somu. Til tess at bøta um henda ójavna mælir Kommununevndin til, at staðbundnar nevdir verða settar, so at tey smáu bygdasamfeløgini kunnu verða hoyrd.

Men harumframt heldur Kommununevndin, at tað staðbundna fólkastýrið verður ikki skert, sjálvt um kommunueindirnar verða størri. Heldur tvørturímóti. Við nýggju kommunuskipanini fáa kommunurnar veruligar uppgávur at røkja, við tað at hesar uppgávur verða fluttar frá landinum (bæði tær, sum nú formliga eru kommunalar, men sum landið umsitur, og møguligar aðrar uppgávur) til kommunurnar at umsita. Á tann hátt fáa kommunurnar veruligan møguleika at raðfesta sínar uppgávur, samstundis sum tær verða fluttar nærri borgarunum. Við øðrum orðum sagt, so mennist tað staðbundna fólkastýrið við nýggju skipanini, av tí at tað staðbundna fólkastýrið av sonnum verður veruligt.

# 10.2 Vansar

Ein vansi við nýggju kommunuskipanini kann sigast at vera tann, at ein kommunuumsiting, ið hevur stórar, kommunalar eindir, kann verða stirvin. Kommunuumsitingin verður formligari, so tað verður ikki lagamanni hjá borgaranum hvørja løtu at fara til bygda(r)ráðsformannin at veita sær hjálp og ráðgeving. Harafturímóti kann tó verða sagt, at tann umsitingarliga arbeiðsviðgerðin verður ikki so treytað av persónum, og kommunupolitikararnir skuldu eisini havt betri stundir at tikið sær av tí politiska arbeiðinum, tí í nýggju skipanini hava teir eina veruliga umsiting sær til hjálpar.
Ein annar vansi við nýggju kommunuskipanini (ið tó hvørvur, sum frá líður!) er tann, at kommunur, ið hava lítla og onga skuld, verða lagdar saman við kommunum, ið eru skuldartyngdar. Tað kann av sonnum sigast, at tær kommunur, ið hava lítla og onga skuld, og sum skynsamt hava umsitið kommunukassan, verða nú revsaðar fyri sína skilagóðu umsiting, við tað at tær nú skulu rinda ein part av skuldini hjá øðrum kommunum. Men hetta er tó kortini ikki allur sannleikin, tí ofta er tað so, at hesar kommunur, ið lítla og onga skuld hava, hava gagnnýtt íløgur o.a. í teimum stóru kommununum, og tessvegna eiga tær kanska eisini ein part" av skuldini hjá teimum skuldabundnu kommununum. Men hóast, at so er, so kann hesin vansin tó bera við sær, at tær kommunur, ið hava nakað av gjaldføri og skulu leggja saman við kommunu, ið skyldar meira enn tær sjálvar, fara at nýta alt sítt gjaldføri, áðrenn samanleggingin verður framd, uttan at hugsað verður um, hvørt nýtslan er skilagóð ella ikki.
Ein annar vansi er møguliga tann, at kommunala umsitingin verður dýrari. Hesin vansin eigur tó at verða borin saman við, at spart verður í landsumsitingini[18], av tí at tann kommunala útbyggingin verður virkisførari, og at kommunurnar nú verða betur førar fyri at veita borgarunum eina betri og virknari tænastu.

# 10.3 Annað

[18] Upplýsast kann, at Toll- og Skattastova Føroya hevur umleið 130 fulltíðarstørv úti á økisskrivstovunum, Almannastovan hevur umleið 11 fulltíðarstørv, meðan heimarøktin hevur umleið 289 fulltíðarstørv. Eftir ætlan kunnu hesi gerast kommunal størv.

Annað, sum her er at viðmerkja, er mótviljin ímóti kommunusamanleggingum. Hann kemur serliga til sjóndar hjá teimum smáu kommununum, tí tær bera ótta fyri, at tær fara at verða fyri vanbýti í eini stórari, kommunalari eind. Til tess er at siga, at samanlagda kommunueindin skal fylgja teimum lógarásettu krøvunum, og hesi krøv eru galdandi fyri alla kommunueindina og ikki bert partar av henni. Um kommunan ikki ger skyldur sínar, verður hon revsað. Men til tess krevst eisini, at rættargildiseftirlitið verður veruligt, og at tørvandi orka verður latin til hetta endamál.
Tað eru eisini tær bygdir, ið nú eru sjálvstøðugar kommunur, sum óttast tær stóru, kommunalu eindirnar, tí tær halda, at tær fara at missa sín samleika. Í hesum viðfangi er at nevna, at í løtuni hava tær flestu kommunurnar (t.e. 28) meira enn eina bygd, so tað er ikki óvanligt, at tað eru fleiri bygdir í eini kommunu.

# 11. Verksetanarætlan

Uppskotið um nýggja kommunustýrislóg eigur at verða viðgjørt, samtykt og sett í gildi 1998. Sama er galdandi fyri samanleggingarlógina. Uppskotið um broytingar í vallógini eigur at verða viðgjørt og samtykt so skjótt sum gjørligt. Uppskot um nýggja vallóg til kommunur og løgting eigur at verða viðgjørt og samtykt fyri kommunuvalið ár 2002, sí niðanfyri. Í kapitli 6 eru nevndar tær broytingar, sum neyðugar eru at gera í verandi lóggávu, sum løgfrøðingar beinanvegin eiga at evna til, tá ið nýggja kommunustýrislógin er sett í gildi.
Eftir at nýggja kommunustýrislógin er sett í gildi, væntandi í 1998, eiga kommunurnar at brúka tey komandi 4 árini til sjálvbodnar at leggja saman. Best hevði verið, um tær høvdu lagt saman fyri næsta kommunuval, sum verður við árslok í 2000. Men Kommununevndin sær longu, at hetta skotbráið verður í so stutt. Hon mælir tí heldur til, at kommunurnar fáa 4 ár til sjálvbodnar at leggja saman, tí so verða betri stundir at fyrireika ta nýggju kommunueindina. Samstundis vónar Kommununevndin, at tað verða so nógvar sjálvbodnar samanleggingar, sum til ber, í hesum tíðarhvarvi. Um kommunurnar skulu fáa 4 ár til sjálvbodna samanlegging, verður neyðugt at broyta komandi kommunuvalskeið til 2 ár, so at eitt kommunuval eisini kann verða við árslok 2002. Um so er, at tann sjálvbodna kommunusamanleggingin ikki er lokin í ár 2002, so eiga tær írestandi kommunurnar tá at verða lagdar saman við lóg. Fyrireikingarnar til hetta eiga at byrja við ársbyrjan 2002, so at borgararnir til kommunuvalið í 2002 fáa høvi at velja til tær nýggju kommunueindirnar. Nevndin mælir til, at kommunurnar í felag gera ein útbyggingarætlan fyri ta nýggju kommunueindina, áðrenn viðkomandi kommunur eru lagdar saman.
Eftir at kommunubýtið er broytt, eigur uppgávubýtið somuleiðis at verða broytt. Kommununevndin mælir við øðrum orðum til, at kommunbýtið fyrst verður framt, av tí at tað er grundarlagið undir einum greiðum uppgávubýti.
Í kapitli 5 hevur Kommununevndin viðgjørt tey øki, sum sambært verandi lóggávu viðvíkja kommununum, og nevndin hevur gjørt sínar tilráðingar, um økið eigur at verða kommunalt ella ikki. Tær neyðugu tillagingarnar hesum viðvíkjandi kunnu tó ikki verða framdar frá degi til dags. Nevndin mælir tí til, at uppgávurnar verða latnar kommununum so hvørt, sum tær nýggju kommunueindirnar eru búnar til tess. Við hesum fáa kommunurnar og landið stundir at skipa tær einstøku uppgávurnar á skilabesta hátt. Her hevur Kommununevndin so gjørt ein raðfestingarlista yvir tey høvuðsøki, sum eiga at verða latin kommununum:

1. Fíggjarskipanin
2. Barnaøkið
   - barnaforsorgin
   - fólkaskúlin
3. Eldraøkið v.m.
   - ellis- og røktarheim
   - heimarøktin
4. Almannaøkið
   - forsorg
5. eftirløn (møguliga)
6. Heilsuøkið

Víðvíkandi fíggingarskipanini. Tað fyrsta, sum umráðandi er at fáa greiði á í eini nýggjari kommunalari skipan, er fíggingarskipanin, so at hon er í lagi við ársbyrjan 2003, tá ið kommunurnar

hava lagt saman. Við øðrum orðum sagt, so eigur fíggingarskipanin at verða lagað til nýggju kommunuskipanina í teimum árum, tær sjálvbodnu samanleggingarnar fara fram, so at hon er í lagi við ársbyrjan 2003. Hetta er umráðandi at fáa gjørt soleiðis at tá ið kommunurnar skulu yvirtaka uppgávurnar skulu bert neyðugar broytingar, sum t.d. at tillaga ávikavist kommunu- og landsskatt, verða gjørdar í fíggingarskipanini. Umráðandi er tí straks at seta ein arbeiðsbólk við umboðum frá kommununum og landsumsitingini at laga skattaskipanina eftir nýggja kommunubygnaðinum.
Viðvíkjandi barnaøkinum. Í løtuni er barnaøkið tað mest átrokandi málið hjá kommununum. Nevndin mælir tí til, at hetta økið verður fyrst latið kommununum. Tað snýr seg bæði um barnaforsorgina og um fólkaskúlan.
Viðvíkjandi eldraøkinum v.m. Eitt annað mál, sum eisini er átrokandi hjá kommununum í løtuni, er eldraøkið, og mælir Kommununevndin tí til, at hetta verður næsta uppgávan, latin verður kommununum. Her er talan um ellis- og røktarheim og um heimarøktina. Í heimarøktini eru eisini bæði heilsu systrar og heimasjúkrasystrar, ið ikki bara taka sær av teimum eldru. Greiði má tískil verða fingin á, um hesar uppgávur skulu verða býttar sundur ella ikki.
Í hesum høpi viðger Kommununevndin bert tey øki, ið sambært verandi lóggávu eru kommunal ella lutvís kommunal og lutvís landsuppgáva. Tað kann tó hugsast, at eisini aðrar landsuppgávur kunnu verða latnar kommununum. Um so skuldi verið, er neyðugt, at bæði land og kommunur samráðist um hetta og gera tær neyðugu broytingarnar sambært samráðingarúrslitinum. Broytingarnar mega tó fylgja meginreglunum í hesum áliti.

Talvan sýnir tíðarætlanina, tá ið nýggja, kommunala skipanin verður sett í gildi.

| Ár | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003-> |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| Sjálvbodnar kommunusamanleggingar | ------ | ------ | ------ | ------ | ------ | |
| Nýggj kommunustýrislóg verður sett í gildi | ------ | | | | | |
| Samanleggingarlóg verður sett í gildi | ------ | | | | | |
| Fíggjarskipanin verður lagað eftir nýggju skipanini | ------ | ------ | ------ | ------ | ------ | |
| Arbeiðsbólkur settur at gera neyvari reglar fyri kontoskipan, bókhald og lántøku | ------ | | | | | |
| Broytingar í kommunuvallógini verða settar í gildi | ------ | | | | | |
| Nevnd verður sett at gera uppskot um nýggja vallóg til kommunu- og løgtingsval | ------ | | | | | |
| Løgtingslóg um val til kommunur og løgting verður sett í gildi | | | | | ------ | |
| Møgulig kommunusamanlegging við lóg | | | | | ------ | |
| Barnaøkið verður latið kommunum | | | | | ------ | ------ |
| Javningar í fíggjarskipanini sb. Broytingunum í uppgávubýtinum | | | | | ------ | ------ |
| Uppgávubýtið verður lagað eftir nýggju kommuskipanini | | | | | | ------ |
| Tillagingar í serlóggávuni | ------ | ------ | ------ | ------ | ------ | ------ |

# 12. Uppskot um nýggja kommunustýrislóg

## 12.1 Uppskot um nýggja kommunustýrislóg[19]

### Kapittul 1

**Um lógarøki og allýsingar**

**§ 1.** Lógin fevnir um øll fyrisitingarlig øki, har kommunan hevur málsførleika, uttan so er, at undantøk eru í aðrari lóg.
*Stk. 2.* Val til kommunustýrið fer fram eftir reglunum í kommunalu vallógini.

**§ 2.** Reglur um kommunubýti verða ásettar í aðrari lóg.

**§ 3.** Við meirilutavali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær reinan meiriluta av teimum, ið á fundi eru, er valt.
*Stk. 2.* Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin reinan meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um.
*Stk. 3.* Fær hvørgin teirra reinan meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti.

**§ 4.** Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.
*Stk. 2.* Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við
1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetur ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.
*Stk. 3.* Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.
*Stk. 4.* Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør ið umboðar hvønn bólkin.
*Stk. 5.* Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir stk.1-3.

### Kapittul 2

**Um kommunustýrið**

---

[19] Sí eisini fylgiskjal B og C.

**§ 5.** Kommunuviðurskifti verða stýrd av einum stýri, sum nevnt verður kommunustýri. Formaðurin í kommunustýrinum nevnist borgarstjóri.

**§ 6.** Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um síni stýrisviðurskifti í eina kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.
*Stk. 2.* Talið á kommunustýrislimum skal í minsta lagi vera 7 og í mesta lagi 17. Limatalið skal vera stakt.
*Stk. 3.* Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um sína málsmannagongd í eina fundarskipan.
*Stk. 4.* Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um starvsfólkaviðurskiftini í eina starvsfólkaskipan.

**§ 7.** Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja til borgarstjóra, vara-borgarstjóra, nevndarlim ella umboð.
*Stk. 2.* Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. Tá ið borgarstjórin er valdur, skal hann leggja vanliga starvið frá sær, umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við fólkavalda starvið sum borgarstjóri.
*Stk. 3.* Val av varaborgarstjóra hevur gildi alt virkisskeiðið. Varaborgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. Ásetur kommunustýrisskipanin, at 1. og 2. varaborgarstjóri skulu verða valdir, fer valið fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4.
*Stk 4.* Kommunustýrislimur kann av persónligum áðum bera seg undan at verða borgarstjóravalevni.

**Arbeiðstakari**

**§ 8.** Kommunustýrislimur, sum er arbeiðstakari, hevur rætt til fríloyvi í neyðugum vavi til tess at røkja starv sítt sum fólkavalt umboð.

**Samsýning og løn**

**§ 9.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur við kunngerð reglur um samsýning til kommunustýrislimir. Samsýning kann m.a. verða veitt fyri:

a) luttøku á kommunustýrisfundum og nevndarfundum,
b) luttøku á øðrum fundum í sambandi við útinning av starvinum sum kommunalt valdur limur,
c) skeiðsluttøku, sum kommunustýrið hevur góðkent,
d) annað virksemi, eftir umbøn frá kommunustýrinum ella eini fastari nevnd.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur við kunngerð reglur um løn til borgarstjórar.

**Gegni**

**§ 10.** Kommunustýrislimur hevur skyldu at boða frá, um hann heldur iva verða um sítt gegni.
*Stk. 2.* Kommunustýrið ella føst nevnd ger av, um eitt mál er av tílíkum áhuga hjá einum limi, at hann hvørki kann vera við í viðgerð ella atkvøðugreiðslu.
*Stk. 3.* Er líkt til, at kommunustýrið ella føst nevnd tekur avgerð um, at kommunustýrislimur ella fastur nevndarlimur er ógegnigur, kunnu limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.
*Stk. 4.* Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, kommunustýrið ella ein føst nevnd ger av, at kommunustýrislimur ella fastur nevndarlimur er ógegnigur, kunnu teir limir, ið valdir eru á viðkomandi valevnislista, krevja, at málið verður flutt til næsta fund.
*Stk. 5.* Málið kann tó ikki verða flutt, um 2/3 av teimum hjá støddu kommunustýrislimunum ella í minsta lagi helmingurin av teimum føstu nevndarlimunum eru ímóti, ella at málið fyrnast.

**§ 11.** Kommunustýrislimur, sum starvast hjá kommununi, kann ikki verða limur í fastari nevnd, um nevndin umsitur málsøki, sum hava tilknýti til hansara starvssøki.
*Stk. 2.* Ein nevndarlimur kann ikki gera nakað arbeiði móti samsýning fyri tann partin av kommunalu fyrisitingini, ið verður stjórnað av viðkomandi nevnd, um so er, at arbeiðið ikki er boðið út alment.

## Kapittul 3

### Um kommunustýrisfundir

**§ 12.** Nývalda kommunustýrið skal skipa seg í seinasta lagi innan árslok í valárinum.
*Stk. 2.* Kommunustýrið skal vera fullmannað á fyrsta fundi. Fyrst valdi kommunustýrislimur gevur fundarboð og leiðir fundin, til borgarstjóri er valdur.
*Stk. 3.* Berst kommunustýrislimi frá at møta á fyrsta fundi, skal tiltakslimur innkallast

**§ 13.** Kommunustýrislimur kann seta fram uppskot og spyrja um øll kommunal viðurskifti.

**§ 14.** Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nágreiniligari reglur um vanligar fundir skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.
*Stk. 2.* Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.

### Viðtøkuføri

**§ 15.** Kommunustýrið er viðtøkuført, um í minsta lagi helmingurin av kommunustýrislimunum er á fundi.
*Stk. 2.* Um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið meirilutin av teimum, ið greiða atkvøðu, hevur atkvøtt fyri uppskotinum. Stendur á jøvnum, er uppskotið fallið.

**Borgarstjórin**

**§ 16.** Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini. Hann býtir málini sundur til tær ymisku nevndirnar og tekur sær av teimum málum, sum ikki eru latin nakrari nevnd.
*Stk. 2.* Borgarstjórin gevur fundarboð og fyrireikar kommunustýrisfundirnar.
Undan hvørjum fundi skal borgarstjórin kunna kommunustýrislimirnar um, hvørji mál koma fyri.
*Stk. 3.* Eitt hóskandi tíðarskeið fyri fundin skal borgarstjórin leggja mál og málsupplýsingar fram, so at kommunustýrislimirnir kunnu gera sær eina sjálvsmeting um hesi málini.

**§ 17.** Á hvørjum vanligum kommunustýrisfundi boðar borgarstjórin frá, hvørji mál eru beind í nevnd síðan síðsta fund.
*Stk. 2.* Borgarstjórin ansar eftir, at tey mál, ið krevja kommunustýrisviðgerð, fáa tílíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin. Í átrokandi førum kann borgarstjórin tó fyriskipa, hvussu málini skulu verða avgreidd.
*Stk. 3.* Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast ella har ongin orsøk er til iva.
*Stk. 4.* Borgarstjórin ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum kommunustýrisins. Hann ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan.

**§ 18.** Mál, ið snúgva seg um virksemi borgarstjórans, kunnu verða løgd fyri kommunustýrið, um fleiri kommunustýrislimir krevja tað. Borgarstjórin skal geva kommunustýrinum allar umbidnar upplýsingar, eins og hann í øllum lutum skal lýða tær avgerðir, kommunustýrið tekur.
*Stk. 2.* Nágreiniligari reglur um virksemi borgarstjórans skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina.
*Stk. 3.* Verjir borgarstjórin seg við at fremja tær uppgávur, ið annaðhvørt eftir lógini ella kommunustýrisskipanini eru latnar honum at umsita, so kann kommunustýrið tilnevna ein annan kommunustýrislim at røkja hansara uppgávur. Kommunustýrið kann í álvarsomum føri fyribils velja ein annan sum virkandi borgarstjóra.
*Stk. 4.* Avgerðin sambært stk. 3, 2. pkt. skal alt fyri eitt verða latin landsstýrismanninum í kommunumálum til staðfestingar. Staðfestingin skal alt fyri eitt skjótast inn fyri dómsvaldið til rættarroynd.

**§ 19.** Setur borgarstjóri fram umbøn um at verða loystur úr starvi, kann kommunustýrið loysa hann úr starvinum.
*Stk. 2.* Fer borgarstjóri úr kommunustýrinum, doyr, ella verður loystur úr starvi, so skal nýval av borgarstjóra fara fram eftir reglunum í § 7, stk. 2.

**Innlit**

**§ 20.** Kommunustýrið skal áseta í kommunustýrisskipanina, hvussu kommunustýrislimur skal kunna fáa upplýsingar ella tekniska hjálp frá fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðir.
*Stk. 2.* Kommunustýrislimur hevur rætt at kanna framlagt tilfar saman við serkønum stuðli, sum ikki er kommunustýrislimur, í tí vavi, tað er í samsvari við reglurnar um tagnarskyldu.

**§ 21.** Kommunustýrislimur hevur rætt at fáa skjalainnlit í málum, har tilfarið í endaligum skapi er til skjals í kommunalu fyrisitingini.

*Stk. 2.* Kommunustýrislimur skal stíla umsókn sína um skjalainnlit til borgarstjóran við tilskilan um, hvørji skjøl ella mál talan er um.
*Stk. 3.* Borgarstjórin kann avmarka rættin til skjalainnlit í tí vavi, tað er neyðugt við atliti at málsavgreiðsluni, ella har skjalainnlit í avgerandi mun ber ampa við sær.

*Fráfall*

**§ 22.** Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsu-støðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. Setur eingin kommunustýrislimur fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð.
*Stk. 2.* Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal borgarstjórin geva tiltakslimi fundarboð.
*Stk. 3.* Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru lokanar.

**§ 23.** Tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri luttaka, fer innkomin tiltakslimur út.
*Stk. 2.* Í teimum førum, har fleiri tiltakslimir eru komnir inn á sama valevnislista, men har starvstíðin ikki endar samstundis, skal tann tiltakslimur, ið fyrstur er valdur, verða seinastur út.

**§ 24.** Er tiltakslimur komin inn fyri borgarstjóra ella varaborgarstjóra eftir reglunum í § 22, stk. 2, men sannlíkt er, at fráveran varir longri enn 2 mánaðir, so skal kommunustýrið fyribils velja borgarstjóra ella varaborgarstjóra í teirra stað eftir reglunum í ávíkavist § 7, stk. 2 og stk. 3.

**Gerðabókin**

**§ 25.** Borgarstjórin ansar eftir, at allar samtyktir á kommunustýrisfundi verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða undirskrivað av øllum teimum luttakandi kommunustýrislimunum.
*Stk. 2.* Hevur kommunustýrislimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina. Hetta er eisini galdandi, tá tilfarið verður sent øðrum myndugleika.

## Kapittul 4

**Um borgarligt almenni**

**§ 26.** Kommunustýrisfundir eru almennir. Um neyðugt kann kommunustýrið gera av, at mál, sum t.d. persónsmál, skulu verða viðgjørd fyri aftur latnum hurðum. Henda viðgerð kann fara fram fyri aftur latnum hurðum, um borgarstjórin ger tað av, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevur tað.
*Stk. 2.* Kommunustýrið kann loyva starvsfólki hjá kommununi at fylgja við eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum.
*Stk. 3.* Kommunustýrið kann loyva øðrum fólki at fylgja eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum, til tess at fáa upplýsingar í málinum, við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu.

**§ 27.** Kommunustýrið skal kunna borgararnar um ta endaligu samtyktu fíggjarætlanina eins og um roknskapin saman við møguligum viðmerkingum.
*Stk. 2.* Yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, eins og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund, skulu verða almannakunngjørd við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu.

## Kapittul 5

### Um fastar nevndir

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, smbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja í fasta nevnd, stýri og tílíkt, umframt at gera aðrar kommunalar uppgávur, sum kommunustýrið áleggur honum.
*Stk. 3.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið, ið er fyri alt virkisskeiðið hjá nevndini, fer fram eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4.
*Stk. 4.* Hevur borgarstjórin ella annar kommunustýrislimur fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.

**§ 29.** Allir nevndarlimir skulu vera kommunustýrislimir.
*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nágreiniligari reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.
*Stk. 3.* Nágreiniligari reglur um nevndararbeiðið kunnu verða ásettar í eina fundarskipan.

### Nevndarfundir

**§ 30.** Nevndarformaður gevur fundarboð og fyrireikar nevndarfund.
*Stk. 2.* Borgarstjórin hevur atgongd til allar nevndarfundir, tó uttan atkvøðurætt. Borgarstjórin skal hava fundarskrá og fráboðan um, nær og hvar nevndarfundur verður hildin.
*Stk. 3.* Nevndin kann geva øðrum persóni atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa upplýsingar í málinum.

**§ 31.** Nevndarformaðurin ansar eftir, at farið verður fram eftir nevndarsamtyktunum. Hann ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan.
*Stk. 2.* Nevndarformaður kann taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast, ella har ongin orsøk er til iva. Tó skal borgarstjórin kunnast, áðrenn avgerð verður tikin í fyrningarfongdum málum, uttan so er, at tað snýr seg um avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.
*Stk. 3.* Ein og hvør nevndarlimur kann leggja mál um virksemi hjá nevndarformanninum fyri nevndina. Formaðurin skal eftir áheitan geva nevndini allar upplýsingar, eins og hann í øllum lutum skal lýða tær avgerðir nevndin tekur.

**§ 32.** Nevndarlimur kann, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri kommunustýrið til avgerðar. Undantiknar hesum eru avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.
*Stk. 2.* Ein og hvør kommunustýrislimur, ið ikki er nevndarlimur, kann krevja at fáa sent dagsskráir, úrrit úr gerðabókum, málstilfar o.a., sum sent verður nevndarlimunum.

**Viðtøkuføri**

**§ 33.** Ein nevnd er viðtøkufør, um í minsta lagi helmingurin av nevndarlimunum er møttur.
*Stk. 2.* Um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið ein meiriluti av teimum, ið greiða atkvøðu, hava atkvøtt fyri tí.

**Gerðabókin**

**§ 34.** Nevndarformaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða undirskrivað av teimum luttankandi nevndarlimunum.
*Stk. 2.* Hevur nevndarlimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina. Hetta er eisini galdandi, tá um tilfarið verður sent øðrum myndugleika.

## Kapittul 6

**Onnur umboðan**

**§ 35.** Skal kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum vera umboðað í øðrum nevndum o.t., hevur kommunustýrislimur skyldu at taka við vali.
*Stk. 2.* Skal kommunustýrið bert velja eitt umboð, fer valið fram eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4.
*Stk. 3.* Skal ein nevnd ella tílíkt verða mannað við øðrum enn bara kommunustýrislimum, fer valið av teimum, ið kommunustýrið skal velja, fram undir einum.
*Stk. 4.* Í teirri raðfylgju, sessirnir verða lutaðir einum bólki, kann bólkurin tilnevna limir ella onnur, til annað slag av sessum er sett.

**§ 36.** Kommunustýrið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir at taka sær av einstøkum málum hjá kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd.
*Stk. 2.* Kommunustýrið ásetur nágreiniligari reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.

**§ 37.** Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja, at staðbundin áhugamál verða hoyrd í kommunustýrinum.
*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

*Stk. 3.* Nágreiniligari reglur um samanseting, manning og hoyringarmannagongd skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina.
*Stk. 4.* Val av staðbundnum umboðum fer fram sama dag og eftir somu reglum, sum val fer fram til kommunustýrið.
*Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

## Kapittul 7

### Um fíggjarumsiting

**§ 38.** Fíggjarnevndin tekur sær av fíggjarligu umsitingini hjá kommununi. Borg-arstjórin er nevndarformaður.
*Stk. 2.* Fíggjarnevndin samskipar og hevur eftirlit við fíggjarligu og fyrisiting-arligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið.
*Stk. 3.* Áðrenn mál víðvíkjandi fíggjarviðurskiftum verða løgd fyri kommunu-stýrið, skal fíggjarnevndin geva sítt ummæli.

**§ 39.** Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.
*Stk. 2.* Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

**§ 40.** Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði fyrr enn neyðug játtan er tøk.
*Stk. 2.* Kommunustýrið kann veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.
*Stk. 3.* Kommunustýrið kann ikki geva tilsøgn um regluligar veitingar, sum tað ikki hevur skyldu til sambært lóg, uttan at landsstýrismaðurin í kommunumálum gevur loyvi til tess.
*Stk. 4.* Kommunustýrið kann áseta gjald fyri kommunalar tænastuveitingar.
*Stk. 5.* Er nøktandi játtan ikki sett av til lógarásettar veitingar o.a., skal tílík játtan verða útvegað sum skjótast.

**§ 41.** Fíggjarnevndin hevur ábyrgd av
1) at gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,
2) at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,
3) at viðgera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini og
4) at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskriving.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann við kunngerð áseta nágreiniligari reglur um kontoskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tílíkt.

### Fæ og lántøka

**§ 42.** Fíggjarnevndin skal ansa eftir, at øll peningaogn hjá kommununi er goymd á tryggan hátt.
*Stk. 2.* Peningaognir skulu setast í peningastovn, á postgiro ella í tílík lánibrøv, ið nýtt vera, tá ið um ræður ognir hjá ómyndingum, so tær geva sum mest av sær.
*Stk. 3.* Virðisbrøv skulu hava átekning um, at tey eru ogn hjá kommununi, og at eingin hevur ræði á teimum, uttan samtykt kommunustýrisins. Um til ber, skal átekningin verða skrivað í bók hjá viðkomandi stovni.

**§ 43.** Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.
*Stk. 2.* Er nettoskuldin meira enn ein álíkning við miðal loyvda skattaprosenti, so krevst loyvi frá landsstýrismanninum í kommunumálum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum.

**Medundirskrift**

**§ 44.** Skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av virkandi borgarstjóra og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.

**Grannskoðan**

**§ 45.** Kommunan skal hava óhefta, sakkøna grannskoðan av sínum fíggjarviðurskiftum. Grannskoðarin skal vera ríkisgóðkendur ella skrásettur.
*Stk. 2.* Grannskoðarin skal regluliga eftirkanna roknskaparførslu og roknskapar-mannagongdir hjá kommununi.
*Stk. 3.* Grannskoðarin kann krevja allar neyðugar upplýsingar útflýggjaðar frá kommunustýrinum til tess at skoða, um tann fíggjarliga umsitingin samsvarar við lógina, fíggjarætlanina, eykajáttanir og aðrar tiknar avgerðir.

**§ 46.** Í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.
*Stk. 2.* Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum í kommunumálum.

**Bann**

**§ 47.** Ikki er loyvt kommunum at fíggja rakstur, rentur og avdráttir ella lógar-ásettar avsetingar við lántøku.
*Stk. 2.* Ikki er loyvt at seta á stovn ábyrgdarbindingar.
*Stk. 3.* Ikki er loyvt kommunum at taka lut í vinnuligum virksemi, hvørki bein-leiðis ella óbeinleiðis.
*Stk. 4.* Ikki er loyvt kommunum at veita beinleiðis ella óbeinleiðis kappingaravlagandi stuðul til fyritøkur, stovnar ella tílíkt.

**§ 48.** Ikki er loyvt kommunum at seta á stovn kommunusamstørv, ið hava við sær avmarkingar í teimum lógarásettu heimildunum, sum kommunustýrið hevur eftir hesi lóg, uttan so er, at landsstýrismaðurin í kommunumálum í serstøkum føri góðkennir eina tílíka samstarvsavtalu.
*Stk. 2.* Hevur landsstýrismaðurin í kommunumálum í hendingaføri góðkent eina kommunusamstarvsavtalu, skal tað eisini góðkenna treytirnar í sambandi við avtaluslit. Er ósemja um treytirnar, verða tær ásettar av landsstýrismanninum.

## Kapittul 8

### Um eftirlit, rættartiltøk o.a.

**§ 49.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum hevur eftirlit við kommununum.

**§ 50.** Kommunustýrið hevur skyldu at veita landsstýrismanninum í kommunumálum allar neyðugar upplýsingar og frágreiðingar.
*Stk. 2.* Til tess at landsstýrismaðurin í kommunumálum kann røkja sínar eftirlitsskyldur við fíggjarligu viðurskiftinum hjá kommununum, skulu tær lata honum:

1) grannskoðaðan roknskap innan 1. juni,
2) samtykta fíggjarætlan innan 3 gerandisdagar eftir 1. desember og
3) samtykta eykajáttan innan 3 gerandisdagar.

### Rættartiltøk

**§ 51.** Er nettoskuldin hjá kommununi meira enn eina nettoálíkning, smbr. § 43, stk. 2, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum geva kommunustýrinum boð um at gera neyðugar broytingar í uppskotið til fíggjarætlan, í fíggjarætlanina ella í eykajáttanina, um landsstýrismaðurin metir, at:

1) inntøku- og útreiðslumetingarnar eru skeivar,
2) inntøku- og útreiðslumetingarnar eru gjørdar á skeivum grundarlagi, ella at
3) útreiðslurnar eru óneyðugar ella órímiligar.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann í tí í § 43, stk. 2 nevnda føri geva kommunustýrinum boð um at lata uppskot til fíggjarætlan inn til landsstýrismannin í kommunum innan 1. oktober.

**§ 52.** Hevur kommunustýrið tikið eina avgerð, sum er ímóti lógini, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum:

1) ógilda avgerðina ella
2) fyribils avtaka avgerðina.

*Stk. 2.* Heldur kommunustýrið seg óvirkið mótvegis lógarásettum skyldum, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum áleggja teimum kommunustýrislimum, sum bera ábyrgd av hesum, tvingsilsbøtur.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann í teimum í stk. 2 nevndu førum saksøkja kommunustýrislimi eftir endurgjaldi, um hann ber ábyrgd av, at kommunan hevur verið fyri fíggjaligum missi.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann sleppa einum sakarmáli, um viðkomandi kommunustýrislimur ístaðin sektarsamtykkir mótvegis kommununi innan ásetta freist.
*Stk. 5.* Kommunustýrislimur, sum grefliga skúgvar til viks skyldur sínar sum fólkavalt kommunustýrisumboð, verður sektaður við bót. Óskettni verður ikki revsað.

**§ 53.** Staðfestir landsstýrismaðurin í kommunumálum eina avgerð hjá kommunustýrinum sambært § 18, stk. 4, er borgarstjórin undantikin starvi sínum frá hesum mundi.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í stk. 1 nevnda føri gera av, at lønin hjá borgarstjóranum skal verða skerd við einum fjórðingi, eini helvt, ella at hon í versta føri fellur burtur.

**§ 54.** Fremur kommunustýrið grovt lógarbrot, ella endurtaka lógarbrotini seg, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum seta kommunustýrið undir umboðsstjórn sína, so rættandi tiltøk verða gjørd alt fyri eitt.

**Gildiskoma**

**§ 55.** Lógin kemur í síni heild í gildi 1. januar 2003.
*Stk. 2.* Fram til 1. januar 2003 kann landsstýrismaðurin í kommunumálum tó við kunngerð seta kommunustýrislógina ella partar av henni í gildi.

**56.** Samstundist, sum henda lóg fær gildi, fara hesar lógir úr gildi:
1) Løgtingslóg nr. 45 frá 1972 um føroysku kommunurnar, sum seinast broytt við ll. nr. 34 frá 29/5-1985
2) Løgtingslóg nr. 189 frá 8/12-1993 um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. og
3) Løgtingslóg nr. 85 frá 30/5-1994 um broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m.

# 12.2 Viðmerkingar til uppskot um nýggja kommunustýrislóg

## Almennar viðmerkingar

## 1. Inngangur.

Við støði í samtykt landsstýrisins 23. apríl 1996 um at seta eina nevnd at gera uppskot um eina nýggja kommunala skipan í Føroyum, verður uppskotið til lóg um kommunustýrið borið fram. Víst verður á, at almennu viðmerkingarnar eru avmarkaðar til tað ítøkiliga lógaruppskotið. Til tess at fáa eitt heildaryvirlit yvir almennar viðmerkingar í sambandi við uppskotið um eina nýggja

kommunala skipan í Føroyum, verður í síni heild víst til: Niðurstøður og tilmæli" frá Kommununevndini.

## 2. Høvuðstættir.

Endamálið við lógaruppskotinum er í fyrsta lagi:

- at endurskoða lógina rættarliga, so hon samsvarar nútímans, kommunala umsiting,
- at dagføra lógina, so hon fær ein natúrligan, evnisrættarligan samanhang, og at óneyðugar og ótíðarhóskandi reglur verða strikaðar,
- og harumframt at dagføra lógina málsliga, so hon samsvarar við nútímans málburð.

Hesi endamál taka støði í tí sannroynd, at samfelagið er vorðið fjøllbroyttari, borgarin krevur meira kunning um i viðurskifti, sum viðkoma hansara umstøðum, stór krøv verða sett til tænastustøðið, - tað veri seg almennar ella privatar tænastur o.s.fr.
Hetta hevur millum annað við sær, at krøvini til kommunalu umsitingina vaksa alsamt, og tískil vaksa eisini krøvini til tann einstaka kommunustýrislimin, sum skal umsita alskyns kommunumál.

## 3. Endurskoðan.

Mótvegis galdandi lóg um føroyskar kommunur er hetta lógaruppskotið evnisrættarliga ein nýskapan á fleiri økjum. Hetta sæst t.d. aftur í lógaruppskotinum um:

- at tryggja kommunustýrislimi rætt til burturveru frá arbeiðinum og trygd ímóti starvsuppsøgn vegna starv sítt sum kommunustýrislimur,
- at tryggja kommunustýrislimi rætt til sakkønan stuðul í sambandi við kommunala málsviðgerð,
- at áseta reglur um tørvandi gegni og rættarfylgjuna av hesum,
- at áseta reglur um innkalling av tiltakslimum, og hvussu útskiftingin verður framd,
- at loyva øðrum persónum, sum ikki eru kommunustýrislimir, at fylgja eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum,
- at áseta reglur um, hvussu farast skal fram í málum, ið eru um at fyrnast,
- at áseta reglur um valskyldu, og hvussu hon er galdandi,
- at seta serligar ráðgevandi nevndir og sonevndar staðbundnar nevndir,
- at áseta reglur um regluliga grannskoðan av kommunalum roknskaparviðurskiftum,
- at áseta reglur um almannakunngering og
- at áseta greiðar og nágreiniligar reglur um ta kommunalu fíggjarumsitingina.

Verður uppskotið til nýggja lóg um kommunustýri samtykt í óbroyttum líki, er rættarliga grundarlagi fingið til høldar til tess at tryggja:

- at somu karmar vera um ta kommunalu umsitingina,
- at somu kor vera fyri kommunustýrislimir, og at
- borgararnir fáa fullgott (skynsamt) innlit í kommunumál.

## 4. Fíggjarligar avleiðingar

Tað er sera trupult at meta um fíggjarligu avleiðingarnar í krónum av lógaruppskotinum. Tað kann tó sigast, at eftirlitið við kommununum verður styrkt, og kemur hetta at kosta meira enn tað ger í dag. Somuleiðis kemur uppskotið um lóg um kommunusamanlegging, sum er ein avleiðing av hesum lógaruppskotið, at kosta nakað, við tað at ein nevnd verður sett at hjálpa til við sjálvbodnum kommunusamanlegginum um kommunurnar ynskja hetta og eisini at fyrireika kommunusamanleggingar við lóg. Somuleiðis skulu ymiskir arbeiðsbólkar setast at fyrireika yvirgongdina til nýggju kommunuskipanina meira nágreiniliga.
Hinvegin er avleiðingin av lógaruppskotinum, kommunur við størri førleika og eitt týðiligari greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Hetta skuldi lætt munandi um umsitingina hjá landinum viðvíkjandi kommunum.
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum, við kunngerð, at áseta reglur fyri samsýning í sambandi við kommunalt arbeiði. Hugsast kann tí, at samsýningarskipanin verður gjørd meira tíðarhóskandi. Tí kann hetta lógaruppskotið viðføra øktar útreiðslur fyri kommunurnar á hesum øki við tað at kommunustýrislimir og serliga borgarstjórin verða betri lønt fyri sítt arbeiði.

## Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinirnar

## Til kapittul 1.

### Um lógarøki og allýsingar.

### Til § 1

*§ 1. Lógin fevnir um øll fyrisitingarlig øki, har kommunan hevur málsførleika, uttan so er, at undantøk eru í aðrari lóg.*
*Stk. 2. Val til kommunustýrið fer fram eftir reglunum í kommunalu vallógini.*

Lógaruppskotið fevnir um sama økið, sum lóg um føroysku kommunurnar fatar um, sí ll. nr. 45 frá 29/06-1972, tó soleiðis, at § 1, stk. 1 týðiliga tilskilar, at miðdepilin fyri lógarbinding er tann kommunala fyrisitingin.
Lógin tekur ikki støðu til, hvat hugtakið tann kommunala fyrisitingin" fevnir um, við tað at reglur um kommunalar uppgávur, sum kommunan annaðhvørt skal ella kann røkja, ikki eru hildnar at vera vanligar stýrisreglur. Sostatt má avmarkingin av hugtakinum tann kommunala fyrisitingin" altíð standa í mun til lógarásettar, kommunalar uppgávur og til fyrisiting av teimum uppgávum, ið ikki eru lógarásettar, t.e. tað, ið vanliga verður nevnt kommunufulltrúin.
Av tí at tað ikki til fulnar ber til at skilmarka ta kommunalu fyrisitingina, skal her bert í stuttum verða víst á, at frælsið hjá tí kommunala sjálvstýrinum og eftirlitið við kommununum er lógarfest í § 82 í grundlógini, sí L. nr. 169 af 05.06.1953: Danmarks Riges Grundlov, har henda áseting stendur:
*Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov."*

Í Færø Amts Kundgørelse Nr. 11 af 31.03.1948 af Lov om Færøernes Hjemmestyre" t.e. í heimastýrislógini, stendur henda ásetingin í pkt. 3 í Lista A undir føroysk sermál:
Kommunal mál. Harundir hoyra stjórnan av kommununum, eftirlit við teimum, kommunuskattur."

Og í § 56 í stýrisskipanarlógini, ll. nr. 103 frá 26.07.1994, er ásett, at :
*Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldarbindast við láni, borgan o.ø.m."*

umframt, at nevna, at kjarnin í tí kommunala sjálvstýrinum framvegis er rætturin til at leggja fíggjarætlan og at áseta skatt.

Ásetingin í § 1, stk. 2 er einans tikin við fyri at gera lesaranum greitt, at ásetingar um sjálvt valið til kommunustýrið ikki standa í hesi lóg.

**Til § 2**

***§ 2.*** *Reglur um kommunubýti verða ásettar í aðrari lóg.*

Ásetingin í § 2 er tikin við av lógartekniskum orsøkum, av tí at tað ikki verður hildið skilagott at tengja reglur um kommunubýtið saman við reglum um kommunustýrið.

**Til § 3**

***§ 3.*** *Við meirilutavali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær reinan meiriluta av teimum, ið á fundi eru, er valt.*
*Stk. 2. Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin reinan meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um.*
*Stk. 3. Fær hvørgin teirra reinan meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti.*

Henda ásetingin er av lógartekniskum orsøkum orðað sum ein allýsing, av tí at tað snýr seg um ein valhátt, sum verður endurtikin í lógini.
Sambært stk. 1 verður reinur meiriluti mettur í mun til talið á teimum kommunustýrislimum, ið møttir eru á fundi.
Ikki kann verða vikið frá ásetingunum í lógini um meirilutaval. Tó kann eitt samt kommunustýri víkja frá ásetingunum um meirilutaval í sambandi við eitt ítøkiligt val; men hetta kann tó ikki verða gjørt yvirhøvur.
Sambært stk. 2, 1. pkt er einki, ið forðar fyri, at onnur valevni kunnu verða skotin upp við aðru atkvøðugreiðslu, sjálvt um tey ikki vóru skotin upp við fyrstu atkvøðugreiðslu.

Í stk. 3 í lógini er ikki ásett, hvussu eitt lutakast skal verða avgreitt. Eitt mótmæli um framferðarháttin við lutakastinum eigur tí at verða sett fram, áðrenn lutakastið verður greitt úr hondum. Annars er mótmælisrætturin í kommunustýrinum mistur.
§ 3, stk. 3, 2. pkt. ásetur at fyrst valdi limur skipar fyri. Fyrst valdi er tann, ið hevur fingið flestar atkvøður á tí lista, ið hevur størsta atkvøðutal.

**Til § 4**

***§ 4.*** *Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*
*Stk. 2. Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetur ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*
*Stk. 3. Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.*
*Stk. 4. Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør ið umboðar hvønn bólkin .*
*Stk. 5. Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir stk.1-3.*

Grein 4 er eins og § 3 sett sum ein allýsing.

Við lutfalsvali skal sundurbýtið í bólkar sambært stk. 1 verða fráboðað undan valinum; men tó er tað ikki ein treyt, at henda fráboðanin skal verða givin undan tí fundi, tá valið fer fram.
Av tí at borgarstjórin er føddur nevndarformaður í fíggjarnevndini, samanber § 38, stk. 1, skulu limirnir til allar fastar nevndir verða valdir eftir sama bólkabýti til tess at forða fyri tí møguleika, at bólkur borgarstjórans kann fáa ein óynsktan fyrimun í fíggjarnevndini, við tað at borgarstjórin so kann siga seg vera ein einmansbólk, samstundis sum tann bólkurin, ið borgarstjórin annars hoyrir til, eisini sigur seg vera ein sjálvstøðugan bólk.
Grein 4, ið er samfest § 28, stk. 4, lýsir meginregluna um mótrokning av sessum, um so er, at borgarstjórin ella ein nevndarformaður eru føddur limir í eini nevnd v.m. Í tílíkum føri skal hesin sessur verða mótroknaður tí sessatali, hansara bólkur eigur. Reglan er treytað av, at viðkomandi samstundis er limur í kommunustýrinum, við ta at tað bert eru kommunustýrislimir, ið boða frá, hvønn bólk teir eru í.
Verður limatalið broytt í eini fastari nevnd, skulu allar fastar nevndir verða valdar og nýskipaðar eftir tí nýggju bólkauppgerðini av sessum, ið broytingin hevur borið við sær.

## Til kapittul 2.

**Um kommunustýrið.**

**Til § 5**

*§ 5.* *Kommunuviðurskifti verða stýrd av einum stýri, sum nevnt verður kommunustýri. Formaðurin í kommunustýrinum nevnist borgarstjóri.*

Heitið kommunustýrið" verður nýtt um tað stýri, ið stýrir teimum kommunalu viðurskiftunum. Lógin ber heitið Lóg um kommunustýrið", og er hetta at skilja, júst sum tað er sagt, tí talan er um at gera lógarkarmar bæði um skipanir og starvshættir hjá kommunustýrinum og øðrum kommunalum stovnum.
Ein avleiðing av § 5 er, at eitt kommunustýri kann vanliga ikki lata frá sær eina uppgávu til eitt sjálvstøðugt felag og samstundis varðveita stýrisræðið á hesum uppgávuøki.

**Til § 6**

***§ 6.*** *Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um síni stýrisviðurskifti í eina kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.*
*Stk. 2. Talið á kommunustýrislimum skal í minsta lagi vera 7 og í mesta lagi 17. Limatalið skal vera stakt.*
*Stk. 3. Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um sína málsmannagongd í eina fundarskipan.*
*Stk. 4. Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um starvsfólkaviðurskiftini í eina starvsfólkaskipan.*

Sambært stk. 1 skal kommunustýrið áseta reglur, ið serstakliga viðvíkja heildarskipan kommununnar í kommunustýrisskipanini. Lógin ásetur ymsastaðni, hvørji tey viðurskifti eru, sum skulu ella kunnu verða lagað gjøllari í kommunustýrisskipanini. Lógin viðger tó ikki hetta út í æsir. Sambært vanligum kommunalum rættaraðalreglum eru nøkur innihaldslig krøv sett kommunustýrisskipanini. Í henni eiga t.d. ikki at vera reglur um heimiling (delegatión) ella um viðurskifti, sum hvørki viðvíkja kommunalum uppgávum ella kommunalum virksemi annars. Sambært § 49 hevur landsstýrismaðurin sum partur av tí vanliga rættargildisseftirlitinum (legalitetseftirlitinum) eftirlitið við, at ongar ólógligar ásetingar eru í kommunustýrisskipanini. Sambært stk. 1, 2. pkt. skulu broytingar í kommunustýrisskipanini hava tvær viðgerðir. Ásetingin er serliga ætlað at vera vernd ímóti, at vikið verður frá kommunustýrisskipanini av hentleikaorsøkum undir eini málsviðgerð. Harumframt skal kravið um tvær viðgerðir tryggja, at innihaldið fær eina holla viðgerð. Kommunustýrið skal ansa eftir, at kommunustýrisskipanin er hóskandi. Samanumtikið verður tað tí hildið, at sama kommunustýrið skal viðgera bæði uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipanina.
Sambært stk. 2 er talið av kommunustýrislimum leyst av støddini á kommununi. Hugsandi er, at tann samanlagda kommunueindin í fyrsta umfari heldur er tørvur er á nógvum limum fyri at tryggja, at so nógv áhugamál fáa umboðan sum gjørligt. Seinni tá nýggja eindin er ein valvirkandi eind kann talið so minka um kommunustýrið ynskir ta.
Sambært stk. 3 skal kommunustýrið serliga gera ásetingar í fundarskipanina, sum viðvíkja rættargangsreglum ella mannagongdum fyri kommunustýrisvirksemið sum t.d., hvussu fundarboð verður givið, mannagongd fyri atkvøðugreiðslu o.s.fr. Fundarskipanin skal sostatt áseta karmarnar fyri arbeiðsskipanina hjá kollegialum stýrum.

Innihaldsliga kann fundarskipanin ikki áseta reglur, sum víkja frá vanligum, rættarligum meginreglum tílíkum stýrum viðvíkjandi. Sostatt kunnu ongar ásetingar verða gjørdar í fundarskipanina, sum gera rættarstøðuna verri hjá tí einstaka kommunustýrisliminum í mun til vanligar reglur.
Ásetingin í stk. 4 um eina starvsfólkaskipan er einasta áseting í lógini, sum umrøður skipanina av tí kommunualu fyrisitingini. Ásetingin vísir fyrst og fremst, at tann kommunala fyrisitingin er partur av stýriskervinum, har kommunustýrið er evsta stýrið og tí næst, at talan er um ein fyrisitingarmyndugleika. Tá ið hetta er sagt, skal verða lagt afturat, at kommunustarvsfólk hava onga sjálvstøðuga heimild, uttan so er, at tað er heimilað teimum í lóggávuni.
Talan er um starvsfólkaviðurskifti fyri starvsfólk, sum kommunan setur í starv. Í eini tílíkari starvsfólkaskipan eiga at vera ásettar reglur fyri, hvussu fólk verða sett/søgd úr starvi, hvør setur/sigur úr starvi, starvsøki, starvsheiti og aðrar almennar og ítøkiligar ásetingar.

**Til § 7**

*§ 7. Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja til borgarstjóra, varaborgarstjóra, nevndarlim ella umboð.*
*Stk. 2. Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. Tá ið borgarstjórin er valdur, skal hann leggja vanliga starvið frá sær, umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við fólkavalda starvið sum borgarstjóri.*
*Stk. 3. Val av varaborgarstjóra hevur gildi alt virkisskeiðið. Varaborgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. Ásetur kommunustýrisskipanin, at 1. og 2. varaborgarstjóri skulu verða valdir, fer valið fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4.*
*Stk 4. Kommunustýrislimur kann av persónligum áðum bera seg undan at verða borgarstjóravalevni.*

Sambært stk. 2 fer val av borgarstjóra fram eftir meirilutavalháttinum, samanber eisini viðmerkingarnar til § 19. Valt kann ikki vera í loyndum. Tí skal ein møgulig skrivlig atkvøðugreiðsla verða skipað soleiðis, at tað kann staðfestast, hvussu teir einstøku kommunustýrislimirnir hava atkvøtt.
Tað er einki, ið forðar fyri at velja ein kommunustýrislim, sum ikki er á fundi, til borgarstjóra, sí tó stk. 4.
Ikki kann verða vikið frá ásetingini í stk. 2, 1. pkt. um, at val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Virkisskeiðið hjá borgarstjóranum kann verða styttri enn valskeiðið, men einans eftir játtan sambært § 19, stk. 1 og í teimum í § 19, stk. 2 nevndu førum, ella um borgarstjórin verður settur úr starvi sambært § 18, stk. 4.
Tá ið borgarstjórin er valdur, skal hann sambært stk. 2, 3. pkt. leggja vanliga starv sítt niður og onnur møgulig størv við, herímillum fólkavald størv, sum t.d. løgtings- og landsstýrislimur. Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 9.
Harafturímíti er ásett í stk. 3, at varaborgarstjóri verður valdur fyri alt virkisskeiðið, samanber viðmerkingar til § 28.
Ásetingin í stk. 4 er eitt fyrivarni í mun til § 7, stk. 1, sum ásetur skylduna til at lata seg velja til borgarstjóra. Tá borgarstjórastarvi sambært kommunustýrislógini er eitt fulltíðar leiðslustarv, sum ikki er sambæriligt við annað borgarligt starv ella fólkavalda umboðan, ber hetta við sær, at skyldan

til at lata seg velja til borgarstjóra í serstøkum førum kann vera skerd. Tey føri talan kann vera um, er avmarkað til persónligar grundaðar orsøkir. Talan kann ikki einans vera um sjúku, men eisini um valið verður kommunustýrisliminum ella borgarliga starvi hansar til óbótaliga skaða.

**Til § 8**

*§ 8. Kommunustýrislimur, sum er arbeiðstakari, hevur rætt til fríloyvi í neyðugum vavi til tess at røkja starv sítt sum fólkavalt umboð.*

Grein 8 lógarfestir rættin til fríloyvi ella fráveru frá arbeiðinum til tess at røkja eitt kommunalt starv.
Grein 8 skal veita trygd fyri, at býtið verður javnari í kommunustýrinum ímillum privat og alment lønt.
Ásetingin fevnir bæði um arbeiðstakarar, sum eru kommunustýrislimir og arbeiðstakarar, sum røkja onnur kommunal arbeiði. Hugtakið arbeiðstakari" verður ikki allýst; men rætturin er latin øllum starvsfólkum, tað veri seg privat ella alment lønt.
Hetta er sostatt ein lágmarks verndarregla. Tað er tí einki, ið forðar fyri, at tað í aðrari lóggávu, í sáttmálum ella øðrum verður veitt arbeiðstakara betri rætt til fráveru.
Ásetingin er samstundis ein vernd ímóti uppsøgn vegna tað kommunala starvið. Hetta liggur í sjálvari ásetingini um fráveruloyvi, tí annars er vandi fyri, at álitið á fráverurættin verður beint burtur.
Arbeiðstakarin kann umbera seg við fráverurættin í neyðugum vavi, so at hann kann vera á kommunustýrisfundum, nevndarfundum og skeiðvirksemi, sum er partur av hansara kommunala virksemi, og tílíkum.
Verður ein arbeiðstakari settur úr starvi, skal arbeiðsgevarin í einum trætumáli prógva, at uppsøgnin ikki er grundað á tað kommunalpolitiska arbeiðið. Er arbeiðstakari frásettur ímóti hesi verndarreglu, skal arbeiðsgevarin rinda honum samsýning (godtgørelse).

**Til § 9**

*§ 9. Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur við kunngerð reglur um samsýning til kommunustýrislimir. Samsýning kann m.a. verða veitt fyri:*
*a) luttøku á kommunustýrisfundum og nevndarfundum,*
*b) luttøku á øðrum fundum í sambandi við útinning av starvinum sum kommunalt valdur limur,*
*c) skeiðsluttøku, sum kommunustýrið hevur góðkent,*
*d) annað virksemi, eftir umbøn frá kommunustýrinum ella eini fastari nevnd.*
*Stk. 2. Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur við kunngerð reglur um løn til borgarstjórar.*

At grein 9, ið snýr seg um samsýning til kommunustýrislimirnar, er tikin við, stendst fyrst og fremst av tí, at umráðandi er at virðismeta tað kommunalpolitiska arbeiðið. Men tað er eisini gjørt við atliti at teirri ábyrgd, sum ein og hvør kommunustýrislimur hevur fyri at kommunal viðurskifti verða stýrd á fullgóðan hátt.
Tað er latið upp í hendurnar á landsstýrismanninum at áseta fastar og greiniligar reglur um á hvønn hátt og nær, samsýning skal verða veitt. Sostatt kann talan verða um samsýning fyri hvønn fund,

fyri tíðarnýtslu o.s.fr. ella um skipan við fastari samsýning til kommunustýrislimirnar vegna starv teirra sum kommunalpolitikarar, ella kanska eina skipan, sum onkursvegna sameinir hesar samsýningarhættir.
Endamálið við ásettum samsýningarreglum er, at ein og sama skipan er galdandi fyri øll kommunustýri. Skipanin skal vera so mikið greið, at hon ikki á nakran hátt kann verða nýtt ella misnýtt at trýsta kommunustýrislimir.
Sambært stk. 2 skal landsstýrismaðurin áseta reglur um løn til borgarstjórar. Ásetingin tekur støði í kommunustýrislógini yvirhøvur. Sambært § 16, stk. 1, 1. pkt. skal borgarstjórin virka sum dagligur leiðari á tí kommunalu fyrisitingini, umframt at hann skal røkja tær uppgávur, ið annars eru latnar honum.
Sambært § 7, stk. 2, 3. pkt. hevur borgarstjórin skyldu at røkja starv sítt av heilum huga, og tí skal hann eisini hava løn fyri starv sítt sum borgarstjóri.

**Til § 10**

***§ 10.*** *Kommunustýrislimur hevur skyldu at boða frá, um hann heldur iva verða um sítt gegni.*
*Stk. 2. Kommunustýrið ella føst nevnd ger av, um eitt mál er av tílíkum áhuga hjá einum limi, at hann hvørki kann vera við í viðgerð og atkvøðugreiðslu.*
*Stk. 3. Er líkt til, at kommunustýrið ella føst nevnd tekur avgerð um, at kommunustýrislimur ella fastur nevndarlimur er ógegnigur, kunnu limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.*
*Stk. 4. Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, kommunustýrið ella ein føst nevnd ger av, at kommunustýrislimur ella fastur nevndarlimur er ógegnigur, kunnu teir limir, ið valdir eru á viðkomandi valevnislista, krevja, at málið verður flutt til næsta fund.*
*Stk. 5. Málið kann tó ikki verða flutt, um 2/3 av teimum hjástøddu kommunustýrislimunum ella í minsta lagi helmingurin av teimum føstu nevndarlimunum eru ímóti, ella at málið fyrnast.*

Grein 10 fevnir um tað serliga ella ávísa gegnið. Umráðandi er, um kommunustýrislimurin hevur ein serligan áhuga í einum ávísum máli, samanber § 3 í ll nr. 132 frá 10.06.1993 um fyrisitingarlóg. Boðar ein kommunustýrislimur frá, at hann heldur iva vera um sítt gegni, so skal annaðhvørt kommunustýrið ella tann fasta nevndin avgreiða gegnismálið, áðrenn farið verður undir málsviðgerðina, samanber viðmerkingarnar til § 15, stk. 2. Henda mannagongdin eigur at verða nýtt, av tí at rættarfylgjan av ógegni er, at viðkomandi kommunustýrislimur skal fara av fundinum, tá ið tað málið, har ið hann er ógegnigur, skal verða avgreitt.
Tó kann ein kommunustýrislimur bæði vera við í málsviðgerðini um gegnisspurning sín og greiða atkvøðu um hann.
Hetta er eitt undantak í mun til vanligu regluna í § 6, stk. 3 í fyrisitingarlógini; men hevur hetta sín uppruna í meginreglum um kollegialt samansettar fyrisitingarligar stovnar.
Um so er, at kommunustýrið ella tann fasta nevndin ger av, at kommunustýrislimur er ógegnigur, so er henda avgerð ein rættaravgerð, sum skal hava sítt støði í lóggávuni, herímillum í vanligum rættargrundreglum.
Ásetingin at innkalla tiltakslim er grundað á umhugsni um ikki tilvildarliga at broyta tað politiska styrkislutfallið í kommunustýrinum ella í føstu nevndini, vegna tess at ein limur verður ógegnigur.
Ásetingin er ikki tvungin. Tiltakslimur *kann* verða innkallaður. Tað kann hugsast at verða trupult hjá tiltakslimi, ið bert verður boðsendur at taka støðu í einum ávísum máli, at fáa nóg gott innlit í

tey kommunalu viðurskiftini, og at tað tí kanska er høpisleyst at krevja eina sjálvstøðuga støðutakan undir ábyrgd frá tílíkum limi.
Tað eru teir limir, ið valdir eru á viðkomandi valevnislista, ið hava rætt at krevja, at tiltakslimur verður innkallaður. Sostatt fellur tað *ikki* í lut hansara, ið ógegnigur er, at krevja, at tiltakslimur verður innkallaður, uttan so at hann er einvaldur. Tiltakslimur er tann, ið stendur ovastur á viðkomandi valevnislista.

**Til § 11**

***§ 11.*** *Kommunustýrislimur, sum starvast hjá kommununi, kann ikki verða limur í fastari nevnd, um nevndin umsitur málsøki, sum hava tilknýti til hansara starvssøki.*
*Stk. 2. Ein nevndarlimur kann ikki gera nakað arbeiði móti samsýning fyri tann partin av kommunalu fyrisitingini, ið verður stjórnað av viðkomandi nevnd, um so er, at arbeiðið ikki er boðið út alment.*

Grein 11 fevnir um tað, ið rópt verður generelt gegni ella starvsósambæri. Sambært hesi áseting verður kommunalt settur persónur útihýstur úr fastari nevnd, um so er, at málsøki hjá tí føstu nevndini fatar um hansara tænastuøki.
Ásetingin í stk.1 tekur støði í fyrilitinum fyri, at persónur ikki eigur at vera limur í eini nevnd, um viðkomandi vegna ítøkiligt ógegni ikki kann vera við í fleiri málsviðgerðum. Her snýr tað seg so at siga bert um fyrilit, ið eru til gagns fyri ta kommunalu fyrisitingina. Harumframt tekur ásetingin eisini støði í fyrilitinum um álit borgaranna á ta kommunalu fyrisitingina.
Sum meginregla vil henda ásetingin útihýsa øllum teimum, ið starvast innan tað fyrisitingarliga økið hjá einari fastari nevnd. Hetta leggur ásetingin uppfyri við at seta eitt krav um tilknýti ella øvugt, at til ber at siga eitt fjarstøðueyðkenni fyri á tann hátt at normera" vavið á ásetingini. Sambært tilknýtiskravinum ella fjarstøðueyðkenninum skal metingin um starvsósambæri hava sítt upprunastøði í, um tað er *neyðugt* at útihýsa tí kommunalt setta frá limaskapinum í eini fastari nevnd fyri at tryggja grundleggjandi fyrilit við fyrisitingarligum virkisføri og á tann hátt at varðveita álit borgaranna. Metingin skal vera ítøkilig.
Grein 11, stk. 2 forðar fyri, at arbeiði í loyndum kann verða latið upp í hendurnar á einum nevndarlimi. Brot á hesa reglu verður revsað, samanber § 52, stk. 2.

## Til kapittul 3.

**Um kommunustýrisfundir.**

**Til § 12**

***§ 12.*** *Nývalda kommunustýrið skal skipa seg í seinasta lagi innan árslok í valárinum.*
*Stk. 2. Kommunustýrið skal vera fullmannað á fyrsta fundi. Fyrst valdi kommunustýrislimur gevur fundarboð og leiðir fundin, til borgarstjóri er valdur.*

*Stk. 3. Berst kommunustýrislimi frá at møta á fyrsta fundi, skal tiltakslimur innkallast*

Ásetingin í stk. 1 um, at kommunustýrið skal skipa seg fyri árslok, sigur greitt, at kommunustýrið skal verða skipað, áðrenn valskeiðið byrjar. Í grundini hevur ásetingin helst sítt støði í hentleikaorsøkum.
Skuldi tað borist á, at ein limur fellur varandi frá, eftir at kommunustýrið er skipað, og áðrenn valskeiðið byrjar, nýtist kommunustýrinum ikki at skipa seg av nýggjum.
Sambært reglum í løgtingslóg um val til kommunurnar er tað ásett, at áðrenn nývalda kommunustýrið kann taka við, skal tað gamla ella sitandi kommunustýrið tó hava avgreitt møguligar klagur um valið v.m.
Um so er, at ein klaga um valið ber við sær, at samansetingin í kommunustýrinum verður broytt, so skal kommunustýrið skipa seg av nýggjum.
Í tíðarskeiðinum til valskeiðið byrjar, kann kommunustýrið einans viðgera tey mál, sum lógin ásetur, sum t.d. val av borgarstjóra, varaborgarstjóra, val av limum í fíggjarnevndina o.s.fr.
Stk. 2 ásetur, at kommunustýrið skal vera fullmannað á fyrsta fundi. Hesi áseting kann ikki verða vikið frá. Tí skal tiltakslimur sambært stk. 3 verða innkallaður í slíkum førum.

**Til § 13**

***§ 13.*** *Kommunustýrislimur kann seta fram uppskot og spyrja um øll kommunal viðurskifti.*

Kommustýrislimur kann krevja, at eitt mál verður tikið við á fundarskránna til kommunustýrisfundir. Kommunustýrislimur kann nýta sín rætt bæði viðvíkjandi málum, sum eru til nevndarviðgerð ella innan ta kommunalu fyrisitingina, og viðvíkjandi øðrum málum. Sí eisini viðmerkingarnar til 31.
Grein 13 gevur einans kommunustýrislimum tann sonevnda framtaksrættin (initiativret), sum tó er avmarkaður, við tað at hesin framtaksrættur ikki fevnir um ta framhaldandi avgreiðsluna av málinum.

**Til § 14**

***§ 14.*** *Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nágreiniligari reglur um vanligar fundir skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*
*Stk. 2. Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.*

Ásetingin í stk. 1 um, at kommunustýrið vanliga hevur fund eina ferð um mánaðin er ein lágmarksregla. Tó er hon ikki til hindurs fyri, at eingir vanligir fundir t.d. verða hildnir í summarfrítíðini.
Sambært stk. 1 ger kommunustýrið sjálvt av, nær og hvar vanligir fundir verða hildnir.
Kommunustýrið kann gera av at halda fundir ávísar dagar í vikuni, dagstevndar dagar ella annað.

Tá ið kommunustýrið árliga ásetur fundarmundið fyri kommunustýrisfundirnar, so eigur tað at verða gjørt við atliti at møguleika borgaranna til hjáveru. Tað er tí hóskiligt at halda kommunustýrisfundir uttan fyri vanliga arbeiðstíð.
Tann samtykta fundarætlanin er bindandi, og skal hon sambært stk. 1, 2. pkt. verða almannakunngjørd. Sambært vanligum reglum er tað eitt krav til fundarætlanina, at hon er so mikið greið, at borgararnir ikki aftan á almannakunngeringa ivast í, nær kommunustýrisfundir verða hildnir. Henda ásetingin krevur sostatt, at bæði tann árliga fundarrøðin og tann einstaki fundurin skulu verða almannakunngjørd.
Skulu eykafundir sambært stk. 2 verða hildnir, so eiga teir at verða hildnir skjótast gjørligt. Vanliga reglan um fundarfráboðan ber við sær, at eykafundur eigur at verða fráboðaður einar tríggjar til fýra yrkadagar frammanundan, um so er, at málið tolir at bíða so leingi.

**Til § 15**

***§ 15.** Kommunustýrið er viðtøkuført, um í minsta lagi helmingurin av kommunustýrislimunum er á fundi.*
*Stk. 2. Um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið meirilutin av teimum, ið greiða atkvøðu, hevur atkvøtt fyri uppskotinum. Stendur á jøvnum, er uppskotið fallið.*

Sambært stk. 1 er kommunustýrið viðtøkuført, um í minsta lagi helmingurin av limunum eru á fundi. Tað er ikki nøkur treyt, at t.d. borgarstjórin er møttur. Hildið verður ikki, at tað kann hava við sær vantandi viðtøkuføri fyri kommunustýrið, um limir fara av fundinum undir atkvøðugreiðsluni um eitt ávíst mál, sjálvt um atkvøðurgreiðslan í tí ávísa málinum ikki er lokin.
Er kommunustýrislimur sambært § 10 hildin at vera ógegnigur í einum ávísum máli, so kann hann hvørki vera við í málsviðgerðini ella í atkvøðugreiðsluni, og kann hann tí heldur ikki verða taldur við í uppgerðina um, hvørt kommunustýrið er viðtøkuført ella ikki.
Ein blonk telur við í atkvøðugreiðsluni, tvs. við munliga atkvøðugreiðslu, er neyðugt at spyrja, um nakar atkvøður blankt.
Ásetingin í stk. 2 um atkvøðumeiriluta ber við sær, at fær eitt uppskot ikki atkvøðumeiriluta, so er tað fallið. Løgfrøðiliga merkir hetta, at tað krevst ein meiriluti at broyta eina rættarliga ella veruliga støðu. Annars er hon standandi óbroytt. Yvirhøvur skal eisini verða víst á viðmerkingarnar til § 33.

**Til § 16**

***§ 16.** Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini. Hann býtir málini sundur til tær ymisku nevndirnar og tekur sær av teimum málum, sum ikki eru latin nakrari nevnd.*
*Stk. 2. Borgarstjórin gevur fundarboð og fyrireikar kommunustýrisfundirnar.*
*Undan hvørjum fundi skal borgarstjórin kunna kommunustýrislimirnar um, hvørji mál koma fyri.*
*Stk. 3. Eitt hóskandi tíðarskeið fyri fundin skal borgarstjórin leggja mál og málsupplýsingar fram, so at kommunustýrislimirnir kunnu gera sær eina sjálvsmeting um hesi málini.*

Í grein 16 er neyv lýsing av leiðsluábyrgd borgarstjórans mótvegis kommunustýrinum, og er henda lýsingin gjørd við fyriliti til ásetingina í § 9, stk. 2, samanber viðmerkingarnar.

Tað er ikki nøkur treyt, at borgarstjórin persónliga skal greiða allar leiðsluuppgávur úr hondum. Í teimum førum, ásett er í lógini, at ein áheitan skal verða send borgarstjóranum, sum t.d. ein áheitan um skjalainnlit sambært § 21, stk. 2, so skal hetta verða gjørt. Í øðrum føri kunnu sjálvsagdar áheitanir av handahógvi verða avgreiddar av starvsfólki kommununnar.
Sum dagligur aðalstjóri fyri ta kommunalu fyrisitingina hevur borgarsjórin ábyrgd av, at øll formlig krøv viðvíkjandi málsviðgerðini eru í lagi. Hetta merkir í stuttum, at borgarstjórin skal síggja til, *at* skikkað starvsfólk eru tøk, *at* tey settu fylgja góðum fyrisitingarsiði, *at* arbeiðið er lagt til rættis á hóskandi hátt, *at* tann neyðuga samskipanin ímillum samanhangandi málsøki verður tryggjað o.s.fr. Ein fyritreytin at røkja hesar leiðsluuppgávur er, at borgarstjórin fær høvi at hava eftirlit við øllum lutum í fyrisitingini, sum neyðugir eru til tess.
Sambært stk. 1 lutar borgarstjórin mál sundur til tær ymisku nevndirnar. Nøkur krøv gera seg galdandi viðvíkjandi sundurskiftingini. Her verður serliga hugsað um, *at* eingin ivi skal valda um uppgávubýtið ímillum tær føstu nevndirnar, *at* øki, ið natúrliga hoyra neyvt saman, helst eiga at vera í somu nevnd, og *at* málsøkini hjá teimum føstu nevndunum eru nøkulunda lík, tá ið tað snýr seg um stødd og týdning.
Ásetingin í stk. 1 um, at borgarstjórin tekur sær av teimum málum, ið ikki eru løgd til nakra nevnd, er sett av hentleikaávum. Sambært kommunustýrisskipanini skulu í grundini øll mál verða lutað og latin viðkomandi nevndum. Fellur eitt mál ikki natúrliga inn undir málsøkið hjá eini fastari nevnd, skal borgarstjórin lata kommunustýrið taka støðu til hetta.
Sambært stk. 2, 1. pkt. so fatar skylda borgarstjórans at fyrireika kommunustýrisfundirnar um tey formligu viðurskiftini, samanber eisini viðmerkingarnar til § 30.
Hóskandi tíðarskeið fyri fundin er í minsta lagi 3-4 yrkadagar.
Sambært stk. 3 fyriskipar borgarstjórin framløguna av málstilfari til kommunustýrislimirnar, so at teir kunnu fáa allar tær upplýsingar, sum tørvur er á, og sostatt verða førir fyri at taka avgerðir á hollum grundarlagi.
Hava kommunustýrislimir ikki fingið nóg góðar møguleikar at fyrireika seg til eitt mál, sum teir tí ikki kunnu taka støðu til, og teir mótmæla hesum, so kann kommunustýrið ikki taka avgerð í málinum, uttan so er, at tað er um at fyrnast, t.e.: at tað tolir ikki at bíða vegna formliga ella rættarliga freist, ella at málið er av slíkum slagi, at støða kann verða tikin til tað av handahógvi - uttan fyrireiking.

**Til § 17**

***§ 17.*** *Á hvørjum vanligum kommunustýrisfundi boðar borgarstjórin frá, hvørji mál eru beind í nevnd síðan síðsta fund.*
*Stk. 2. Borgarstjórin ansar eftir, at tey mál, ið krevja kommunustýrisviðgerð, fáa tílíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin. Í átrokandi førum kann borgarstjórin tó fyriskipa, hvussu málini skulu verða avgreidd.*
*Stk. 3. Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast ella har ongin orsøk er til iva.*
*Stk. 4. Borgarstjórin ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum komm-unustýrisins. Hann ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan.*

Í høvuðsheitum greinir § 17 hvussu borgarstjórin skal fremja sína fyrisitingarleiðslu.
Sambært stk. 2 skal borgarstjórin ansa eftir, at mál fáa formliga avgreiðslu. Við hesum er m.a. sagt, at borgarstjórin skal ansa eftir, at allar tær avgerðir, sum tiknar eru í kommunustýrinum, skulu verða framdar í verki.

Borgarstjórin hevur í ávísum føri ein inntrivsrætt. Hetta merkir, at hann kann tálma fremjing av eini avgerð, um hann t.d. gerst varugur við, at avgerðin kann hava endurgjaldskrav við sær ímóti kommunustýrinum.
Hevur eitt framt tiltak ikki neyðuga játtan, skal borgarstjórin leggja málið um játtan fyri kommunustýrið.
Í stk. 3 er ásett, at borgarstjórin hevur eina lógarfesta heimild til, kommunustýrisins vegna, at taka avgerð í ávísum málum, sum koma inn undir ásetingina. Treytin um, at eitt mál ikki má geva høvi til iva, er lokin, um borgarstjórin metir, at ikki bara hann, men eisini allir aðrir kommunustýrislimir halda ongan iva vera um málið.
Borgarstjórin skal í fyrstu syftu sjálvur meta, um lógarinnar treytir eru loknar. Hann hevur ikki skyldu til at upplýsa kommunustýrið um tær avgerðir, ið tiknar eru sambært hesi áseting. Henda upplýsingarskylda kann tó verða ásett í kommunustýrisskipanina.
Eru mál um at fyrnast, t.e.: at tað tolir ikki at bíða vegna formliga ella rættarliga freist, hevur borgarstjórin somuleiðis heimild at taka avgerð kommunustýrisins vegna. Men heimildin hjá borgarstjóranum at taka slíkar avgerðir er undir øllum umstøðum treytað av, at málið sambært lógini ikki *skal* verða lagt fyri kommunustýrið.
Ásetingin í stk. 4 um, at borgarstjórin skal ansa eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan, fevnir bæði um lógarásett og ikki lógarásett tiltøk, samanber viðmerkingarnar til § 40.

**Til § 18**

***§ 18.** Mál, ið snúgva seg um virksemi borgarstjórans, kunnu verða løgd fyri kommunustýrið, um fleiri kommunustýrislimir krevja tað. Borgarstjórin skal geva kommunustýrinum allar umbidnar upplýsingar, eins og hann í øllum lutum skal lýða tær avgerðir, kommunustýrið tekur.*
*Stk. 2. Nágreiniligari reglur um virksemi borgarstjórans skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina.*
*Stk. 3. Verjir borgarstjórin seg við at fremja tær uppgávur, ið annaðhvørt eftir lógini ella kommunustýrisskipanini eru latnar honum at umsita, so kann kommunustýrið tilnevna ein annan kommunustýrislim at røkja hansara uppgávur. Kommunustýrið kann í álvarsomum føri fyribils velja ein annan sum virkandi borgarstjóra.*
*Stk. 4. Avgerðin sambært stk. 3, 2. pkt. skal alt fyri eitt verða latin landsstýrismanninum í kommunumálum til staðfestingar. Staðfestingin skal alt fyri eitt skjótast inn fyri dómsvaldið til rættarroynd.*

Hóast borgarstjórin sambært stk. 1 og meginregluni í § 13 um tann sonevnda framtaks-rættin er undirgivin teimum avgerðum, sum kommunustýrið hevur tikið, so gevur henda áseting í so máta borgarstjóranum eina eyka vernd, við tað at mál um virksemi hjá borgarstjóranum krevja sameining. Sostatt er tað ikki nóg mikið, at *ein* kommunustýrislimur leggur málið fram, samanber eisini viðmerkingarnar til § 31.
Sambært stk. 3 kann vandi verða fyri, at borgarstjórin verður settur úr starvinum sum borgarstjóri, um so er, at hann ikki røkir sínar lógarásettu uppgávur.
Borgarstjóranum til verndar skal landsstýrismaðurin sambært stk. 4 staðfesta avgerðina, áðrenn hon fær gildi, sí eisini viðmerkingarnar til § 7. Staðfestingin skal harumframt standa sína roynd í rættinum fyri at kanna, um verjing borgarstjórans er verulig og avgerðin hjá kommunustýrinum um fyribils at velja ein annan kann góðtakast.

**Til § 19**

***§ 19.*** *Setur borgarstjóri fram umbøn um at verða loystur úr starvi, kann kommunustýrið loysa hann úr starvinum.*
*Stk. 2. Fer borgarstjóri úr kommunustýrinum, doyr, ella verður loystur úr starvi, so skal nývál av borgarstjóra fara fram eftir reglunum í § 7, stk. 2.*

Umbøn frá einum borgarstjóra um at verða loystur úr starvi tað, ið eftir er av valskeiðinum, kann sambært stk. 1, verða tikin aftur, so leingi kommunustýrið ikki hevur tikið avgerð í málinum.
Játtar kommunustýrið at eftirlíka umbønini, skal ein tílík samtykt í fyrsta lagi verða tikin beint undan tí tíðarskeiði, sum borgarstjórin sambært umbønini ynskir at verða loystur úr starvi.
Grein 19 fevnir einans um borgarstjórans undantøku úr starvinum. Um undantøku av limaskapi í kommunustýrinum verður yvirhøvur víst til lógina um val til kommunurnar.
Fer borgarstjórin úr starvinum, skal annar borgarstjóri verða valdur sambært reglunum í § 7, stk. 2, um val av borgarstjóra sí eisini viðmerkingarnar. Sostatt verður varaborgarstjórin ikki sjálvvirkin borgarstjóri. Tó skal varaborgarstjórin røkja starvið sum borgarstjóri, til nýggjur borgarstjóri er valdur.

**Til § 20**

***§ 20.*** *Kommunustýrið skal áseta í kommunustýrisskipanina, hvussu kommunustýrislimur skal kunna fáa upplýsingar ella tekniska hjálp frá fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðir.*
*Stk. 2. Kommunustýrislimur hevur rætt at kanna framlagt tilfar saman við ser-kønum stuðli, sum ikki er kommunustýrislimur, í tí vavi, tað er í samsvari við reglurnar um tagnarskyldu.*

Grein 20 heimilar kommunustýrinum at gera av í hvønn mun og hvussu ein áheitan frá kommunustýrislimi at fáa ískoytisupplýsingar skal verða játtað. Ásetingin birtir upp undir kjak í kommunustýrinum um hesi viðurskifti. Tílíkt kjak eigur at snúgva seg um tann tørv, kommunustýrislimir hava at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini.
Verða upplýsingar t.d. sendar kommunustýrislimum, so skal kommunustýrið vissa seg um, at allir kommunustýrislimir fáa somu atgongd til upplýsingarnar. Sostatt skal ein kommunustýrislimur, sum t.d. ikki kann nýta teldu, fáa atgongd til upplýsingar, sum annars verða latnir um teldukervið, á annan hátt.
Sambært stk. 2 hevur kommunustýrislimur harumframt rætt at kanna tað tilfar, ið fram er lagt, saman við fólki uttan fyri kommunustýrið.
Ásetingin forðar ikki fyri, at ein kommuna harumframt kann loyva kommunustýrislimum óavmarkaða atgongd til annað tilfar, sum er málinum viðkomandi.
Tá ið sipað verður til vanligar reglur um tagnarskyldu, ásetur § 26 í fyrisitingarlógini tær vanligu reglurnar hesum viðvíkjandi.

**Til § 21**

*§ 21. Kommunustýrislimur hevur rætt at fáa skjalainnlit í málum, har tilfarið í endaligum skapi er til skjals í kommunalu fyrisitingini.*
*Stk. 2. Kommunustýrislimur skal stíla umsókn sína um skjalainnlit til borgar-stjóran við tilskilan um, hvørji skjøl ella mál talan er um.*
*Stk. 3. Borgarstjórin kann avmarka rættin til skjalainnlit í tí vavi, tað er neyðugt við atliti at málsavgreiðsluni, ella har skjalainnlit í avgerandi mun ber ampa við sær.*

Grein 21 er lógarfesting um verandi atgongd til skjalainnlit. Høvuðstreytin fyri skjalainnliti er, at tilfarið, skjalainnlit ynskist í, viðvíkur einum máli, sum kann verða lagt fyri kommunustýrið. Sambært stk. 1, fatar rætturin til skjalainnlit einans um verandi tilfar. Sostatt kann ein kommunustýrislimur ikki krevja, at ískoytistilfar verður útvegað. Harafturímóti fevnir rætturin til skjalainnlit eisini um skjøl, sum eru undantikin almenni eftir lóg um innlit í fyrisitingina, sí ll. nr. 133 frá 10/06-1993.
Við ásetingini í stk. 2 um, at kommunustýrislimur skal stíla umsókn um skjalainnlit til borgarstjóran, er tað gjørt greitt, at kommunustýrislimir ikki bara kunnu fara ígjøgnum eina mongd av málum í fyrisitingini, ella at teir beinleiðis kunnu krevja fyrisitingina um skjalainnlit, samanber. eisini viðmerkingarnar til § 16.
Er talan um áheitan um skjalainnlit frá kommunustýrislimi, sum er ógegnigur í tí máli, tilfarið snýr seg um, so skal ein tílík áheitan um skjalainnlit meginregluliga verða noktað. Metingin um, hvørt tilfarið skal verða hildið loyniligt fyri tí ógegniga kommunustýrisliminum, valdast, um tað er neyðugt vegna kommunal áhugamál. Metingin skal vera ítøkilig.
Borgarstjórin skal syrgja fyri, at viðkomandi kommunustýrislimur ikki fær atgongd til tilfarið sum kommunustýrislimur. Sostatt kann hugsast, at ivi um gegnið hjá einum kommunustýrislimi kann volda, at avgerðin um hansara gegni hevur skund, so støða kann verða tikin til, um kommunustýrislimi skal verða noktað skjalainnlit sambært hesi áseting.

**Til § 22**

*§ 22. Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. Setur eingin kommunustýrislimur fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð.*
*Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal borgarstjórin geva tiltakslimi fundarboð.*
*Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru lokanar.*

Starvið sum kommunustýrislimur verður mett sum borgaraskylda. Hetta upprunastøðið er millum annað lógarfest í tí kommunalu vallógini um skylduna at taka við vali, um ein er valbærur.
Ein kommunustýrislimur hevur sostatt skyldu at røkja starvið í virkiskeiðinum. Hetta merkir í fyrstu syftu, at kommunustýrislimur hevur skyldu at vera á kommunustýrisfundum og á teimum nevndarfundum, har hann er valdur sum nevndarlimur.
Hóast kommunustýrislimur hevur møtiskyldu, er hon ikki treytaleys. Hetta sæst eisini í ásetingunum í stk. 1 og 2 um lógligt forfall. Lógin viðger ikki út í æsir, nær talan er um lógligt forfall, og hon tekur heldur ikki støðu til, hvussu langt møtiskyldan røkkur.

Heilsustøða er greidliga nevnd bæði í stk. 1 og 2 sum lóglig forfalsorsøk. Hetta merkir, at bæði heilsustøðan hjá kommunustýrisliminum sjálvum eins og heilsustøðan hjá hansara barni ella øðrum nær skyldum ættfólki, kann volda, at hann hevur lógligt forfall og tískil ikki møtiskyldu.
At røkja annað starv er sambært stk. 2 somuleiðis ásett sum lóglig forfalsorsøk. Skal ein kommunustýrislimur røkja tvær ella fleiri borgarligar skyldur um sama mundið, kann limurin sjálvur velja, hvat av hesum hann vil røkja.
Tað eru eisini onnur viðurskifti, sum kunnu vera grundir til lógligt forfall. Í so máta kann frítíð eisini møguliga vera ein lóglig forfalsorsøk. Sama kann gera seg galdandi viðvíkjandi sjálvstøðugum áhugamálum, um so er, at umráðandi er at raðfesta røkt teirra so frammarlaga, at t.d. fundarvirksemi kann volda, at hann tessvegna kann verða fyri álvarsomum missi ella ampa.
Ásetingin í § 22 at innkalla tiltakslim er ikki algongd, og merkir tí ikki, at tiltakslimur skal verða boðsendur í teimum førum, kommunustýrislimur ikki er møttur.
Sambært stk. 1 kann tiltakslimur verða innkallaður, um so er, at kommunustýrislimur ikki kann møta av heilsuávum. At innkalla tiltakslim sambært hesi áseting er sjálvkravt, og tí er ein áheitan um hetta fortreytin fyri, at tiltakslimur kann verða innkallaður. Øvugt ber til at siga um stk. 2, at tiltakslimur skal verða innkallaður, tá treytirnar hesum viðvíkjandi eru loknar.
Sambært stk. 2 er tað borgarstjórin, sum skal ansa eftir, at treytirnar at innkalla tiltakslim eru loknar. Í tí viðfangi skulu neyðugar upplýsingar og helst eisini skjalprógv vera til taks, ið siga, hví og hvussu leingi kommunustýrislimurin væntandi ikki kann røkja starv sítt.
Sambært stk. 2 skal tað ikki bera kommunustýrislimi til at møta í minsta lagi 14 samfullar dagar. Fráveran er at rokna frá teirri løtu, borgarstjórin verður kunnaður um hana, ella frá tí, at sjálv fráveran byrjar.
Sambært stk. 3 er tað kommunustýrið, ið ger av, um treytirnar at innkalla tiltakslim eru loknar.

**Til § 23**

***§ 23.*** *Tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri luttaka, fer innkomin tiltakslimur út.*
*Stk. 2. Í teimum førum, har fleiri tiltakslimir eru komnir inn á sama valevnislista, men har starvstíðin ikki endar samstundis, skal tann tiltakslimur, ið fyrstur er valdur, verða seinastur út.*

Grein 23 er tikin við til tess at gera málið um ta veruligu útskiftingina greidligari, serliga við atliti at mannagongdini, tá ið fleiri tiltakslimir eru inni í senn.

**Til § 24**

***§ 24.*** *Er tiltakslimur komin inn fyri borgarstjóra ella varaborgarstjóra eftir reglunum í § 22, stk. 2, men sannlíkt er, at fráveran varir longri enn 2 mánaðir, so skal kommunustýrið fyribils velja borgarstjóra ella varaborgarstjóra í teirra stað eftir reglunum í ávíkavist § 7, stk. 2 og stk. 3.*

Hevur borgarstjórin sambært § 22, stk. 2 forfall í minst 14 samfullar dagar, og er varaborgarstjórin vorðin fyribils borgarstjóri, kann nýval av virkandi borgarstjóra ikki fara fram, uttan so er, at varaborgarstjórin fær fráboðan um, at borgarstjórin væntandi hevur forfall í meira enn 2 mánaðir.

Eftir hesum virkar varaborgarstjórin einans í borgarstjórans stað, tá ið borgarstjórin hevur bráðfeingis forfall. Í tí tíðarskeiði, varaborgarstjórin virkar í borgarstjórans stað, hevur varaborgarstjórin allar skyldur og øll rættindi, sum annars eru galdandi fyri ein valdan borgarstjóra.

**Til § 25**

***§ 25.*** *Borgarstjórin ansar eftir, at allar samtyktir á kommunustýrisfundi verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða undirskrivað av øllum teimum luttakandi kommunustýrislimunum.*
*Stk. 2. Hevur kommunustýrislimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina. Hetta er eisini galdandi, tá tilfarið verður sent øðrum myndugleika.*

Endamálið við gerðabókini er at skjalprógva innihaldið í avgerðum og samtyktum kommunustýrisins. Harumframt skal gerðabókin skjalprógva, hvørjir kommunustýrislimir hava ábyrgd av eini avgerð ella samtykt. At skriva í gerðabók eina avgerð ella samtykt er tó eingin gildistreyt. Tí er neyðugt at skriva upp, hvørjir kommunustýrislimir eru á fundi, eins og fest eigur at verða á blað, tá ið kommunustýrislimur fer av fundi í ótíð, samanber eisini viðmerkingarnar til § 34. Sambært § 25 eru tað bert avgerðir og samtyktir, sum skulu verða førdar í gerðabókina. Sostatt skulu tingingarfrásagnir ikki verða førdar í bókina. At skriva gerðabók skal vera skipað á sovorðnan hátt, at tað ikki er gjørligt at broyta tað, ið skrivað er, uttan at tað sæst aftur.
Við undirskriftini verður staðfest, at kommunustýrislimurin viðgongur, at hann hevur verið á fundi, og at tað, sum skrivað er í gerðabókina, samsvarar við tað, ið farið er fram á fundinum.
Sambært stk. 2 kann kommunustýrislimur krevja sína serstøðu viðmerkta í gerðabókina, um so er, at hon viðvíkur einum máli, ið hevur verið viðgjørt á fundi. Serstøðan skal staðfesta, hvat kommunustýrislimurin heldur, at kommunustýrið átti at havt avgjørt ella samtykt. Sostatt skal viðmerkingin vera stuttorðað. Kommunustýrislimur kann eisini krevja, at sín ólíka hugsan um eina mannagongd skal verða førd í gerðabókina.
Kommunustýrislimur, sum ynskir at fáa sína serstøðu førda í gerðabók, skal seta fram áheitan um hetta.
Sambært stk. 2 er rætturin at krevja, at serstøða verður send við til annan myndugleika, avmarkaður til tey føri, har kommunustýrið gevur sítt ummæli til ein annan myndugleika. Hetta merkir, at verður ein avgerð ella ein samtykt send øðrum myndugleika til kunningar, hevur kommunustýrislimurin ikki rætt at krevja, at sín viðmerkta serstøða skal verða send við.

## Til kapittul 4.

**Um borgarligt almenni.**

**Til § 26**

***§ 26.*** *Kommunustýrisfundir eru almennir. Um neyðugt kann kommunustýrið gera av, at mál, sum t.d. persónsmál, skulu verða viðgjørd fyri aftur latnum hurðum. Henda viðgerð kann fara fram fyri*

*aftur latnum hurðum, um borgarstjórin ger tað av, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevur tað.*
*Stk. 2. Kommunustýrið kann loyva starvsfólki hjá kommununi at fylgja við eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum.*
*Stk. 3. Kommunustýrið kann loyva øðrum fólki at fylgja eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum, til tess at fáa upplýsingar í málinum, við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu.*

Meginreglan um fundir í kollegialum stýrum er, at teir ikki eru almennir, uttan so er, at tað er lógarfest. Ásetingin í § 25, stk. 1, 1. pkt. um, at kommunustýrisfundir eru almennir, ber tí við sær, at meginreglan er vorðin linkað eitt sindur, samanber viðmerkingarnar til § 30 um nevndarfundir.
Ásetingin fevnir einans um fundaralmenni. Rætturin til málsinnlit í almennu fyrisitingini, sum partur ella ikki partur í einum máli, er ávikavist javnførdur í fyrisitingarlógini og í lóg um innlit í fyrisitingina, sí Ll. nr. 132 og 133 frá 10.06.1993.
Reglan um fundaralmenni heimilar ikki fundaráhoyrarum talufrælsi á kommunustýrisfundunum. Hildið verður, at tað er ólógligt at veita áhoyrarum talufrælsi, meðan samráðst verður í kommunustýrinum.
Meginregluliga hava tíðindafólk og aðrir áhoyrarar ikki loyvi at taka tað, ið borið verður fram á kommunustýrisfundi, upp á ljóðband, sjónband ella tílíkt. Hesum kann kommunustýrið tó víkja frá, eins og treytir kunnu verða settar við tílík undantaksloyvi. Avgerð um hetta verður tikin við vanligum atkvøðumeiriluta.
Ásetingin í stk. 1, 2. pkt. um, at mál kunnu verða viðgjørd fyri aftur latnum hurðum, er eitt undantak til lógarásettu meginreglu um, at kommunustýrisfundir eru almennir.
Tey mál, ið av góðum grundum kunnu verða viðgjørd fyri aftur latnum hurðum, eru tílík, har trúnaðarupplýsingar væntandi verða drignir fram undir málsviðgerðini. Men um trúnaðarlig upplýsing bert kann væntast at verða drigin fram í møguligum kjaki í eini máli, sum er á fundarskránni, skuldu ongar áneyðir verið at havt fund fyri aftur latnum hurðum.
Nær ein upplýsing er trúnaðarlig, veldst um, hvat eyðkenni hennara er. Persónligar upplýsingar eru aloftast trúnaðarligar, sí eisini § 26 í fyrisitingarlógini og § 152, stk. 3 og § 152 a-c í Lb. nr. 215 af 24/6-1939 af borgerlig straffelov.
Ásetingin forðar ikki fyri, at kommunustýrið kann seta í fundarskipanina nøkur sløg av málum, sum væntandi skulu verða viðgjørd fyri aftur latnum hurðum. Tó skal ein ítøkilig meting verða gjørd í hvørjum einstøkum føri.
Sambært stk. 1, 2. og 3. pkt. kann spurningurin um, hvørt eitt mál skal verða viðgjørt t fyri aftur latnum hurðum eisini verða viðgjørdur fyri aftur latnum hurðum; men tað krevst ikki. Orsøkin til tess er, at tað í sjálvari spurningsviðgerðini um aftur latnar hurðar kann koma fram, at málið skal ikki verða viðgjørt fyri aftur latnum hurðum.
Sambært stk. 2 kann heimildin at loyva kommunalt settum fólki at vera við á fundum fyri aftur latnum hurðum verða gagnnýtt bæði yvirhøvur og í sambandi við ávís mál. Sambært § 26 í fyrisitingarlógini hava kommunalt sett fólk tagnarskyldu.
Heimildin í stk. 3 at loyva eisini øðrum persónum at vera við á fundi hevur ta fyritreyt, at tað kann verða loyvt hesum persónum talufrælsi á fundum fyri aftur latnum hurðum. Kommunustýrið kann áleggja hesum persónum tagnarskyldu eftir § 26 í fyrisitingarlógini. Verða trúnaðarupplýsingar bornar fram á fundinum, hevur kommunustýrið skyldu at áleggja hesum persónum tagnarskyldu.

**Til § 27**

*§ 27. Kommunustýrið skal kunna borgararnar um ta endaligu samtyktu fíggjarætlanina eins og um roknskapin saman við møguligum viðmerkingum.*
*Stk. 2. Yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, eins og úrrit* úr *gerðabókini fyri síðsta fund, skulu verða almannakunngjørd við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu.*

Ásetingin í stk. 1 gevur ikki borgarum rætt at fáa avrit av fíggjarætlanini og roknskapinum saman við viðmerkingum ella annað; men hon er einans ætlað sum ein skylda hjá kommunustýrinum at kunna borgaran. Hesi skjøl koma annars inn undir tær vanligu reglurnar um skjalainnlit í lóg um innlit í fyrisitingina.
Yvirlitið yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, er neyðturviliga ikki samlíkt fundarskránni. Eftir stk. 2 skal yvirlitið í minsta lagi hava eina frásøgn um málsevnini. Sostatt fevnir reglan eisini um tey málsevni, ið verða viðgjørd fyri aftur latnum hurðum, við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu. Tá ið tað snýr seg um úrrit úr gerðabókini av seinasta fundi, eru tað einans reglurnar um tagnarskyldu, sum seta avmarkingar hesum viðvíkjandi. Hetta ber við sær, at hóast eitt mál hevur verið viðgjørt fyri aftur latnum hurðum, so forðar tað í sær sjálvum ikki fyri, at samtyktin verður tikin við í eina framløgu av úrriti úr gerðabókini. Einasta treytin er, at tað í hesum høpi verða ikki latnar trúnaðarligar upplýsingar.

## Til kapittul 5.

### Um fastar nevndir.

### Til § 28

***§ 28.*** *Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, smbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.*
*Stk. 2. Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja í fasta nevnd, stýri og tílíkt, umframt at gera aðrar kommunalar uppgávur, sum kommunustýrið áleggur honum.*
*Stk. 3. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið, ið er fyri alt virkisskeiðið hjá nevndini, fer fram eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4.*
*Stk. 4. Hevur borgarstjórin ella annar kommunustýrislimur fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.*

Grein 28 krevur, at tað í tí kommunala bygnaðinum eru í minsta lagi tvær nevndir: ein fíggjarnevnd og ein onnur føst nevnd. Sigast kann, at fíggjarnevndin sum so ikki er føst nevnd, við tað at borgarstjórin er føddur formaður, og tí at lógin hevur fleiri ásetingar um, hvørjar uppgávur fíggjarnevndin skal røkja. Men av tí at fíggjarnevndin eisini kann røkja aðrar uppgávur enn tær, lógin ásetur, er tað av terminologiskum" orsøkum kortini valt at lata fíggjarnevndina koma undir heitið: føst nevnd.
Tey kommunalu viðurskifti, talan er um eftir stk. 1, eru tey mál, ið løgd eru til nevndirnar,og eru tey annaðhvørt eftir lógini ella sambært avgerð.

Ásetingin í stk. 1, 2. pkt. um, at nevndirnar skipa seg sjálvar, merkir, at tær uttan uppílegging frá kommunustýrinum kunnu velja formann, gera av, um næstformaður skal verða valdur, nær nevndarfundir skulu verða hildnir, gera uppskot til fundarskrá o.s.fr. Sambært § 38, stk. 1, 2. pkt. kann fíggjarnevndin tó ikki sjálv velja formann.
Í stk. 2 er lýst tann borgarliga skyldan at lata seg velja í nevnd og onnur arbeiði í sambandi við kommununa. Ásetingin í stk. 3 um val av limum og tiltakslimum er tikin við, til tess at nevndirnar skulu hava møguleika at útinna nevndararbeiðið, uttan at vandi skal verða fyri tarni, vegna tess at onkur nevndarlimur hevur forfall.
Av tí at lógin bert ásetur, at nevndarlimur hevur nevndarsessin alt virkisskeiðið, samanber stk. 3, 2. pkt., so kann ein føst nevnd gera av at velja nýggjan nevndarformann. Virkisskeiðið hjá tí føstu nevndini kann verða styttri enn valskeiðið. Verður virkisskeiðið stytt, skal øll nevndin verða vald av nýggjum.
Sambært § 7, § 12 og § 28 velur kommunustýrið limir og tiltakslimir til tær føstu nevndirnar, eftir at borgarstjórin er valdur. Hetta ber við sær, at tað er kommunustýrið sjálvt, sum skal velja allar limirnar til tær føstu nevndirnar. Tað er einki krav um raðfylgju í sambandi við nevndaval.
Í stk. 4 er mótrokningarmeginreglan vorðin staðfest, við tað at ein fastur sessur skal verða taldur upp í alt sessatalið, sum lutað verður bólkinum. Hetta er gjørt til tess at forða maktumskipling.

**Til § 29**

***§ 29.*** *Allir nevndarlimir skulu vera kommunustýrislimir.*
*Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nágreiniligari reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.*
*Stk. 3. Nágreiniligari reglur um nevndararbeiðið kunnu verða ásettar í eina fundarskipan.*

Tað eru bert kommunustýrislimir, ið kunnu verða valdir sum limir ella tiltakslimir í fasta nevnd. Tær heimildir, ið sambært lógini ella kommunustýrisskipanini eru latnar eini fastari, kunnu ikki verða fluttar til aðrar nevndir ella líknandi.
Ásetingin í stk. 2, 2. pkt. um, at talið skal vera stakt og minni enn helmingurin, veitir trygd fyri, at ein føst nevnd ongantíð kann vera meiriluti í kommunustýrinum, og at hon á tann hátt frammanundan skal hava møguleika at tryggja sær, at eitt uppskot verður samtykt.
Nevndin kann sambært stk. 3 áseta nágreiniligari reglur um nevndararbeiðið í eina fundarskipan, t.d. um, hvussu nevndarformaðurin skal fyrireika nevndarfundirnar.

**Til § 30**

***§ 30.*** *Nevndarformaður gevur fundarboð og fyrireikar nevndarfund.*
*Stk. 2. Borgarstjórin hevur atgongd til allar nevndarfundir, tó uttan atkvøðurætt. Borgarstjórin skal hava fundarskrá og fráboðan um, nær og hvar nevndarfundur verður hildin.*
*Stk. 3. Nevndin kann geva øðrum persóni atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa upplýsingar í málinum.*

Uppgávurnar hjá nevndarformanninum samsvara við tær uppgávur, borgarstjórin hevur í mun til kommunustýrisfundirnar, samanber viðmerkingarnar til § 16, stk. 2, og eisini viðmerkingarnar til § 31.
Meginregluliga ger nevndin sjálv av, nær og hvar nevndarfundir skulu verða hildnir. Sí ásetingina í § 32, stk. 1 um rættin hjá nevndarlimi at krevja mál lagt fyri kommunustýrið.
Hóast § 30 einans positivt heimilar borgarstjóranum atgongd til nevndarfundirnar, er tað tó at meta sum, at hann harumframt kann verða hjástaddur, meðan atkvøtt verður. Hetta hevur sítt støði í ásetingarendamálinum, sum er at samskipa tað kommunala virksemið.
Sambært stk. 3 kann nevndin, loyva øðrum persóni at vera við á nevndarfundum; men so skal grundgevingin fyri hesum vera við atliti at málsupplýsingum, samanber viðmerkingarnar til § 26. Talan kann vera um persónar, sum eru limir í kommunustýrinum, kommunustarvsfólk og onnur. Ásetingin loyvir ikki eini nevnd at seta á stovn eina varandi eygleiðaraskipan fyri t.d. kommunustýrislimir.
Heimildin at vera við á fundi fevnir einans um sjálvar samráðingarnar og ikki um atkvøðugreiðsluna.

**Til § 31**

***§ 31.*** *Nevndarformaðurin ansar eftir, at farið verður fram eftir nevndarsamtyktunum. Hann ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan.*
*Stk. 2. Nevndarformaður kann taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast, ella har ongin orsøk er til iva. Tó skal borgarstjórin kunnast, áðrenn avgerð verður tikin í fyrningarfongdum málum, uttan so er, at tað snýr seg um avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.*
*Stk. 3. Ein og hvør nevndarlimur kann leggja mál um virksemi hjá nevndarformanninum fyri nevndina. Formaðurin skal eftir áheitan geva nevndini allar upplýsingar, eins og hann í øllum lutum skal lýða tær avgerðir nevndin tekur.*

Sum nevnt í viðmerkingunum til § 30, eru uppgávurnar hjá nevndarformanninum javnsettar uppgávunum hjá borgarstjóranum í sambandi við kommunustýrisfundirnar, herímillum tá talan er um at ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur hava neyðuga játtan, samanber § 31, stk. 1 og eisini viðmerkingarnar til § 40.
Sambært ásetingini í stk. 2, 1. pkt. kann nevndarformaðurin nevndarinnar vegna einsamallur taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast, t.e. at tað ikki tolir at bíða vegna formliga ella rættarliga freist, ella um eingin orsøk er til iva. Heimildin er tó ikki eitt frávik frá tí samsvarandi heimild, sum løgd er til borgarstjóran í tílíkum málum.
Ásetingin í stk. 2, 2. pkt. áleggur nevndarformanninum eina fráboðanarskyldu mótvegis borgarstjóranum, tá ið talan er um mál, ið eru um at fyrnast. Í tílíkum førum skal nevndarformaðurin, áðrenn avgerð verður tikin, kunna borgarstjóran til tess at tryggja rætt hansara at útinna sínar samskipanarheimildir í teirri kommunalu fyrisitingini, herímillum rættin at leggja uppí, um eitthvørt fer fram, sum er ólógligt. Kunningarskyldan fevnir ikki um avgerðir, sum eftir lógini eru latnar nevndini.
Harafturímóti hevur nevndarformaðurin sum dagligur leiðari ongar heimildir viðvíkjandi eini grein innan fyrisitingina, eins og borgarstjórin. Tó kann nevndin í ávísan mun lata nevndarformanninum upp í hendi heimildir, sum nevndin annars hevur. Lógin áleggur ikki nakað heimilingarforboð í so máta.

Ásetingin í stk. 3 um, at nevndarformaðurin skal vera avgerðum nevndarinnar lýðin, sigur greitt, at tær lógarásettu heimildirnar hjá formanninum eftir stk. 2 nerta ikki við sjálva nevndarskipanina, samanber eisini viðmerkingarnar til § 18, stk. 1, 2. pkt. viðvíkjandi borgarstjóranum, og harumframt viðmerkingarnar til § 13.

**Til § 32**

***§ 32.*** *Nevndarlimur kann, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri kommunustýrið til avgerðar. Undantiknar hesum eru avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.*
*Stk. 2. Ein og hvør kommunustýrislimur, ið ikki er nevndarlimur, kann krevja at fáa sent dagsskráir, úrrit úr gerðabókum, málstilfar o.a., sum sent verður nevndarlimunum.*

Grein 32, stk. 1, 1. pkt. er ein lógarfesting um eina víðfevnandi minnilutaverndarreglu, tí reglan heimilar hvørjum einstøkum nevndarlimi ein íhaldsrætt. Reglan fevnir um allar avgerðir, sum nevndin hevur tikið; men tó ikki tær málsavgerðir, ið nevndarformaðurin tekur, og sum eru um at fyrnast, samanber eisini viðmerkingarnar til § 30. Harumframt kann nevndarlimur ikki nýta sín íhaldsrætt viðvíkjandi avgerðum, ið sambært lóggávuni ikki kunnu verða lagdar fyri kommunustýrið.
Íhaldsrætturin er avmarkaður til veruligar avgerðir, og avgerðir viðvíkjandi rættargangsspurningum eru ikki íroknaðar sum t.d. áheitan um upplýsingar í sambandi við málsviðgerð og tílíkt.
Íhaldsrætturin er treytaður av, at nevndarlimurin hevur verið á nevndarfundinum. Tó er tað eingin treyt, at hann hevur atkvøtt ímóti avgerðini.
Hóast fremjanin av íhaldsrættinum kann hava óhepnar avleiðingar við sær sum t.d. øktar útreiðslur, so er tað í sjálvum sær ikki nøkur grundgeving fyri at sýta, at íhaldsrætturin kann verða framdur í verki. Í slíkum føri verður kommunustýrið noytt at halda eykafund til tess at bøta um tílíkar avleiðingar.
Krevur ein nevndarlimur íhald, skal tað verðaført í gerðabókina. Kravið um íhald skal týðiliga vera eitt ynski um, at málið verður lagt fyri kommunustýrið. Er ivi um hetta, skal nevndarformaðurin fáa greiði á hesum.
Er verksetanin av eini nevndaravgerð steðgað vegna íhaldsrættin, skal kommunustýrið taka støðu til, um tann steðgaða avgerðin skal verða sett í verk.
Áðrenn kommunustýrisfundur er hildin, kann kommunustýrislimur, sum hevur útint sín íhaldsrætt, altíð taka sín íhaldsrætt aftur við tí fylgju, at nevndin so kann seta avgerðina í verk.
Ásetingin í stk. 2 fevnir einans um rættin hjá kommunustýrislimi at fáa tilfar sendandi. Ásetingin fevnir ikki um tann vanliga rættin til skjalainnlit í fyrisitingini. Eftir hesi áseting kann hvørki kommunustýrið ella nøkur føst nevnd seta treytir ella avmarka rættin hjá kommunustýrislimi at fáa tilfar sendandi.

**Til § 33**

***§ 33.*** *Ein nevnd er viðtøkufør, um í minsta lagi helmingurin av nevndarlimunum er møttur.*
*Stk. 2. Um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið ein meiriluti av teimum, ið greiða atkvøðu, hava atkvøtt fyri tí.*

Grein 33 lýsir, nær nevndin er viðtøkufør. Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta, samanber viðmerkingarnar til § 15 um viðtøkuføri hjá kommunustýrinum. Kravið um viðtøkuføri er eisini galdandi í førum, har nevndin gevur sítt tilmæli til kommunustýrið.

**Til § 34**

***§ 34.*** *Nevndarformaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða undirskrivað av teimum luttankandi nevndarlimunum.*
*Stk. 2. Hevur nevndarlimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina. Hetta er eisini galdandi, tá um tilfarið verður sent øðrum myndugleika.*

Viðvíkjandi § 34 verður samanumtikið víst á viðmerkingarnar til § 25. Harumframt er at viðmerkja, at hvør einstøk føst nevnd skal hava sína egnu gerðabók. Men lógin sigur tó einki um, júst hvussu gerðabókin skal verða skipað. Gerðabókarskipanin má onkursvegna veita trygd fyri, at einki ivamál er um hennara próvdygd. Kommunan skal hava gerðabókina í varðveitslu.
Rætturin hjá nevndarlimi at krevja sína serstøðu viðmerkta er ásettur í stk. 2. Hevur nevndarlimur aðra áskoðan um einahvørja avgerð, herímillum t.d. avgerðir um gegni (processuelt), kann hann krevja, at tað verður viðmerkt.

## Til kapittul 6.

**Onnur umboðan.**

**Til § 35**

***§ 35.*** *Skal kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum vera umboðað í øðrum nevndum o.t., hevur kommunustýrislimur skyldu at taka við vali.*
*Stk. 2. Skal kommunustýrið bert velja eitt umboð, fer valið fram eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4.*
*Stk. 3. Skal ein nevnd ella tílíkt verða mannað við øðrum enn bara kommunustýrislimum, fer valið av teimum, ið kommunustýrið skal velja, fram undir einum.*
*Stk. 4. Í teirri raðfylgju, sessirnir verða lutaðir einum bólki, kann bólkurin tilnevna limir ella onnur, til annað slag av sessum er sett.*

Sambært stk. 1 er tann borgarliga skyldan at lata seg velja víðkað til eisini at fevna um onnur almenn stýri og tílíkt, har tað ikki einans veldst um avgerðir, sum kommunustýrið hevur tikið. Kommunustýrislimum kann meginregluliga verða álagt boð um at lata seg velja, ella teir hava við øðrum orðum sum umboð kommunustýrisins skyldu at taka ímóti vali til eitt tílíkt kommunalt embæti.

Kommunustýrið velur sjálvt sínar limir til hesi stýri og tílíkt, samanber stk. 3. Valið kann fara fram á fyrsta fundi, tá ið kommunustýrið skipar seg; men tað kann av praktiskum orsøkum eisini verða gjørt seinni.
Ásetingin fevnir ikki um umboðanarviðurskifti í mun til stakar tilburðir, har kommunustýrið ella kommunan skal verða umboðað.
Ásetingin í stk. 4 er at skilja soleiðis, at í tí røð bólkarnir hava rætt til sess avgerða teir um umboð teirra skal vera kommunustýrislimur ella annað umboð so leingi sum annað slagi av sessum ikki er fullmannað. Dømi: nevnd skal setast við 5 limum, 2 kommunustýrislimir og 3 onnur umboð. Bólkurin, ið eigur fyrsta umboð hevur frítt val, tað sama er galdandi fyri annað umboð, men um fyrsta og annað umboð eru kommunustýrislimir skulu triðja, fjórða og fimta umboði vera onnur umboð.

**Til § 36**

*__§ 36.__ Kommunustýrið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir at taka sær av einstøkum málum hjá kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd.*
*Stk. 2. Kommunustýrið ásetur nágreiniligari reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.*

Grein 36 fevnir um tey føri, har kommunustýrið ger av, um ein serstøk ráðgevandi nevnd skal verða sett. Val til slíkar nevndir fer fram eftir lutfalsvalháttinum og eigur ikki fara fram á fyrsta fundi, tá ið kommunustýrið skipar seg. Hetta er grundað á fyrilitið um møguleikan hjá kommunustýrinum til frammanundan at samráðast, um ein slík nevnd yvirhøvur skal halda áfram ella verða sett.
Verða slíkar nevndir settar, skal kommunustýrið síggja til, at setanin ikki avmarkar tær heimildir, sum fíggjarnevndin ella onnur føst nevnd hevur sambært kommunustýrislógini ella sambært kommunustýrisskipanini.
Hevur kommunustýrið sambært stk. 2 ikki ásett nágreiniligari reglur um virksemi og nevndalimir, skal tað í ivamálum verða gjørt ítøkiligt, um tær vanligu ásetingarnar í kommunustýrislógini um fastar nevndir eisini eru galdandi fyri hesa umboðan. Hugsast kann, at, tá ið kommunustýrið setur tílíkar nevndin, hevur havt sum fyritreyt, at vanligu ásetingarnar um t.d. gegni eisini eru galdandi fyri slíkar nevndir.

**Til § 37**

*__§ 37.__ Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja, at staðbundin áhugamál verða hoyrd í kommunustýrinum.*
*Stk. 2. Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.*
*Stk. 3. Nágreiniligari reglur um samanseting, manning og hoyringarmannagongd skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina.*
*Stk. 4. Val av staðbundnum umboðum fer fram sama dag og eftir somu reglum, sum val fer fram til kommunustýrið.*
*Stk. 5. Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.*

Ásetingin í grein 37 um møguleikan at seta staðbundnar nevndir hevur sítt støði í fyrilitinum fyri at útinna eitt munadygt, staðbundið fólkastýri.
Sambært stk. 2 velur kommunustýrið sínar limir til staðbundnar nevndir millum kommunustýrislimirnar. Staðurin, sum kann verða ein ella fleiri bygdir ella øki, velur sínar limir. Staðbundnar nevndir skulu vera lýdnar teimum avgerðum, sum kommunustýrið, fíggjarnevndin ella aðrar fastar nevndir hava tikið. Kommunustýrið ásetur tað staðbundna økið og reglur um limatal og annað. Tó er ásett í stk. 2, at staðbundnu umboðini skulu eiga meirilutan í nevndini. Henda lágmarksverndarregla skal veita trygd fyri endamáli nevndarinnar, sum er at fremja og styrkja tað staðbundna fólkastýrið.
Ásetingin í stk. 5, at ein kommunustýrislimur ikki samstundist kann verða staðbundið umboð, skal tryggja skilna millum kommunustýrið og staðbundnu umboðini.

## Til kapittul 7.

**Um fíggjarumsiting.**

**Til § 38**

***§ 38.*** *Fíggjarnevndin tekur sær av fíggjarligu umsitingini hjá kommununi. Borgarstjórin er nevndarformaður.*
*Stk. 2. Fíggjarnevndin samskipar og hevur eftirlit við fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið.*
*Stk. 3. Áðrenn mál víðvíkjandi fíggjarviðurskiftum verða løgd fyri kommunustýrið, skal fíggjarnevndin geva sítt ummæli.*

Sambært stk. 1 tekur fíggjarnevndin sær av tí fíggjarligu fyrisitingini. Fíggjarnevndin eins og aðrar fastar nevndir er undirgivin teimum avgerðum, sum kommunustýrið hevur tikið, uttan í teimum førum, har fíggjarnevndin hevur fingið serstakar heimildir sambært lógini ella kommunustýrisskipanini.
Sambært stk. 1, 1. pkt. er borgarstjórin nevndarformaður. Endamálið við hesi áseting er at økja um møguleika borgarstjórans at samskipa ta kommunalu fyrisitingina.
Tær lógarásettu uppgávurnar hjá fíggjarnevndini snúgva seg serstakliga um innanhýsis viðurskifti í kommununi sum t.d.: roknskaparviðurskifti, fyrisitingarligar uppgávur við fyri skipan av málsviðgerðum o.s.fr. Alt samalt uppgávur, har borgarstjórin er á odda sum dagligur leiðari.
Fíggjarnevndin er hvørki yvir ella undir øðrum føstum nevndum. Tó ásetur stk. 2, at fíggjarnevndin samskipar og fremur eftirlitið við teimum fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum, og er tað ein avleiðing av hesum, at tær føstu nevndirnar hava skyldu at svara spurningum um hesi viðurskifti. Hetta gevur tó ikki fíggjarnevndin heimild at leggja seg upp í innanhýsis viðurskifti, sum hoyra undir málsøkið hjá eini aðrari fastari nevnd.
Fíggjarnevndin kann lata upp í hendurnar á borgarstjóranum ella kommunustýrinum at taka ávísar avgerðir.

Ásetingin í stk. 3 um, at fíggjarnevndin skal geva sítt ummæli, hevur sítt støði í, at fíggjarnevndin skal hava høvi at siga sína áskoðan um tey fíggjarligu ella fyrisitingarligu sjónarmiðini í einum máli, áðrenn tað verður lagt fyri kommunustýrið.

**Til § 39**

***§ 39.*** *Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
*Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.*

Tað kommunala roknskaparárið fylgir álmanakkaárinum. Tíðarfreistirnar eru tvungnar. Fíggjarnevndin hevur við hesi áseting fingið sjálvstøðuga heimild at gera uppskot um fíggjarætlan v.m., við tað at kommunustýrið ikki kann lata hesa heimild nakra aðrastaðni. Tó kann kommunustýrið áseta karmarnar um sjálva fíggjarætlanargerðina.
Lógin hevur ongar reglur um, hvussu fíggjarætlanargerðin skal verða skipað. Tó hevur hon tað sum fyritreyt, at fíggjarætlanargerðin verður samskipað við tær føstu nevndirnar, samanber § 38, stk. 2.
Treytin í stk. 2 um tvær viðgerðir skal veita trygd fyri, at kommunustýrislimir til fulnar fáa høvi at seta seg inn í fíggjarætlanina. Ásetingin er ein lágmarksregla og forðar ikki fyri, at kommunustýrið kann gera av, at fíggjarætlanin til dømis skal hava tríggjar viðgerðir.

**Til § 40**

***§ 40.*** *Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði fyrr enn neyðug játtan er tøk.*
*Stk. 2. Kommunustýrið kann veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.*
*Stk. 3. Kommunustýrið kann ikki geva tilsøgn um regluligar veitingar, sum tað ikki hevur skyldu til sambært lóg, uttan at landsstýrismaðurin í kommunumálum gevur loyvi til tess.*
*Stk. 4. Kommunustýrið kann áseta gjald fyri kommunalar tænastuveitingar.*
*Stk. 5. Er nøktandi játtan ikki sett av til lógarásettar veitingar o.a., skal tílík játtan verða útvegað sum skjótast.*

Ásetingin í stk. 1 staðfestir meginregluna um, at einki arbeiði kann verða gjørt, uttan at neyðuga játtan er tøk.
Hetta merkir, at ársfíggjarætlanin og viðmerkingarnar til hana mega tulkast í hvørjum einstøkum føri til tess at staðfesta, um tann neyðuga játtanin er tøk til ætlaðar inntøkur ella útreiðslur.
Er ivi um vavið á eini játtanarheimild, hevur borgarstjórin og viðkomandi fasta nevndin skyldu at avgreiða ivamálið og møguliga við at leggja tað fram fyri kommunustýrið. Orsøkin til tess er, at bæði borgarstjóri og nevndarformaður hava skyldu at ansa eftir, at neyðuga heimild er fyri øllum inntøkum og útreiðslum, sambært ávíkavist § 17, stk. 4 og § 31, stk. 1. Er tulkingarniðurstøðan tann, at eingin heimild er, krevst eykajáttan til tað ætlaða arbeiðið.
Harumframt tekur stk. 1 sum givið, at bann er ímóti at heimila øðrum játtanarheimild. Sostatt skulu allar málsviðgerðir um játtanarveitingar verða viðgjørdar í kommunustýrinum. Hetta forboð hevur millum annað við sær, at borgarstjórin kann ikki sjálvur veita játtanir í førum, tá ið hann avgreiðir

fyrningarmál, ella, har eingin orsøk er til iva. Kommunustýrið er einræðismyndugleiki á játtanarøkinum í kommunalum viðurskiftum.
Kommunustýrið samtykkir játtanir og kann áseta, at nýtslan av eini játtan skal verða treytað av góðkenning frá fíggjarnevndni. Slíkar fyritreytir fyri nýtslu av eini játtan kunnu bæði verða settar til ávísar upphæddir og ein prosentpart av upphæddini. Kommunustýrið kann samtykkja slíkar fyritreytir í sambandi við játtanarveitingar ella eftir, at ein játtan longu er givin.
Meginreglan viðvíkjandi íløgujáttanum er, at slíkar játtanir kunnu verða ásettar í ársfíggjarætlanini ella seinni í fíggjarárinum. Hvør einstøk íløga skal hava eina ítøkiliga viðgerð, áðrenn farið kann verða undir eitt arbeiði. Sostatt er ein íløgujáttan ikki í sær sjálvum nøkur játtan, so at farið kann verða undir eitt arbeiði.
Stk. 2 ásetur mannagongdina fyri eykajáttanarsamtyktum. Grundgevingin fyri hesi mannagongd er sama, sum tá ið fíggjarætlanin skal verða samtykt, samanber viðmerkingarnar til § 39, stk. 2.
Ásetingin í stk. 3 lógarfestir rættarliga markið fyri heimild og heimildarloysi. Eyðkennið fyri tílíkar veitingar er, at tað snýr seg mangan um eintáttað tiltøk, sum tyngja komandi fíggjarætlanir. Kravið um loyvi er ikki galdandi fyri t.d. limagjaldi til felagsskapir, sum kommunan við uppsagnarfreist kann melda seg úr aftur. Uppsagnarfreistin kann í minsta lagi verða eitt ár, uttan at loyvi krevst frá landsstýrismanninum.
Við síðuna av lógarásetingini í stk. 3 eru tær vanligu rættargrundreglurnar galdandi. Ásetingin hevur sítt støði í, at ræðið hjá kommununi at stýra kommunalum viðurskiftum kann verða heimilað sambært lóg ella sambært heimildini at ráða yvir tilfeinginum.
Ásetingin kann sigast at vera ein aðalklausulur fyri lógarsambæriliga (lógliga), kommunala umsiting. Markið er, eisini uttan lógaráseting, galdandi eftir vanligum umsitingarligum rættargrundreglum. Støðið er kravið um sakleika og javna. Markið er galdandi fyri allar kommunalar tænastuveitingar, sjálvt um tænastuveitingarnar verða framdar sambært umsitingaratgerð ella eftir avtalu.
Sambært teimum kommunalu, rættarligu aðalreglunum er kravið um javna tann týdningarmesta. Umráðandi er, at veitingin er tøk sum hvørs mans nýtsla (allemandsbrug). Í førum, har ein veiting ikki er tøk fyri øll, eru krøv galdandi fyri marknasetingini. Markið skal hava eitt veruligt samband við veitingina ella til nýtsluna av veitingini. Hetta merkir t.d., at verður stuðul latin feløgum, skal tað verða gjørt, uttan at hugsað verður um teirra politiska ella átrúnaðarliga grundarlag.
Viðvíkjandi kravi um sakleika er umráðandi, at veitingin ikki hevur ólógligt endamál. Framumtøka av persónum ella ávísum politiskum áskoðanum er ólóglig. Ein kommuna kann t.d. ikki lógliga røkja eitt flokspolitiskt endamál, eitt átrúnaðarligt endamál ella eitt uttanríkispolitiskt endamál við eini veiting.
Ein onnur vanlig aðalregla er tann, sum ásetur, at tann einstaki borgarin skal ikki fáa serrættindi, ið yvirhøvur eru til ampa fyri borgararnar. Harafturímóti skulu borgarar yvirhøvur heldur ikki fáa serrættindi til ampa fyri tann einstaka. Hesar aðalreglur volda, at kommunan hevur t.d. skyldu at staðfesta, at ein styrkur ella ein veiting verður nýtt til endamálið. Slíkar aðalreglur sum hesar, ið tó ikki her eru lýstar út í æsir, eru grundarlagið undir meginreglunum um lógarsambæriliga, kommunala umsiting, samanber eisini viðmerkingarnar til § 43.
Ásetingin í stk. 4 skilir til, at kommunuvirksemið kann verða fíggjað við skatti ella við gjaldi. Tann vanliga kommunala rættaraðalreglan um nýtslugjald er tann, at gjaldið hvørki skal verða oman fyri ella niðan fyri tann veruliga kostnaðarprísin. Tó kann verða lutvíst nýtslugjal eisini verða ásett. Nýtslugjald verður millum annað viðurkent sum eitt stýrisamboð. Við nýtslugjaldi kann t.d. ein ovurnýtsla av einumhvørjum, t.d. vatni, verða tálmað.
Verður nýtslugjald ásett, skal tað síggjast aftur í fíggjarætlanini og roknskapinum.

**Til § 41**

***§ 41.*** *Fíggjarnevndin hevur ábyrgd av*
*1) at gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,*
*2) at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,*
*3) at viðgera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini og*
*4) at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskriving.*
*Stk. 2. Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann við kunngerð áseta nágreiniligari reglur um kontoskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tilíkt.*

Grein 41, stk. 1 ásetur tær høvuðsuppgávurnar og -skyldurnar hjá fíggjarnevndini í sambandi við fíggjarumsitingina. Tað er latið upp í hendurnar á fíggjarnevndini at gera tær í nr. 1 til nr. 4 ásettu uppgávur, men ikki, hvussu tær skulu verða loystar. Hetta skal fíggjarnevndin sjálv gera av, uttan so er, at landsstýrismaðurin hevur ásett reglur hesum viðvíkjandi.
Fíggjarnevndin skal leggja ársroknskapin fyri kommunustýrið til góðkenningar. Síðan avgreiðir kommunustýrið ársroknskapin.
Ásetingin í stk. 2 gevur landsstýrismanninum heimild at áseta felags reglur fyri allar kommunur.

**Til § 42**

***§ 42.*** *Fíggjarnevndin skal ansa eftir, at øll peningaogn hjá kommununi er goymd á tryggan hátt.*
*Stk. 2. Peningaognir skulu setast í peningastovn, á postgiro ella í tilík lánibrøv, ið nýtt vera, tá ið um ræður ognir hjá ómyndingum, so tær geva sum mest av sær.*
*Stk. 3. Virðisbrøv skulu hava átekning um, at tey eru ogn hjá kommununi, og at eingin hevur ræði á teimum, uttan samtykt kommunustýrisins. Um til ber, skal átekningin verða skrivað í bók hjá viðkomandi stovni.*

Grein 42 ásetur, hvussu peningaognin skal verða umsitin. t. Ásetingin viðger út í æsir, hvussu peningaognin kann verða goymd, til tess at goymslan verður mett at vera trygg.

**Til § 43**

***§ 43.*** *Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tilíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.*
*Stk. 2. Er nettoskuldin meira enn ein álíkning við miðal loyvda skattaprosenti, so krevst loyvi frá landsstýrismanninum í kommunumálum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum.*

Ásetingin í § 43, stk. 1 lógarfestir eitt forboð fyri at heimila. Eingin uttan kommunustýrið kann taka avgerðir, sum viðvíkja teimum í stk. 1 nevndu avgerðum og tilíkum.
Sum nevnt í viðmerkingunum til § 40, kann kommunustýrið heimila fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd at taka avgerðir innan fyri teir karmar, sum kommunustýrið hevur ásett.

Í stk. 2 er ásett, at loyvi frá landsstýrismanninum krevst til at taka lán um nettoskuldin er omanfyri ásett mark og til at gera broytingar í lánitreytunum. Ásetingin er tikin við fyri at fáa eina ábyrgdarfulla, fíggjarliga, kommunala umsiting. Við øðrum orðum ásetur § 43, stk. 2 markið fyri eina ráðiliga, kommunala nettoskuld, sum ikki treytar nakað loyvi frá landsstýrismanninum.
Við nettoskuld skilst skuldin hjá kommununi frádrigið fíggjarognina hjá kommununi, t.e. peningur innistandani í peningastovni ella giro umframt lættumsetilig virðisbrøv. Ein álíkning við miðal loyvda skattaprosentið, merkir, at nettoskuldin skal setast í mun til álíkningina í kommununi um skattaprosentið í kommununi var miðalskattaprosentið í skattabandinum, sum verður ásett í skattalóggávuni. Við hesum verður tryggjað, at allar kommunur fáa loyvi, uttan góðkenning frá landsstýrismanninum, til lutvíst líka stóra nettolántøku til íløgur.

**Til § 44**

*§ **44.** Skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av virkandi borgarstjóra og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.*

Grein 44 er einans ein legitimatiónsregla" og fevnir sostatt ikki um sjálva heimildina at taka avgerð í teimum umrøddu rættarhandlum og gildisleika teirra.
Sambært ásetingini skal kommunustýrið tilnevna persónliga og við navns nevni medundirskrivaran hjá tí virkandi borgarstjóranum. Starvsheitið er ikki nøktandi. Ásetingin hevur tað sum fyritreyt, at medundirskrivarin annaðhvørt er í kommunustýrinum, ella at hann starvast hjá kommununi.

**Til § 45**

*§ **45.** Kommunan skal hava óhefta, sakkøna grannskoðan av sínum fíggjarviðurskiftum. Grannskoðarin skal vera ríkisgóðkendur ella skrásettur.*
*Stk. 2. Grannskoðarin skal regluliga eftirkanna roknskaparførslu og roknskaparmannagongdir hjá kommununi.*
*Stk. 3. Grannskoðarin kann krevja allar neyðugar upplýsingar útflýggjaðar frá kommunustýrinum til tess at skoða, um tann fíggjarliga umsitingin samsvarar við lógina, fíggjarætlanina, eykajáttanir og aðrar tiknar avgerðir.*

§ 45, stk. 1 lógarfestir kravið um eina óhefta og sakkøna grannskoðan. Henda meginregla telist millum tær vanligu rættaraðalreglurnar, og hevði hon sostatt verið galdandi, hóast hon ikki var lógarfest.
Kravið um eina óhefta grannskoðan ber við sær, at grannskoðanin eigur ikki at vera við í avgerðum kommunustýrisins á sovorðnan hátt, at vandi verður fyri sjálvræði hjá grannskoðaranum. Við tað at lógin ásetur, at grannskoðanin skal vera sakkøn, so er tað við hesum lýst neyvt, at hon skal vera ríkisgóðkend ella skrásett.
Ásetingin í stk. 2 lýsir, at virksemið hjá grannskoðanini fevnir um eina vanliga ella regluliga fíggjargrannskoðan. Hissini grannskoðan er ikki nøktandi.
Vavið av grannskoðanini er ikki ásett út í æsir. Givið er sambært stk. 3, at umframt ta vanligu fíggjargrannskoðanina kann grannskoðarin, eisini gera eina fyristingarliga grannskoðan. Í eini fyrisitingarligari grannskoðan skal grannskoðarin meta, um einstakar avgerðir, uppgávur ella

virksemi annars eru framd á ein fíggjarligan, ráðiligan hátt og grannskoðað, og um úrslitini samsvara teimum samtyktum, ið gjørdar eru.
Tann fyristingarliga grannskoðanin kann verða gjørd saman við tí fíggjarligu grannskoðanini, tí einki krav er um at hon skal verða gjørd fyri seg.
Kommunustýrið hevur skyldu at veita allar upplýsingar í sambandi við roknskaparøkið. Hevur kommunustýrið heimilað øðrum myndugleika sjálvstøðuga heimild, so hevur hesin myndugleiki samsvarandi upplýsingarskyldu mótvegis grannskoðanini.

**Til § 46**

*§ **46.** Í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.*
*Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum í kommunumálum.*

Undir viðgerðini av ársroknskapinum skal kommunustýrið eisini taka støðu til, um grannskoðarin skal halda fram ella ikki.
Ásetingin í stk. 1 um skyldubundna støðutakan til grannskoðanina birtir upp undir kjak í kommunustýrinum til tess at fáa greiðið á, um grannskoðanin er hildin at vera hóskandi ella ikki. Hugsast kann, at grannskoðanin ikki verður hildin at verða nóg djúptøkin, at hon ikki longur er óheft ella annað. Í tílíkum føri skal kommunustýrið hava heimild at gera av, at ein annar grannskoðari skal verða settur í staðin.
Við hesum í huga er ásett í stk. 2, at loyvi krevst frá landsstýrismanninum at loysa grannskoðaran úr starvi. Ásetingin er tikin við fyri at forða valdsmisnýtslu í kommunustýrinum, tá ið tað snýr seg um at taka støðu til, um sami grannskoðari framhaldandi skal grannskoða kommununa ella ikki.

**Til § 47**

*§ **47.** Ikki er loyvt kommunum at fíggja rakstur, rentur og avdráttir ella lógarásettar avsetingar við lántøku.*
*Stk. 2. Ikki er loyvt at seta á stovn ábyrgdarbindingar.*
*Stk. 3. Ikki er loyvt kommunum at taka lut í vinnuligum virksemi, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.*
*Stk. 4. Ikki er loyvt kommunum at veita beinleiðis ella óbeinleiðis kappingaravlagandi stuðul til fyritøkur, stovnar ella tílíkt.*

Grein 47, stk. 1 lógarfestir meginregluna um, at kommunur skulu fíggja útreiðslur uttan lántøku, og tessvegna eru rakstrarlán bannað. Ásetingin í stk. 2 hevur støði í tí kommunala sjálvsstýrinum. Ein avleiðing av hesum er, at bann er ímóti ábyrgdarbindingum, tí tær skerja tað kommunala sjálvsræðið.
Ásetingin í stk. 3 lógarfestir rættaraðalregluna um, at uttan lógarheimild hevur ein kommuna ikki loyvi at taka lut í vinnuligum virksemi. Ásetingin eigur at verða samlisin við ásetingina í stk. 4, sum sýtir øllum kappingaravlagandi virksemi. Avgerandi er, um virksemið ella stuðulin kunnu avlaga markið ímillum tað almenna og tað privata, ella um tað kann ávirka ta privatu kappingina.

Sambært vanligum kommunalrættaraðalreglum er høvuðsreglan tann, at kommunan skal hava lógarheimild at veita tænastuveitingar, sum tað privata vanliga hevur rikið móti gjaldi. Henda regla hevur fyrst og fremst støði í meginreglunum um vinnufrælsi og í tí, at tað eru marknaðartreytirnar, ið skulu gera av, um eitt virksemi ber seg ella ikki. Ein kommuna, sum í roynd og veru hevur alt tað kommunala tilfeingið til taks, órógvar í vinnuligum høpi marknaðartreytirnar.
Kjarnin fyri einum slíkum banni er, at kommunan skal ikki reka vinnuligt virksemi, við vinningi fyri eyga. Tann metingin, nær eitt kommunalt virksemi kemur undir bannið og ikki, skal vera ítøkilig.

**Til § 48**

***§ 48.*** *Ikki er loyvt kommunum at seta á stovn kommunusamstørv, ið hava við sær avmarkingar í teimum lógarásettu heimildunum, sum kommunustýrið hevur eftir hesi lóg, uttan so er, at landsstýrismaðurin í kommunumálum í serstøkum føri góðkennir eina tílíka samstarvsavtalu.*
*Stk. 2. Hevur landsstýrismaðurin í kommunumálum í hendingaføri góðkent eina kommunusamstarvsavtalu, skal tað eisini góðkenna treytirnar í sambandi við avtaluslit. Er ósemja um treytirnar, verða tær ásettar av landsstýrismanninum.*

Sambært § 48, stk. 1 eru kommunal samstørv bannað. Bannið hevur støði í aðalregluni um, at eitt kommunustýri kann ikki uttan lógarheimild lata avgerðarheimildina til onnur stýri og tílíkt, ella at tað kann binda seg fyri eitt longri tíðarskeið. Bannið er harumframt staðiliga ásett, við tað at kommunal samstørv eru brot á § 5, stk. 1, sum lógarfestir meginregluna um, at kommunustýrið ræður.
Kravið um góðkenning av samstarvsavtalum er tí ætlað at vera ein terpin undantaksregla, samanber orðingina í stk. 2, ið viðger í hendingaførum".
Bannið fevnir ikki um kommunalar felagsskapar ella kommunal feløg, har einki er vorðið heimilað frá kommunustýrinum til ta nýggju, sjálvstøðugu stýriseindina.

## Til kapittul 8.

**Um eftirlit, rættartiltøk v.m.**

**Til § 49**

§ 49. Landsstýrismaðurin í kommunumálum hevur eftirlit við kommununum.

Grein 49 ásetur, at rættargildiseftirlitið (legalitetseftirlitið) við kommununum verður framt av landsstýrismanninum í kommunumálum. Tað, sum eyðkennir rættargildiseftirlitið, er, at tað kann verða framt av sínum eintingum, ella sum tað eisini rópast ex. officio". Hetta merkir, at eftirlitið ikki er treytað av einumhvørjum skumpi uttanífrá; men tað kann fara til verka av sínum eintingum

Orsøkin til, at farið verður til verka, kann t.d. vera ein áheitan frá einum borgara, eini fyritøku, frá minnilutanum í kommunustýrinum ella frá einum øðrum myndugleika, ella tí at eftirlitsmyndugleikin, gjøgnum fjølmiðlarnar gerst varigur við eitthvørt mál, ið eigur at vera viðgjørt.
Ein áheitan uttanífrá gevur ikki eftirlitsmyndugleikanum nakra skyldu at taka málið upp til viðgerðar. Tó hevur eftirlitið skyldu at umsita sína heimild sambært lógini, og skal tí taka støðu til, um eitt mál skal verða viðgjørt ella ikki. Í grundini skal eftirlitið viðgera, um ein áheitan er ógrundað ella ikki.
Vavið av rættargildiseftirlitinum er ikki bert avmarkað til ólógligar avgerðir og samtyktir í sambandi við málsviðger og tílíkt, men fevnir eisini um kommunal skipanarviðurskifti. Útinnan av einum virknum rættargildiseftirlitið treytar, at støðið ikki einans verður tikið í løgtingslógum og kunngerðum, men eisini í kommunustýrisskipanum, fundarskipanum og starvsfólkaskipanum, sum kommunustýrini hava samtykt. Við í hesum er, at rættargildiseftirlitið skal kanna um áður nevndu skipanir, ið kommunustýrini hava samtykt, eru í ansøgn við skrivaða og óskrivaða lóg.
Eitt annað eyðkenni fyri rættargildiseftirlitið er, at tað uttan serstaka lógarheimild kann brúka óbindandi ummæli. Hetta verður serliga nýtt í sambandi við, hvussu tær kommunalu, rættarligu reglurnar skulu skiljast og tá fyrst og fremst viðvíkjandi kommunustýrislógini og innihaldinum í kommunufulltrúini.

**Til § 50**

***§ 50.*** *Kommunustýrið hevur skyldu at veita landsstýrismanninum í kommunumálum allar neyðugar upplýsingar og frágreiðingar.*
*Stk. 2. Til tess at landsstýrismaðurin í kommunumálum kann røkja sínar eftirlitsskyldur við fíggjarligu viðurskiftinum hjá kommununum, skulu tær lata honum:*
*1) grannskoðaðan roknskap innan 1. juni,*
*2) samtykta fíggjarætlan innan 3 gerandisdagar eftir 1. desember og*
*3) samtykta eykajáttan innan 3 gerandisdagar.*

Tíðarfreistirnar í ásetingini eru tvungnar. Harumframt hevur kommunustýrið í minsta lagi somu upplýsingarskyldu mótvegis eftirlitsmyndugleikanum, sum tað hevur mótvegis grannskoðanini.

**Til § 51**

***§ 51.*** *Er nettoskuldin hjá kommununi meira enn eina nettoálíkning, smbr. § 43, stk. 2, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum geva kommunustýrinum boð um at gera neyðugar broytingar í uppskotið til fíggjarætlan, í fíggjarætlanina ella í eykajáttanina, um landsstýrismaðurin metir, at:*
*1) inntøku- og útreiðslumetingarnar eru skeivar,*
*2) inntøku- og útreiðslumetingarnar eru gjørdar á skeivum grundarlagi, ella at*
*3) útreiðslurnar eru óneyðugar ella órímiligar.*
*Stk. 2. Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann í tí í § 43, stk. 2 nevnda føri geva kommunustýrinum boð um at lata uppskot til fíggjarætlan inn til landsstýrismannin í kommunum innan 1. oktober.*

Grein 51 gevur landsstýrismanninum eitt stýrisamboð í teimum føri, tá ið kommunuskuldin er vorðin ov stór. Treytin at koma undir ásetingina er, at kommunan skyldar meira enn eina álíkning, sum lýst í § 43, stk. 2. Sjálvt í hesum føri er ásetingin fakultativ, t.e. ikki skyldubundin, við tað at landsstýrismaðurin kann áleggja kommunustýrinum at endurskoða fíggjarætlanina. Íroknað § 51 er rætturin hjá landsstýrismanninum at geva kommunustýrinum boð um at gera neyðugar broytingar í kommunuskattaprosentinum.
Verður kommunustýrið álagt at endurskoða fíggjarætlanina, hevur kommunustýrislimur skyldu at atkvøða fyri, tá ið uppskotið um at endurskoða fíggjarætlanina verður lagt fyri kommunustýrið. At atkøða ímóti ella als ikki at atkvøða er eitt brot á lógina.
Ásetingin er ætlað at vera ein fíggjarligur trygdarventilur, og eigur nýtslan av henni tí alrahelst eisini at bera dám av hesum, so henda áseting bert verður nýtt, tá ið eyðsýnt er, at ein av treytunum í nr. 1 til 3 er lokin.

**Til § 52**

***§ 52.*** *Hevur kommunustýrið tikið eina avgerð, sum er ímóti lógini, kann lands-stýrismaðurin í kommunumálum:*
*1) ógilda avgerðina ella*
*2) fyribils avtaka avgerðina.*
*Stk. 2. Heldur kommunustýrið seg óvirkið mótvegis lógarásettum skyldum, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum áleggja teimum kommunustýrislimum, sum bera ábyrgd av hesum, tvingsilsbøtur.*
*Stk. 3. Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann í teimum í stk. 2 nevndu førum saksøkja kommunustýrislimi eftir endurgjaldi, um hann ber ábyrgd av, at kommunan hevur verið fyri fíggjaligum missi.*
*Stk. 4. Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann sleppa einum sakarmáli, um viðkomandi kommunustýrislimur ístaðin sektarsamtykkir mótvegis kommununi innan ásetta freist.*
*Stk. 5. Kommunustýrislimur, sum grefliga skúgvar til viks skyldur sínar sum fólkavalt kommunustýrisumboð, verður sektaður við bót. Óskettni verður ikki revsað.*

Rættartiltøkini í hesi áseting kunnu verða nýtt ímóti kommunustýrinum og tí einstaka kommunustýrisliminum. Somuleiðis kunnu rættartiltøkini verða sett tí verk mótvegis teimum avgerðum, sum annaðhvørt borgarstjórin ella nevndarformaðurin hevur tikið í málum, sum eru um at fyrnast, ella har eingin orsøk er til iva. At so er, stendst av tí, at hesar avgerðir verða tiknar vegna kommunustýrið ella ta føstu nevndini. Í hesi ásetingini er eisini, at rættartiltøkini harumframt kunnu verða nýtt um avgerðir, sum ein føst nevnd hevur tikið ella onkurt annað stýri og tílíkt, ið sett eru sambært kommunustýrislógini, um so er, at tey hava fingið skyldur, sum kommunustýrið hevur latið teimum at røkja.
Tær avgerðir, sum kunnu verða fyri rættar- og revsitiltøkum, eru tær ólógligu. Tá sipað verður til lógina, er tað bæði at fata sum kommunustýrislógin og lóggávan yvirhøvur, bæði skrivaður og óskrivaður rættur, herímillum rættaraðalreglurnar. Nevnt skal tí eisini verða, at ein stórur partur av reglunum um tær kommunalu uppgávurnar eru óskrivaðar sum t.d. reglurnar viðvíkjandi kommunufulltrúini.
Harumframt er treytin at seta tiltøk í verk tann, at tað er greitt fyri eftirlitsmyndugleikanum, at lógin er skúgvað til viks. Eingin sannlíkur ivi eigur at vera um, at lógin er sett til viks. Umframt hetta er kanningarmeginreglan galdandi. Hon áleggur eftirlitsmyndugleikanum at lýsa málið. Harafturat

eigur eftirlitsmyndugleikin at ansa eftir, um nakar partur er í málinum, tí so er fyrisitingarlógin eisini galdandi fyri málsviðgerðina fyri tann partin.
Rættartiltøkini eru fleiri. Heimildin til ógilding sambært stk. 1 nr. 1 kann verða nýtt til avgerðir, sum hava rættarvirknaðin í hyggju. Uttanfyri eru sonevndar avgerðir, ið hava til eyðkennis, at tær eru ummæli ella tilmæli.
Heimild til fyribils at avtaka eina avgerð sambært stk. 1 nr. 2, er eitt fyribils rættartiltak, ið hevur til endamáls at tryggja, at eftirlitið kann útvega sær tað neyðuga avgerðargrundarlagið, uttan at vandi er fyri, at heimildin at ógilda verður slept ella gleppur av hondum. Fyribils avtøka kemur upp á tal í førum, tá ið styrktur illgruni er um eitthvørt, sum er ólógligt, hóast tað um mundið ikki greitt er prógvað, at tað ólógliga er so mikið eyðsýnt, at orsøk er at ógilda avgerðina.
Kjarnin fyri heimildini at áleggja tvingsilsbøtur sambært stk. 2 er ólógligt óvirkni, við tað at ólógligar avgerðir kunnu verða gjørdar ógildigar. Tvingsilsbøtur kunnu einans verða álagdar teimum kommunustýrislimum, ið bera ábyrgd av tí ólógliga óvirkninum, t.d. mótvegis teimum kommunustýrislimum, ið ikki hava atkvøtt ella hava atkvøtt ímóti einum uppskoti viðvíkjandi eini skyldubundnari avgerð. Tvingsilsbøtur eru treytaðar av, at eftirlitsmyndugleikin greitt kann lýsa innihaldið í tí avgerð, sum skal verða noydd fram, samanber eisini viðmerkingarnar til § 11, stk. 2.
Heimildin í stk. 3 at saksøkja kommunustýrislim eftir endurgjaldi, er treytað av, at kommunustýrið ber ábyrgd av, at kommunan hevur verið fyri missi. Harumframt eru tær vanligu endurgjaldstreytirnar galdandi. Ábyrgdin verður løgd á teir kommunustýrislimir, ið bera ábyrgd av avgerðini ella óvirkninum.
Ásetingin í stk. 4 heimilar eftirlitsmyndugleikanum at sleppa einum sakarmáli um endurgjald afturfyri, at tann ella teir kommunustýrislimir, sum bera ábyrgd, játta at rinda eina ávísa peningaupphædd. Sostatt kann bótin koma í staðin fyri eitt sakarmál.
Vil ein kommunustýrislimur ikki rinda bótina, kann eftirlitið í staðin leggja endurgjaldssakarmál móti kommunustýrisliminum.
Ásetingin í stk. 5 er tikin við fyri, at eingin ivi skal vera um, at tann einstaki kommunustýrislimurin kann revsast sum fólkavalt kommunustýrisumboð.

**Til § 53**

*__§ 53.__ Staðfestir landsstýrismaðurin í kommunumálum eina avgerð hjá kommunustýrinum sambært § 18, stk. 4, er borgarstjórin undantikin starvi sínum frá hesum mundi.*
*Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í stk. 1 nevnda føri gera av, at lønin hjá borgarstjóranum skal verða skerd við einum fjórðingi, eini helvt, ella at hon í versta føri fellur burtur.*

Hevur kommunustýrið sambært § 18, stk. 3, 2. pkt. fyribils valt ein annan sum virkandi borgarstjóra og sambært § 18, stk. 4 lagt avgerðina fyri landsstýrismannin til staðfestingar, fær avgerðin hjá kommunustýrinum fyrst rættargildi, eftir at hon er staðfest av landsstýrismanninum, samanber § 53, stk. 1.
Grein 53, stk. 2 er ein heimild hjá landsstýrismanninum at skjerja lønina hjá borgarstjóranum, verður hann settur frá. Lønarskerjingin eigur at verða eftir, hvussu álvarsamt borgarstjórin hevur vart seg ímóti at fremja sínar skyldubundnu uppgávur.

**Til § 54**

*§ 54. Fremur kommunustýrið grovt lógarbrot, ella endurtaka lógarbrotini seg, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum seta kommunustýrið undir umboðsstjórn sína, so rættandi tiltøk verða gjørd alt fyri eitt.*

Ásetingin er ætlað sum ein trygdarventilur í álvarsomum førum og kann verða nýtt í staðin fyri rættartiltøkini eftir § 52 ella javnbjóðis teimum. Umboðstjórnin er tíðaravmarkað til viðurskiftini eru komin í rættlag.

**Til § 55**

*§ 55. Lógin kemur í síni heild í gildi 1. januar 2003.*
*Stk. 2. Fram til 1. januar 2003 kann landsstýrismaðurin í kommunumálum tó við kunngerð seta kommunustýrislógina ella partar av henni í gildi.*

Um endurskoðanin á kommunuøkinum fylgir tíðarætlanini, kann øll lógin fáa gildi 1. januar 2003. Hetta forðar tó ikki fyri, at øll lógin kann verða sett fyrr í gildi, ella at ávísar ásetingar fáa gildi. Gildiskoman verður latin upp í hendurnar á landsstýrismanninum í kommunumálum.

**Til § 56**

*56. Samstundist, sum henda lóg fær gildi, fara hesar lógir úr gildi:*
*1) Løgtingslóg nr. 45 frá 1972 um føroysku kommunurnar, sum seinast broytt við ll. nr. 34 frá 29/5-1985*
*2) Løgtingslóg nr. 189 frá 8/12-1993 um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. og*
*3) Løgtingslóg nr. 85 frá 30/5-1994 um broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppåulánsgrunn v.m.*

Samstundis sum løgtingslógirnar nevndar í § 56, 1-3 fara úr gildi fara eisini fylgjandi kunngerðir úr gildi:

K. nr. 49 frá 22/7-1972 (skiftisreglur í sambandi við, at kommunustýrislógin fær gildi)
K. nr. 78 frá 22/10-1974 um broytan av kommunumarkinum ímillum Tórshavnar uttanbíggja kommunu og Kirkjubøar kommunu
K. nr. 67 frá 12/10-1976 um samanlegging av Kaldbaks kommunu og Tórshavnar kommunu
K. nr. 60 frá 5/10-1978 um umskipan av kommunumarkinum ímillum Tórshavnar uttanbíggja kommunu og Tórshavnar kommunu
K. nr. 200 frá 21/12-1993 um samanlegging av Argja kommunu og Tórshavnar kommunu
K. nr. 91 frá 7/6-1994 um ásetan av freist fyri samtykt og góðkenning av endurskoðaðu kommunalu fíggjarætlanunum fyri 1994
K. nr. 153 frá 10/11-1995 um felagskommunala ábyrgd, veðhaldsgrunn og felagskommunala borgan

K. nr. 119 frá 19/6-1997 um broyting í kunngerð um felagskommunala ábyrgd, veðhaldsgrunn og felagskommunala borgan
K. nr. 152 frá 10/11-1995 um ígildisetan av § 9 a í løgtingslóg um kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan veðhaldsgrunn o.a.m.

# 12.3 Uppskot um lóg um samanlegging og sundurbýti í kommunur

*§ 1. Endamálið við hesi lóg er at skapa størri kommunueindir, sum grundarlag undir einum greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti ímillum land og kommunur.*

**Um sjálvbodnar kommunusamanleggingar**

**§ 2.** Avtalur um sjálvbodnar kommunusamanleggingar skulu leggjast fyri landsstýrismannin í kommunumálum til góðkenningar í seinasta lagi 1. januar ár 2002.

**§ 3.** Avtalur um kommunusamanleggingar skulu hava fyrilit fyri:
1) at stovnseta kommunueindir í økjum, sum eru samfeld landafrøðiliga og samferðsluliga,
2) møguleikunum fyri at menna fólka-, vinnu- og búskaparviðurskifti,
3) at røkja kommunuuppgávur og
4) at fólkatalið helst skal vera í minsta lagi 2000 borgarar.

**§ 4.** Í avtalum um kommunusamanleggingar skal semja í minsta lagi vera um:
1) kommununavnið, har heitið kommuna" er ein ómissandi lutur,
2) staðseting um, hvar kommunustýrið finnur sær sæti,
3) mannagongd um samanlegging av fyrisiting og búskapi,
4) tíðarfesting um, nær samanleggingin skal verða fullførd og
5) um staðbundnar nevndir skulu verða settar.

**§ 5.** Sjálvbodnar kommunusamanleggingar skulu í minsta lagi sam-svara við hesar kommunueindir:
1) Norðoyggjar
2) Eystureysturoy
3) Vestureysturoy
4) Sundalagið
5) Streymoy
6) Vágar
7) Sandoy
8) Norðsuðuroy
9) Suðursuðuroy

*Stk. 2.* Elduvíkar og Funnings kommunur hava valfrælsi, hvørt tær leggja saman við Sundalagnum ella Vestureysturoy; tó skal fyrilitið í § 3, nr. 1, takast.

**§ 6.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum tekur avgerð um góðkenning sambært §§ 2-5. Avgerðin kann ikki verða kærd.

Um fyriskipaðar kommunusamanleggingar

**§ 7.** Eru kommunusamanleggingarnar ikki fullførdar 1. januar ár 2002, skipar landsstýrismaðurin í kommunumálum fyri samanlegging og sundurbýti í kommunur eftir hesum leisti:

1) Norðoyggjar, t.e. Fugloyar, Svínoyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar, Mikladals og Húsa kommunur, verður ein kommuna.
2) Eysturoy, t.e. Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Nes, Runavíkar, Skála, Sjóvar og Oyndarfjarðar kommunur, verður ein kommuna og harumframt møguliga eisini Funnings og Elduvíkar kommunur, samanber § 5, stk. 2.
3) Sundalagið, t.e. Eiðis, Sunda, Gjáar, Haldórsvíkar, Saksunar, Hvalvíkar og Hósvíkar kommunur, verður ein kommuna og harumframt møguliga eisini Funnings og Elduvíkar kommunur, samanber § 5, stk. 2.
4) Streymoy, t.e. Vestmanna, Kvívíkar, Kollafjarðar, Tórshavnar, Kirkjubøar, Nólsoyar og Hests kommunur, verður ein kommuna.
5) Vágar, t.e. Sandavágs, Miðvágs, Sørvágs, Bíggjar og Mykines kommunur, verður ein kommuna.
6) Sandoy, t.e. Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur, verður ein kommuna.
7) Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur, verður ein kommuna.

**§ 8.** Samanlegging og sundurbýti í kommunur sambært § 7 fær gildi frá 1. januar 2003.

**Um heimildir**

**§ 9.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann umskipa og tillaga kommunumark, har kommunusamanleggingin ber við sær óhóskilig marknaviðurskifti, bæði tá talan er um sjálvbodna ella fyriskipaða samanlegging.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum tekur avgerð í ivamálum um kommunumark. Avgerðin kann ikki verða kærd.

**§ 10.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann leggja sínar heimildir og sín umsitingarmyndugleika sambært hesi lóg til eina samanleggingarnevnd.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur neyvari reglur um mannings og fundarskipan og veitir nevndini neyðugan stuðul til avgreiðslu av teimum málum, nevndin umsitur.

**§ 11.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur, nær lógin fær gildi (5. januar 1999).

# 12.4 Viðmerkingar til uppskot um lóg um samanlegging og sundurbýti í kommunur

## Almennar viðmerkingar

Sum viðmerkingar til lógina yvirhøvur verður víst á Niðurstøður og tilmæli" frá Kommununevndini.

## Viðmerkingar til tær einkultu lógargreinirnar

**Til § 1**

Ásetingin í § 1 lýsir endamáli lógarinnar. Hon staðfestir meginregluna um at broyta verandi kommunubýti eins og uppgávu- og ábyrgdarbýtið ímillum land og kommunur.
Raðfylgjan er skilvís, av tí at tað sæst sambært niðurstøðunum hjá Kommununevndini, at stórar kommunueindir er ein tann týdningarmesta fyritreytin fyri veruligari stovnan av einum greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti ímillum land og kommunur.

**Til § 2**

Ásetingin í § 2 skilar til, at landsstýrismaðurin í kommunumálum er góðkenningarmyndugleiki, tá ið tað snýr seg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar. Freistin at søkja um góðkenning innan 1. januar ár 2002 er endalig.
Treytin um, at avtalur um kommunusamanleggingar verða góðkendar, hevur sítt støði í teimum fyrilitum, sum ásett eru í § 3, nr. 1-4, tá ið samráðingar verða um sjálvbodnar kommunusamanleggingar. Undirstøðið undir hesum fyrilitum sæst aftur í endamálinum við lógini, smbr. § 1.

**Til § 3**

Tey fyrilit, sum nevnd eru í § 3, eru beinagrindin í lógini. Av hesum skilst, at tær avtalur um kommunusamanleggingar, sum ikki geva sær far um hesi fyrilit, hava ikki rætt at vænta, at landsstýrismaðurin í kommunumálum góðkennir tílíkar avtalur.
Orðingin staðfestir, at fyrilitini í nr. 1-3 av sonnum javnviga, so at einki av teimum kann verða tikið fram um okkurt annað, so at tað má lúta.
Orðingin í § 3, nr. 4 staðfestir, at fólkatalið avgjørt er eitt fyrilit, ið skal verða havt í huga, men at fólkatalið tó kann hava lútandi týdning í sambandi við eina heildarmeting um, hvørt ein avtala um kommunusamanlegging kann verða góðkend ella ikki. Av hesum er gjørt greitt, at fólkatalið í sær sjálvum forðar neyðturviliga ikki fyri, at landsstýrismaðurin í kommunumálum kann góðkenna eina avtalu um kommunusamanlegging.

**Til § 4**

Uppreksingin í § 4, nr. 1-5 ásetur, hvørji viðurskifti skulu verða avtalað, áðrenn ein avtala um kommunusamanlegging yvirhøvur kann verða tikin upp til veruleikaviðgerð av góðkenningarmyndugleikanum.
Harumframt veitir ásetingin trygd fyri, at landsstýrismaðurin í kommunumálum ikki kemur sær upp í hesi viðurskifti í tíðarhvarvinum fram til 1. januar ár 2002. Lógin miðar eftir, at kommunurnar sjálvar fáa greiði á hesum týdningarmiklu viðurskiftum og leggja saman í størri kommunueindir fyri ár 2002, tí annars verður framferðarhátturin eftir § 7 og § 8 nýttur.

**Til § 5**

Við støði í §§ 3 og 4 vísir ásetingin í § 5 á 9 møguligar kommunueindir. Talið á kommunueindunum er eitt hámark. Tær kunnu verða færri enn níggju, men ikki fleiri.
Ásetingin í stk. 2 um Elduvíkar og Funnings kommunur er galdandi, sjálvt um hesar kommunur sjálvbodnar leggja saman í eina av tveimum møguligum kommunueindum, ella um samanleggingin verður fyriskipað. Ásetingin tekur støði í teirri serstøðu, sum Elduvíkar og Funnings kommunur hava sambært fyrilitunum í §§ 3-5.

**Til § 6**

Sambært hesi lógargrein kann ein avgerð um at veita ella sýta góðkenning um sjálvbodna kommunusamanlegging ikki verða kærd.
Ætlanin við § 6 er fyrst og fremst at birta uppundir, at kommunurnar sum skjótast taka stig til at leggja saman, tí annars kann landsstýrismaðurin í kommunumálum sjálvur fyriskipa samanleggingina. Eisini veitir § 6 trygd fyri, at landsstýrismaðurin í kommunumálum kann halda ta lógarásettu tíðarætlanina.
At kuta ein og hvønn kærumøguleika er eyðvitað ein víðfevnd áseting; men hon er tó eitt natúrligt framhald av staðfestingini um, at samráðingar, um kommunusamanlegging skulu vera veruligar og tær skulu verða tiknar við mesta álvarsemi av avtalupartunum við atliti at teimum fyrilitum, lógin ásetur.

**Til § 7**

Ásetingin í § 7 staðfestir tann leistin, landsstýrismaðurin í kommunumálum vil nýta til tess at fyriskipa samanlegging og sundurbýti í kommunur. Av hesum sæst, at er eingin sjálvboðin kommunusamanlegging fullførd pr. 1. januar ár 2002, so verða tað sambært § 8 pr. 1. januar ár 2003 í mesta lagi 7 kommunueindir, so sum ásettar í § 7, nr. 1-7.
Tá ið sipað verður til fullførd" í § 7, 1. pkt. verður hugsað um, at avtalurnar um kommunusamanleggingar skulu verða lagdar fyri landsstýrismanninum í kommunumálum til góðkenningar. Verður ein avtala ikki góðkend sambært hesum samankomingardegi, koma avtalupartarnir av sær sjálvum undir ásetingina í § 7.

**Til § 8**

Tíðarmundið í § 8 er endaligt.

**Til § 9**

Sambært § 9 er tað landsstýrismaðurin í kommunumálum, sum tekur avgerð í málum um kommunumark, bæði í sambandi við sjálvbodnar og fyriskipaðar kommunusamanleggingar. Heldur ikki hesar avgerðir kunnu verða kærdar, smbr. viðmerkingarnar til § 6.
Sum dømi um trupul marknaviðurskifti kann verða nevnt, at verður Suðuroyggin býtt sundur í tvær kommunueindir, t.e. í Norðsuðuroy og Suðursuðuroy, so verður kommunumarkið Hovsegg.
Verður Eysturoyggin býtt sundur í tvær kommunueindir, t.e. Eystureysturoy og Vestureysturoy, so verður kommunumarkið Gøtueiði. Sostatt verður tann parturin av Gøtu kommunu, sum er við Skálafjørðin, frábýttur, og sama ger seg galdandi fyri tann partin av Fuglafjarðar kommunu, sum er við Oyndarfjørð, so at hesi øki koma undir Eystureysturoy.

**Til § 10**

Tað skal ásannast, at um endamálið við lógini skal verða náað til ásettu tíð, so má umsitingin av lógini verða væl fyriskipað og fyrireikað. § 10 gevur tí landsstýrismanninum í kommunumálum heimild til at geva eini nevnd hesar umsitingaruppgávur.
Samtykkir landsstýrismaðurin í kommunumálum at seta tílíka nevnd, so er tað skilabest, at hon verður sett, samstundis sum lógin fær gildi. Orsøkin til tess er tann, at nevndin helst skal fara til verka beinanvegin, av tí at umsitingaruppgávur nevndarinnar bæði eru knýttar at tíðarskeiðinum fyri sjálvbodnar og fyriskipaðar kommunusamanleggingar.
Harafturat kann landsstýrismaðurin í kommunumálum gera av, um nevndin í hesum høpi t.d. skal hava ráðgevandi ella samskipandi uppgávur ella tílíkt.
Verður samanleggingarnevnd sett, eigur hon at hava umboð bæði fyri land og kommunur. Harumframt eigur nevndin at hava løgfrøðiligan serkunnleika, tí hon skal taka endaligar avgerðir, ið ikki kunnu kærast.

**Til § 11**

Lógin eigur at koma í gildi skjótast til ber. Harumframt eigur hon at koma í gildi í síni heild ella als ikki, til tess at sloppið kann verða undan eini reinging av endamálinum, sum er: at skapa fyritreytirnar fyri einum greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti ímillum land og kommunur samsvarandi tilmælinum frá Kommununevndini. Og somuleiðis at sloppið kann verða undan at flestu kommunur verða stýrdar við undantøkum sum í dag, sambært § 49 í galdandi løgtingslóg nr. 45 frá 1972 um føroysku kommunurnar.

# Keldulisti


1. *Álit um kannan av kommunalu lóggávuni*, Nevnd, Tórshavn 1971.
2. *Aftale om refinansiering af den færøske kommunegæld*, Advokatskrivstovan Fr.Petersensgøta, September 1995.
3. Arnesen, Irene, *Kommuneforvaltningen i Norden*, Økonomiske analyse 7/97.
4. A/S Jens Bisballe Planlægning, *Projekt vedrørende landsadministrationens økonomistyring, formlige arbejdsgange og informatik*, Færøernes Landsstyre 17. januar 1994.
5. Basse, Martin og Oluf Jørgensen, *Kommunalt Folkestyre*, Den kommunale højskole i Danmark, 1997.
6. Basse, Martin og Oluf Jørgensen, *Kommunal forvaltning*, Dansk kommunalkursus, 1996.
7. Den Kommunal Højskole i Danmark, Kommunernes Landsforening, *ymisk temaheftir.*
8. Félagsmálaráðuneytið, *Lokaskýrsla Sveitarfélaganefndar*, Mars 1993.
9. Føroya landsstýri, *Føroya Kunngerðasavn*, ymisk ár.
10. Føroya landsstýri, *Lógbók fyri Føroyar*, Bind I-IV.
11. Føroya landsstýri, *Uppskot til kommissorium um nýggja kommunala skipan*, Februar 1995.
12. Føroya Skúlabókagrunnur, *Fólkaskúlin, Undirvísingarleiðbeining, Almennur partur*, 1990.
13. Indenrigsministerens redegørelse til Folketinget, *Kommunalpolitisk redegørelse*, Maj 1997.
14. Indenrigsministeriet, *Betænkning fra Hovedstadskommissionen om hovedstadsområdets fremtidige struktur*, December 1995.
15. Indenrigsministeriet, *Betænkning fra Hovedstadskommissionen om hovedstadsområdets fremtidige struktur, Vurderinger og forslag*, December 1995.
16. Indenrigsministeriet, *De kommunale opgavers fordeling og finansiering*, Betænkning nr. 1168, Maj 1989.
17. Indenrigsministeriet, *Kommunal Udligning en guide til det kommunale tilskuds og udligningssystem*, Juni 1997.
18. Indenrigsministeriet, *Kommunal Udligning en kort præsentation*, Juni 1997.
19. Indenrigsministeriet, *Opgaver og Finansiering*, Februar 1996.
20. Hagstova Føroya, *ymisk hagfrøðisligt tilfar.*
21. Harder, Erik, *Dansk Kommunalforvaltning III, Kommunalt selvstyre & Statsligt tilsyn*, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 1994.
22. Harder, Erik, *Dansk kommunestyre i grundtræk*, Kbh. 1973.
23. Harder, Erik, *De kommunale opgaver, Kommunal Fuldmagten*, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 1965.
24. Heinesen, Signar P., *Kritikpunkt til Uppskot til kommisorium um nýggja kommunala skipan*, 1995.
25. Høgenni, Hilmar, *En færøsk Kommunalreform?*, Kbh. november 1992.
26. Høgenni, Hilmar, *Kommunalreformer/-overvejelser i udlandet*, Københavns Universitet, April 1992.
27. Jensen, Thor Øivind, Rune Vaage og Eystein J. Venneslan, *Desentralisering som administrativ reform*, SEFOS, Bergen.

*28. Kommunal udligning og tilskud til kommuner*, Redegørelse fra det af indenrigsministeriet nedsatte udvalg vedrørende kommunernes finansiering, København 1983.
*29. Kommunale styrelsesformer og kommunalpolitikernes arbejdsvilkår m.v*, Betænkning nr. 894, 1980.
*30. Kommunalførvaltningen i Norden*, Den vi nordiska kommunalkonferensen i Visby, Sverige, 1996.
31. Kommunallovskommissionen, *Kommuner og kommunestyre*, Betænkning nr. 420, Statens Trykningskontor 1966.
*32. Kommunalreformen i Danmark*, Bind 1-6, Forlaget Kommuneinformation.
33. Kommunernes Landsforening, *Analyse af de færøske kommuners økonomi ved en gældsomlægning*, Maj 1994.
34. Kommunernes Landsforening, *Generelle tilskud og kommunal udligning  principper og debat*, Økonomiske publikationer 1993.
35. Kommunubólkurin, *Fyribilsálit frá kommunubólkinum*, Tórshavn 1971.
36. Kristoffersen, Pia, *De islandske kommuner*, Odense Universitet, Maj 1994.
37. Kryger, Karsten og Lene Nellemann, *De islandske kommuner 1993  en rapport om den kommende kommunesammenlægning*, Roskilde Universitetscenter 1993.
38. Lie, Trond, *Bydelsforvaltning  smått er gådt?*, Rogalandsforskning.
39. Lotz, Jørgen, *Kommunernes finansiering, 3. udgave*, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 1987.
40. Matrikulstovan, *Matrikulering  Útskiftingarkortlegging*, Mars 1985.
41. Nielsen Peter, *Arealplanlegging på Færøyene*, Hovedoppgave ved Norges Landbrukshøgskole, 1980.
42. Norges Offentlige Utredninger, *Kommune- og fylkesinndelingen i et Norge i forandring*, Statens forvaltningstjeneste seksjon statens trykking, 1992.
43. Pedersen, Niels Jørgen Mau, *Decentralisering og kommunaløkonomi*, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 1995.
*44. Ráðlegging Fólkaskúlans (Fyrisitingarligur partur)*, Landsskúlafyrisitingin, 1996.
45. Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans, *Álit um nýggja fólkaskúlalóg*, Landsskúlafyrisitingin 1996.
46. Toll- og Skattstova Føroya, *Líkningarprosessin upplegg til kjak*, Mai 1995.

# Keldur serliga til kapitul 12

1. Basse, Ellen Margrethe, Jens Garde m.fl., *Forvaltningsret, Almindelige emner, 2. Udgave*, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 1988.
2. Eyben, Bo von, Jan Pedersen og Jørgen Nørgaard, *Karnovs Lovsamling*, Karnovs Forlag A/S, 1997.
3. Gammeltoft-Hansen, Hans, Jon Andersen, Kaj Larsen & Karsten Loiborg, *Forvaldningsret*, s. 405-533, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 1994.
4. Garde, Jens og Jørgen Mathiassen, *Kommunalret*, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 1991.
5. Maire, Emil le og Niels Preisler, *Normalforretningsordenen med kommentarer*, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 1996.
6. Viðmerkingar til donsk lógaruppskot:

Nr LSF 37 frá 1989 *om ændring af de kommunale styrelseslove*
Nr LSF 187 frá 1989 *om ændring af de kommunale styrelseslove*
Nr LSF 219 frá 1993 *om ændring af lov om kommunernes styrelse*
Nr LSF 175 frá 1994 *om ændring af de kommunale styrelseslove*
Nr LSF 167 frá 1995 *om ændring af de kommunale styrelseslove m.v.*
Nr LSF 137 frá 1997 *om ændring af lov om kommunernes styrelse.*

# FYLGISKJØL

# Fylgiskjal A: Nettoskuld pr. álíkning í 1996 um skattaprosentið var 23%

| Kommuna | Skatta% | Skatta-grundarlag | Skattur | Skattur við 23% | Nettoskuld | Nettoskuld pr. Álíkning | Nettoskuld pr. Álíkning 23% |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fugloyar Kommuna | 16 | 4.467 | 758 | 1.027 | -1.336 | -1,8 | -1,3 |
| Svínoyar Kommuna | 16 | 3.951 | 675 | 909 | -931 | -1,4 | -1 |
| Viðareiðis Kommuna | 22 | 20.890 | 3.924 | 4.805 | 14.800 | 3,8 | 3,1 |
| Hvannasunds Kommuna | 20 | 29.513 | 4.800 | 6.788 | | | |
| Klaksvíkar Kommuna | 20 | 335.201 | 68.463 | 77.096 | 160.143 | 2,3 | 2,1 |
| Kunoyar Kommuna | 16 | 8.960 | 1.472 | 2.061 | -750 | -0,5 | -0,4 |
| Mikladals Kommuna | 16 | 5.101 | 734 | 1.173 | 688 | 0,9 | 0,6 |
| Húsar Kommuna | 19 | 3.920 | 663 | 902 | 673 | 1 | 0,7 |
| OyndarfjarðAr Kommuna | 23 | 11.332 | 2.967 | 2.606 | 13.199 | 4,4 | 5,1 |
| Elduvíkar Kommuna | 23 | 5.359 | 1.231 | 1.233 | 4.575 | 3,7 | 3,7 |
| Fuglafjarðar Kommuna | 19,12 | 128.868 | 21.583 | 29.640 | 54.829 | 2,5 | 1,8 |
| Leirvíkar Kommuna | 22 | 55.156 | 12.612 | 12.686 | 40.951 | 3,2 | 3,2 |
| Gøtu Kommuna | 19 | 70.443 | 13.149 | 16.202 | 22.574 | 1,7 | 1,4 |
| Nes Kommuna | 19,9 | 76.939 | 15.811 | 17.696 | 14.055 | 0,9 | 0,8 |
| Sjóar Kommuna | 17 | 62.292 | 10.262 | 14.327 | 11.416 | 1,1 | 0,8 |
| Skála Kommuna | 21,35 | 47.536 | 8.702 | 10.933 | 42.625 | 4,9 | 3,9 |
| EiðIs Kommuna | 18,5 | 41.553 | 8.178 | 9.557 | 3.913 | 0,5 | 0,4 |
| Sunda Kommuna | 17,74 | 35.145 | 6.458 | 8.083 | 8.106 | 1,3 | 1 |
| Funnings Kommuna | 16 | 7.923 | 1.218 | 1.822 | 36 | 0 | 0 |
| Gjáar Kommuna | 16 | 5.876 | 726 | 1.351 | | | |
| Haldórsvíkar Kommuna | 18,2 | 16.715 | 3.201 | 3.844 | 9.016 | 2,8 | 2,3 |
| Saksunar Kommuna | 19 | 1.726 | | 397 | | | |
| Hvalvíkar Kommuna | 19 | 21.085 | 4.143 | 4.850 | 9.304 | 2,2 | 1,9 |
| Hósvíkar Kommuna | 17,5 | 15.979 | 2.866 | 3.675 | 2.329 | 0,8 | 0,6 |
| KollafjarðAr Kommuna | 18,5 | 61.810 | 13.790 | 14.216 | 6.151 | 0,4 | 0,4 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kvívíkar Kommuna | 18,5 | 38.548 | 7.183 | 8.866 | 2.012 | 0,3 | 0,2 |
| Vestmanna Kommuna | 23 | 82.066 | 18.838 | 18.875 | 68.383 | 3,6 | 3,6 |
| Kirkjubøar Kommuna | 17 | 15.369 | 2.357 | 3.535 | 1.440 | 0,6 | 0,4 |
| Hests Kommuna | 17 | 3.278 | 520 | 754 | -259 | -0,5 | -0,3 |
| Nólsoyar Kommuna | 19 | 15.671 | 2.645 | 3.604 | -380 | -0,1 | -0,1 |
| Sandavágs Kommuna | 19,3 | 45.967 | 10.594 | 10.572 | 9.173 | 0,9 | 0,9 |
| MiðVágs Kommuna | 23 | 81.205 | 14.017 | 18.677 | 44.410 | 3,2 | 2,4 |
| Sørvágs Kommuna | 21 | 79.560 | 14.927 | 18.299 | 27.612 | 1,8 | 1,5 |
| Bíggjar Kommuna | 17 | 4.143 | 642 | 953 | -567 | -0,9 | -0,6 |
| Mykines Kommuna | 16 | 1.190 | 172 | 274 | -362 | -2,1 | -1,3 |
| Sands Kommuna | 23 | 34.921 | 7.062 | 8.032 | 49.164 | 7 | 6,1 |
| Skopunar Kommuna | 23 | 30.219 | 6.692 | 6.950 | 28.939 | 4,3 | 4,2 |
| Skálavíkar Kommuna | 18 | 11.435 | 2.400 | 2.630 | -1.202 | -0,5 | -0,5 |
| Húsavíkar Kommuna | 20,5 | 10.234 | 1.837 | 2.354 | 4.467 | 2,4 | 1,9 |
| Skúvoyar Kommuna | 16 | 3.932 | 605 | 904 | -1.109 | -1,8 | -1,2 |
| Hvalbiar Kommuna | 19 | 56.965 | 9.151 | 13.102 | 12.090 | 1,3 | 0,9 |
| Tvøroyrar Kommuna | 23 | 134.415 | 29.238 | 30.915 | 155.563 | 5,3 | 5 |
| Fámjins Kommuna | 16 | 8.893 | 1.292 | 2.045 | -199 | -0,2 | -0,1 |
| Hovs Kommuna | 21 | 8.426 | 1.630 | 1.938 | 5.883 | 3,6 | 3 |
| Porkeris Kommuna | 23 | 24.470 | 5.847 | 5.628 | 15.484 | 2,6 | 2,8 |
| Vágs Kommuna | 23 | 85.882 | 20.946 | 19.753 | 81.316 | 3,9 | 4,1 |
| Sumbiar Kommuna | 19 | 24.490 | 4.020 | 5.633 | 5.600 | 1,4 | 1 |
| Tórshavnar Kommuna | 19 | 1.796.139 | 257.962 | 413.112 | 557.595 | 2,2 | 1,3 |
| Runavíkar Kommuna | 20 | 164.881 | 34.409 | 37.923 | 63.829 | 1,9 | 1,7 |

# Fylgiskjal B

## Galdandi kommunulóg í mun til uppskotið um nággja kommunustárislóg

Tað í uppskotinum skrivað við kursiv er nýtt í mun til verandi lóggávu.

| **Løgtingslóg nr. 45 frá 29.06.1997 um føroysku kommunurnar** | **Uppskot um løgtingslóg nr. ? frá ? um kommunustárislóg** |
|---|---|
| | |
| **ØKI LÓGARINNAR** | |
| **§ 1.** Hendan lóg fatar um allar kommunur í Føroyum, har ikki serligt undantak er gjørt. | **§ 1.** Lógin fevnir um øll fyrisitingarlig øki, har kommunan hevur málsførleika, uttan so er, at undantøk eru í aðrari lóg. |
| | |
| **UM BYGDA(R)RÁðIð** | |
| **§ 2.** Kommunurnar verða stárdar av bygda(r)ráðnum, sum verða vald sambært kommunalu vallógini. | **§ 1,** *Stk. 2.* Val til kommunustárið fer fram eftir reglunum í kommunalu vallógini. |
| | **§ 5.** Kommunuviðurskifti verða stárd av einum stýri, sum nevnt verður kommunustýri. *Formaðurin í kommunustýrinum nevnist borgarstjóri* |
| | **§ 8.** *Kommunustýrislimur, sum er arbeiðstakari, hevur rætt til fríloyvi í neyðugum vavi til tess at røkja starv sítt sum fólkavalt umboð.* |
| 2. *petti*. Bygda(r)ráðið verður valt fyri 4 ár, og valið fer fram ein av Føroya landsstýri ásettan dag í tíðarskeiðinum 20. november - 10. desember. Nývalda bygda(r)ráðið tekur við 1. januar. | (Kommunuvallógin) |
| 3. *petti*. Hvør tann, sum hevur valbæri til bygda(r)ráðið, hevur skyldu at taka við vali. Tó kann tann, ið hevur verið limur í bygda(r)ráðnum í 2 valskeið ella meira bera seg undan, til 2 fylgjandi valskeið eru farin. Somuleiðis kann persónur, ið fylt hevur 60 ár, bera seg undan at taka við vali. Endaliga kunnu løgmaður, limir av landsstýrinum og ríkisumboðsmaður bera seg undan. | (Kommunuvallógin) |
| 4. *petti*. Nærri fyrisetingar um, hvussu kommunan verður stjórnað, ger bygda(r)ráðið í eini reglugerð, sum landsstýrið skal góðkenna. | **§ 6.** Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um síni stýrisviðurskifti í eina kommunustýrisskipan. *Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga* |

| | |
|---|---|
| | *millumbili.* |
| 5. *petti*. Bygda(r)ráðið ger sjálvt starvsskipan sína. | **§6,** *Stk. 3.* Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um sína málsmannagongd í eina fundarskipan. |
| **§ 3.** Í reglugerðini verður talið á bygda(r)ráðslimum ásett. Teir skulu vera 7-9, um kommunan hevur færri enn 2500 íbúgvar, 9-13, um íbúgvaratalið er 2500-5000, og um íbúgvaratalið er 5000 ella meira, skulu bygda(r)ráðslimirnir vera 13-17. Talið á bygda(r)ráðslimum skal altíð vera stakt. | **§6,** *Stk. 2.* Talið á kommunustýrislimum skal í minsta lagi vera 7 og í mesta lagi 17. Limatalið skal vera stakt. |
| **§ 4.** Nývalt bygda(r)ráð kemur saman sum skjótast og áðrenn 31. desember í árinum, sum valið er farið fram. Tann fyrst valdi limurin kallar saman til fundar og leiðir fundin, til formaðurin er valdur. | **§ 12.** Nývalda kommunustýrið skal skipa seg í seinasta lagi innan árslok í valárinum.<br><br>**§ 12,** *Stk. 2*, 2. pkt. Fyrst valdi kommunustýrislimur gevur fundarboð og leiðir fundin, til borgarstjóri er valdur. |
| 2. *petti*. Á hesum fundi fer fram val av formanni fyri alla starvstíð bygda(r)ráðsins. Formaðurin verður valdur ímillum bygda(r)ráðslimirnar. Við val av formanni krevst við fyrstu atkvøðugreiðslu, at meira enn helmingurin av teimum, á fundi eru, atkvøða fyri tí, ið valdur skal verða. Fæst tílíkur meiriluti ikki, verður atkvøtt umaftur. Fær eitt valevni hesaferð atkvøður frá meira enn helminginum av teimum, á fundi eru, ella fær bert eitt valevni atkvøður, er hetta valt. Fæst heldur eingin avgerð við aðru atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt ímillum teir báðar limirnar, sum við aðru atkvøðugreiðslu fingu flestar atkvøður. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, verður avgjørt við lutakasti, um hvørjar tveir, atkvøtt skal verða við bundna valið. Standa atkvøðurnar eisini við triðju atkvøðugreiðslu á jøvnum, verður við lutakasti gjørt av, hvør skal verða valdur. | **§ 3.** Við meirilutavali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær reinan meiriluta av teimum, ið á fundi eru, er valt.<br><br>*Stk. 2.* Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin reinan meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um.<br><br>*Stk. 3.* Fær hvørgin teirra reinan meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti.<br><br>**§ 7,** *Stk. 2. Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið.* Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. *Tá ið borgarstjórin er valdur, skal hann leggja vanliga starvið frá sær, umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við fólkavalda starvið sum borgarstjóri.* |

| | |
|---|---|
| 3. *petti*. Tá formansvalið er av, verður valdur næstformaður eftir somu mannagongd. Næstformaðurin er í formansins stað, tá hesum berst frá. Sí tó § 10, 4. petti. | **§ 7,** *Stk. 3,* 1. og 2 pkt. *Val av varaborgarstjóra hevur gildi alt virkisskeiðið.* Varaborgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. |
| 4. *petti*. Í reglugerðini kann verða fyriskipað, at valdir skulu verða 1. og 2. næstformaður, og teir verða tá valdir eftir lutfallsvalháttinum. | **§ 7,** *Stk. 3,* 3. pkt. Ásetur kommunustýrisskipanin, at 1. og 2. varaborgarstjóri skulu verða valdir, fer valið fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4. |
| 5. *petti*. (Strikað) | |
| **§ 5.** Bygda(r)ráðslimur hevur skyldu at lata seg velja til formann, næstformann ella lim í nevnd, sum verður sett sambært hesi lóg, ella sambært reglugerðini. | **§ 7.** Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja til borgarstjóra, varaborgarstjóra, nevndarlim ella umboð.<br><br>**§ 7,** *Stk 4. Kommunustýrislimur kann av persónligum áðum bera seg undan at verða borgarstjóravalevni.* |
| 2. *petti*. Heldur ein bygda(r)ráðslimur seg hava orsøk til - áðrenn tíðarskeiðið, hann er valdur fyri, er lokið - at krevja seg loystan úr tí starvi, hann er valdur í (bygda(r)ráðsformaður, næstformaður ella nevndarlimur), kann bygda(r)ráðið undir serstøkum umstøðum játta umsókn hansara. Er limurin ikki nøgdur við avgerð bygda(r)ráðsins, kann hann leggja málið fyri landsstýrið. Verður slík umsókn játtað bygda(r)ráðsformanninum og/ella næstformanninum, verður nýval at fara fram eftir reglunum í § 4, 2. petti. | **§ 19.** Setur borgarstjóri fram umbøn um at verða loystur úr starvi, kann kommunustýrið loysa hann úr starvinum.<br><br>*Stk. 2.* Fer borgarstjóri úr kommunustýrinum, doyr, ella verður loystur úr starvi, so skal nýval av borgarstjóra fara fram eftir reglunum í § 7, stk. 2.<br><br>**§ 20.** Kommunustýrið skal áseta í kommunustýrisskipanina, hvussu kommunustýrislimur skal kunna fáa upplýsingar ella tekniska hjálp frá fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðir.<br><br>*Stk. 2.* Kommunustýrislimur hevur rætt at kanna framlagt tilfar saman við serkønum stuðli, sum ikki er kommunustýrislimur, í tí vavi, tað er í samsvari við reglurnar um tagnarskyldu.<br><br>**§ 21.** Kommunustýrislimur hevur rætt at fáa skjalainnlit í málum, har tilfarið í endaligum skapi er til skjals í kommunalu fyrisitingini.<br><br>*Stk. 2.* Kommunustýrislimur skal stíla umsókn sína um skjalainnlit til borgarstjóran við tilskilan |

| | |
|---|---|
| | um, hvørji skjøl ella mál talan er um.<br><br>*Stk. 3.* Borgarstjórin kann avmarka rættin til skjalainnlit í tí vavi, tað er neyðugt við atliti at málsavgreiðsluni, ella har skjalainnlit í avgerandi mun ber ampa við sær. |
| **§ 6.** Bygda(r)ráðið hevur fund vanliga eina ferð um mánaðin. Bygda(r)ráðsfundur er almennur, men í serstøkum føri kann bygda(r)ráðið gera av, at einstøk mál verða viðgjørd fyri stongdum hurðum. Spurningurin, um mál skal viðgerast fyri stongdum hurðum, verður viðgjørdur á fundi fyri stongdum hurðum, um formaðurin ger tað av ella 1/3 av limunum krevur tað. | **§ 14.** Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. *Nágreiniligari reglur um vanligar fundir skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanini.*<br><br>**§ 26.** Kommunustýrisfundir eru almennir. Um neyðugt kann kommunustýrið gera av, at mál, sum t.d. persónsmál, skulu verða viðgjørd fyri aftur latnum hurðum. Henda viðgerð kann fara fram fyri aftur latnum hurðum, um borgarstjórin ger tað av, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevur tað.<br><br>*Stk. 2.* Kommunustýrið kann loyva starvsfólki hjá kommununi at fylgja við eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum.<br><br>*Stk. 3.* Kommunustýrið kann loyva øðrum fólki at fylgja eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum, til tess at fáa upplýsingar í málinum, við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu. |
| 2. *petti*. Bygda(r)ráðið tekur avgerð um, nær og hvar regluligir fundir skulu vera, og við byrjanina av hvørjum ári verður hetta kunngjørt á tann hátt, ið vanliga verður nýttur í kommununi. | **§ 14,** *Stk 1*, 3. pkt. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir. |
| 3. *petti*. Eykafundur verður at halda, tá formaðurin heldur tað vera neyðugt, ella tá 1/3 av limunum krevur tað. Bygda(r)ráðsformaðurin ger av, nær og hvar eykafundirnir skulu vera, og um tað ber til, verða hesir fundir kunngjørdir framman undan fyri íbúgvunum í kommununi. | **§ 14,** *Stk. 2.* Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess. |
| **§ 7.** Bygda(r)ráðið er viðtøkuført, tá ið minsta lagi helmingurin av limunum eru á fundi. | **§ 15.** Kommunustýrið er viðtøkuført, um í minsta lagi helmingurin av kommunustýrislimunum er á fundi. |
| 2. *petti*. Avgerðir verða, tá ikki annað er fyriskipað, tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Eitt uppskot er samtykt, tá meirilutin av teimum, sum greiða atkvøðu, atkvøður fyri. Um eitt uppskot fær líka nógvar atkvøður fyri sum ímóti, er tað fallið. | **§ 15***, Stk. 2.* Um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið meirilutin av teimum, ið greiða atkvøðu, hevur atkvøtt fyri uppskotinum. Stendur á jøvnum, er uppskotið fallið. |

| | |
|---|---|
| **§ 8.** Tað, sum samtykt verður á bygda(r)ráðsfundi, verður at føra í gerðabók, sum verður undirritað av teimum limum, sum á fundi eru. | **§ 25.** Borgarstjórin ansar eftir, at allar samtyktir á kommunustýrisfundi verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða undirskrivað av øllum teimum luttakandi kommunustýrislimunum. |
| 2. *petti*. Hevur limur serstøðu, kann hann krevja, at henda í stuttum verður tilskilað í gerðabókini. | **§ 25,** *Stk. 2.* Hevur kommunustýrislimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina. *Hetta er eisini galdandi, tá tilfarið verður sent øðrum myndugleika*. |
| **§ 9.** Bygda(r)ráðið ger av, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum limi, at hann ikki eigur at taka lut í fundarviðgerðini og atkvøðugreiðslu hesum máli viðvíkjandi. Um so er, skal avvarandi fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt. Bygda(r)ráðslimur skal sjálvur siga frá um hann heldur iva vera um luttøkuføri. | **§ 10.** Kommunustýrislimur hevur skyldu at boða frá, um hann heldur iva verða um sítt gegni.<br><br>*Stk. 2.* Kommunustýrið *ella føst nevnd* ger av, um eitt mál er av tílíkum áhuga hjá einum limi, at hann hvørki kann vera við í viðgerð ella atkvøðugreiðslu.<br><br>*Stk. 3. Er líkt til, at kommunustýrið ella føst nevnd tekur avgerð um, at kommunustýrislimur ella fastur nevndarlimur er ógegnigur, kunnu limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.*<br><br>*Stk. 4. Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, kommunustýrið ella ein føst nevnd ger av, at* komm*unustýrislimur ella fastur nevndarlimur er ógegnigur, kunnu teir limir, ið valdir eru á viðkomandi valevnislista, krevja, at málið verður flutt til næsta fund.*<br><br>*Stk. 5. Málið kann tó ikki verða flutt, um 2/3 av teimum hjástøddu kommunustýrislimunum ella í minsta lagi helmingurin av teimum føstu nevndarlimunum eru ímóti, ella at málið fyrnast.* |

| | |
|---|---|
| **§ 10.** Berst bygda(r)ráðslimi frá í meira enn 1 mánað kann næsti maður á lista hansara verða innkallaður. Kann limur vísa á, at tað ikki fer at bera honum til at møta í 1 mánaða, kann tiltaksmaðurin verða innkallaður beinanvegin. | **§ 22.** Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. *Setur eingin kommunustýrislimur fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð.*<br><br>*Stk. 2.* Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal borgarstjórin geva tiltakslimi fundarboð.<br><br>**§ 23.** Tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri luttaka, fer innkomin tiltakslimur út.<br><br>Stk. 2. Í teimum førum, har fleiri tiltakslimir eru komnir inn á sama valevnislista, men har starvstíðin ikki endar samstundis, skal tann tiltakslimur, ið fyrstur er valdur, verða seinastur út. |
| 2. *petti*. Berst limi frá at møta á fyrsta fundi í nývaldum bygda(r)ráð, skal tiltaksmaður hansara taka lut á fundinum. | **§ 12,** *Stk. 2. Kommunustýrið skal vera fullmannað á fyrsta fundi*.<br><br>*Stk. 3.* Berst kommunustýrislimi frá at møta á fyrsta fundi, skal tiltakslimur innkallast. |
| 3. *petti*. Bygda(r)ráðið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksmonnum eru til staðar. | **§ 22,** *Stk. 3.* Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru lokanar. |
| 4. *petti*. Kemur tiltaksmaður í staðin fyri formannin, tekur næstformaðurin við uttan so, at bygda(r)ráðið ger av at velja nýggjan formann eftir reglunum í § 4, 2. petti. | **§ 24.** Er tiltakslimur komin inn fyri borgarstjóra ella varaborgarstjóra eftir reglunum í § 22, stk. 2, *men sannlíkt er, at fráveran varir longri enn 2 mánaðir*, *so skal* kommunustýrið fyribils velja borgarstjóra ella varaborgarstjóra í teirra stað eftir reglunum í ávíkavist § 7, stk. 2 og stk. 3. |
| **§ 11.** Fyri luttøku á bygda(r)ráðsfundum og fundum í nevndum, sum bygda(r)ráðið velur sambært hesi lóg ella reglugerðini, verður veitt fundarsamsýning. | **§ 9.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur við kunngerð reglur um samsýning til kommunustýrislimir. Samsýning kann m.a. verða veitt fyri:<br><br>a) luttøku á kommunustýrisfundum og nevndarfundum,<br><br>b) luttøku á øðrum fundum í sambandi við útinning av starvinum sum kommunalt valdur |

| | |
|---|---|
| | limur,<br><br>c) skeiðsluttøku, sum kommunustýrið hevur góðkent,<br><br>d) annað virksemi, eftir umbøn frá kommunustýrinum ella eini fastari nevnd. |
| 2. *petti*. Støddin á samsýningini verður ásett av landsstýrinum sum ein føst upphædd um dagin. Er fundurin longri enn 4 tímar, verður samsýningin tvífaldað.<br><br>3. *petti*. Landsstýrið kann eisini loyva, at samsýning verður veitt fyri onnur nevndararbeiði.<br><br>4. *petti*. Um serlig orsøk er til tess, kann bygda(r)ráðið við loyvi landsstýrisins veita formanninum í eini av bygda(r)ráðnum settari nevnd eina serliga árliga samsýning. | |
| | |
| **UM NEVNDIR** | |
| **§ 12.** At taka sær av fíggjarligu umsitingini verður sett ein fíggjarnevnd. Í hesi nevnd sita bygda(r)ráðsformaðurin, ið er føddur formaður, og afturat honum 2 ella 4 aðrir bygda(r)ráðslimir. Hetta verður gjørt av í reglugerðini. | |
| 2. *petti*. Samsvarandi tí, sum fyriskipað er í reglugerðini, fyrisitur fíggjarnevndin kassa- og roknskapardeildina og hevur eftirlit við kommunalu umsitingini sum heild. | **§ 28,** *Stk. 1,* 1. pkt. Settar skulu verða ein fíggjarnevnd _..<br><br>**§ 38,** *Stk. 1,* 1. pkt. Borgarstjórin er nevndarformaður. |
| | **§ 38,** *Stk 1,* 2. pkt. Fíggjarnevndin tekur sær av fíggjarligu umsitingini hjá kommununi.<br><br>*Stk. 2.* Fíggjarnevndin samskipar og hevur eftirlit við fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið. |
| 3. *petti*. Áðrenn mál viðvíkjandi fíggjarviðurskiftunum hjá kommununi ella onnur umsitingarmál verða løgd fyri bygda(r)ráðið, skal ummæli verða fingið frá fíggjarnevndini. | **§ 38,** *Stk. 3.* Áðrenn mál víðvíkjandi fíggjarviðurskiftum verða løgd fyri kommunustýrið, skal fíggjarnevndin geva sítt ummæli. |

| | |
|---|---|
| **§ 13.** Umframt fíggjarnevndina verða settar aðrar fastar nevndir av bygda(r)ráðslimum, soleiðis sum ásett í reglugerðini. | **§ 28,** *Stk. 1,* 1. pkt __.. og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum.<br><br>*Stk. 2. Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja í fasta nevnd, stýri og tílíkt, umframt at gera aðrar kommunalar uppgávur, sum kommunustýrið áleggur honum.* |
| 2. *petti*. Bygda(r)ráðið kann eisini seta serligar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella vera ráðgevandi hjá fíggjarnevndini, øðrum føstum nevndum ella bygda(r)ráðnum. | **§ 36.** Kommunustýrið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir at taka sær av einstøkum málum hjá kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd.<br><br>*Stk. 2. Kommunustýrið ásetur nágreiniligari reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.*<br><br>**§ 37.** Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja, at staðbundin áhugamál verða hoyrd í kommunustýrinum.<br><br>*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.<br><br>*Stk. 3.* Nágreiniligari reglur um samanseting, manning og hoyringarmannagongd skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina.<br><br>*Stk. 4.* Val av staðbundnum umboðum fer fram sama dag og eftir somu reglum, sum val fer fram til kommunustýrið.<br><br>*Stk. 5. Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.* |
| 3. *petti*. Bygda(r)ráðið kann áleggja einum ella fleiri av limum tess at gera serstøk kommunal arbeiði. Slík arbeiði kunnu eisini verða latin øðrum íbúgvarum í kommununi upp í hendur, um hesir vilja. | |
| **§ 14.** Bygda(r)ráðið velur frammanfyri umrøddu nevndir. Limirnir í fíggjarnevndini og í hinum føstu nevndunum verða valdir ímillum bygda(r)ráðslimirnar. | **§ 29.** Allir nevndarlimir skulu vera kommunustýrislimir. |

| | |
|---|---|
| 2. *petti*. Val av teimum í 1. petti um røddu nevndum fer fram beint aftan á val av formanni og næstformanni og hevur gildi alt valskeiðið. Valt verður eftir lutfallsvalháttinum. Hesar nevndir skulu hvør sær vera í minniluta í bygda(r)ráðnum. | **§ 28,** *Stk. 3.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið, *ið er fyri alt virkisskeiðið hjá nevndini*, fer fram eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4. |
| 3. *petti*. (Strikað) | **§ 29,** *Stk. 2, 2. pkt. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.* |
| **§ 15.** Bygda(r)ráðið velur limir í tær nevndir har bygda(r)ráðið eftir øðrum fyriskipanunum skal verða umboðað. Skulu fleiri limir verða valdir í somu nevnd verður lutfallsvalhátturin nýttur. Skal bert 1 verða valdur, verður meirilutavalhátturin nýttur. | **§ 35.** Skal kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum vera umboðað í øðrum nevndum o.t., hevur kommunustýrislimur skyldu at taka við vali.<br><br>**§ 35,** *Stk. 4.* Í teirri raðfylgju, sessirnir verða lutaðir einum bólki, kann bólkurin tilnevna limir ella onnur, til annað slag av sessum er sett. |
| **§ 16.** Nevndirnar skipa seg sjálvar, jbr. tó § 12, 1. petti. | **§ 28,** ***Stk. 1,*** 2. pkt. Nevndirnar skipa seg sjálvar, smbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt. |
| 2. *petti*. Nevndarviðgerð fer fram á fundi, sum er viðtøkuførur, tá ið í minsta lagi helmingurin av nevndarlimunum eru møttir. Avgerð verður tikin við vanligum meiriluta. | **§ 33.** Ein nevnd er viðtøkufør, um í minsta lagi helmingurin av nevndarlimunum er møttur.<br><br>*Stk. 2.* Um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið ein meiriluti av teimum, ið greiða atkvøðu, hava atkvøtt fyri tí. |
| 3. *petti*. Nevndirnar gera sjálvar starvsskipan sína. Allar nevndarsamtyktir verða at føra í gerðabók, sum verður undirritað av øllum nevndarlimum, sum á fundi eru. | **§ 29,** *Stk. 3.* Nágreiniligari reglur um nevndararbeiðið kunnu verða ásettar í eina fundarskipan.<br><br>**§ 34.** Nevndarformaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða undirskrivað av teimum luttakandi nevndarlimunum.<br><br>*Stk. 2. Hevur nevndarlimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina. Hetta er eisini galdandi, tá um tilfarið verður sent øðrum myndugleika.* |

| | |
|---|---|
| 4. *petti*. Bygda(r)ráðsformaðurin hevur rætt til at vera við á nevndarfundi, sjálvt um hann ikki er nevndarlimur. Hann skal hava fundarboð, og skrá um tílík verður send limunum. | **§ 30.** *Nevndarformaður gevur fundarboð og fyrireikar nevndarfund.*<br><br>*Stk. 2.* Borgarstjórin hevur atgongd til allar nevndarfundir, tó uttan atkvøðurætt. Borgarstjórin skal hava fundarskrá og fráboðan um, nær og hvar nevndarfundur verður hildin.<br><br>*Stk. 3. Nevndin kann geva øðrum persóni atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa upplýsingar í málinum.* |
| **§ 17.** Nevndirnar umsita tey mál, sum verða latin teimum upp í hendur, samsvarandi fíggjarætlanini og fyriskipanum bygda(r)ráðsins. Tær skulu ansa eftir, at ikki verður farið upp um tær játtaðu peningaupphæddirnar, og skulu ígjøgnum fíggjarnevndina gera tilráðing til bygda(r)ráðið, um eykajáttan er neyðug. | **§ 29,** *Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nágreiniligari reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum.<br><br>**§ 31.** *Nevndarformaðurin ansar eftir, at farið verður fram eftir nevndarsamtyktunum.* Hann ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan.<br><br>*Stk. 2. Nevndarformaður kann taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast, ella har ongin orsøk er til iva. Tó skal borgarstjórin kunnast, áðrenn avgerð verður tikin í fyrningarfongdum málum, uttan so er, at tað snýr seg um avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.* |
| 2. *petti*. Eftir áheitan frá fíggjarnevndini og innan fyri eina tíðarfrest, sum hendan nevnd setir, skulu nevndirnar koma við teirra parti av uppskotinum til ársfíggjarætlanina og til gerð av íleggingar- og fíggjarætlanum. | |
| **§ 18.** Bygda(r)ráðslimur kann leggja fyri bygda(r)ráðið allar spurningar um virksemi hjá nevndunum, og nevndirnar skulu geva bygdaráðnum allar upplýsingar, sum biðið verður um. | **§ 13.** Kommunustýrislimur kann seta fram uppskot og spyrja um øll kommunal viðurskifti.<br><br>**§ 18.** Mál, ið snúgva seg um virksemi borgarstjórans, kunnu verða løgd fyri kommunustýrið, *um fleiri kommunustýrislimir krevja tað*. Borgarstjórin skal geva kommunustýrinum allar umbidnar upplýsingar, eins og hann í øllum lutum skal lýða tær avgerðir, kommunustýrið tekur.<br><br>**§ 31,** *Stk. 3.* Ein og hvør nevndarlimur kann leggja mál um virksemi hjá nevndarformanninum fyri nevndina. Formaðurin skal eftir áheitan geva |

| | |
|---|---|
| | nevndini allar upplýsingar, eins og hann í øllum lutum skal lýða tær avgerðir nevndin tekur. |
| 2. *petti*. Tá lógin ikki skilar annað til, eru nevndirnar bundnar av avgerðunum hjá bygda(r)ráðnum. | |
| **§ 19.** Áðrenn nevndaravgerð verður sett í verk, kann hvør nevndarlimur krevja, at málið fyrst verður lagt fyri bygda(r)ráðið. Undantiknar eru tó avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini í hendur. | **§ 32.** Nevndarlimur kann, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri kommunustýrið til avgerðar. Undantiknar hesum eru avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.<br><br>*Stk. 2. Ein og hvør kommunustýrislimur, ið ikki er nevndarlimur, kann krevja at fáa sent dagsskráir, úrrit úr gerðabókum, málstilfar o.a., sum sent verður nevndarlimunum.* |
| **§ 20.** Tá bygda(r)ráðið skal velja tveir ella fleiri limir í eina nevnd, fer slíkt val fram eftir lutfallsvalháttinum. Lutfallsval fer fram fram eftir hesum reglum: Limir bygda(r)ráðsins býta seg í bólkar, limirnir í hvørjum bólki hava frammanundan boðað bygda(r)ráðsformanninum frá, at teir vilja atkvøða saman við valið, ið skal fara fram. Limatalið í hvørjum bólki verður býtt við 1,2,3 o.s.fr. Býtingartalið, ið tá kemur fram, ásetur í hvørjum rað hvør bólkur sær kann velja síni umboð. Eru 2 ella fleiri býtingartøl eins stór, verður raðfylgjan avgjørd við lutakasti, sum bygda(r)ráðsformaðurin skipar fyri. Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir at siga bygda(r)ráðsformanninum frá beinan vegin, hvør skal vera teirra umboð. Sigur ein bólkur frá sær rættin til at seta eitt ella fleiri umboð, verða óásettu plássini býtt ímillum hinar bólkarnar á sama hátt, sum tilskilaður er omanfyri. | **§ 4.** Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.<br><br>*Stk. 2.* Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetur ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.<br><br>*Stk. 3.* Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.<br><br>*Stk. 4.* Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør ið umboðar hvønn bólkin .<br><br>*Stk. 5.* Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir stk.1-3. |
| 2. *petti*. Tá íð nevnd skal verða vald, har limirnir skulu vera bæði úr bygda(r)ráðnum og uttanfyri, fer valið fram í senn millum teir limir, bygda(r)ráðið skal velja. Í tí rað, sessirnir lutast einum bólki, kann hesin tilnevna limir ella ikki-limir í bygda(r)ráðnum, til annað slagið av sessum er sett. | **§ 35***, Stk. 2.* Skal kommunustýrið bert velja eitt umboð, fer valið fram eftir meiriluta-valháttinum, sambært § 3. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4.<br><br>*Stk. 3.* Skal ein nevnd ella tílíkt verða mannað við øðrum enn bara kommunustýrislimum, fer valið av teimum, ið kommunustýrið skal velja, fram undir einum. |

| | |
|---|---|
| 3. *petti*. Við meirilutaval er tað valevni valt, ið fær reinan meiriluta av teimum, sum greitt hava atkvøðu. Fæst slíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin hesa ferð reinan meiriluta av teimum greiddu atkvøðunum, verður bundið val ímillum teir báðar, sum við seinru atkvøðugreiðslu fingu flestar atkvøður, soleiðis at tað - um teir fáa líka mangar atkvøður verður kastaður lutur um, hvørjar tveir atkvøtt skal verða um við tað bundna valið. Er atkvøðutalið eins við triðju atkvøðugreiðslu, verður avgerðin tikin við lutakasti, sum bygda(r)ráðsformaðurin skipar fyri.<br><br>4. *petti*. Tá persónur verður settur í kommunalt starv, fer val ímillum fleiri umsøkjarar fram eftir reglunum í 3. petti. | **§ 3.** Við meirilutavali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær reinan meiriluta av teimum, ið á fundi eru, er valt.<br><br>*Stk. 2.* Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin reinan meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um.<br><br>*Stk. 3.* Fær hvørgin teirra reinan meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti. |
| **§ 21.** Har bygda(r)ráðsformaðurin er fastur limur í nevnd, sum bygda(r)ráðið velur, verður sessur hansara at rokna sum ein av teimum sessum, sum bólkur hansara hevur rætt til.<br><br>**§ 22.** Fer bygda(r)ráðslimur í valskeiðinum úr eini nevnd, har hann er valdur av einum ávísum bólki, skal hesin bólkur seta mann í hansara stað.<br><br>*2. petti.* Hevur nevndarlimur havt forfall í meira enn 1 mánaða, kann bólkur hansara seta annan í hansara stað. | **§28.** *Stk. 4.* Hevur borgarstjórin ella annar kommunustýrislimur fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær. |
| **§ 23.** Eingin, sum situr í starvi hjá kommununi, má vera limur í kommunalari nevnd, sum hevur við hansara starvsviðurskifti at gera. | **§ 11.** Kommunustýrislimur, sum starvast hjá kommununi, kann ikki verða limur í fastari nevnd, um nevndin umsitur málsøki, sum hava tilknýti til hansara starvssøki. |
| 2. *petti*. Ein nevndarlimur má ikki fyri viðurlag gera nakað arbeiði fyri tann partin av kommunalu fyrisitingini, ið verður stjórnaður av avvarandi nevnd, uttan so at arbeiðið er útboðið alment, ella umstøðurnar serstakliga ráða til slíkt, og í seinra føri skal bygda(r)ráðið hava samtykt hetta framanundan. | **§ 11,** *Stk. 2.* Ein nevndarlimur kann ikki gera nakað arbeiði móti samsýning fyri tann partin av kommunalu fyrisitingini, ið verður stjórnað av viðkomandi nevnd, um so er, at arbeiðið ikki er boðið út alment. |
| | |
| **BYGDARÁÐSFORMAÐURIN** | |

| | |
|---|---|
| **§ 24.** Formaðurin kallar saman til bygda(r)ráðsfundar og fyrireikar hesar. Hann leiðir fundirnar og ansar eftir, at samtyktirnar verða førdar í gerðabókina. | **§ 16***, Stk. 2,* 1. pkt. Borgarstjórin gevur fundarboð og fyrireikar kommunustýrisfundirnar.<br><br>**§ 25.** Borgarstjórin ansar eftir, at allar samtyktir á kommunustýrisfundi verða førdar í gerðabók. |
| *2. petti.* Framman undan hvørjum fundi letur hann í so stóran mun sum gjørligt limirnar vita, hvørji mál fara at koma til viðgerðar, og eisini roynir hann mest møguligt at gera útvegir fyri, at hesi mál og teir upplýsingar, ið fingnir eru til vega til at kunna meta um tey, verða løgd fram til eftirlit fyri limunum eitt hóskandi tíðarskeið undan fundinum. | **§ 16,** *Stk.2,* 2. pkt. Undan hvørjum fundi skal borgarstjórin kunna kommunustýrislimirnar um, hvørji mál koma fyri.<br><br>*Stk. 3.* Eitt hóskandi tíðarskeið fyri fundin skal borgarstjórin leggja mál og málsupplýsingar fram, so at kommunustýrislimirnir kunnu gera sær eina sjálvsmeting um hesi málini. |
| **§ 25.** Formaðurin ansar eftir, at farið verður eftir teimum samtyktum, sum bygda(r)ráðið hevur gjørt. Hann kann bygda(r)ráðsins vegna taka avgerð í smærri málum, sum ikki tola at bíða, og har eingin orsøk er til iva. | **§ 17,** *Stk. 3.* Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast ella har ongin orsøk er til iva.<br><br>*Stk. 4.* Borgarstjórin ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum kommunustýrisins. *Hann ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan.* |
| 2. *petti*. Formaðurin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu umsitingini. Hann býtir málini ímillum tær ymsu nevndirnar og kann um neyðugt fyriskipa, hvussu málini verða at avgreiða. Hann ansar eftir, at tey mál, sum krevja bygda(r)ráðsviðgerð, fáa hesa, og at neyðug ummæli verða fingin. Formaðurin tekur sær av teimum málum, sum ikki eru løgd til nakra nevnd. | **§ 16.** Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini. Hann býtir málini sundur til tær ymisku nevndirnar og tekur sær av teimum málum, sum ikki eru latin nakrari nevnd. |
| | **§ 17,** *Stk. 2.* Borgarstjórin ansar eftir, at tey mál, ið krevja kommunustýrisviðgerð, fáa tílíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin. Í átrokandi førum kann borgarstjórin tó fyriskipa, hvussu málini skulu verða avgreidd. |
| 3. *petti*. Á hvørjum vanligum bygda(r)ráðsfundi boðar formaðurin frá, hvørji mál, ið beind eru í nevnd síðan seinasta fund. | **§ 17.** Á hvørjum vanligum kommunustýrisfundi boðar borgarstjórin frá, hvørji mál eru beind í nevnd síðan síðsta fund. |

| | |
|---|---|
| 4. *petti*. Í reglugerðini er nærri fyriskipað um virki formansins. | **§ 18,** *Stk. 2.* Nágreiniligari reglur um virksemi borgarstjórans skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina. *Stk. Stk. 3. Verjir borgarstjórin seg við at fremja tær uppgávur, ið annaðhvørt eftir lógini ella kommunustýrisskipanini eru latnar honum at umsita, so kann kommunustýrið tilnevna ein annan kommunustýrislim at røkja hansara uppgávur. Kommunustýrið kann í álvarsomum føri fyribils velja ein annan sum virkandi borgarstjóra.*<br><br>*Stk. 4. Avgerðin sambært stk. 3, 2. pkt. skal alt fyri eitt verða latin landsstýrismanninum í kommunumálum til staðfestingar. Staðfestingin skal alt fyri eitt skjótast inn fyri dómsvaldið til rættarroynd.* |
| **§ 26.** Skjøl viðvíkjandi keypi, sølu og øðrum, sum hevur við fastar ognir at gera, lántøku og veðhaldsveitan, skulu vera undirritað av bygda(r)ráðsformanninum og einum persóni, sum bygda(r)ráðið hevur heimilað til tess. Sama er, tá talan er um at taka av árit um, at samtykki krevst frá bygda(r)ráðnum til at nýta skjalið. | **§ 44.** Skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av virkandi borgarstjóra og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess. |
| **§ 27.** Bygda(r)ráðsformaðurin fær eina samsýning, sum er ásett í reglugerðini.<br><br>2. *petti*. Um næstformaðurin í longri tíð er í formansins stað kann bygda(r)ráðið veita honum eina samsýning, alt eftir hvussu leingi formaðurin er burtur, og hvussu stórt arbeiðið er. Somuleiðis er eisini, tá ein bygda(r)ráðslimur verður settur sum formaður sambært § 10, 4. petti. | **§ 9,** *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur við kunngerð reglur um løn til borgarstjórar. |
| | |
| **FÍGGJARUMSITINGIN** | |
| **§ 28.** Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. | **§ 39.** Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. |
| **§ 29.** Fíggjarnevndin skal áðrenn 1. oktober gera uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár. Avrit av uppskotinum verður sent landsstýrinum. | **§ 39. *Skt. 1,*** 2. pkt. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. |
| 2. *petti*. Ársfíggjarætlanin skal 2 ferðir verða viðgjørd í bygdaráðnum við í minsta lagi 14 døgum ímillum og skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 20. desember. | **§ 39.** *Stk. 2.* Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. |
| **§ 30.** Íbúgvararnir í kommununi skulu hava atgongd at gera seg kunnugar við endaliga | **§ 27.** Kommunustýrið skal kunna borgararnar um ta endaligu samtyktu fíggjarætlanina __ |

| | |
|---|---|
| samtyktu fíggjarætlanina. | |
| **§ 31.** Samtykta ársfíggjarætlanin er bindandi fyri kommunalu umsitingina komandi fíggjarár. Tó kann bygda(r)ráðið um neyðugt geva eykajáttanir. Tílíkar játtanir krevja 2 viðgerðir við í minsta lagi 14 døgum ímillum. | **§ 40.** *Stk. 2,* 1. og 2. pkt. Kommunustýrið kann veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. |
| 2. *petti.* Ikki má verða farið undir eitt arbeiði uttan neyðug játtan fyriliggur. Tó kann verða farið undir lógarásett tiltøk, áðrenn játtan fyriliggur, men henda má tá sum skjótast verða fingin frá bygda(r)ráðnum. | **§ 40.** Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði fyrr enn neyðug játtan er tøk.<br><br>**§ 40,** *Stk. 5.* Er nøktandi játtan ikki sett av til lógarásettar veitingar o.a., skal tílík játtan verða útvegað sum skjótast. |
| 3. *petti.* Við hvørja eykajáttan má verða ávíst, hvaðani peningurin fæst. | **§ 40,** *Stk. 2,* 3. pkt. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað. |
| 4. *petti.* Fíggjarnevndin ansar eftir, at peningaognir kommununnar - íroknaður tann peningur, ið ikki er neyðugur til gjaldingar av dagligu útreiðslunum verða goymdar á tryggan hátt og eisini soleiðis, at tær geva sum mest av sær. | **§ 42.** Fíggjarnevndin skal ansa eftir, at øll peningaogn hjá kommununi er goymd á tryggan hátt. |
| 5. *petti.* Tær peningaognir, ið ikki eru neyðugar at hava til taks í reiðum peningi fyri at greiða dagligu útreiðslurnar, skulu verða settar inn í banka, sparikassa, á postkonto ella settar í slík lánibrøv, sum verða nýtt, tá ið tað snýr seg um ognir hjá ómyndingum. | **§ 42,** *Stk. 2.* Peningaognir skulu setast í peningastovn, á postgiro ella í tílík lánibrøv, ið nýtt vera, tá ið um ræður ognir hjá ómyndingum, so tær geva sum mest av sær. |
| 6. *petti.* Virðisbrøv kommununnar skulu - um tey ikki verða tryggjað á annan fullgóðan hátt - fáa átekning um, at tey eru ogn kommununnar, og at eingin hevur ræði á nøkrum virðisbrævi uttan við samtykki bygda(r)ráðsins. Um tað er møguligt, skal átekning verða skrivað í bók hjá avvarandi stovni. | **§ 42,** *Stk. 3.* Virðisbrøv skulu hava átekning um, at tey eru ogn hjá kommununi, og at eingin hevur ræði á teimum, uttan samtykt kommunustýrisins. Um til ber, skal átekningin verða skrivað í bók hjá viðkomandi stovni. |
| **§ 32.** Til lántøku, trygdarveitan, veðsetan av ognum kommununnar, nýtslu úr grunnum og nýtslu av rakstraravlopi krevst samtykt bygdaráðsins. | **§ 43.** Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum. |

| | |
|---|---|
| **§ 33.** Kommunan skal hava eina sakkøna grannskoðan, sum verður at góðkenna av landsstýrinum. Henda grannskoðan kann ikki verða koyrd frá uttan loyvi landsstýrisins. | **§ 45.** Kommunan skal hava óhefta, sakkøna grannskoðan av sínum fíggjarviðurskiftum. Grannskoðarin skal vera ríkisgóðkendur ella skrásettur.<br><br>*Stk. 2. Grannskoðarin skal regluliga eftirkanna roknskaparførslu og roknskaparmannagongdir hjá kommununi.*<br><br>**§ 46.** Í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.<br><br>*Stk. 2.* Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum í kommunumálum. |
| *2. petti.* Grannskoðanin kann frá bygda(r)ráðnum krevja allar fyri grannskoðanina neyðugar upplýsingar. | **§ 45,** *Stk. 3.* Grannskoðarin kann krevja allar neyðugar upplýsingar útflýggjaðar frá kommunustýrinum til tess at skoða, um tann fíggjarliga umsitingin samsvarar við lógina, fíggjarætlanina, eykajáttanir og aðrar tiknar avgerðir. |
| **§ 34.** Bókførslan hjá kommununi verður at leggja soleiðis til rættis, at hon vísir, hvussu ognirnar verða umsitnar, og um umsitingin samsvarar við fíggjarætlanina og samtyktir bygda(r)ráðsins yvirhøvur.<br><br>**§ 35.** Áðrenn oktober mánaði er úti, skal roknskapurin fyri farna fíggjarárið vera liðugur og lagdur fyri grannskoðanina. Eitt yvirlit yvir ábyrgdarbindingar kommununnar skal fylgja við roknskapinum. Harafturat skulu vera neyðugar viðmerkingar, serstakliga um størri munir millum tær upphæddir, ið roknskapurin vísir og tær, ið avsettar eru á fíggjarætlanini og eisini í mun til íleggingar og fíggingarætlanirnar hjá kommununi v.m.<br><br>2. *petti.* Tá fíggjarnevndin hevur svarað uppá tær av grannskoðanini gjørdu viðmerkingar, og - tá tað snýr seg um viðmerkingar, sum ikki beinleiðis koma undir tað málsøki, sum fíggjarnevndin hevur við at gera - eisini avvarandi kommunali myndugleiki, tekur bygda(r)ráðið á fundi avgerð viðvíkjandi teimum | **§ 41.** *Fíggjarnevndin hevur ábyrgd av*<br><br>*1) at gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,*<br><br>*2) at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,*<br><br>*3) at viðgera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini og*<br><br>*4) at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskriving.*<br><br>*Stk. 2. Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann við kunngerð áseta nágreiniligari reglur um kontoskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tílíkt.* |

| | |
|---|---|
| gjørdu viðmerkingunum og sendir landsstýrinum rokusnkapin til góðkenningar fyri 1. desember.<br><br>3. *petti*. Eingin kann taka lut í eini avgerð um eina roknskaparviðmerking, sum viðvíkur teirri fyrisiting, har hann sum limur av fíggjarnevnd, aðrari fastari nevnd ella sambært serstakum kommunalum starvi beinleiðis hevur verið við. | |
| 4. *petti*. Íbúgvararnir hava rætt til at gera seg kunnugar við endaliga samtykta roknskapin og møguligar viðmerkingar. | **§ 27.** Kommunustýrið skal kunna.. eins og um roknskapin saman við møguligum viðmerkingum.<br><br>*Stk. 2. Yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, eins og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund, skulu verða almannakunngjørd við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu.*<br><br>**§ 36.** Bygda(r)ráðið ásetir nærri reglur fyri skipan av roknskaparførslu kommununnar í eini serligari reglugerð. Reglugerðin verður latin grannskoðanini, sum eisini skal hava boð um allar broytingar áðrenn tær verða settar í verk. |
| | |
| **EFTIRLIT** | |
| **§ 37.** Landsstýrið hevur eftirlit við kommununum. | **§ 49.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum hevur eftirlit við kommununum. |
| **§ 38.** So skjótt, sum ársfíggjarætlanin er endaliga samtykt, verður hon send landsstýrinum. | **§ 50,** *Stk. 2.* Til tess at landsstýrismaðurin í kommunumálum kann røkja sínar eftirlitsskyldur við fíggjarligu viðurskiftinum hjá kommununum, skulu tær lata honum:<br><br>1) grannskoðaðan roknskap innan 1. juni,<br><br>2) samtykta fíggjarætlan innan 3 gerandisdagar eftir 1. desember og<br><br>3) samtykta eykajáttan innan 3 gerandisdagar. |
| 2. *petti*. Ársroknskapurin hjá kommununum verður at senda landsstýrinum undan 1. desember saman við grannskoðarafrágreiðingini og teimum avgerðum, sum bygda(r)ráðið hevur tikið í samband við hesa. | |

| | |
|---|---|
| **§ 39.** Til lántøku ella broyting í lánitreytunum krevst loyvi landsstýrisins. Um eitt arbeiði skal verða fíggjað við lántøku, má ikki verða byrjað, fyrrenn loyvi landsstýrisins fyriliggur. | **§ 43***, Stk. 2.* Er nettoskuldin *meira enn ein álíkning við miðal loyvda skattaprosenti*, so krevst loyvi frá landsstýrismanninum í kommunumálum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum. |
| | **§ 47.** *Ikki er loyvt kommunum at fíggja rakstur, rentur og avdráttir ella lógarásettar avsetingar við lántøku.*<br><br>**§ 51.** *Er nettoskuldin hjá kommununi meira enn eina nettoálíkning, smbr. § 43, stk. 2, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum geva kommunustýrinum boð um at gera neyðugar broytingar í uppskotið til fíggjarætlan, í fíggjarætlanina ella í eykajáttanina, um landsstýrismaðurin metir, at:*<br><br>1) inntøku- og útreiðslumetingarnar eru skeivar,<br><br>2) inntøku- og útreiðslumetingarnar eru gjørdar á skeivum grundarlagi, ella at<br><br>3) útreiðslurnar eru óneyðugar ella órímiligar.<br><br>*Stk. 2. Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann í tí í § 43, stk. 2 nevnda føri geva kommunustýrinum boð um at lata uppskot til fíggjarætlan inn til landsstýrismannin í kommunum innan 1. oktober.* |
| 2. *petti*. Tó kann bygda(r)ráðið uttan loyvi landsstýrisins taka lán, sum verður afturgoldið yvir raksturin við í minsta lagi 1/3 um árið. | |
| 3. *petti*. Bygda(r)ráðið kann ikki áleggja kommununi veðhaldsskyldur ella gera broytingar í treytunum fyri veðhaldsskyldu uttan loyvi landsstýrisins. | **§ 47,** *Stk. 2.* Ikki er loyvt at seta á stovn ábyrgdarbindingar.<br><br>*Stk. 3. Ikki er loyvt kommunum at taka lut í vinnuligum virksemi, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.*<br><br>*Stk. 4. Ikki er loyvt kommunum at veita beinleiðis ella óbeinleiðis kappingarav-lagandi stuðul til fyritøkur, stovnar ella tílíkt.* |

| | |
|---|---|
| | **§ 48.** *Ikki er loyvt kommunum at seta á stovn kommunusamstørv, ið hava við sær avmarkingar í teimum lógarásettu heimildunum, sum kommunustýrið hevur eftir hesi lóg, uttan so er, at landsstýrismaðurin í kommunumálum í serstøkum føri góðkennir eina tílíka samstarvsavtalu.*<br><br>*Stk. 2. Hevur landsstýrismaðurin í kommunumálum í hendingaføri góðkent eina kommunusamstarvsavtalu, skal tað eisini góðkenna treytirnar í sambandi við avtaluslit. Er ósemja um treytirnar, verða tær ásettar av landsstýrismanninum.* |
| 4. *petti*. Heldur ikki kann bygda(r)ráðið uttan loyvi landsstýrisins geva tilsøgn um regluligar veitingar, sum kommunan ikki eftir lógini hevur skyldu til. | **§ 40,** *Stk. 3.* Kommunustýrið kann ikki geva tilsøgn um regluligar veitingar, sum tað ikki hevur skyldu til sambært lóg, uttan at landsstýrismaðurin í kommunumálum gevur loyvi til tess.<br><br>*Stk. 4. Kommunustýrið kann áseta gjald fyri kommunalar tænastuveitingar.* |
| **§ 40.** Í hvørji kommunu verður stovnaður ein fastognargrunnur. Í henda grunn verður lagt alt tað, sum sambært higartil galdandi reglum hevur staðið á serligari ognarkonto hjá kommununi.<br><br>2. *petti*. Bygda(r)ráðið má ikki uttan loyvi landsstýrisins minka um ognirnar hjá fastognargrunninum. Kommunurnar verða at rinda raksturin við skatti og øðrum inntøkum.<br><br>3. *petti*. Tá henda lóg kemur í gildi, skal støða verða tikin til, um fastognargrunnurin sambært 1. petti er nóg stórur hjá teimum ymsu kommununum. Um ikki, ger landsstýrið av, hvussu nógv kommunan skal útvega afturat til grunnin um árið.<br><br>**§ 41.** Bygda(r)ráðið kann ikki uttan loyvi landsstýrisins selja ella veðseta fastar ognir hjá kommununi ella fáa sær nýggjar fastar ognir.<br><br>2. *petti*. Verður føst ogn seld, skal ágóðin av søluni verða lagdur í fastognagrunnin, um landsstýrið ikki loyvir aðra nýtslu. Verður føst ogn keypt, kann hon verða goldin úr | |

| | |
|---|---|
| fastognagrunninum. | |
| **§ 42.** Landsstýrið kann seta úr gildi samtyktir hjá einum bygda(r)ráð, sum eru í stríð við lóggávuna. | **§ 52.** Hevur kommunustýrið tikið eina avgerð, sum er ímóti lógini, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum:<br><br>1) ógilda avgerðina ella<br><br>2) fyribils avtaka avgerðina. |
| 2. *petti*. Hevur eitt bygda(r)ráð gjørt brot á galdandi lóg, eitt nú sloppið sær undan at gera skyldur sínar, ger landsstýrið tað, sum neyðugt er. Um tað er neyðugt, kann landsstýrið áleggja teimum einstøku bygda(r)ráðslimunum tvingsilsbøtur. | **§ 52,** *Stk. 2.* Heldur kommunustýrið seg óvirkið mótvegis lógarásettum skyldum, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum áleggja teimum kommunustýrislimum, sum bera ábyrgd av hesum, tvingsilsbøtur. |
| 3. *petti*. Landsstýrið kann eisini um neyðugt við rættarmáli gera persónliga ábyrgd galdandi ímóti teimum einstøku bygda(r)ráðsliunum. | **§ 52,** *Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann í teimum í stk. 2 nevndu førum saksøkja kommunustýrislimi eftir endurgjaldi, um hann ber ábyrgd av, at kommunan hevur verið fyri fíggjaligum missi.<br><br>*Stk. 4. Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann sleppa einum sakarmáli, um viðkomandi kommunustýrislimur ístaðin sektarsamtykkir mótvegis kommununi innan ásetta freist.*<br><br>*Stk. 5. Kommunustýrislimur, sum gref liga skúgvar til viks skyldur sínar sum fólkavalt kommunustýrisumboð, verður sektaður við bót. Óskettni verður ikki revsað.*<br><br>**§ 53.** Staðfestir landsstýrismaðurin í kommunumálum eina avgerð hjá kommunustýrinum sambært § 18, stk. 4, er borgarstjórin undantikin starvi sínum frá hesum mundi.<br><br>*Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í stk. 1 nevnda føri gera av, at lønin hjá borgarstjóranum skal verða skerd við einum fjórðingi, eini helvt, ella at hon í versta føri fellur burtur.*<br><br>**§ 54.** Fremur kommunustýrið grovt lógarbrot, ella endurtaka lógarbrotini seg, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum seta kommunustýrið undir umboðsstjórn sína, so rættandi tiltøk verða gjørd alt fyri eitt. |

| | |
|---|---|
| **SERLIGAR FYRISKIPANIR** | |
| **§ 43.** Bygda(r)ráðið skal síggja fyri, at øll skjøl hjá kommununi verða hildin í varðveitslu.<br><br>2. *petti*. Landsstýrið kann fyriskipa, hvussu og hvussu leingi omanfyri nevndu skjøl verða at varðveita, og nær og hvussu beint kann verða fyri teimum.<br><br>3. *petti*. Á fyrsta fundi aftan á nýval skulu bygda(r)ráðslimirnir gerast kunnugir við øll ognar- og skuldarskjøl, sum kommuna hevur í varðveitslu. | |
| **§ 44.** Bygda(r)ráðið hevur skyldu at geva landsstýrinum allar frágreiðingar um viðurskifti hjá kommununi, tá biðið verður um tað. | |
| **§ 45.** (Strikað) | **§ 50.** Kommunustýrið hevur skyldu at veita landsstýrismanninum í kommunumálum allar neyðugar upplýsingar og frágreiðingar. |
| **§ 46.** Í seinasta lagi 1/2 ár eftir at henda lóg er komin í gildi skulu kommunurnar hava gjørt eina reglugerð fyri fyrisitingina og sent landsstýrinum hana til góðkenningar. Innan somu frest skal starvsskipanin verða samtykt.<br><br>2. *petti*. Landsstýrið ger eina standard reglugerð og eina standard starvsskipan, sum kommunurnar kunna nýta.<br><br>3. *petti*. Um ikki reglugerð og starvsskipan eru gjørdar innan nevndu frest, skal landsstýrið seta standard reglugerðina og starvsskipanina í gildi. | |
| **§ 47.** Bygda(r)ráðið skal hava eina serliga reglugerð um talið á tænastumonnum og starvsfólki, tilnevning teirra og uppsøgn, starvsøki og starvsheiti, og um lønar- og eftirlønartreytir teirra. Henda reglugerð verður at góðkenna av landsstýrinum. | **§ 6,** *Stk. 4.* Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um starvsfólkaviðurskiftini í eina starvsfólkaskipan. |

| | |
|---|---|
| **§ 48.** Tær føroysku kommunurnar eru, tá henda lóg fær gildi, hesar:<br><br>1. Fugloyar kommuna<br><br>2. Svínoyar "<br><br>3. Viðareiðis "<br><br>4. Hvannasunds "<br><br>5. Klaksvíkar "<br><br>6. Kunoyar "<br><br>7. Mikladals "<br><br>8. Húsa "<br><br>9. Elduvíkar "<br><br>10. Oyndarfjarðar "<br><br>11. Fuglafjarðar "<br><br>12. Leirvíkar "<br><br>13. Gøtu "<br><br>14. Runavíkar "<br><br>15. Nes "<br><br>16. Skála "<br><br>17. Sjóar "<br><br>18. Sunda "<br><br>19. Eiðis "<br><br>20. Gjáar "<br><br>21. Funnings "<br><br>22. Haldarsvíkar "<br><br>23. Saksunar "<br><br>24. Hvalvíkar "<br><br>25. Hósvíkar "<br><br>26. Kollafjarðar " | |

| | |
|---|---|
| 2. *petti*. Um tvær ella fleiri kommunur ynskja at verða lagdar saman, ger landsstýrið av, um samanlegging skal fara fram og skipar fyri hesari.<br><br>3. *petti*. Somuleiðis kann landsstýrið samtykkja umskipan av markinum ímillum kommunur, um semja er ímillum hesar.<br><br>**§ 49.** Tá fólkatalið í eini kommunu er minni enn 1000, kann landsstýrið gera undantak frá §§ 3, 6, 11, 12-23, 29, 45, 46 og 47. Uttan mun til fólkatalið kann landsstýrið gera undantak frá nevndu greinum, til nýval er farið fram.<br><br>2. *petti*. Landsstýrið hevur heimild at gera tær reglur, sum neyðugar eru, tá undantak verður gjørt frá nevndu greinum ella einstøkum av teimum. | **§ 2.** Reglur um kommunubýti verða ásettar í aðrari lóg. |
| **§ 50.** Henda lóg fær gildi beinan vegin. Samstundis fara úr gildi: Lóg nr. 30 frá 28. februar 1872 om de færøske landkommuners styrelse", lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 om byen Thorshavns kommunale styrelse" og § 32 í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt. | **§ 55.** Lógin kemur í síni heild í gildi 1. januar 2003.<br><br>*Stk. 2.* Fram til 1. januar 2003 kann landsstýrismaðurin í kommunumálum tó við kunngerð seta kommunustýrislógina ella partar av henni í gildi. |
| | **56.** Samstundist, sum henda lóg fær gildi, fara hesar lógir úr gildi:<br><br>1) Løgtingslóg nr. 45 frá 1972 um føroysku kommunurnar, sum seinast broytt við ll. nr. 34 frá 29/5-1985<br><br>2) Løgtingslóg nr. 189 frá 8/12-1993 um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. og<br><br>3) Løgtingslóg nr. 85 frá 30/5-1994 um broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan krepplánsgrunn v.m. |
| 2. *petti*. Bygda(r)ráðið í kommunu, sum telur í minsta lagi 1500 íbúgvar, kann í reglugerðini gera av at nýta heiti býráð og býráðsformaður. | |

# Fylgiskjal C

## Uppskotið um nýggja kommunustýrislóg í mun til galdandi kommunulog

| **Uppskot um løgtingslóg nr. ? frá ? um kommunustýrislóg** | **Løgtingslóg nr. 45 frá 29.06.1997 um føroysku kommunurnar** |
|---|---|
| **Kapittul 1**<br>*Um lógarøki og allýsingar* | |
| **§ 1.** Lógin fevnir um øll fyrisitingarlig øki, har kommunan hevur málsførleika, uttan so er, at undantøk eru í aðrari lóg. | **§ 1.** Hendan lóg fatar um allar kommunur í Føroyum, har ikki serligt undantak er gjørt. |
| | **§ 18**, *2. petti*. Tá lógin ikki skilar annað til, eru nevndirnar bundnar av avgerðunum hjá bygda(r)ráðnum. |
| *Stk. 2.* Val til kommunustýrið fer fram eftir reglunum í kommunalu vallógini. | **§ 2**. …sum verða vald sambært kommunalu vallógini. |
| **§ 2.** Reglur um kommunubýti verða ásettar í aðrari lóg. | **§ 48**, *2. petti*. Um tvær ella fleiri kommunur ynskja at verða lagdar saman, ger landsstýrið av, um samanlegging skal fara fram og skipar fyri hesari.<br>*3. petti*. Somuleiðis kann landsstýrið samtykkja umskipan av markinum ímillum kommunur, um semja er ímillum hesar. |
| **§ 3.** Við meirilutavali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær reinan meiriluta av teimum, ið á fundi eru, er valt. | **§ 4**, *2. petti*, 3-8 pkt. Við val av formanni krevst við fyrstu atkvøðugreiðslu, at meira enn helmingurin av teimum, á fundi eru, atkvøða fyri tí, ið valdur skal verða. Fæst tílíkur meiriluti ikki, verður atkvøtt umaftur. Fær eitt valevni hesaferð atkvøður frá meira enn helminginum av teimum, á fundi eru, ella fær bert eitt valevni atkvøður, er hetta valt. Fæst heldur eingin avgerð við aðru atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt ímillum teir báðar limirnar, sum við aðru atkvøðugreiðslu fingu flestar atkvøður. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, verður avgjørt við lutakasti, um hvørjar tveir, atkvøtt skal verða við bundna valið. Standa atkvøðurnar eisini við triðju atkvøðugreiðslu á jøvnum, verður við lutakasti gjørt av, hvør skal verða valdur.<br>**§ 20**, *3. petti*, 1. pkt. Við meirilutaval er tað valevni valt, ið fær reinan meiriluta av teimum, sum greitt hava atkvøðu. |
| *Stk. 2.* Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin reinan meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar | **§ 20**, *3. petti*, 2. og 3. pkt. Fæst slíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin hesa ferð reinan meiriluta av teimum greiddu atkvøðunum, verður |

| | |
|---|---|
| atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um. | bundið val ímillum teir báðar, sum við seinru atkvøðugreiðslu fingu flestar atkvøður, soleiðis at tað - um teir fáa líka mangar atkvøður verður kastaður lutur um, hvørjar tveir atkvøtt skal verða um við tað bundna valið. |
| *Stk. 3.* Fær hvørgin teirra reinan meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti. | **§ 20**, *3. petti***,** 4. pkt. Er atkvøðutalið eins við triðju atkvøðugreiðslu, verður avgerðin tikin við lutakasti, sum bygda(r)ráðsformaðurin skipar fyri. |
| **§ 4.** Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman. | **§ 20**. Tá bygda(r)ráðið skal velja tveir ella fleiri limir í eina nevnd, fer slíkt val fram eftir lutfallsvalháttinum. Lutfallsval fer fram fram eftir hesum reglum: Limir bygda(r)ráðsins býta seg í bólkar, limirnir í hvørjum bólki hava frammanundan boðað bygda(r)ráðsformanninum frá, at teir vilja atkvøða saman við valið, ið skal fara fram. Limatalið í hvørjum bólki verður býtt við 1,2,3 o.s.fr. Býtingartalið, ið tá kemur fram, ásetur í hvørjum rað hvør bólkur sær kann velja síni umboð. Eru 2 ella fleiri býtingartøl eins stór, verður raðfylgjan avgjørd við lutakasti, sum bygda(r)ráðsformaðurin skipar fyri. Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir at siga bygda(r)ráðsformanninum frá beinan vegin, hvør skal vera teirra umboð. Sigur ein bólkur frá sær ræ ttin til at seta eitt ella fleiri umboð, verða óásettu plássini býtt ímillum hinar bólkarnar á sama hátt, sum tilskilaður er omanfyri. |
| *Stk. 2.* Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetur ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.<br><br>*Stk. 3.* Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.<br><br>*Stk. 4.* Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør ið umboðar hvønn bólkin.å<br>*Stk. 5.* Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir stk.1-3. | |
| **Kapittul 2**<br>Um kommunustýrið | |
| **§ 5.** Kommunuviðurskifti verða stýrd av einum | **§ 2.** Kommunurnar verða stýrdar av |

| | |
|---|---|
| stýri, sum nevnt verður kommunustýri. Formaðurin í kommunustýrinum nevnist borgarstjóri. | bygda(r)ráðnum,..... |
| **§ 6.** Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um síni stýrisviðurskifti í eina kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. | **§ 2,** *4. petti.* Nærri fyrisetingar um, hvussu kommunan verður stjórnað, ger bygda(r)ráðið í eini reglugerð, sum landsstýrið skal góðkenna.<br><br>**§ 43**. Bygda(r)ráðið skal síggja fyri, at øll skjøl hjá kommununi verða hildin í varðveitslu.<br>*2. petti*. Landsstýrið kann fyriskipa, hvussu og hvussu leingi omanfyri nevndu skjøl verða at varðveita, og nær og hvussu beint kann verða fyri teimum.<br>**§ 46**. Í seinasta lagi 1/2 ár eftir at henda lóg er komin í gildi skulu kommunurnar hava gjørt eina reglugerð fyri fyrisitingina og sent landsstýrinum hana til góðkenningar. Innan somu frest skal starvsskipanin verða samtykt.<br>*2. petti*. Landsstýrið ger eina standard reglugerð og eina standard starvsskipan, sum kommunurnar kunna nýta.<br>*3. petti*. Um ikki reglugerð og starvsskipan eru gjørdar innan nevndu frest, skal landsstýrið seta standard reglugerðina og -starvsskipanina í gildi.<br>**§ 50**, *2. petti*. Bygda(r)ráðið í kommunu, sum telur í minsta lagi 1500 íbúgvar, kann í reglugerðini gera av at nýta heiti býráð og býráðsformaður. |
| *Stk. 2.* Talið á kommunustýrislimum skal í minsta lagi vera 7 og í mesta lagi 17. Limatalið skal vera stakt. | **§ 3**. Í reglugerðini verður talið á bygda(r)ráðslimum ásett. Teir skulu vera 7-9, um kommunan hevur færri enn 2500 íbúgvar, 9-13, um íbúgvaratalið er 2500-5000, og um íbúgvaratalið er 5000 ella meira, skulu bygda(r)ráðslimirnir vera 13-17. Talið á bygda(r)ráðslimum skal altíð vera stakt. |
| *Stk. 3.* Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um sína málsmannagongd í eina fundarskipan. | **§ 2,** *5. petti*. Bygda(r)ráðið ger sjálvt starvsskipan sína. |
| *Stk. 4.* Kommunustýrið skal áseta nágreiniligari reglur um starvsfólkaviðurskiftini í eina starvsfólkaskipan. | **§ 20**, *4. petti*. Tá persónur verður settur í kommunalt starv, fer val ímillum fleiri umsøkjarar fram eftir reglunum í 3. petti.<br><br>**§ 47**. Bygda(r)ráðið skal hava eina serliga reglugerð um talið á tænastumonnum og starvsfólki, tilnevning teirra og uppsøgn, starvsøki og starvsheiti, og um lønar- og eftirlønartreytir teirra. Henda reglugerð verður at |

| | |
|---|---|
| | góðkenna av landsstýrinum. |
| **§ 7.** Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja til borgarstjóra, varaborgarstjóra, nevndarlim ella umboð.<br><br>*Stk. 2.* Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. Tá ið borgarstjórin er valdur, skal hann leggja vanliga starvið frá sær, umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við fólkavalda starvið sum borgarstjóri. | **§ 5**. Bygda(r)ráðslimur hevur skyldu at lata seg velja til formann, næstformann ella lim í nevnd, sum verður sett sambært hesi lóg, ella sambært reglugerðini.<br><br>**§ 4**, *2. petti*, 1. og 2. pkt. Á hesum fundi fer fram val av formanni fyri alla starvstíð bygda(r)ráðsins. Formaðurin verður valdur ímillum bygda(r)ráðslimirnar. |
| *Stk. 3.* Val av varaborgarstjóra hevur gildi alt virkisskeiðið. Varaborgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum, sambært § 3. Ásetur kommunustýrisskipanin, at 1. og 2. varaborgarstjóri skulu verða valdir, fer valið fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4.<br><br>*Stk 4*. Kommunustýrislimur kann av persónligum áðum bera seg undan at verða borgarstjóravalevni.<br><br>*Arbeiðstakari*<br>**§ 8.** Kommunustýrislimur, sum er arbeiðstakari, hevur rætt til fríloyvi í neyðugum vavi til tess at røkja starv sítt sum fólkavalt umboð. | **§ 4**, *3. petti*. Tá formansvalið er av, verður valdur næstformaður eftir somu mannagongd. Næstformaðurin er í formansins stað, tá hesum berst frá. Sí tó § 10, 4. petti.<br>*4. petti*. Í reglugerðini kann verða fyriskipað, at valdir skulu verða 1. og 2. næstformaður, og teir verða tá valdir eftir lutfallsvalháttinum. |
| *Samsýning og løn* | |
| **§ 9.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur við kunngerð reglur um samsýning til kommunustýrislimir. Samsýning kann m.a. verða veitt fyri:<br>a) luttøku á kommunustýrisfundum og nevndarfundum,<br>b) luttøku á øðrum fundum í sambandi við útinning av starvinum sum kommunalt valdur limur,<br>c) skeiðsluttøku, sum kommunustýrið hevur góðkent,<br>d) annað virksemi, eftir umbøn frá kommunustýrinum ella eini fastari nevnd. | **§ 11**. Fyri luttøku á bygda(r)ráðsfundum og fundum í nevndum, sum bygda(r)ráðið velur sambært hesi lóg ella reglugerðini, verður veitt fundarsamsýning.<br>*2. petti*. Støddin á samsýningini verður ásett av landsstýrinum sum ein føst upphædd um dagin. Er fundurin longri enn 4 tímar, verður samsýningin tvífaldað.<br>*3. petti*. Landsstýrið kann eisini loyva, at samsýning verður veitt fyri onnur nevndararbeiði.<br>*4. petti*. Um serlig orsøk er til tess, kann bygda(r)ráðið við loyvi landsstýrisins veita formanninum í eini av bygda(r)ráðnum settari nevnd eina serliga árliga samsýning. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum ásetur við kunngerð reglur um løn til borgarstjórar. | **§ 27,** *2. petti*. Um næstformaðurin í longri tíð er í formansins stað kann bygda(r)ráðið veita honum eina samsýning, alt eftir hvussu leingi formaðurin er burtur, og hvussu stórt arbeiðið er. Somuleiðis er eisini, tá ein bygda(r)ráðslimur verður settur sum formaður sambært § 10, 4. petti. |
| | **§ 27**. Bygda(r)ráðsformaðurin fær eina samsýning, sum er ásett í reglugerðini. |
| Gegni | |
| **§ 10.** Kommunustýrislimur hevur skyldu at boða frá, um hann heldur iva verða um sítt gegni. | **§ 9**, *1. petti,* 3. pkt. Bygda(r)ráðslimur skal sjálvur siga frá um hann heldur iva vera um luttøkuføri. |
| *Stk. 2.* Kommunustýrið ella føst nevnd ger av, um eitt mál er av tílíkum áhuga hjá einum limi, at hann hvørki kann vera við í viðgerð ella atkvøðugreiðslu. | **§ 9**, *1. petti,* 1. og 2. pkt. Bygda(r)ráðið ger av, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum limi, at hann ikki eigur at taka lut í fundarviðgerðini og atkvøðugreiðslu hesum máli viðvíkjandi. Um so er, skal avvarandi fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt. |
| *Stk. 3.* Er líkt til, at kommunustýrið ella føst nevnd tekur avgerð um, at kommunustýrislimur ella fastur nevndarlimur er ógegnigur, kunnu limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.<br><br>*Stk. 4.* Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, kommunustýrið ella ein føst nevnd ger av, at kommunustýrislimur ella fastur nevndarlimur er ógegnigur, kunnu teir limir, ið valdir eru á viðkomandi valevnislista, krevja, at málið verður flutt til næsta fund. | |
| *Stk. 5.* Málið kann tó ikki verða flutt, um 2/3 av teimum hjástøddu kommunustýrislimunum ella í minsta lagi helmingurin av teimum føstu nevndarlimunum eru ímóti, ella at málið fyrnast. | |
| **§ 11.** Kommunustýrislimur, sum starvast hjá kommununi, kann ikki verða limur í fastari nevnd, um nevndin umsitur málsøki, sum hava tilknýti til hansara starvssøki. | **§ 23**. Eingin, sum situr í starvi hjá kommununi, má vera limur í kommunalari nevnd, sum hevur við hansara starvsviðurskifti at gera. |
| *Stk. 2.* Ein nevndarlimur kann ikki gera nakað arbeiði móti samsýning fyri tann partin av kommunalu fyrisitingini, ið verður stjórnað av viðkomandi nevnd, um so er, at arbeiðið ikki er boðið út alment. | **§ 23**, *2. petti*. Ein nevndarlimur má ikki fyri viðurlag gera nakað arbeiði fyri tann partin av kommunalu fyrisitingini, ið verður stjórnaður av avvarandi nevnd, uttan so at arbeiðið er útboðið alment, ella umstøðurnar serstakliga ráða til slíkt, og í seinra føri skal bygda(r)ráðið hava samtykt hetta framanundan. |
| **Kapittul 3**<br>*Um kommunustýrisfundir* | |

| | |
|---|---|
| **§ 12.** Nývalda kommunustýrið skal skipa seg í seinasta lagi innan árslok í valárinum. | **§ 4**, *1. petti,* 1. pkt. Nývalt bygda(r)ráð kemur saman sum skjótast og áðrenn 31. desember í árinum, sum valið er farið fram. |
| *Stk. 2.* Kommunustýrið skal vera fullmannað á fyrsta fundi. Fyrst valdi kommunustýrislimur gevur fundarboð og leiðir fundin, til borgarstjóri er valdur. | **§ 4**, *1. petti*, 2. pkt. Tann fyrst valdi limurin kallar saman til fundar og leiðir fundin, til formaðurin er valdur.<br><br>**§ 43**, *3. petti*. Á fyrsta fundi aftan á nýval skulu bygda(r)ráðslimirnir gerast kunnugir við øll ognar- og skuldarskjøl, sum kommuna hevur í varðveitslu. |
| *Stk. 3.* Berst kommunustýrislimi frá at møta á fyrsta fundi, skal tiltakslimur innkallast | **§ 10**, *2. petti*. Berst limi frá at møta á fyrsta fundi í nývaldum bygda(r)ráð, skal tiltaksmaður hansara taka lut á fundinum. |
| **§ 13.** Kommunustýrislimur kann seta fram uppskot og spyrja um øll kommunal viðurskifti. | **§ 18**. Bygda(r)ráðslimur kann leggja fyri bygda(r)ráðið allar spurningar um virksemi hjá nevndunum, og nevndirnar skulu geva bygdaráðnum allar upplýsingar, sum biðið verður um. |
| **§ 14.** Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nágreiniligari reglur um vanligar fundir skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir. | **§ 6**, *1. petti*, 1. pkt. Bygda(r)ráðið hevur fund vanliga eina ferð um mánaðin.<br><br>**§ 6**, *2. petti*. Bygda(r)ráðið tekur avgerð um, nær og hvar regluligir fundir skulu vera, og við byrjanina av hvørjum ári verður hetta kunngjørt á tann hátt, ið vanliga verður nýttur í kommununi. |
| *Stk. 2.* Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess. | **§ 6,** *3. petti*. Eykafundur verður at halda, tá formaðurin heldur tað vera neyðugt, ella tá 1/3 av limunum krevur tað. Bygda(r)ráðsformaðurin ger av, nær og hvar eykafundirnir skulu vera, og um tað ber til, verða hesir fundir kunngjørdir framman undan fyri íbúgvunum í kommununi. |
| *Viðtøkuføri* | |
| **§ 15.** Kommunustýrið er viðtøkuført, um í minsta lagi helmingurin av kommunustýrislimunum er á fundi. | **§ 7**. Bygda(r)ráðið er viðtøkuført, tá ið minsta lagi helmingurin av limunum eru á fundi. |
| *Stk. 2.* Um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið meirilutin av teimum, ið greiða atkvøðu, hevur atkvøtt fyri uppskotinum. Stendur á jøvnum, er uppskotið fallið. | **§ 7,** *2. petti*. Avgerðir verða, tá ikki annað er fyriskipað, tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Eitt uppskot er samtykt, tá meirilutin av teimum, sum greiða atkvøðu, atkvøður fyri. Um eitt uppskot fær líka nógvar atkvøður fyri sum ímóti, er tað fallið. |
| *Borgarstjórin* | |
| **§ 16.** Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini. Hann býtir málini sundur til tær ymisku nevndirnar og tekur sær av teimum málum, sum ikki eru latin nakrari nevnd. | **§ 25**, *2. petti*, 1. og 2. pkt. Formaðurin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu umsitingini. Hann býtir málini ímillum tær ymsu nevndirnar og kann um neyðugt fyriskipa, hvussu málini |

| | |
|---|---|
| | verða at avgreiða. |
| *Stk. 2.* Borgarstjórin gevur fundarboð og fyrireikar kommunustýrisfundirnar. Undan hvørjum fundi skal borgarstjórin kunna kommunustýrislimirnar um, hvørji mál koma fyri. | **§ 24**, *1. petti*, 1. pkt. Formaðurin kallar saman til bygda(r)ráðsfundar og fyrireikar hesar. Hann leiðir fundirnar og ansar eftir, at samtyktirnar verða førdar í gerðabókina.<br><br>**§ 24**, *2. petti*. Framman undan hvørjum fundi letur hann í so stóran mun sum gjørligt limirnar vita, hvørji mál fara at koma til viðgerðar, |
| *Stk. 3.* Eitt hóskandi tíðarskeið fyri fundin skal borgarstjórin leggja mál og málsupplýsingar fram, so at kommunustýrislimirnir kunnu gera sær eina sjálvsmeting um hesi málini. | **§ 24**, *2. petti*. ..og eisini roynir hann mest møguligt at gera útvegir fyri, at hesi mál og teir upplýsingar, ið fingnir eru til vega til at kunna meta um tey, verða løgd fram til eftirlit fyri limunum eitt hóskandi tíðarskeið undan fundinum. |
| **§ 17.** Á hvørjum vanligum kommunustýrisfundi boðar borgarstjórin frá, hvørji mál eru beind í nevnd síðan síðsta fund. | **§ 25**, *3. petti*. Á hvørjum vanligum bygda(r)ráðsfundi boðar formaðurin frá, hvørji mál, ið beind eru í nevnd síðan seinasta fund. |
| *Stk. 2.* Borgarstjórin ansar eftir, at tey mál, ið krevja kommunustýrisviðgerð, fáa tilíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin. Í átrokandi førum kann borgarstjórin tó fyriskipa, hvussu málini skulu verða avgreidd. | **§ 25**, *2. petti*, 3. og 4. pkt. Hann ansar eftir, at tey mál, sum krevja bygda(r)ráðsviðgerð, fáa hesa, og at neyðug ummæli verða fingin. Formaðurin tekur sær av teimum málum, sum ikki eru løgd til nakra nevnd. |
| *Stk. 3.* Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast ella har ongin orsøk er til iva. | **§ 25**, *1. petti*, 2. pkt. Hann kann bygda(r)ráðsins vegna taka avgerð í smærri málum, sum ikki tola at bíða, og har eingin orsøk er til iva. |
| *Stk. 4.* Borgarstjórin ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum kommunustýrisins. Hann ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan. | **§ 25**, *1. petti*, 1. pkt. Formaðurin ansar eftir, at farið verður eftir teimum samtyktum, sum bygda(r)ráðið hevur gjørt. |
| **§ 18.** Mál, ið snúgva seg um virksemi borgarstjórans, kunnu verða løgd fyri kommunustýrið, um fleiri kommunustýrislimir krevja tað. Borgarstjórin skal geva kommunustýrinum allar umbidnar upplýsingar, eins og hann í øllum lutum skal lýða tær avgerðir, kommunustýrið tekur. | **§ 18**. Bygda(r)ráðslimur kann leggja fyri bygda(r)ráðið allar spurningar um virksemi hjá nevndunum, og nevndirnar skulu geva bygdaráðnum allar upplýsingar, sum biðið verður um. |
| *Stk. 2.* Nágreiniligari reglur um virksemi borgarstjórans skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina. | **§ 25**, *4. petti*. Í reglugerðini er nærri fyriskipað um virki formansins. |
| *Stk. 3.* Verjir borgarstjórin seg við at fremja tær uppgávur, ið annaðhvørt eftir lógini ella kommunustýrisskipanini eru latnar honum at umsita, so kann kommunustýrið tilnevna ein annan kommunustýrislim at røkja hansara uppgávur. Kommunustýrið kann í álvarsomum føri fyribils velja ein annan sum virkandi borgarstjóra. | |

| | |
|---|---|
| *Stk. 4.* Avgerðin sambært stk. 3, 2. pkt. skal alt fyri eitt verða latin landsstýrismanninum í kommunumálum til staðfestingar. Staðfestingin skal alt fyri eitt skjótast inn fyri dómsvaldið til rættarroynd. | |
| **§ 19.** Setur borgarstjóri fram umbøn um at verða loystur úr starvi, kann kommunustýrið loysa hann úr starvinum. | **§ 5**, *2. petti*, 1. og 2. pkt. Heldur ein bygda(r)ráðslimur seg hava orsøk til - áðrenn tíðarskeiðið, hann er valdur fyri, er lokið - at krevja seg loystan úr tí starvi, hann er valdur í (bygda(r)ráðsformaður, næstformaður ella nevndarlimur), kann bygda(r)ráðið undir serstøkum umstøðum játta umsókn hansara. Er limurin ikki nøgdur við avgerð bygda(r)ráðsins, kann hann leggja málið fyri landsstýrið. |
| *Stk. 2.* Fer borgarstjóri úr kommunustýrinum, doyr, ella verður loystur úr starvi, so skal nýval av borgarstjóra fara fram eftir reglunum í § 7, stk. 2. | **§ 5**, *2. petti*, 3. pkt. Verður slík umsókn játtað bygda(r)ráðsformanninum og/ella næstformanninum, verður nýval at fara fram eftir reglunum í § 4, 2. petti. |
| *Innlit*<br>**§ 20.** Kommunustýrið skal áseta í kommunustýrisskipanina, hvussu kommunustýrislimur skal kunna fáa upplýsingar ella tekniska hjálp frá fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðir.<br><br>*Stk. 2.* Kommunustýrislimur hevur rætt at kanna framlagt tilfar saman við serkønum stuðli, sum ikki er kommunustýrislimur, í tí vavi, tað er í samsvari við reglurnar um tagnarskyldu.<br><br>**§ 21.** Kommunustýrislimur hevur rætt at fáa skjalainnlit í málum, har tilfarið í endaligum skapi er til skjals í kommunalu fyrisitingini.<br><br>*Stk. 2.* Kommunustýrislimur skal stíla umsókn sína um skjalainnlit til borgarstjóran við tilskilan um, hvørji skjøl ella mál talan er um.<br><br>*Stk. 3.* Borgarstjórin kann avmarka rættin til skjalainnlit í tí vavi, tað er neyðugt við atliti at málsavgreiðsluni, ella har skjalainnlit í avgerandi mun ber ampa við sær. | |
| *Fráfall* | |
| **§ 22.** Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu | **§ 10**, *1. petti*, 1. pkt. Berst bygda(r)ráðslimi frá í meira enn 1 mánað kann næsti maður á lista |

| | |
|---|---|
| teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. Setur eingin kommunustýrislimur fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð. | hansara verða innkallaður. |
| *Stk. 2.* Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal borgarstjórin geva tiltakslimi fundarboð. | **§ 10**, *1. petti*, 2. ptk. Kann limur vísa á, at tað ikki fer at bera honum til at møta í 1 mánaða, kann tiltaksmaðurin verða innkallaður beinanvegin. |
| *Stk. 3.* Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru lokanar. | **§ 10**, *3. petti*. Bygda(r)ráðið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksmonnum eru til staðar. |
| **§ 23.** Tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri luttaka, fer innkomin tiltakslimur út.<br><br>*Stk. 2.* Í teimum førum, har fleiri tiltakslimir eru komnir inn á sama valevnislista, men har starvstíðin ikki endar samstundis, skal tann tiltakslimur, ið fyrstur er valdur, verða seinastur út. | |
| **§ 24.** Er tiltakslimur komin inn fyri borgarstjóra ella varaborgarstjóra eftir reglunum í § 22, stk. 2, men sannlíkt er, at fráveran varir longri enn 2 mánaðir, so skal kommunustýrið fyribils velja borgarstjóra ella varaborgarstjóra í teirra stað eftir reglunum í ávíkavist § 7, stk. 2 og stk. 3. | **§ 10**, *4. petti*. Kemur tiltaksmaður í staðin fyri formannin, tekur næstformaðurin við uttan so, at bygda(r)ráðið ger av at velja nýggjan formann eftir reglunum í § 4, 2. petti. |
| *Gerðabókin* | |
| **§ 25.** Borgarstjórin ansar eftir, at allar samtyktir á kommunustýrisfundi verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða undirskrivað av øllum teimum luttakandi kommunustýrislimunum. | **§ 8**. Tað, sum samtykt verður á bygda(r)ráðsfundi, verður at føra í gerðabók, sum verður undirritað av teimum limum, sum á fundi eru.<br><br>**§ 24**, *1. petti*, 2. pkt. Hann leiðir fundirnar og ansar eftir, at samtyktirnar verða førdar í gerðabókina. |
| *Stk. 2.* Hevur kommunustýrislimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina. Hetta er eisini galdandi, tá tilfarið verður sent øðrum myndugleika. | **§ 8,** *2. petti*. Hevur limur serstøðu, kann hann krevja, at henda í stuttum verður tilskilað í gerðabókini. |
| **Kapittul 4**<br>*Um borgarligt almenni* | |
| **§ 26.** Kommunustýrisfundir eru almennir. Um neyðugt kann kommunustýrið gera av, at mál, sum t.d. persónsmál, skulu verða viðgjørd fyri aftur latnum hurðum. Henda viðgerð kann fara fram fyri aftur latnum hurðum, um borgarstjórin | **§ 6**, *1. petti*, 2. og 3. pkt. Bygda(r)ráðsfundur er almennur, men í serstøkum føri kann bygda(r)ráðið gera av, at einstøk mál verða viðgjørd fyri stongdum hurðum. Spurningurin, um mál skal viðgerast fyri stongdum hurðum, |

| | |
|---|---|
| ger tað av, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevur tað.<br><br>*Stk. 2.* Kommunustýrið kann loyva starvsfólki hjá kommununi at fylgja við eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum.<br><br>*Stk. 3.* Kommunustýrið kann loyva øðrum fólki at fylgja eini málsviðgerð fyri aftur latnum hurðum, til tess at fáa upplýsingar í málinum, við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu. | verður viðgjørdur á fundi fyri stongdum hurðum, um formaðurin ger tað av ella 1/3 av limunum krevur tað. |
| **§ 27.** Kommunustýrið skal kunna borgararnar um ta endaligu samtyktu fíggjarætlanina eins og um roknskapin saman við møguligum viðmerkingum. | **§ 30**. Íbúgvararnir í kommununi skulu hava atgongd at gera seg kunnugar við endaliga samtyktu fíggjarætlanina.<br><br>**§ 35**, *4. petti*. Íbúgvararnir hava rætt til at gera seg kunnugar við endaliga samtykta roknskapin og møguligar viðmerkingar. |
| *Stk. 2.* Yvirlit yvir tey mál, ið koma fyri á fundi, eins og úrrit úr gerðabókini fyri síðsta fund, skulu verða almannakunngjørd við fyriliti fyri reglunum um tagnarskyldu. | |
| **Kapittul 5**<br>*Um fastar nevndir* | |
| **§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, smbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt. | **§ 12**, *1. petti*, 1. pkt. At taka sær av fíggjarligu umsitingini verður sett ein fíggjarnevnd.<br><br>**§ 13**. Umframt fíggjarnevndina verða settar aðrar fastar nevndir av bygda(r)ráðslimum, soleiðis sum ásett í reglugerðini.<br><br>**§ 16**. Nevndirnar skipa seg sjálvar, jbr. tó § 12, 1. petti. |
| *Stk. 2.* Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja í fasta nevnd, stýri og tílíkt, umframt at gera aðrar kommunalar uppgávur, sum kommunustýrið áleggur honum. | |
| *Stk. 3.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið, ið er fyri alt virkisskeiðið hjá nevndini, fer fram eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4. | **§ 14**, *2. petti*, 1. og 2. pkt. Val av teimum í 1. petti umrøddu nevndum fer fram beint aftan á val av formanni og næstformanni og hevur gildi alt valskeiðið. Valt verður eftir lutfallsvalháttinum. |
| *Stk. 4.* Hevur borgarstjórin ella annar kommunustýrislimur fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær. | **§ 22**. Fer bygda(r)ráðslimur í valskeiðinum úr eini nevnd, har hann er valdur av einum ávísum bólki, skal hesin bólkur seta mann í hansara stað. *2. petti*. Hevur nevndarlimur havt forfall í meira enn 1 mánaða, kann bólkur hansara seta annan í hansara stað. |

| | |
|---|---|
| | **§ 21**. Har bygda(r)ráðsformaðurin er fastur limur í nevnd, sum bygda(r)ráðið velur, verður sessur hansara at rokna sum ein av teimum sessum, sum bólkur hansara hevur rætt til. |
| **§ 29.** Allir nevndarlimir skulu vera kommunustýrislimir | **§ 14**. Bygda(r)ráðið velur frammanfyri umrøddu nevndir. Limirnir í fíggjarnevndini og í hinum føstu nevndunum verða valdir ímillum bygda(r)ráðslimirnar. |
| *Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nágreiniligari reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum. | **§ 14**, *2. petti*, 3. pkt. Hesar nevndir skulu hvør sær vera í minniluta í bygda(r)ráðnum.<br><br>**§ 17**, *1. petti*, 1. pkt. Nevndirnar umsita tey mál, sum verða latin teimum upp í hendur, samsvarandi fíggjarætlanini og fyriskipanum bygda(r)ráðsins. |
| *Stk. 3.* Nágreiniligari reglur um nevndararbeiðið kunnu verða ásettar í eina fundarskipan. | **§ 16**, *3. petti*, 1. pkt. Nevndirnar gera sjálvar starvsskipan sína. |
| *Nevndarfundir*<br>**§ 30.** Nevndarformaður gevur fundarboð og fyrireikar nevndarfund. | |
| *Stk. 2.* Borgarstjórin hevur atgongd til allar nevndarfundir, tó uttan atkvøðurætt. Borgarstjórin skal hava fundarskrá og fráboðan um, nær og hvar nevndarfundur verður hildin. | **§ 16**, *4. petti*. Bygda(r)ráðsformaðurin hevur rætt til at vera við á nevndarfundi, sjálvt um hann ikki er nevndarlimur. Hann skal hava fundarboð, og skrá um tílík verður send limunum. |
| *Stk. 3.* Nevndin kann geva øðrum persóni atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa upplýsingar í málinum. | |
| **§ 31.** Nevndarformaðurin ansar eftir, at farið verður fram eftir nevndarsamtyktunum. Hann ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan. | **§ 17**, *1. petti*, 2. pkt. Tær skulu ansa eftir, at ikki verður farið upp um tær játtaðu peningaupphæddirnar, og skulu ígjøgnum fíggjarnevndina gera tilráðing til bygda(r)ráðið, um eykajáttan er neyðug. |
| *Stk. 2.* Nevndarformaður kann taka avgerð í málum, ið eru um at fyrnast, ella har ongin orsøk er til iva. Tó skal borgarstjórin kunnast, áðrenn avgerð verður tikin í fyrningarfongdum málum, uttan so er, at tað snýr seg um avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini. | |
| *Stk. 3.* Ein og hvør nevndarlimur kann leggja mál um virksemi hjá nevndarformanninum fyri nevndina. Formaðurin skal eftir áheitan geva nevndini allar upplýsingar, eins og hann í øllum lutum skal lýða tær avgerðir nevndin tekur. | **§ 18**. Bygda(r)ráðslimur kann leggja fyri bygda(r)ráðið allar spurningar um virksemi hjá nevndunum, og nevndirnar skulu geva bygdaráðnum allar upplýsingar, sum biðið verður um. |
| **§ 32.** Nevndarlimur kann, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri kommunustýrið til avgerðar. Undantiknar hesum eru avgerðir, sum við lóg eru | **§ 19**. Áðrenn nevndaravgerð verður sett í verk, kann hvør nevndarlimur krevja, at málið fyrst verður lagt fyri bygda(r)ráðið. Undantiknar eru tó avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini í |

| | |
|---|---|
| latnar nevndini.<br><br>*Stk. 2.* Ein og hvør kommunustýrislimur, ið ikki er nevndarlimur, kann krevja at fáa sent dagsskráir, úrrit úr gerðabókum, málstilfar o.a., sum sent verður nevndarlimunum. | hendur. |
| *Viðtøkuføri* | |
| **§ 33.** Ein nevnd er viðtøkufør, um í minsta lagi helmingurin av nevndarlimunum er møttur. | **§ 16**, *2. petti*, 1. pkt. Nevndarviðgerð fer fram á fundi, sum er viðtøkuførur, tá ið í minsta lagi helmingurin av nevndarlimunum eru møttir. |
| *Stk. 2.* Um einki annað er fyriskipað, er eitt uppskot samtykt, tá ið ein meiriluti av teimum, ið greiða atkvøðu, hava atkvøtt fyri tí. | **§ 16**, *2. petti*, 2. pkt. Avgerð verður tikin við vanligum meiriluta. |
| *Gerðabókin* | |
| **§ 34.** Nevndarformaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabók, sum við fundarlok skal verða undirskrivað av teimum luttakandi nevndarlimunum.<br><br>*Stk. 2.* Hevur nevndarlimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina. Hetta er eisini galdandi, tá um tilfarið verður sent øðrum myndugleika.<br><br><br>**Kapittul 6**<br>*Onnur umboðan*<br>**§ 35.** Skal kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum vera umboðað í øðrum nevndum o.t., hevur kommunustýrislimur skyldu at taka við vali.<br><br>*Stk. 2.* Skal kommunustýrið bert velja eitt umboð, fer valið fram eftir meiriluta-valháttinum, sambært § 3. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum, sambært § 4. | **§ 16**, *3. petti*, 2. pkt. Allar nevndarsamtyktir verða at føra í gerðabók, sum verður undirritað av øllum nevndarlimum, sum á fundi eru. |
| *Stk. 3.* Skal ein nevnd ella tílíkt verða mannað við øðrum enn bara kommunustýrislimum, fer valið av teimum, ið kommunustýrið skal velja, fram undir einum. | **§ 20**, *2. petti*, 1. pkt. Tá íð nevnd skal verða vald, har limirnir skulu vera bæði úr bygda(r)ráðnum og uttanfyri, fer valið fram í senn millum teir limir, bygda(r)ráðið skal velja.<br><br>**§ 20**, *2. petti*, 2. pkt. Í tí rað, sessirnir lutast einum bólki, kann hesin tilnevna limir ella ikki-limir í bygda(r)ráðnum, til annað slagið av sessum er sett. |
| *Stk. 4.* Í teirri raðfylgju, sessirnir verða lutaðir einum bólki, kann bólkurin tilnevna limir ella | **§ 15**. Bygda(r)ráðið velur limir í tær nevndir har bygda(r)ráðið eftir øðrum fyriskipanunum skal |

| | |
|---|---|
| onnur, til annað slag av sessum er sett. | verða umboðað. Skulu fleiri limir verða valdir í somu nevnd verður lutfallsvalhátturin nýttur. Skal bert 1 verða valdur, verður meirilutavalhátturin nýttur. |
| **§ 36.** Kommunustýrið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir at taka sær av einstøkum málum hjá kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd. | **§ 13**, *2. petti*. Bygda(r)ráðið kann eisini seta serligar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella vera ráðgevandi hjá fíggjarnevndini, øðrum føstum nevndum ella bygda(r)ráðnum.<br><br>**§ 13,** 3. petti. Bygda(r)ráðið kann áleggja einum ella fleiri av limum tess at gera serstøk kommunal arbeiði. Slík arbeiði kunnu eisini verða latin øðrum íbúgvarum í kommununi upp í hendur, um hesir vilja. |
| *Stk. 2.* Kommunustýrið ásetur nágreiniligari reglur bæði um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.<br><br>**§ 37.** Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja, at staðbundin áhugamál verða hoyrd í kommunustýrinum.<br><br>*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.<br><br>*Stk. 3.* Nágreiniligari reglur um samanseting, manning og hoyringarmannagongd skulu verða ásettar í kommunustýrisskipanina.<br><br>*Stk. 4.* Val av staðbundnum umboðum fer fram sama dag og eftir somu reglum, sum val fer fram til kommunustýrið.<br><br>*Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.<br><br><br>**Kapittul 7**<br>*Um fíggjarumsiting* | |
| **§ 38.** Fíggjarnevndin tekur sær av fíggjarligu umsitingini hjá kommununi. Borgarstjórin er nevndarformaður. | **§ 12**, *1. petti*, 2. og 3. pkt. Í hesi nevnd sita bygda(r)ráðsformaðurin, ið er føddur formaður, og afturat honum 2 ella 4 aðrir bygda(r)ráðslimir. Hetta verður gjørt av í reglugerðini. |

| | |
|---|---|
| | **§ 12,** *2. petti*. Samsvarandi tí, sum fyriskipað er í reglugerðini, fyrisitur fíggjarnevndin kassa- og roknskapardeildina ….. |
| *Stk. 2.* Fíggjarnevndin samskipar og hevur eftirlit við fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið. | **§12**, *2. petti*. ..og hevur eftirlit við kommunalu umsitingini sum heild.<br><br>**§ 17,** *2. petti*. Eftir áheitan frá fíggjarnevndini og innan fyri eina tíðarfrest, sum hendan nevnd setir, skulu nevndirnar koma við teirra parti av upp skotinum til ársfíggjarætlanina og til gerð av íleggingar- og fíggjarætlanum. |
| *Stk. 3.* Áðrenn mál víðvíkjandi fíggjarviðurskiftum verða løgd fyri kommunustýrið, skal fíggjarnevndin geva sítt ummæli. | **§ 12,** *3. petti*. Áðrenn mál viðvíkjandi fíggjarviður-skiftunum hjá kommununi ella onnur umsitingarmál verða løgd fyri bygda(r)ráðið, skal ummæli verða fingið frá fíggjarnevndini. |
| **§ 39.** Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. | **§ 28**. Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember.<br><br>**§ 29**. Fíggjarnevndin skal áðrenn 1. oktober gera uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár. Avrit av uppskotinum verður sent landsstýrinum. |
| *Stk. 2.* Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. | **§ 29**, *2. petti*. Ársfíggjarætlanin skal 2 ferðir verða viðgjørd í bygdaráðnum við í minsta lagi 14 døgum ímillum og skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 20. desember. |
| **§ 40.** Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði fyrr enn neyðug játtan er tøk. | **§ 31**, *2. petti*, 1. pkt. Ikki má verða farið undir eitt arbeiði uttan neyðug játtan fyriliggur. |
| *Stk. 2.* Kommunustýrið kann veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað. | **§ 31**. Samtykta ársfíggjarætlanin er bindandi fyri kommunalu umsitingina komandi fíggjarár. Tó kann bygda(r)ráðið um neyðugt geva eykajáttanir. Tílíkar játtanir krevja 2 viðgerðir við í minsta lagi 14 døgum ímillum.<br><br>**§ 31**, *3. petti*. Við hvørja eykajáttan má verða ávíst, hvaðani peningurin fæst. |
| *Stk. 3.* Kommunustýrið kann ikki geva tilsøgn um regluligar veitingar, sum tað ikki hevur skyldu til sambært lóg, uttan at landsstýrismaðurin í kommunumálum gevur loyvi til tess.<br><br>*Stk. 4.* Kommunustýrið kann áseta gjald fyri kommunalar tænastuveitingar. | **§ 39**, *4. petti*. Heldur ikki kann bygda(r)ráðið uttan loyvi landsstýrisins geva tilsøgn um regluligar veitingar, sum kommunan ikki eftir lógini hevur skyldu til. |
| *Stk. 5.* Er nøktandi játtan ikki sett av til lógarásettar veitingar o.a., skal tílík játtan verða útvegað sum skjótast. | **§ 31**, *2. petti*, 2. pkt. Tó kann verða farið undir lógarásett tiltøk, áðrenn játtan fyriliggur, men henda má tá sum skjótast verða fingin frá bygda(r)ráðnum. |

| | |
|---|---|
| **§ 41.** Fíggjarnevndin hevur ábyrgd av<br>1) at gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,<br>2) at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,<br>3) at viðgera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini og<br>4) at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskriving. | **§ 34**. Bókførslan hjá kommununi verður at leggja soleiðis til rættis, at hon vísir, hvussu ognirnar verða umsitnar, og um umsitingin samsvarar við fíggjarætlanina og samtyktir bygda(r)ráðsins yvirhøvur.<br><br>**§ 35**. Áðrenn oktober mánaði er úti, skal roknskapurin fyri farna fíggjarárið vera liðugur og lagdur fyri grannskoðanina. Eitt yvirlit yvir ábyrgdarbindingar kommununnar skal fylgja við roknskapinum. Harafturat skulu vera neyðugar viðmerkingar, serstakliga um størri munir millum tær upphæddir, ið roknskapurin vísir og tær, ið avsettar eru á fíggjarætlanini og eisini í mun til íleggingar og fíggingarætlanirnar hjá kommununi v.m.<br>*2. petti*. Tá fíggjarnevndin hevur svarað uppá tær av grannskoðanini gjørdu viðmerkingar, og - tá tað snýr seg um viðmerkingar, sum ikki beinleiðis koma undir tað málsøki, sum fíggjarnevndin hevur við at gera - eisini avvarandi kommunali myndugleiki, tekur bygda(r)ráðið á fundi avgerð viðvíkjandi teimum gjørdu viðmerkingunum og sendir landsstýrinum roknskapin til góðkenningar fyri 1. desember.<br><br>*3. petti*. Eingin kann taka lut í eini avgerð um eina roknskaparviðmerking, sum viðvíkur teirri fyrisiting, har hann sum limur av fíggjarnevnd, aðrari fastari nevnd ella sambært serstakum kommunalum starvi beinleiðis hevur verið við.<br><br>**§ 36**. Bygda(r)ráðið ásetir nærri reglur fyri skipan av roknskaparførslu kommununnar í eini serligari reglugerð. Reglugerðin verður latin grannskoðanini, sum eisini skal hava boð um allar broytingar áðrenn tær verða settar í verk. |
| *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann við kunngerð áseta nágreiniligari reglur um kontoskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tílíkt. | |
| *Fæ og lántøka* | |
| **§ 42.** Fíggjarnevndin skal ansa eftir, at øll peningaogn hjá kommununi er goymd á tryggan hátt. | **§ 31**, *4. petti*. Fíggjarnevndin ansar eftir, at peningaognir kommununnar - íroknaður tann peningur, ið ikki er neyðugur til gjaldingar av dagligu útreiðslunum  verða goymdar á tryggan hátt og eisini soleiðis, at tær geva sum mest av |

| | |
|---|---|
| | sær.<br><br>**§ 40**. Í hvørji kommunu verður stovnaður ein fastognargrunnur. Í henda grunn verður lagt alt tað, sum sambært higartil galdandi reglum hevur staðið á serligari ognarkonto hjá kommununi.<br>*2. petti*. Bygda(r)ráðið má ikki uttan loyvi landsstýrisins minka um ognirnar hjá fastognargrunninum. Kommunurnar verða at rinda raksturin við skatti og øðrum inntøkum.<br>*3. petti*. Tá henda lóg kemur í gildi, skal støða verða tikin til, um fastognargrunnurin sambært 1. petti er nóg stórur hjá teimum ymsu kommununum. Um ikki, ger landsstýrið av, hvussu nógv kommunan skal útvega afturat til grunnin um árið.<br><br>**§ 41,** *2. petti*. Verður føst ogn seld, skal ágóðin av søluni verða lagdur í fastognagrunnin, um landsstýrið ikki loyvir aðra nýtslu. Verður føst ogn keypt, kann hon verða goldin úr fastognagrunninum. |
| *Stk. 2.* Peningaognir skulu setast í peningastovn, á postgiro ella í tílík lánibrøv, ið nýtt vera, tá ið um ræður ognir hjá ómyndingum, so tær geva sum mest av sær. | **§ 31**, *5. petti*. Tær peningaognir, ið ikki eru neyðugar at hava til taks í reiðum peningi fyri at greiða dagligu útreiðslurnar, skulu verða settar inn í banka, sparikassa, á postkonto ella settar í slík lánibrøv, sum verða nýtt, tá ið tað snýr seg um ognir hjá ómyndingum. |
| *Stk. 3.* Virðisbrøv skulu hava átekning um, at tey eru ogn hjá kommununi, og at eingin hevur ræði á teimum, uttan samtykt kommunustýrisins. Um til ber, skal átekningin verða skrivað í bók hjá viðkomandi stovni. | **§ 31**, *6. petti*. Virðisbrøv kommununnar skulu - um tey ikki verða tryggjað á annan fullgóðan hátt - fáa átekning um, at tey eru ogn kommununnar, og at eingin hevur ræði á nøkrum virðisbrævi uttan við samtykki bygda(r)ráðsins. Um tað er møguligt, skal átekning verða skrivað í bók hjá avvarandi stovni. |
| **§ 43.** Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.<br><br>*Stk. 2.* Er nettoskuldin meira enn ein álíkning við miðal loyvda skattaprosenti, so krevst loyvi frá landsstýrismanninum í kommunumálum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum. | **§ 32**. Til lántøku, trygdarveitan, veðsetan av ognum kommununnar, nýtslu úr grunnum og nýtslu av rakstraravlopi krevst samtykt bygdaráðsins.<br><br>**§ 41**. Bygda(r)ráðið kann ikki uttan loyvi landsstýrisins selja ella veðseta fastar ognir hjá kommununi ella fáa sær nýggjar fastar ognir.<br><br>**§ 39**. Til lántøku ella broyting í lánitreytunum krevst loyvi landsstýrisins. Um eitt arbeiði skal verða fíggjað við lántøku, má ikki verða byrjað, fyrrenn loyvi landsstýrisins fyriliggur. |

| | |
|---|---|
| *Medundirskrift* | |
| **§ 44.** Skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av virkandi borgarstjóra og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess. | **§ 26**. Skjøl viðvíkjandi keypi, sølu og øðrum, sum hevur við fastar ognir at gera, lántøku og veðhaldsveitan, skulu vera undirritað av bygda(r)ráðsformanninum og einum persóni, sum bygda(r)ráðið hevur heimilað til tess. Sama er, tá talan er um at taka av árit um, at samtykki krevst frá bygda(r)ráðnum til at nýta skjalið. |
| *Grannskoðan* | |
| **§ 45.** Kommunan skal hava óhefta, sakkøna grannskoðan av sínum fíggjarviðurskiftum. Grannskoðarin skal vera ríkisgóðkendur ella skrásettur.<br><br>*Stk. 2.* Grannskoðarin skal regluliga eftirkanna roknskaparførslu og roknskaparmannagongdir hjá kommununi. | **§ 33**, *1. petti*, 1. pkt. Kommunan skal hava eina sakkøna grannskoðan, sum verður at góðkenna av landsstýrinum. |
| *Stk. 3.* Grannskoðarin kann krevja allar neyðugar upplýsingar útflýggjaðar frá kommunustýrinum til tess at skoða, um tann fíggjarliga umsitingin samsvarar við lógina, fíggjarætlanina, eykajáttanir og aðrar tiknar avgerðir. | **§ 33**, 2. petti. Grannskoðanin kann frá bygda(r)ráðnum krevja allar fyri grannskoðanina neyðugar upplýsingar. |
| **§ 46.** Í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. | |
| *Stk. 2.* Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum í kommunumálum. | **§ 33**, *1. petti*, 2. pkt. Henda grannskoðan kann ikki verða koyrd frá uttan loyvi landsstýrisins. |
| *Bann* | |
| **§ 47.** Ikki er loyvt kommunum at fíggja rakstur, rentur og avdráttir ella lógar-ásettar avsetingar við lántøku.<br><br>*Stk. 2.* Ikki er loyvt at seta á stovn ábyrgdarbindingar.<br><br>*Stk. 3.* Ikki er loyvt kommunum at taka lut í vinnuligum virksemi, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.<br><br>*Stk. 4.* Ikki er loyvt kommunum at veita beinleiðis ella óbeinleiðis kappingaravlagandi stuðul til fyritøkur, stovnar ella tílíkt.<br><br>**§ 48.** Ikki er loyvt kommunum at seta á stovn kommunusamstørv, ið hava við sær avmarkingar í teimum lógarásettu heimildunum, sum | **§ 39**, *2. petti*. Tó kann bygda(r)ráðið uttan loyvi landsstýrisins taka lán, sum verður afturgoldið yvir raksturin við í minsta lagi 1/3 um árið.<br><br>**§ 39**, *3. petti*. Bygda(r)ráðið kann ikki áleggja kommununi veðhaldsskyldur ella gera broytingar í treytunum fyri veðhaldsskyldu uttan loyvi landsstýrisins. |

| | |
|---|---|
| kommunustýrið hevur eftir hesi lóg, uttan so er, at landsstýrismaðurin í kommunumálum í serstøkum føri góðkennir eina tílíka samstarvsavtalu.<br><br>*Stk. 2.* Hevur landsstýrismaðurin í kommunumálum í hendingaføri góðkent eina kommunusamstarvsavtalu, skal tað eisini góðkenna treytirnar í sambandi við avtaluslit. Er ósemja um treytirnar, verða tær ásettar av landsstýrismanninum. | |
| **Kapittul 8**<br>*Um eftirlit, rættartiltøk o.a.* | |
| **§ 49.** Landsstýrismaðurin í kommunumálum hevur eftirlit við kommununum. | **§ 37**. Landsstýrið hevur eftirlit við kommununum. |
| **§ 50.** Kommunustýrið hevur skyldu at veita landsstýrismanninum í kommunumálum allar neyðugar upplýsingar og frágreiðingar. | **§ 44**. Bygda(r)ráðið hevur skyldu at geva landsstýrinum allar frágreiðingar um viðurskifti hjá kommununi, tá biðið verður um tað. |
| *Stk. 2.* Til tess at landsstýrismaðurin í kommunumálum kann røkja sínar eftirlitsskyldur við fíggjarligu viðurskiftinum hjá kommununum, skulu tær lata honum:<br>1) grannskoðaðan roknskap innan 1. juni,<br>2) samtykta fíggjarætlan innan 3 gerandisdagar eftir 1. desember og<br>3) samtykta eykajáttan innan 3 gerandisdagar. | **§ 38**. So skjótt, sum ársfíggjarætlanin er endaliga samtykt, verður hon send landsstýrinum.<br><br>**§ 38**, *2. petti.* Ársroknskapurin hjá kommununum verður at senda landsstýrinum undan 1. desember saman við grannskoðarafrágreiðingini og teimum avgerðum, sum bygda(r)ráðið hevur tikið í samband við hesa. |
| *Rættartiltøk* | |
| **§ 51.** Er nettoskuldin hjá kommununi meira enn eina nettoálíkning, smbr. § 43, stk. 2, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum geva kommunustýrinum boð um at gera neyðugar broytingar í uppskotið til figgjarætlan, í fíggjarætlanina ella í eykajáttanina, um landsstýrismaðurin metir, at:<br>1) inntøku- og útreiðslumetingarnar eru skeivar,<br>2) inntøku- og útreiðslumetingarnar eru gjørdar á skeivum grundarlagi, ella at<br>3) útreiðslurnar eru óneyðugar ella órímiligar.<br><br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann í tí í § 43, stk. 2 nevnda føri geva kommunustýrinum boð um at lata uppskot til fíggjarætlan inn til landsstýrismannin í kommunum innan 1. oktober. | |
| **§ 52.** Hevur kommunustýrið tikið eina avgerð, sum er ímóti lógini, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum: | **§ 42**. Landsstýrið kann seta úr gildi samtyktir hjá einum bygda(r)ráð, sum eru í stríð við lóggávuna. |

| | |
|---|---|
| 1) ógilda avgerðina ella<br>2) fyribils avtaka avgerðina. | |
| *Stk. 2.* Heldur kommunustýrið seg óvirkið mótvegis lógarásettum skyldum, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum áleggja teimum kommunustýrislimum, sum bera ábyrgd av hesum, tvingsilsbøtur. | **§ 42**, *2. petti*. Hevur eitt bygda(r)ráð gjørt brot á galdandi lóg, eitt nú sloppið sær undan at gera skyldur sínar, ger landsstýrið tað, sum neyðugt er. Um tað er neyðugt, kann landsstýrið áleggja teimum einstøku bygda(r)ráðslimunum tvingsilsbøtur. |
| *Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann í teimum í stk. 2 nevndu førum saksøkja kommunustýrislimi eftir endurgjaldi, um hann ber ábyrgd av, at kommunan hevur verið fyri fíggjaligum missi.<br><br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin í kommunumálum kann sleppa einum sakarmáli, um viðkomandi kommunustýrislimur ístaðin sektarsamtykkir mótvegis kommununi innan ásetta freist.<br><br>*Stk. 5.* Kommunustýrislimur, sum grefliga skúgvar til viks skyldur sínar sum fólkavalt kommunustýrisumboð, verður sektaður við bót. Óskettni verður ikki revsað. | **§ 42**, *3. petti*. Landsstýrið kann eisini um neyðugt við rættarmáli gera persónliga ábyrgd galdandi ímóti teimum einstøku bygda(r)ráðsliunum. |
| **§ 53.** Staðfestir landsstýrismaðurin í kommunumálum eina avgerð hjá kommunustýrinum sambært § 18, stk. 4, er borgarstjórin undantikin starvi sínum frá hesum mundi.<br><br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í stk. 1 nevnda føri gera av, at lønin hjá borgarstjóranum skal verða skerd við einum fjórðingi, eini helvt, ella at hon í versta føri fellur burtur.<br><br>**§ 54.** Fremur kommunustýrið grovt lógarbrot, ella endurtaka lógarbrotini seg, kann landsstýrismaðurin í kommunumálum seta kommunustýrið undir umboðsstjórn sína, so rættandi tiltøk verða gjørd alt fyri eitt. | |
| *Gildiskoma* | |
| **§ 55.** Lógin kemur í síni heild í gildi 1. januar 2003. | **§ 48**. Tær føroysku kommunurnar eru, tá henda lóg fær gildi, hesar:<br>1. Fugloyar kommuna<br>2. Svínoyar "<br>3. Viðareiðis "<br>4. Hvannasunds "<br>5. Klaksvíkar "<br>6. Kunoyar " |

| | |
|---|---|
| | 7. Mikladals "<br>8. Húsa "<br>9. Elduvíkar "<br>10. Oyndarfjarðar "<br>11. Fuglafjarðar "<br>12. Leirvíkar "<br>13. Gøtu "<br>14. Runavíkar "<br>15. Nes "<br>16. Skála "<br>17. Sjóar "<br>18. Sunda "<br>19. Eiðis "<br>20. Gjáar "<br>21. Funnings "<br>22. Haldarsvíkar "<br>23. Saksunar "<br>24. Hvalvíkar "<br>25. Hósvíkar "<br>26. Kollafjarðar "<br>27. Kvívíkar "<br>28. Vestmanna "<br>29. Argja "<br>30. Tórshavnar "<br>31. Kirkjubøar "<br>32. Hests "<br>33. Nólsoyar "<br>34. Sandavágs "<br>35. Miðvágs "<br>36. Sørvágs "<br>37. Bíggjar "<br>38. Mykines "<br>39. Skopunar "<br>40. Sands "<br>41. Húsavíkar "<br>42. Skálavíkar "<br>43. Skúvoyar "<br>44. Hvalbiar "<br>45. Tvøroyrar "<br>46. Fámjins "<br>47. Hovs "<br>48. Porkeris "<br>49. Vágs "<br>50. Sumbiar "<br><br>**§ 50**, *1. petti*, 1. pkt. Henda lóg fær gildi beinan vegin. |
| *Stk. 2.* Fram til 1. januar 2003 kann | **§ 49**. Tá fólkatalið í eini kommunu er minni enn |

| | |
|---|---|
| landsstýrismaðurin í kommunumálum tó við kunngerð seta kommunustýrislógina ella partar av henni í gildi. | 1000, kann landsstýrið gera undantak frá §§ 3, 6, 11, 12-23, 29, 45, 46 og 47. Uttan mun til fólkatalið kann landsstýrið gera undantak frá nevndu greinum, til nýval er farið fram.<br>*2. petti*. Landsstýrið hevur heimild at gera tær reglur, sum neyðugar eru, tá undantak verður gjørt frá nevndu greinum ella einstøkum av teimum. |
| **56.** Samstundist, sum henda lóg fær gildi, fara hesar lógir úr gildi:<br>1) Løgtingslóg nr. 45 frá 1972 um føroysku kommunurnar, sum seinast broytt við ll. nr. 34 frá 29/5-1985<br>2) Løgtingslóg nr. 189 frá 8/12-1993 um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. og<br>3) Løgtingslóg nr. 85 frá 30/5-1994 um broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. | **§ 50**, *1. petti*, 2. pkt. Samstundis fara úr gildi: Lóg nr. 30 frá 28. februar 1872 om de færøske landkommuners styrelse", lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 om byen Thorshavns kommunale styrelse" og § 32 í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt. |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |